

RI



Na

Telephone: +47

LØGTINGS TIDINDI

1958

Lögtingstíðindi

1958

TÓRSHAVN MCMLX
DAGPRENT

INNIHALD

EYKATINGIÐ Í JUNI 1958

bls.

Tingselingin 1
Frágreiðing frá lögmanni 3
Fiskimarksspurningurin 7

ÓLAVSÓKUTINGIÐ 1958

Tingselingin 17
Tingmenninir 17
Frágreiðing frá lögmanni 19
Tingnevndir 30

ALMANNAMÁL

Lóg um fólkatrygging 50
Umskipan og bótan av vanlukkutryggingarlógini 67

LANDSFYRISITINGIN

Fyrispurningur til landsstýrismann Ole J. Jensen 59
Fyrispurningur til landsstýrið 60
Fyrispurningur til landsstýrið 84
Fyrispurningur til landsstýrið 87

LÓGTINGIÐ

Lógtingslóg um flaggið 31
Broyting í lógtingsvallógini 33

FÍGGJARMÁL

Fíggjarlógtingslóg 1959/60 31
Söla burturav matr. nr. 470 í Tórshavn 78

HEILSUMÁL

Sjúkrasystrar 12

KOMMUNAL MÁL

Ábyrgd av láni til Miðvágs kommunu 64

LANDBÚNAÐARMÁL

Forboð fyri gerð og sölu av mjólk frá mjólkamaskinum 32

LÁNSÁBYRGDIR OG LANDSKASSALÁN

Ábyrgd av láni til Tórshavnar kommunu 37
Ábyrgd av láni til Miðvágs kommunu 64
Lán til vegabygging 65
Ábyrgd av láni til keyp av agnsild 66
Ravmagnsverk í Skúvoy 70
Lán til húsabygging 82

SAMFERÐSLUMÁL

Radar í för. ferðaskipum 17
Gummibátar á för. skipum 18
Radar í för. ferðaskipum 49
Nýggj havnaætlan 51
Studningur til útbygging v.m. av pollinum í Sumba 69
Havnaætlan í Skálavík 79
Smærri havnir og lendingar 81
Smærri havnir og lendingar 81
Studningur til lendingar 85

SJÓVINNUMÁL

Broyting í skipagjöldum 31
Yvirtöka av skipaeftirlitinum 35
Studningur til útróðrarmenn við dekksförum 36
Útróður í Grönlandi 43
Lóg um kanning viðv. fiskasölu og fiskaprísi 44
Lóg um kanning av fiskivinnurekstri 45
Frítíð við lön til fiskimenn 46
Broyting í bjargingarreglunum 48
Frítíð við lön til fiskimenn 50
Val av nevnd í fiskimarksmálinum 61
Bygging av seksæringum 62
Studningur til bátar til útróður í Grönlandi 80

SKÚLAMÁL

Hægri skúli 30

TRYGGINGARMÁL

Ábyrgdartrygging fyri bundar 60

VINNUMÁL

Handilskamar 77

VETRARTINGHØ 1958

Tingmeminir 89
Tingsetingin 89
Tingnevndir 91

ALMANNAMÁLUM

Tvungin jarðarfarstrygging 122
Broyting í reglunum um serforsorg 115
Fólkapensión 222
Broyting í lóg um avlamistrygging 225

DÓMSMÁL

Broyting í rættargangslógini 182
Uppskot til samtyktar frá tjóðveldisflokkinum 266

LANDSFYRISITINGIN

Landsstýrismál 97
Val av lögmanni og landsstýrismonnum 105
Fyrispurningur til landsstýrið (oyggjarvegurin) 217
Fyrispurningur til lögmann 279

LØGTINGHØ

Vistarhaldspeningur hjá tingmonnum v.m. 278

FÍGGJARMÁL

Roknskapur og fíggjarstandur landskassans og stovna skjal 1.
Fíggjarlögtingslóg 1959/60 292
Skattalóggávan 135
Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin 148
Tollfrítt tubbakk 151
Elektricifisering av útoyggjum v. m. 194
Skattur til landskassan 218
Gjaldið til fólkapensión 269

HEILSUMÁL

Kgl. fyriskipan um svangerskab 126
Sjúkrasystrar 129
Avogning av lendi til sinnissjúkhús 216

LANDBÚNAÐARMÁL

Últanbíggjajörð 234
Forboð fyri gerð og sölu av mjólk frá mjólkamaskinum 276

LÁNSÁBYRGDIR OG LANDSKASSALÁN

Veðhald av útgerðarlánum til portugalstrolarurnar 120
Veðhald av láni til trolarin Jóannes Fonsdal 156
Ábyrgd av láni til Sandavágs kommunu 218
Landskassalán til havnagerð 226
Ábyrgd av láni til keyp av agni 238

Ábyrgd av láni til Klaksvíkar kommunu 247
Ábyrgd av láni til havn í Lorvík 250
Ábyrgd av lán til Nes kommunu 251
Ábyrgd av láni til S. E. V. 261
Ábyrgd av láni til Vágs kommunu 275

SAMFERÐSLUMÁL

Kommunanna partur í útreiðslum av landsvegabygging 100
Flogsamband við útheimin 150
Studningur til umvæling v. m. av báta drátti á Vágseiði 166
Lendingarábótur í Fugloy 178
Bátabylur í Kaldbak 188
Bygging av strandfaraskipi 219
Vegir og lendingar 255

SJÓVINNUMÁL

Broyting í lógini um fiskiskap undir Föroyum 98
Val av nevnd í fiskimarksmálinum 107
Endurnýggjing av skipaflotanum 132
Frágreiðing frá millumlandafundi í Geneve 134
Sjómannslógtingstóg 151
Bygging og rakstur av flaka- og frystivirkjum 157
Lán til byggingar av húsum til útróðrarmenn í Grönlandi 161
Studningur til bátar til útróður í Grönlandi 163
Studningur til bátar og skútur 165
Bygging av fiskiförum 171
Nýtsla av trolarum sum móðurskip 171
Broyting í lóg um eykanvskriving 179
Broyting í norðsjóvarkonventiónini 187
Viðlót til minstulön og fiskapris 189
Veðhald av útgerðarláni til útróður í Grönlandi 191
Studningur til heimaútróður 192
Eykastudningur til lönjavningargrunnin 228
Fiskiskaptur innanfyri fiskimark 241
Endurgjald av skaða uppá fiskireiðskap 263
Stuðul til útróðrarmenn við Grönlands handil 270

SKÚLAMÁL

Skúlabókaútgáva 177
Hægri skúli 232

TJENASTUMENN

Eftirlön til tænastumenn 268

TRYGGINGARMÁL

Ábyrgdartrygging fyri hundar 127

VAL V. M.

Val av álitismonnum og nevndum 167

VERJUMÁL

Uppskot til samtyktar (radarmálið) 195

VINNUMÁL

Stuðning av vinnuligum framburði 183
Broyting í lóg um seming 220
Broyting í lóg um lönrinding 230

Ólavsøkutingið var inni í 39 dagar og hevði 31 fundir.
Vetrartingið var inni í 113 dagar og hevði 68 fundir.

EYKATINGSETAN Í JUNI 1958

Ár 1958, 4. juni kl. 10 var löglingið sett.

Tingformaðurin legði fram kunngerð frá lögmanni d. 30. mai 1958, har hann hevur boðið tingmonnum til eykating til viðgerðar av tingmáli nr. 1/1958 (eykating): *Fiskimarksspurningurin.*

Tingmenninir vórtu teir somu sum á vetrartingi 1957.

Loyvi at víkja frá tíðarfreistunum eftir tingskipanini var givið við 19—0.

Frágreiðing frá lögmanni á tingi 4. juni 1958.

Nú lögtingsmenn eftir áheitan frá fólkaflokkinum og gl. sjálvstýri eru boðaðir til eykatingsetu til viðgerðar av sjómarksmálinum vil eg fegin, áðrenn farið verður undir viðgerðina av hesum máli, geva teimum æraðu linglimum eina stutta frágreiðing í málinum.

Málið var til viðgerðar í seinastu tingsetu,serlig nevnd var sett, sjómarksnevndin. Hon gav frá sær tilmæli til landsstýrið um stöðu Föroya til tann instruksin, sum givin varð sendinevnd Danmarkar til millumlandafundin í Genéve í februar-apríl í ár til viðgerðar av tí uppskoti til rættarskipan á havinum, sum lógarnevndin í Sameindu Tjóða hevði sett fram. Í donsku sendinevndini vóru eftir tilmæli frá landsstýrinum Daniel Nolsöe, býrattardómari og Johan Djurhuus, skrivstovustjóri, limir.

Stöða landsstýrisins og lögtingsnevndinnar var, at 16 fjórðinga territorialmark átti at verða kravl, um ikki Genévefundurin kundi góðtaka eitið fiskimark. Varð tó serligt fiskimark góðkent, varð semja um at taka við hesum; markið mátti tó helst ikki vera trengri enn 16 fjórðingar og kundi so slakast í kravinum til territorialmarkið. 19. apríl í ár samtykti löglingjð einmælt, at yuskið um 12 mil sum minsta mark er óbroytiligt og verður ikki at víkja frá hesi stöðu. Eftir hesum viðtöknu hava teir föroysku umboðsmenninir í donsku sendinevndini starvast.

Genevéfundurin, har 86 lond vóru umboðað, viðgjördi sum æraðu lögtingsmonnum kunnugt, nógv onnur mál enn breiddina av sjómarkinum. Fundurin hevði sum sagt alt uppskotið frá lógarnevndini til viðgerðar. Uppskotið umfataði rættarskipanina á havinum yvirhövur, sum dömi um onnur mál kunnu nevnast rættin hjá orlogsmonnum til friðaliga sigling, farmasigling, tiltök móti oyðing av fiski og landgrunnin t. v. s. tað sum er í landgrunninum. Tað eydnaðist at fáa samtykt öll hesi seinru málini.

Fyri Föroyar eru tey samtyktu friðartiltökini av största týdningi. Tey geva viðkomandi strandalandi út frá givnum grundum rætt til sjálvi, um samráðingar hava verið úrslitaleysar, at fyriskipa friðingar; hesi tiltök komu í gildi beinanvegin; annað land kann tó krevja málið til viðgerðar í serligum valgerðarrætti. Áðrenn henda og aðrar samtyktir verða bindandi, skulu tær ratifiserast, men er rímulig grund til at rokna við, at tey lond sum fiska undir Föroyum, og tær verður serliga hugsað um Bretland, ratifisera.

Sum kunnugt varð ongin samtykt um sjómarkið sjálvt, tað málið

sum av öllum teimum, ið lógu fyri, hevði størsta týdningin fyri okkum. Fundurin vísti ein týðuligan tendens tann vegin, at 3 míla markið hevur ikki longur ein meirihuta aftan fyri seg. Uppskotið frá Kanada um eitt fiskimark uppá 12 fjórðingar varð einasta uppskotið, ið varð samtykt í undirnevndini, meðan m. a. uppskotið frá U.S.A. fall. Hetta uppskotið, ið fyrisetti eitt territorialmark uppá 6 fjórðingar og eitt fiskimark uppá 12, tó við rætti fyri tey lond, ið hövdu fiskað við viðkomandi strendur seinastu 5 árini, framvegis at fiska millum 6 og 12 fjórðingar, varð tó tikið upp aftur í plenum og fekk har tær flestu ja-atkvöðurnar, fleiri enn upppskot Kanadas. Vegna tær serligu procedureregluarnar, ið fyrisetta, at eitt uppskot fyri at vera samtykt í plenum skuldi hava 2/3 av teim samlaðu ja og nei atkvöðunum, varð onki uppskot samtykt. Fundurin endaði so statt úrslitaleysur hesum máli viðvíkjandi, men var tó samtykt at mæla fyrsta aðalfundi Sameindu Tjóða til at boða til nýggjan millumlanda fund um henda spurning skjótast tilber.

23. mai í ár fær landsstýrið um ríkisumboðið telegram um, at ríkisstýrið hevur tikið upp spurningin um nýggjar samráðingar við Bretland um broyting av fiskimarkinum um Föroyar. Tey sjónarmið, sum frá donsku sendinevndini vóru borin fram á Genévefundinum um, at lond sum t. d. Föroyar, Ísland og Grönland, har fiskivinnan er so at siga einasti möguligi vinnuvegur, skulu hava viðari fiskimark enn tað, sum verður tað generella, eru eisini borin fram á tí Nato fundi, sum var í København í fyrra mánað. Á hesum fundi var eisini borið upp á mál möguleikarnir fyri samráðingum millum tey lond, ið hava áhuga fyri fiskivinnuni í Norðaca-Atlantshavinum. Ríkisstýrið sigur, at tað framvegis hevur í hyggju at arbeiða fyri rúmari föroyskum fiskiöki og í hesum sambandi vil ríkisstýrið fegið, at samráðingar verða skjótast gjörligt millum landsstýrið og ríkisstýrið í København.

Í seinastu dögunum er so hent tað, at íslendska ríkisstýrið hevur sagt frá, at teir 30. í hesum vilja kunngera, at Ísland frá 1. september fastsetur eitt fiskimark uppá 12 fjórðingar, sum tað ikki verður loyvt nökrum fremmandum skipum at fiska innanfyri. Hvussu markið verður roknað er landsstýrinum ikki kunnugt, men verður tað allarhelst so, at tað markið sum er, 4 fjórðingar, verður flutt 8 fjórðingar út.

Hvönn týdning fær henda viðkanin so fyri föroyskan fiskiskap undir Íslandi?

Landsstýrið hevur latið henda spurning kannað og verða fylgjurnar, um viðkanin verður framd, hesar:

Av teimum fiskileiðum, sum föroysk skip hesi seinru árini hava nýtt undir Íslandi, missa trolararnir 60-70 %, snörisskipini 50 %, línuskipini 50 %, snurrurváðsskipini 100 % og garnaskipini 100 %. Serliga verður tað suðurlandsfiskiskapurin sum fær smeitin, av honum verður so at siga onki eftir, einastu för sum kanska fáa royna eru trolararnir, meðan hini skipini mugu finna sær aðrar leiðir hesa tíð av arinum. Aftrat hesum má so sigast, at tað, sum eftir verður av fiskileiðum undir Íslandi, har föroysk skip royna til aðrar líðir, verður so mikið reduseað, at tað í mongum förum kanska er ívasamt um tað loysir seg at fara til Íslands.

Av samlaðu fiskiveiðu Föroya uppá nökur og hálvfems fúsund

tons, óslógdur fiskur umfram sild, eru millum 13 og 11 túsund veidd undir Íslandi. Av hesum missa so vit helst eini 8-9.000 tons. Í millum hesi er so at siga allur tann góði suðurlandsfiskurin.

Ein meiriluti í tinginum, hevur fey seinastu árini, tá ið sjómarksmálið hevur verið til viðgerðar, hildið, at vit í Föroyum skuldu ganga samráðingarvegin. Vit hava samráðst við Bretland um viðkan av fiskimarkinum og gjört semju við teir, vil lóta okkum umboða í dansku sendinevndini til Genéve, alt hetta út frá tí sjónarmiði, at hesin spurningur eigur at verða loystur antin á bilateralum ella á millumlanda grundarlag. Tað at hvört landið ger sum tað nú hóvar tí best, er ikki hildið vera beint. Fastar reglur at ganga eftir og ikki kaos, man nú vera tað sum í millumlanda eins og nationalum politikki stendur seg best í longdini.

Ísland vil so flyta sítt mark út longu nú og ikki steðga eftir, at boðað verður til annan fund í sjómarksmálinum. Hetta broytir okkara stóðu, ja vit eru komnir í eina neyðstóðu, ið ger at vit á ein og hvönn hátt mugu bjarga tí aftur, sum vit missa. Tað er nógv fyri, um vit vera noyddir til at víkja frá tí mannagongd, samráðingar, vil bigartil hava nýtt. Vit hava fó við samráðingarborði menn fyri okkum, sum hava víst, at tað ikki eru bara fey stóru londini, sum hava fingið rettin at liva.

Við samráðing millum ríkisstýrið og tað bretska stjórnina eydnaðist at fáa broyting í konventiónina frá 21. januar 1901, broytingarnar komu í gildi 1. juni 1955, og góvu tær Föroyum eina um ikki stóra so tá eina viðkan av fiskimarkinum.

Lógtingið góðkendi hesa broyting, fó undir tí treyt, at danska ríkisstýrið gjórdi stig til tingingar við Bretland um nýggja viðgerð, um so er og so skjótt grundreglur viðvíkjandi fiskimarki eru samtyktar á millumlanda grund ella í bilateralum skipanum, og hesar vildu givið Föroyum stórri sómdir enn sáttmálin, um so var, at tær vóru galdandi tá.

Hetta fyrivarni tók ríkisstýrið undir við og bar til bretska ríkisstýrið.

Tá sáttmálin frá 22. apríl 1955 varð gjórdur við Bretland, varð handilsstríð millum Bretland og Ísland av tí fiskimarki, sum Ísland einsæris hevði sett nökur ár frammanundan.

Við byrjan februar 1956 hevði hetta handilsstríð fingið ta vend, at ein kompromisloysn til fyrimun Íslands kundi væntast við tað allarfyrsta.

6. februar gjórdi tí danska ríkisstýrið bretska ríkisstýrið vart við, at eitt slíkt kompromis sambart fyrivarni vildi rettvísgera krav um at taka upp aftur samráðingarnar um föroyska fiskimarkið.

Í november 1956 tyktist skipan at vera komin í lag millum Bretland og Ísland, soleiðis at Bretland sum eitt modus vivendi effirlíkndi eitt 1 míla Islendskt fiskimark inntil U. N. hevði fingið skipað allheimsreglur um sjómark og fiskimark.

Aftaná ynski frá Danmark og Föroytum at taka upp aftur samráðingar um föroyska fiskimarkið var sett fram, helt Bretland at best var at steðga við hesum til aftaná fundin í U. N.

Sum frammanfyri greitt frá, kom eingin semja í lag í Genève um sjómarkið og fiskimarkið. Ísland hevur tó nú boðað frá, at teir flyta fiskimarkið út til 12 fjórðingar.

Tað má eftir hesum kunna sigast, at tær umstöður sum valdaðu, tá lögtingið gekk við til sáttmálan við Bretland frá 22. apríl 1955, hava broytt seg so stórliga, at það nú helst er so, at Föroyar ikki longur kunnu vera bundnar av sáttmálanum.

Sum kunnugt gekk sáttmálin frá 1901, sum eisini umfatar Ísland, útfrá princippinum um 3 míla markið. Hesar umstöður mugu í hægsta stíg sigast at vera broytlar við teim íslendsku broytingum, fyrst til 4 fjórðingar og nú til 12 fjórðingar.

Aftaná hetta má lögtingið kunna standa frítt til annaðhvört at krevja upptikið nýggjar samráðingar við Bretland ella, um sakkunnleikin tykir það vera betur gagnandi fyri at fáa so rúmligt fiskimark sum nakað annað land í Norðara-Atlantshavinum fær góðkent ella eftirlíkað, at siga sáttmálan upp.

Um tilætlaða nýggja broytingin í íslendska fiskimarkinum kemur í gildi, kann hetta föra við sær, at ein enn störri fiskiflofi kemur at dríva rovdrift á tí föroyska landgrunninum, og vit soleiðis troðkaðir upp í horn, um samráðingarleiðin ikki förir á mál, verða noyddir at broyta okkara fiskimark á líknandi hátt sum Ísland.

Eg skal tó eina ferð vísa á, at samráðingarleiðin eigur at roynast fyrst og her kunnu hugsast tvinnir möguleikar,

1) ein víðkan av fiskimarkinum,
2) ein friðing av öllum landgrunninum fyri trolfiskiskap saubart tey princippini, sum m. a. Bretland er gingið inn fyri í Genève.

Vit liva í eini tíð, har tey ymisku londini eru meiri bundin av hvörjum öðrum enn nakran tíð og royna tey tí við alheimsskipanum við samráðing og semju at skapa sáttmálar landanna millum, sum í longdini bert kann gagna öllum pörtum. Vit mugu eisini fyri okkara part hava í huga tann stóra týdning það kann hava eisini fyri okkum, ikki minst á tí handilspolitiska ökinum, at vit eftir förinuni eru við í eini slíkari alheimsskipan.

Eg havi við hesum royndi at geva eitt stutt yvirlit yvir fiskimarksmálið og vóni, at landsstýrið heilt skjótt vil vera fört fyri at koma við einum uppskoti.

1. Fiskimarksspurningurin.

Ár 1958, 6. juni legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

samtykkt í fiskimarksspurninginum.

Föroya lögting samtykkir:

Nú Ísland hevur samtykt at flyta sítt fiskimark út á 12 fjórðingar frá 1. september 1958, hevur hesin veruleiki broytt forútsetningin undir sjómarksmálinum so frá grundini, at Föroyar mugu kenna seg leysar av sáttmálanum við Bretland frá 24. juni 1901, sum broyttur í fyribils-sáttmála frá 22. april 1955, og verður sostatt fiskimarkið undir Föroyum sett út á 12 fjórðingar, samstundis sum Ísland flytir.

Viðmerkingar:

Fundurin í Geneve í februar-april 1958 endaði uttan nakra avgerð í fiskimarksspurninginum, men sum kunnugt fekk uppskotið frá Kanada um 12 fjórðinga fiskimark meiriluta í nevnd, men ikki so mikið sum törvaði á plenarfundinum (2/3).

Ísland er fyrsta landið í Norðuratlantshavinum, sum ætlar at seta sær 12 fjórðinga fiskimark og av eintingum og hevur gjört samtykt samsvarandi at koma í gildi 1. september í ár.

Henda samtykt Íslands hevur broytt stöðuna í fiskimarksspurninginum so frá grundini, at Föroyar mugu vera leysar av sínum sáttmálabindingum við Bretland, og flyta sítt fiskimark so langt og samstundis sum Ísland flytir til tess at fáa nakað aftur fyri tað, sum mist verður undir Íslandi og fyri ikki at liggja undir tí ovurfisking á Föroya grunnum, sum ivaleyst fer at standast av samtykt Íslands.

Tað verður neyðugt at halda seg til teir 12 fjórðingarnar, ið hvítssu er fyri fyrst, so sum samtykt á tingi í tingmáli nr. 103/1957, men tað má strikast undir, at henda samtykt fer ikki at skerja okkara geografisku, söguligu og vinnuligu rættindir til grunnin undir Föroyum so langt út sum til "land í eygsjón" (smbr. m. a. lögtingsmál nr. 21/1957: Alheimsreglur um sjómark).

Landsstýrið loyvir sær at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið og landsstýrið vil gera törvandi stig til fremjingar av hesi samtykt.

Tingmaðurin Erlendur Patursson legði fram soljóðandi uppskot fyri tjóðveldisflokkin:

UPPSKOT

til lóg um landhalgi og fiskimark.

§ 1.

Landgrunnur Föroya er föroysk oga og Föroya lögting hevur lóggávu um landhalgi og fiskimark og vernd fiskistovnsins á honum.

§ 2.

Landsstýrið gevur út reglugerð, sum setir fiskimark, ið gongur ikki styttri enn 16 fjórðingar úr ytstu nesum, skerum og flúrum, sum eru undan á flóð, og skal öll fiskiveiða innanfyri hetta mark vera undir föroyskari rættarskipan og föroyskum eftirliti.

§ 3.

Brot á fyrimælum, ið givin verða út eftir hesi lóg, skulu revsast við bótum frá 1.000 upp í 100.000 kr. og eftir tí sum tilskilað verður í fyrrnevndu reglugerð.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin. Reglugerðin, sum nevnd er í 2. §, skal koma í gildi 1. september 1958.

Greinargerð.

Vernd fiskistovnsins á föroyska landgrunninum er nú, aftaná meir enn hálvt hundrað ára oyðandi fiskiskap, bráðneyðug og meir enn nakra tíð lívstreyt hjá öllum Föroya fólki.

Frá elstu búsetu her á landi hava Föroyingar sökt og rökt fiskin á hesum landgrunni, og vunnið sær söguligan rætt, sum m. a. vísir seg í teimum miðanövnum í túsundtali, sum til eru frá innstu leiðum og út ytstu havnið, og í tí at í 200 ára tíðarbili áttu eingir aðrir enn Föroyingar veiðirætt innan fyri mark, sum gekk 16 fjórðingar úr landi. Landgrunnurin var hjá teimum lunnindi sum hoyrdu landinum til.

Aftanat hesum forna söguliga rætti er so at leggja, at eftir teim altjóðarættarligu sjónarmiðum, sum nú vinna störri og störri framgongd hevur landsins stjórn fulla heimild til at seta rættarreglur til at verja fiskistovnin á landgrunninum og til at seta fiskimark.

Hin vegin hava stjórnarligu viðurskifti Föroya verið tey, at landhalgismál landsins hava ikki verið hjá innlendskum stjórnarvöldum, heldur hjá dansku ríkisstjórnini.

Í hondum dansku ríkisstjórnarinnar vórðu fyrst hini söguligtt rættindi Föroyinga á landgrunnitum givin upp. Síðan hevur sama danska ríkisstjórnarvald við sáttargerðum við onnur ríki heft tann rætt, sum altjóðarætturin heimilar í landhalgis- og fiskimarksmálum, og fað júsl á slíkan hátt, at fiskistovnurin hevur ikki fingið neyðuga vernd, heldur tvörtur í móti ligið undir hættisligum og oyðandi ovfiskiskapi.

Hesum viðurskiftum hava Föroyingar og tá serstakliga tær stætlir, sum sjógvin sökja og rökja, og sum av sjónum hava alla útkomu sína, harðliga mótmælt, bæði fyrr og seinni.

Her kann hesum viðvíkjandi verða víst á mótmæli og áheitan frá fiskimonnum landsins í árinum 1898, har teir millum annað krevja fiskimarkið flutt út, ein hóp av öðrum slíkum mótmælum og áheitanum tey seinastu 50-60 árini og nú seinastu árum tey harðligu mótmæli, sum serstakliga vendu sær móti seinastu sáttargerð dansku ríkisstjórnarinnar í hesum máli, nevniliga teirri,ið gjörd varð við Ongland 1955.

Ef nakar sum helst stirðil í Föroya lögtingsmonnum, ja skal tingið eiga uppihorið heitið sítt sum ting Föroya, sum ting Föroya fólks, má tað vera skylda tess einans at lýða hesum boðum og ongum öðrum, og nú laka undir við hesum krövum og fremja tey.

Sjómarksmálið verður at loysast av Föroyingum sjálvum og sum reint föroyskt mál. Landgrunnurin um Föroyar er föroysk ogn og Föroya lögting verður at tilskila sær löggávurætt um landhalgi og fiskimark og vernd fiskistovnsins á honum. Við heimild í hesi lög skal landsstýrið geva úl reglugerð, sum setir fiskimark, ið gongur ikki styttri enn 16 fjórðingar úr ytstu nesum, skerum og flúrum, sum eru undan á flóð, og skal öll fiskiveiði innan fyri hetta mark vera undir föroyskari ræðlarskipan og föroyskum eftirliti. Henda reglugerð um 16 fjórðunga mark skal ganga í gildi 1. september í ár.

Hetta er aðalinnihaldið í tí lógaruppskoti, ið tjóðveldisflokkurin her leggur fram í sjómarksmálinum.

Tað var á vári 1952, at tjóðveldisflokkurin reisti sjómarksmálið á Föroya lögtingi. Víst varð m.a. á einmæltar samtyktir frá útróðrarmonnum í Klakksvík og Skopun. Aftur á ólavsöku sama ár tók tjóðveldisflokkurin málið upp og setti nú fram beinleiðis uppskot um at siga upp sjómarkssáttmála Dana og Bretlendinga frá 1901 um sjómarkið við Föroyar.

Hetta uppskot fekk bert atkvöður tjóðveldisflokksins, meðan bæði fólkaflokkur, sambandsflokkur, javnaðarflokkur og sjálvstýrisflokkur mæltu frá at siga sáttmálan upp. Sum tikið varð til í nevndarálitinum frá hesum flokkum skuldu vit ganga "spakuliga um hurðarnar" og "útnytta lötuna", meðan Íslendingar lógu og stríddust við Bretland og Bretlendingar royndu at svölta Íslendingar til lýdni. Hetta er ein av störstu skammarblettum sum á Föroya lögtingi situr.

Í 1953 skorar javnaðarflokkurin á landsstýri og lögting um at bera fram uppskot um at siga dansk-enska sáttmálan frá 1901 upp, soleiðis at lögtingið, tá uppsagnarfresturin er úti, kann taka endaliga stöðu í sjómarksmálinum. Málið sovnaði í nevnd.

Aftaná at loynisamráðingar hövdu verið í London, legði landsstýrið á ólavsöku 1954 fram uppskotið um broytingar í sáttmálanum frá 1901 og framleinging hans til 1967.

Stöða tjóðveldisflokksins var framvegis hin sama sum í 1952: at krevja 1901-sáttmálan uppsagdan, soleiðis at föroyskt mark kundi setast, tá sáttmálin um 2 ár fór úr gildi.

Aftaná fjæreit H. C. Hansens miðjan august ("Deres interesse") hálsaðn javnaðarflokkurin um og læt kravið um uppsögn falla.

Sambandsflokkurin og fólkaflokkurin gingu undir sjómarksuppskot Bretlendinga — við tí "fyrivarni" mótvegis danska ríkisstjórnini, at hon, undir vissum treytum, skuldi taka stig til tingingar við Bretland.

Øll sjóvinnufelög mótmæltu sjómarksuppskotinum og tey flestu kravdu 1901-sáttmálan uppsagdan.

Málið kom til avgerðar 6. september. Til tess at fyribyrgja ólukkuna mælti tjóðveldisflokkurin í seinastu lötu til at stöðga við öllum málinum. Hesum sýttu hinir flokkarnir og málið kom til atkvöðugreiðslu. Uppskot landsstýrisins um at ganga undir sáttmálan varð samtykt. Uppskot tjóðveldisflokksins um uppsögn fekk bert atkvöður tjóðveldisflokksins.

Aftaná valið í november 1951 kemur tingið saman í december. Um heystið hevði fiskimannafelagið lagt málið fyri limir sínar. Í almennari atkvöðugreiðslu millum fiskimenn gingu 92 % av atkvöðunum móti samtykt tingsins í sjómarksmálinum og á landsfundi felagsins verða einmælt samtykt, at 1901 sáttmálin skuldi uppsigast beinan vegin.

Tjóðveldisflokkurin setti fram 2 uppskot. Hitt fyrra var, at tingið afturkallaði samtykt sína frá 6. september og at tað kravdi 1901-sáttmálan uppsagdan beinan vegin. Hitt var at biðja danska ríkisstjórnina um at stöðga við at undirskriva og ratificera broytingarnar í 1901-sáttmálanum og at leggja sjómarksmálið undir föroyska fólkaatkvöðu.

Álit sambandsflokksins, fólkaflokksins og sjálvstýrisflokksins var orðað soleiðis: Tingið heldur tað ikki vera heint, soleiðis sum millumlandaviðurskiftini viðvíkjandi friðing av fiskigrunnum og setan av fiskimarki nú liggja fyri, í lötuni at siga upp fiskimarkssáttmálan frá 1901.

Javnaðarflokkurin hevði einki uppskot í málinum.

Bæði uppskot tjóðveldisflokksins fullu, meðan uppskot sambands-, fólka- og sjálvstýrisflokksins varð samstykt.

Við bræva skifti millum Danmark og Bretlands koma sáttmálabroytingarnar í gildi 1. juli 1955. Har varð tilskilað, at sáttmálin kundi ikki sigast upp fyrr enn um 10 ár. Frá uppsögn skuldi so ganga 2 ár, t.e. til 1967.Skilast skal til, at lögmaður í framlöguskrivi sínum á ólavsöku 1954 kallaði uppskotið "munandi váðkan av sjómarkinum".

Tingið kom saman á ólavsöku 1956. Tað var bert saman nakrar dagar og kom sjómarksmálið ikki til viðgerðar fyrr enn tingfundir vórðu upp aftur tiknir í januar 1957.

Í 1957 heldur landsstýrið, at "fyrivarnið" eigur at gerast "galdandi", og mælir til, at tingið saman við landsstýrinum velur sendinevnd at taka upp förvandi tingingar.

Uppskot sambands-, fólka- og sjálvstýrisflokks var, at landsstýrið skuldi seta nevnd við 3 mannum úr vinnulivinum og 1 fyri landsstýrið at samráðast við Bretlendingar um fiskimark og landingarviðurskifti.

Uppskot javnaðarflokksins var at setast skuldi 5 mannanevnd, har tingið valdi 4 og landsstýrið setti 1. Nevndin skuldi fáa heimild til at samráðast við Bretlendingar um at lata sjómarkssáttmálan frá 1955 fara úr gildi. Eisini skuldi samráðast um landingarviðurskiftini.

Uppskot tjóðveldisflokksins var sum áður at krevja sjómarkssáttmálan uppsagdan beinan vegin. Samstundis skuldi setasl serstók 5 manna millumtinganevnd í landhalgis- og fiskimarksmálum. Loksins skuldi löglingið fyrireika og gera uppskot um serstaka löggávu um landhalgi og fiskimark og vernd fiskistovnsins á föroyska landgrunninum. Útkast fyri slíkari lög varð lagt fram.

Uppskot samhands-, fólka- og sjálvstýrisflokks varð samtykt. Uppskot javnaðarflokksins og tjóðveldisflokksins fullu öll.

Landsstýrið útnevndi síðani sendinevndina. Hon fór uttan lands, men kom aftur við ongum.

Í 1958 reisir tjóðveldisflokkurin sjómarksmálið av nýggjum við hesum uppskoti: Löglingið tekur undir við krövum Föroya fólks um at gera landið leyst av dansk-enska sáttmálanum um sjómark Föroya, so at vit fáa sjómark so langt út sum altjóðarætturin heimilar.

Uppskotið fekkst onga tíð til atkvöðugreiðslu í tinginum.

Tá Genéve-fundurin skuldi byrja, læt tjóðveldisflokkurin frá sær hesa yvirlýsing: Tjóðveldisflokkurin krevur löggávurætt um landhalgi og fiskimark og vernd fiskistovnsins á föroyska landgrunninum, og tað er í ongum föri trongri mark enn 16 fjórðingar úr ystu nesum, skerum og flúrum, sum eru undan á flóð.

Seinni samtykti löglingið, at í Genève skuldi haldast upp á 12 fjórðungar sum minsta mark.

Aftaná langar og drúgvar samráðingar á Genève-fundinum komu loksins til atkvöðugreiðslu 3 hövuðsuppskot og 1 semingsuppskot. Öll uppskotini fullu, men til samtyktar kravdust 2/3 av atkvöðunum.

Fyrst var atkvöðugreiðsla um uppskotið frá Kanada. Tað heimilaði 12 fjórðunga mark. Hetta uppskot fekk 35 atkvöður, 30 vóru móti, meðan 20 greiddu ikki atkvöðu.

Millum teirra ið ikki greiddu atkvöðu var Danmörk.

Uppskot Ameriku var, at landhalgi skuldi vera 6 fjórðungar, men har aftur at skuldi strandríki hava rætt til 6 fjórðunga fiskimark, t.e. 12 fjórðungar í alt. Men her var undantak, sum hevur allan týdningin fyri okkum Föroyingar: tjóðir, sum seinastu 5 árini hövdu rikið fiskiskap á viðkomandi fiskileiðum, skuldu eiga rætt til at veiða inn móti 6 fjórðunga marki. Greinin kom við hesum undantaki at verða fullkomiliga virðisleys fyri okkum Föroyingar. Uppskotið fekk 45 atkvöður, 33 móti og 7 greiddu ikki atkvöðu.

Danmörk greiddi atkvöðu við hesum uppskoti.

Í triðja lagi kom so semingsuppskot til atkvöðugreiðslu. Tað var frá Indonesiu, Meksiko og 6 öðrum londum. Eftir tí skuldi hvört land hava rætt til landhalgi út á 12 fjórðungar. Í öðrum lagi: var landhalgi tess minni, skuldi fiskimarkið tó vera 12 fjórðungar.

Danmörk greiddi atkvöðu móti hesum uppskoti.

Fjórða uppskotið var frá Sovjetlonduunum. Hetta uppskot heimilaði 12 fjórðungar yvirhövur, men gav har aftur at möguleika fyri viðari landhalgi. Hettu uppskot fekk 21 atkvöður, meðan 17 vóru móti og 7 greiddu ikki atkvöðu.

Danmörk greiddi atkvöðu móti hesum uppskoti.

Hesi vóru uppskotini og soleiðis fór atkvöðugreiðslan fram. Sum

vit siggja hevur danska nevndin, tann sum okkum skuldi umboða, ikki greitt atkvöðu við 12 fjórðunga marki, tó at lögtingið hevði einmælt samtykt, at 12 fjórðunga mark var tað minsta, sum haldast skuldi upp á. Tvörtur í móti greiddi danska nevndin atkvöðu móti 12 fjórðunga marki, og formaður dansku nevndarinnar, Max Sörensen, segði á fundinum, at hann hevði onga heimild til at krevja meir enn 6 fjórðunga mark.

Sjómarksmálið er största mál í nútíðar sögu föroysku tjóðarinnar. Hvör tann maður og hvör tann kvinna, sum Föroyingur vil vera og sum unnar tjóð síni lív og lívsútkomu á hesum oyggjum, verður at geva sjómarksmálinum ans og at halda upp á föroyskan rætt. Her kann eingin sita í atgerðarloysi, tí hetta mál viðkemur okkum öllum og í ti hongur allur trivnaður tjóðarinnar, ikki einans vinnuliga, heldur eisini tjóðskaparliga, menningarliga og sosialt. Tey virði, sum av sjónum koma, eru grundarlagið undir allari tilveru okkara. Gleppur hetta grundarlag, so raplar alt okkara samfelag. Tað stendur tí um lívið.

Men, í ongum öðrum máli hevur föroyska tjóðin verið so illa viðfarin, sum júst í hesum största og mesta lívsnevðsynjarmáli hennara. Í 60 ár hava útlendingar við oyðileggingaramhoðum grópað á hesi dýrastu ogn okkara — landgrunninum. Fleiri hundrað miljóna króna virði flattu teir av miðum okkara, meðan landsins egnu börn illa áttu mat í munnin og tjóðin öll noyddist at liva eymýkjandi fátækramarma tilveru. Hetta er sorgarsöga föroysku tjóðarinnar í meir enn hálva öld.

Og í ongum öðrum máli hevur tjóð okkara verið so illa svikin, sum júst í sjómarksmálinum. Fyri 60 árum síðani kravdu Föroyingar rætt sín: ræði yvir landgrunninum og skip til verju. Men, tað gekk beint tvörtur í móti krövum teirra. Landgrunnurin varð avreiddur útlendingum og eingi skip teir fingu til verju. Fyri 3 árum síðani fær so henda niðlugs- og skaðagerð nýtt vælsignilsi og innsigli. Vil áttu ongan til at verja hin föroyska rætt. Heldur var tað tvörtur í móti, at teir sum verja skuldu, gingu í lið við teimum, sum á okkum níddust. Soleiðis var jú á altjóðafundinum í Geneve her fyri. Hetta er harmasöga okkara.

Alt hetta vita vit. Men, so siga menn: kann naknð gerast? Vit eru so smáir og fáir, hinir so stórir og nógvir. Har til er í fyrsta lagi at svara, at hann, ið ikki heldur upp á sín rætt, men gerst undirbrotligur og royndir at krúpa fyri öðrum, hann hevur tapt í forhond. Har til er í öðrum lagi at svara, at halda vit ikki upp á rætt okkara í sjómarksmálinum, so halda vit ei heldur upp á rætt okkara til at liva í hesum landi. Har til er í triðja lagi at svara, at teir stóru eru ikki so stórir og teir nógvu ikki so nógvir, sum higar til hevur verið hildið. Ella við öðrum orðum sagt: vit eiga bæði rættin og möguleika til at vinna rættin.

Tað eru nevniliga öll tekin til, at tiðin er okkum, eins og öðrum smánum fiskiveiðitjóðum, til vildar. Rætt er tað, at hesar tjóðir fingu ongan samtyktan lógformiligan rætt á altjóðafundinum í Geneve. Men,

soleiðis sum atkvöðurnar fullu har, er tað týðuligt, at tað hungursband, sum hesar smátjóðir hava verið heftar í higar til, nú er farið at dragna.

Og nú stendur til okkara! Tað er fyrst at minna okkum á, at vit hava 60 ára royndir fyri, at hetta livsneyðsynjarmál, sjómarksmálið, verður ikki loyst av öðrum soleiðis at tað verður okkum til gagns og frama. Hetta vita vit, og tað er óneyðugt at tosa meir um tað. Tann tíð er farin og kemur onga tíð aftur, at vit lita nökrum öðrum til í hesum máli. Har næst er at minna okkum á tey mistök, ið vit sjálvir hava gjört, tí mistök hava vit gjört. Största mistakið er tað sum longu er nevnt, nevniliga at vit litu öðrum í hendi at rökja hetta mál. Hitt næsta er, at vit hava havt lyndi til at slaka í sjómarksmálinum í teirri vón, at vit tá fingu einhvönn fyrimunin. Vit hava nú sæð, at tað kom at verða tvörtur í móti. Onnur tjóð, sum júst ikki vildi slaka, fekk fyrimun, vit ikki.

Fyri hvönn dag, ið gongur, verður tað týðiligari og týðiligari, at skal nakað sum helst vinnast í sjómarksmáli okkara, verður Föroya fólk at taka tað í egnar hendur. Danska ríkisstjórnin og menn hennara her hava svikið alt Föroya fólk í hesum máli so dyggiliga sum svikjast kundi.

Landgrunnurin er föroysk ogn og eingir uttan júst Föroyingar sjálvir hava nakað ræði yvir honum ella tí náttúrurikidömi, sum hann eigur. Tað, sum vit Föroyingar verða at gera, er at lýsa og kunngera henda ognarrætt og somuleiðis tað, at vit tilskila okkum öll rættindi til at verunda fiskimið og fiskislóvn á honum — har í millum til at seta fiskimark hesi verund til frama.

Danir hava svikið okkum í sjómarksmálinum frá tí degi, teir fyri meir enn hálvari öld síðani byrjaðu loynisamráðingar sínar við Bretlendingar og til dagin í dag. Sjómarkssáttmálin frá 1901 varð skoðraður inn á okkum — uttan vitan okkara og beint tvörtur í móti vilja okkara. Í hálva öld hevur hövuðsuppgáva donsku sjóverjunnar við Föroyar verið at lætta útlendingum lógarbrot og ránfiskiskap á föroyskum sjóöki. Aftur í loynisamráðingunum í 1953-54 gingu Danir Onglendingum til handa, og við stuðli frá sveinum sínum her undirritaði Danastjórn í 1955 nýggjan sáttmála við Bretland sum í veruleikanum var nógv verri enn hin fyrri. Sáttmálin frá 1901 kundi tó sigast upp og síðan fara úr gildi um 2 ár. Hesin nýggi bindur okkum í 12 ár. Danska ríkisstjórnin hevur alla hesa hálvu öld framt gagnsmál Bretlendinga, men niðst á okkum Föroyingum og gagnsmálum okkara. Og við sonna svikum hildu Danir fram í Geneve, tó teir nú royna at ljúgva seg burtur frá tí, ið har hendi.

Nú er nóg mikið av hesum. Og tann maður, sum framvegis mælir til at láta Danir rökja sjómarksmál okkara, hann svikir fólk sítt. Sjómarksmálið á föroyskar hendur og loyst sum föroyskt mál — hvörki sum danskt mál ella danskt-enskt.

Danir gjördu 1901-sáttmálan og teir gjördu 1955-sáttmálan. Teir og Bretlendingar um tað. Vit siga: landgrunnurin er okkara og ikki tykkara. Her eftir skulu Danir ikki sleppa at handla við hesi dýrastu ogn okkara og Bretlendingar ikki at eyðræna hana.

Her eru bond, sum hefta slíkan sjómarkspolitikk. Tað vita vit. Men

so verða vit at taka avleiðingarnar og gera tað til fullnar. Vit verða at slíta öll ley bond, sum hefta ræði okkara í hesum máli. Og tað er einki at ivast í, at Föroya fólk fer at gera hetta. Tí her stendur um liv ella deyða hjá okkum og eftirkomarum okkara. Fólkið reisir seg, tí tað vil ikki doyggja. Eingin lög, eingin stjórnarskipan, einki úllendskt vald — danskt, enskt ella tað er eingir heimligir svíkjarar kunna binda niður lívsviljan í einum fólki, heldur ikki í tí föroyska fólkinum, tó at illa hevur verið við tí farið.

Sjómarksmálið undir föroyska löggávu tað er leiðin. Samstundis seta vit reglur sum í einstökum lutum áseta fiskimark á landgrunninum. Öll fiskiveiða innan fyri hetta mark skal vera undir föroyskari rættarskipan og föroyskum eftirliti. Og reglur settar til at vernda fiskimiðini og fiskistovnin innan fyri hetta mark. Eyðvitað er, at hitt almenna ráðförir seg við sjóvinnufelög landsins, áður enn slíkar reglugerðir verða settar.

Föroyinga millum eru ikki tvær meiningar um sjómarksmálið, tó at vissar kreftur royna at fáa tað at siggja soleiðis út. Föroyingar vita nú, at landgrunnurin hoyrir landinum til og at föroyska tjóðin og eingin annar eigur yvirvaldsrættin yvir honum. Í góðum treysti skulu vit nú taka hendur saman um at föra sjómarksbardag okkara til fullnaðarsigurs. Soleiðis sum viðurskiftini hava lagað seg verður hetta tyngsta tak, sum föroyska tjóðin nakra tíð er farin undir, men vit hava einki annað í at velja, tí her stendur um liv föroysku tjóðarinnar, okkara sum nú liva og teirra sum aftaná okkum koma og hetta land skulu byggja í komandi tíðum.

Tingmaðurin J. F. Øregaard legði fram soljóðandi uppskot fyri javnaðarflokkin:

1. Lögtingið samtykkir, at frá 1. januar 1959 verður sjómarkið við Föroyar sett 12 sjómíl frá ytstu skerjum og oddum út frá basislinjum, og gítingargrunnar okkara at friða móti trolfiskiskapi.
2. Ríkisstýrið danska verður biðið um at fremja hesa samtykt og kunngera öðrum tjóðum hana.
3. Um ikki sáttmálin við bretar viðvíkjand íföroyska sjómarkinum av nýggju umstöðunum er farin úr gildi, verður heitt á danska ríkisstýrið og Föroya landsstýri at taka sær av at fáa sáttmálan úr gildi innan 1. januar 1959.
4. Viðvíkjandi fiskiskapi innanfyri sjómarkið og verjuni av tí verða at gera serligar reglur.

Viðmerkingar:

Nú íslendingar fara at flyta sjómark 12 fjórðingar út, verður frá 1. september í ár ómöguligt hjá föroyingum at reka fiskiskap undir Íslandi. Henda vend í sjómarksmálinum verður dyggasti smeitur, ið föroyingar hava verið fyri, um vit ikki kunna fáa bót á sárið. Og her megu vit vera snarir í vendini.

Tað, ið nú meiri enn á nökrum sinni leikar fyrst á hjá okkum, er at skipa fyri, at vit við okkara strendur og á okkara sjóöki ikki halda okkum minni rætt enn íslendingar og aðrar tjóðir halda sær við leirra strendur og sjóöki. Vit megu tí nú beinanvegin lýsa tað sum tingsins stöða, at hitt föroyska sjómarkið ikki eigur at fara styttri enn hitt íslendska og russneska, og at okkara gitingargrunnar verða at friða móti trolfiskiskapi.

Tann harmaleikur fór fram, at tingmenn í sini tíð ikki tóku undir við javnaðarmonnum, tá ið teir settu uppskot fram um, at bretar skriviliga skuldu binda seg at góðtaka ella tolerera lika so vítt sjómark við Föroyar sum teir komu at góðtaka ella tolerera við Island. Varð hetta gjört heldur enn at endurnýggja frímilamarkið við einum lítlum bata vestan fyri, hövdu vit ongar trupulleikar av sjómarkinum í dag. Vit vildu so automatisk fingið sama sjómarkið sum íslendingar. Okkara veiðiinteressur undir Íslandi hava verið alstórar, og var tað tí einasta beina leiðin at leggja okkum á somu stöðu sum íslendingar í sjómarkskravinum.

Sagt er, at hond er, ið hevur, og bretar fingu handa 10 ára sáttmálan frá lögtinginum sambart uppskot frá sambandsflokkinum og fólkaflokkinum. Hesin sáttmáli stríðir móti okkara lívsinteressum, og er tað tí lívið um at gera, at hann verður at fara úr gildi. Rikisstýrið danska og Föroya landsstýri megu tí leggja doyðin á at skipa so fyri, at hesin vanlukkusáttmáli verður at fara úr gildi innan 1. januar 1959.

1. viðgerð kl. 11 og málið bein tí serstaka 7 mannanevnd.

Til hennara vóru valdir: Hákun Djurhuus, Samuel Petersen, Trygve Samuelsen, Jens Chr. Olsen, Erlendur Paturssón, J. Fr. Óregaard og P. M. Dam.

2. viðgerð kl. 21. Formaðurin legði fram soljóðandi álit frá nevndini:

Sjómarksnevndin hevur havt lögtingsmál nr. 1/1958: Fiskimarksspurningurin til viðgerðar. Málið var lagt fyri tingið av landsstýrinum og samstundis kom til viðgerðar í nevndini uppskot frá javnaðarflokkinum um Föroya sjómark og frá tjóðveldisflokkinum um landhalgi og fiskimark. Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta (Hákun Djurhuus, Sámal Petersen, Jens Chr. Olsen, Tr. Samuelsen, P. M. Dam og J. Fr. Óregaard) og ein minniluta (Erlendur Paturssón).

Meirilutin tekur undir við landsstýrisins viðmerkingum, ið eru soljóðandi:

Fundurin í Geneve í februar-april 1958 endaði uttan nakra avgerð í fiskimarksspurninginum, men sum kunnugt fekk uppskotið frá Kanada um 12 fjórðinga fiskimark meiriluta í nevnd, men ikki so mikið sum törvaði á plenarfundinum (2/3).

Ísland er fyrsta landið í Norðuratlantshavinum, sum villar at seta sær 12 fjórðinga fiskimark og av eintingum og hevur gjört samtykt samsvarandi at koma í gildi 1. september í ár.

Henda samtykt Íslands hevur broytt stöðuna í fiskimarksspurninginum so frá grundini, at Föroyar mugu vera leysar av sínum sáttmála-

bindingum við Bretland, og flyta sítt fiskimark so langt og samstundis sum Ísland flytir til tess at fáa nakað aftur fyri tað, sum mist verður undir Íslandi og fyri ikki at liggja undir tí ovurfisking á Föroya grunnum, sum ivaleyst fer at standast av samtykt Íslands.

Tað verður neyðugt at halda sig til teir 12 fjórðingarnar, ið hvussu er fyri fyrst, so sum samtykt á tingi í tingmáli nr. 103/1957, men tað má strikast undir, at henda samtykt fer ikki at skerja okkara geografisku, sögulign og vinnulign rættindir til grunnin undir Föroyum so langt út sum til 'land í eygsjón'. (smbr. m. a. lögtingsmál nr. 24/1957: Atheimsreglur um sjómark).

Minnilutin (Erlendur Patursson) mælir til, at uppskot tjóðveldisflokksins verður samtykt óbroytt.

Meirilutin áleggur landsstýrinum at gera lörvandi stig til fremjingar av niðanfyri setta uppskoti:

UPPSKOT
til
samtyktar

Nú Ísland hevur samtykt at flyta fiskimark sítt út á 12 fjórðingar frá 1. september 1958, hevur hesin veruleiki broytt forútsetningin undir sjómarksmálinum so frá grundini, at Föroyar mugu kenna seg leysar av sáttmálanum við Bretland frá 21. juni 1901 sum broyttur í fyrbilssáttmála frá 22. apríl 1955.

Landgrunnur Föroya er föroysk ogn og samlykkir lögtingið, at frá 1. september 1958 verður fiskimarkið um Föroya sett 12 fjórðingar frá ytstu skerjum og oldum út frá beinum basislinjum, og allur trolfiskiskapur bannaður á ökinum innanfyri fiskimarkið.

Minnilutin setur fram hetta

UPPSKOT
til
samtyktar

Föroya lögting mótmælir, at landhalgis- og fiskimarksmál Föroya verða viðgjörd og avgjörd á tí regionala fundi, sum Bretland, Danmark og onnur lond hava í umhúnaði at hava um hesi.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Háknu Djurhuus o. fl.:

Í staðin fyri minnilutans uppskot verður sett:

Föroya lögting góðtekur onga endaliga avgerð viðv. fiskimarkinun um Föroyar, sum er ikki samtykt á Föroya lögtingi.

Uppskot tjóðveldisflokksins fall 6 - 0.

Uppskot meiralutans samtykt 23—0.

Broytingaruppskot frá H. Djurhuus o. fl. samtykt 19 0.

Minnilutauppskot (Erlendur Patursson) fall 6 0.

Ólavsøkutingið 1958.

Ár 1958 ólavsökudag kl. 13 var Föroya lögting sett. Tingformaðurin frá seinastu setu, Joh. M. Fr. Poulsen, lýsti, at ólavsökutingið 1958 var sett sambært skriv lögmannsins frá 15/7-1958.

Tingmenninir eru hesir:

Hákun Djurhuus, Klakksvík, ff.
Richard Jacobsen, Klakksvík, jv.
Sámal Petersen, Klakksvík, sj.
Johan Símonsen, Klakksvík, tf.
Joh. M. Fr. Poulsen, Strendur, sh.
Fredrik Hansen, Söldarfirði, tf.
Olaf Ellingsgaard, Eiði, tf.
Poul Petersen, Tórshavn, ff.
Jens Chr. Olsen, Toftir, sh.
J. Fr. Øregaard, Götu jv.
Fredrik Bláhamar, Vestmanna, ff.
Hans Iversen, Kvívík, sh.
Leon Joensen, Sörvági, sh.
Samuel Ellefsen, Miðvági, ff.
D. P. Danielsen, Miðvági ff.
Richard Long, Tórshavn, sj. í valf. við ff.
Djóni í Geil, Tórshavn, sj.
Trygve Samuelsen, Tórshavn, sh.
Hanus við Högadalsá, Tórshavn, tf.
Kjartan Mohr, Tórshavn, frbf.
J. P. Davidsen, Sandi, jv.
Erlendur Paturssson, Tórshavn, tf.
Arnhold Nielsen, Sumba, sh.
A. Djurhuus, Vági, sh.
J. H. Danbjörg, Porkeri, jv.
P. M. Dam, Tvöroyri, jv.
Knud Nygaard, Tvöroyri, ff.

Til tingformann var Joh. M. Fr. Poulsen, valdur.

Poul Petersen legði fram skriv d. 29/7 hareftir hin föroyski fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) og sjálvstýrisflokkurin vóru gingnir saman í valbólk til val av næstformanni, tingskrivara og tingnevndum fyri tingsetuna.

Til næstformann var so valdur R. Long.

Til tingskrivarar vóru valdir Jens Chr. Olsen og Fr. Bláhamar.

Tingformaðurin bað tingmenn ropa eitt 9 falt hurra fyri kongi og eitt 3 falt hurra fyri Föroyum.

1. august legði tingformaðurin fram fjarrit frá Richard Jacobsen um farloyvi og varamaður hansara E. Waag tók sess hansara á tingi so leingi.

Frágreiðing frá løgmanni á løgtingi 29. iuli 1958.

Eins og tvey tey seinastu árini vil eg, nú löglingið byrjar nýggja setu, landsstýrisins vegna nýta hövi til at geva eina stutta frágreiðing yvir ymisk mál, sum löglingið og landsstýrið hava havt um hendir.

Eg vil halda tað vera beinast at byrja við

fíggjarviðurskiftum landskassans.

Gjögnum seinastu árini síðani seinasta löglingsval hevur landsstýrið roynt at leggja fíggjarlögina soleiðis til rettis, at inntökur landskassans hava verið nakað hægri enn útreiðslurnar; landskassin hevur soleiðis havt eitt hóskandi og rímuligt rakstraravlop.

Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at tað er heldur ikki gjörligt í öllum förum at meta um stöddina av öllum útreiðslum landskassans — t. d. hendir tað, at útreiðslur til sjúkahúsrakstrin, strandferðslu, vega- og havnabygging fara upp um tu útreiðslu,ið er ætlað á fíggjarlögini — og má tað tí haldast neyðugt at meta inntökur landskassans soleiðis, at tey löl, ið sett verða á fíggjarlögina sum inntökur, ið hvussu er halda og allarhelst verða hægri á rokuskapinum.

Tey avlop, sum landskassin hevur havt seinastu árini, hava verið nýtt til konsolidering — ein konsolidering, sum eisini er neyðug, um hugsan skal vera um, at lángevarar her í Föroyum, hinum partinum av rikinum ella útlondunum skulu hava álit á löglting og landsstýri.

Tað skal beinan vegin viðgangast, at seinastu árini hava verið góð inntökuár fyri landi sum heild. Fyri landskassan hevur hetta fört við sær hægri beintleiðis skatt, hóast skattalögin ikki er broytt, og minkandi skattaeftirstöður.

Fylgjandi töl vísa hetta:

Eftirstöður:	Landsskattur:	Fiskaskattur:
1/4 1952	2.749.446,73	
1/4 1953	3.617.555,83	
1/4 1954	3.996.700,44	
1/4 1955	2.706.145,31	574.940,21
1/4 1956	1.655.757,63	213.898,81
1/4 1957	1.508.249,71	75.613,04
1/4 1958	1.517.200,01	48.792,60

Á serligar banka- og sparikassabókur til ymiskur grunnar er sett av:

1)	Felags byggigrunnur	kr.	677.579,55
2)	Útvarpsgrunnur		75.000,00
3)	Nýtt löglingshús		305.215,39
4)	Sjúkahúsbygging		559.154,13
5)	Montunargrunnur	—	256.100,00
6)	Skúlabyggigrunnur	—	376.217,05
7)	Búnaðarskúli	—	164.811,32
8)	Studenta- og kostskúli	—	528.767,95
9)	Eftirlönargrunnur löglingsins	—	344.273,86
10)	Byggigrunnur strandferðsla landsins		100.000,00
11)	Flogvöllurin	—	98.800,00
12)	Framsýning í norðanlondum	—	50.000,00
13)	Fimleikargrunnurin	—	158.830,17
14)	Hotelbyggigrunnur	—	57.219,93
	Tilsamans:	kr.	3.751.969,95

Umfram gjöld úr landskassanum á hesum serkonti er úr landskassanum útgoldið:

Ágóði í millumrokning við "Farm"	454.000,00
Lán úr tiltaksgrunninum til "Farm"	342.000,00
Útgoldið fyri telefonverkið	333.325,00
Goldið sum kautionistur fyri p/f Trolkol (herav eru kr. 16.409,80 afturgoldnar, rest kr. 155.352,79 avskívaðar sum tap)	171.762,59
Goldið sum kautionistur fyri p/f Faerösit (avskrivað sum tap)	36.253,61
Goldið sum kautionistur fyri Föroya mek. Grótldnaða	81.040,71
Pr. 1. april 1958 hevur landskassin tilgóðar í millumrokning við kommunur	925.610,10

Vinnulánsgrunnurin,
sum uppruna liga hevði eina skuld uppá um 9 mill. kr., hevur nú eftir at gjalda kr. 1.577.717,63.

Ymiskir lántakarar skylda kr. 925.421,43.

Uppá útlán hevur vinnulánsgrunnurin tey farnu árini havt eitt tap uppá kr. 7.348.024,43.

Kommunal viðurskifti.

Tey figgjarligu viðurskiftini hjá kommununum hava verið stöðugt batnandi í 1957, og eru skattaeftirstöðurnar hjá flestu kommununum minkaðar. Í meðal eru eftirstöðurnar slakar 50 % av álíkningini, ógvuliga djavnt býttar millum kommununar, og kemur hetta mest av, hvussu stóran dent kommunustýrini leggja á innkrevjingina. Soleiðis

hevur onkur kommuna bert 6—8 % í eftirstöðut, meðan onnur liggur út við 150 % av álíkningini.

Lánini hjá kommununum eru at kalla á jour, og tykjast kommununar ikki at hava trupulleikar av tí dagliga rakstrinum.

Landskassin garanterar stóran part av teim lánum, kommununar hava. Hetta eru mest eldri lán frá teirri tíðini, tá kommununar als ikki fingu lán uttan lögtingsábyrgd, men hava hesi verið minkandi, eins og nú ikki tykist so torfört hjá kommununum sjálvum at fáa lán, bert tær hava loyvi frá landsstýrinum. Tey lán, sum landskassagarantiur er latin til tey seinni árini, eru mest stórri lán fyri at gera kommunurnar förar fyri at fara undir stórri útbyggingar.

Landskassin hevur havt lángarantiir tey seinni árini soleiðis:

pr. 11/ 6 1951	11.710.324,34
pr. 11/12 1953	12.204.923,84
pr. 11/12—1954	10.657.289,19
pr. 11/12—1955	9.633.873,74
pr. 11/12 1956	9.671.370,98
pr. 11/12 1957	10.030.831,18

Í 1957 hevur Klakksvíkar kommuna fingið nýtt lán 1.000.000 kr. til skúlabygging.

Umfram hesi lán til kommunur veðheldur landskassin eisini fyri ymsum öðrum lánum til privatar fyritökur og almennar og hálvalmennar stovnar.

Hesar ábyrgdir vóru:

pr. 11/12—1954	17.937.487,51
pr. 11/12—1955	17.741.135,01
pr. 11/12—1956	21.331.346,98
pr. 11/12—1957	22.899.036,84

Umfram hesi lán við landskassaábyrgd hava kommununar ymisk lán og kredittir uttan ábyrgd. Eftir tí, sum upplýst er, vóru hesi árslok 1957:

í Færö Amts Sparekasse	5.464.727,82
í Sjóvinnubankanum	340.606,27
í Föroya Banka	2.135.584,51
í Norðoya sparikassa	197.100,00
í Suðuroyar sparikassa	143.000,00
tilsamans:	8.281.018,60

Sparipeningur og umfar av peningaseðlum.

Seinastu árini er peningainnsetingin í bankar og sparikassar á vanligar banka- og sparikassabökur vaksin mundandi, og frangongur hetta av fylgjandi tölum:

pr. 1/1 1953	63,5 mill.
pr. 1/1 1954	67,5 —
pr. 1/1 1955	73,5 —
pr. 1/1 1956	81,5 —
pr. 1/1 1957	90,0 —
pr. 1/1 1958	97,3

Í sama tíðarskeiði hevur umfarið av peningaseðlum verið:

	Seðlaumfar:	Landslikvidítetur og fiskavørur á goymslu, samlaða virði:
pr. 1/1 1953:	13,7 mill.	31,6 mill.
pr. 1/1 1954:	13,6 —	35,4 —
pr. 1/1 1955:	13,1 —	34,7 —
pr. 1/1 1956:	15,6 —	38,3 —
pr. 1/1 1957:	16,5 —	41,2 —
pr. 1/1 1958:	18,5 —	41,0 —

Hesi seinastu tølini vísa, at tað eísini er stórur peningur í umfar manna millum, peningur, sum í mongum förum liggju "deyður" á kistubotni og kundi komið vinnulívinum tilgóðar, um hann varð settur í arbeiðsskapandi fyritøkur.

Endurnýggjing av skipaflotanum: Hetta er ein tann mest týdningarmikli spurningur, sum hevur verið frammi síðani krigslok.

Frá almennari síðu eru tiltök gjørd fyri at fáa neyðugan pening til vega sum lán og studning til bygging av nýggjum fiskiförum, modernisering av eldri hóskandi fiskiförum og kondemnering av gomlum skipum fyri umskifting við nýggj skip.

Fylgjandi studningur er veittur og goldin, síðan lógin um studningsveitan kom í gildi:

Til keyp og bygging av trolarum	2.819.500
Til keyp og bygging av línuskipum	692.500
Tekniskar installatiónir í fiskiskip, serliga nýggjar maskinur	239.200
tilsamans:	3.751.200

Umfram er játtaður fylgjandi studningur:

Til bygging av trolarum	2.850.000
Til bygging av línuskipum	110.000
Til modernisering av fiskiskipum	205.000
tilsamans:	3.195.000

Eg nevndi áðjör, at best var, um endurnýggingin av skipaflotanum kundi farið so líðandi fram, at tann neyðugi peningurin varð játtaður á fíggjarlógini. Men tíverri eru vit her í aftarhond, og verður það tí neyðugt tey fyrstu árini eisini at læna pening til landskassan at rökja hesa uppgávu.

Landsstýrið hevur heimild til lántöku:
sambr. lögtingslóg nr. 30, frá 5. september 1955, sum broytt við lögtingslóg nr. 22 frá 28. marts 1956, 20 mill. kr. til bygging av stáltrolarum og/ella öðrum fiskiförum,
lögtingslóg nr. 16 frá 7. marts 1957 15 mill. kr. til bygging av 3 stáltrolarum,
lögtingslóg nr. 29 frá 26. apríl 1956 2 mill. kr. til stuðningsveitan (eftir reglunum í lögtingslóg nr. 12 frá 5. apríl 1955, sum broytt við lögtingslóg nr. 11 frá 22. marts 1956, lögtingslóg nr. 49 frá 4. mai 1957 og lögtingslóg nr. 8 frá 6. marts 1958.

Landsstýrið hevur samráðst um upptöku av útlendskum láunum, men hevur hígartil verið ógjörligt at fáa tílík lán uttan ábyrgd frá ríkisstýrinum. Tó er í samband við keypið av trolaranum "Jóannes Fonsdal" fingið lán í Noregi.

Landsstýrið vil halda fram við samráðing um lántöku.

Sum kunnugt hevur landsstýrið sambr. lögtingslóg nr. 16 frá 17. marts 1957 3 dieseltrolarar í gerð í Portugal. Tann fyrsti av hesum væntast liðugur í marts 1959, tann næsti einar tveir mánaðar seinni og tann triði umleið primo oktober 1959.

Keypari er til tann fyrsta trolaran, nevnliga Suðuroyar nørðara trolarafelag. Hinir báðir hava menn í Vági og Fuglafirði sagt seg hugaðar at keypa, umframt at aðrir eisini tykjast hugaðir til at ognast hesar trolarar.

Síðan 1954 er tann föroyski skipaflotin öktur við 20 skipum við samlaðum brutto-tonsatali uppá 4.712.

Í sama tíðarskeiði eru 29 skip farin úr flotanum við samlaðum bruttotonsatali uppá 9.712, heruppií "Oyrnafjall" við 2.810 tonsum, og eru 12 lögd til samlað brutto-tonsatal uppá 881.

Tað er greitt, at neyðugt er at ökja fiskiflotan í skundi, um neyðugur peningur fæst tilvega, og menn ella felög eru hugað fyri at skjóta tann neyðuga eginpening (10 %) inn.

Landsstýrið er framvegis av teirri áskoðan, at tað privata initiativið eigur at vera uppi í endurnýggingini. Við tí lóggávu, vit nú hava, har tað bert krevst ein eginpeningur uppá 10 %, má tað haldast, at tað almenna hevur lagt endurnýggingina soleiðis til rættis, at skipaflotin skuldi kunna fingið tann neyðuga vöksturin.

Iðnaður í samband við fiskivinnuna er neyðugur, og má tí ein útbygging av hesum fara fram, samstundis sum fiskiflotin veksur, helst um gjörligt skjótari, fyri at gera fiskivinnu okkara so fjölbroytta sum gjörligt.

Landsstýrið arbeiðir við hesum máli.

Í lötuni er umleið nóg mikið av turkivirkjum, men ov lítið av frystivirkjum, flakavirkjum, konservesvirkjum og fiskamjölsvirkjum.

Fiskimarkið.

Í hesum máli hevur lögtingið gjört ta samtykt í eykatingsetuni 1. til 6. juni, at Föroyar skulu hava 12 fjórðinga fiskimark.

Landsstýrið hevur síðani samráðst við ríkisstýrið, og tók ríkisstýrið undir við tí föroysku stöðuni og gjördi Bretum hetta kunnugt.

Bretar hava svarað, og hevur ríkisstýrið givið aftursvar.

Málið liggur nú soleiðis fyri, at pástandur stendur móti pástandi um, hvat fólkarættur veruliga er fiskimarkinum viðvíkjandi.

Landsstýrið gev tað, sum gerast kann, fyri at fremja lögtingssamtyktina.

Landsstýrinum er greitt, at um Ísland veruliga fær eftirlika sítt krav um 12 fjórðingamark, so mugu Föroyar samstundis hava sama rætt.

Jarðabrúkið.

Til fremjan av einari meira hóskandi löggávu jarðabrúkinum viðvíkjandi situr serstök millumtinganevnd.

Landsstýrið heldur tað vera neyðugt at stöðga við möguligari lógarbroyting, til uppskot fyriliggur frá nevndini.

Löntjeningsgrunturin er stovnaður sambr. lögtingslóg nr. 19 frá 21. december 1949, broytt við lögtingslóg nr. 83 frá 31. december 1950. Eftir hesari löggávu hevur grunnurin rætt til avgjald av útfluttninginum. Seinasta ár gav hetta gjald kr. 817.137,35.

Aftrat hesi inntöku fær grunnurin í studningi úr landskassanum 1,5 mill. kr. Landsstýrið vil í uppskoti til fíggjarlóg taka henda studning við, men vónar, at resin studningur, sum frálíður, við tí vaksandi skipaflota kann minka og síðani falla burtur, offirsum tey nýggju skipini helst skulðu givið mannningunum so mikið av inntöku, at tær ikki komu undir minstulön.

Tað, sum soleiðis kann sparast í studningi til grunnin, kann so nýtast í studningi til útbygging av skipaflotanum og soleiðis aftur ökja um inntökur landsins.

Studningur til heimútróður.

Sambart lögtingslóg nr. 10 frá 1. apríl 1955 hevur landsstýrið havt heimild til at lata í studningi til teir, ið reka útróður við opnum bátum. 2 oyru pr. kg í rundfiski, tó 5 oyru pr. kg til teir, ið reka útróður frá plássi, ið liggur 10 km frá næstu útfluttningshavn. Hesin studningur var ætlaður at vega imóti bensingjaldinum eftir lögtingslóg nr. 8, 25. marts 1955 og allarmest til teir útróðrarmenn, sum búgva á plássum, har havnaviðurskiftini eru so, at útróður bert kann rekast við opnum maskinbátum.

Hesin studningur er útgoldin:

1955/56	89.743,53

1956/57	.....	91.348,30
1957/58	.....	125.897,26

Í seinastu tingsetu varð samtykt, at viðka studningsskipanina soleiðis, at allir fiskimenn, jð reka útróður í Föroyum, koma undir hana, eisini teir, sum fiska á dekksförum.

Tað kann ætlast, at henda samtyktin kemur at ökja studningsveitingina við um leið 150.000 kr.

Tá tað ikki er avsettur peningur á fíggjarlógini til henda meirstudning (avsettar eru 100.000 kr.), hevur landsstýrið steðgað við at staðfesta lógina, so at nærri samráðing kann fara fram við fíggjarnevndina.

Havna- og vegabygging og útbygging av el-verkum.

Lögtingið revur samtykt at veita Tórshavnar kommunu í studningi til havnagerð 50 % av 17.325.000 kr. at játta yvir 20 ár frá ti íri, tá allur byggipeningurin er tryggjaður.

Á tingi var til viðgerðar uppskot um havnabygging í öðrum kommunum fyri 15.875.000 kr. Av hesum skuldi landskassin veita 50 % í studningi. Málið varð beint til landsstýrið til nærri fyrireikingar.

Landsverkfröðingurin hevur gjört eina fyribils samlaða vegaætlan fyri komandi árini fyri upp ímóti 500 mill. kr.

Hesar ætlanir föra við sær, at játtanir mugu setast munandi upp, t. v. s., at tað, um ikki inntökur skattaborgaranna ökjast og harvið skatturin samsvarandi, mugu finnast týggjar inntökur, fyri at ikki hall skal koma í landskassaraksturin.

Til útbygging av el-verkum krevst stórur peningur.

Flogsambandið við útheimin.

Landsstýrið hevur samráðst við ríkisstýrið, og hava serkönir menn gjört kanningar ymsastaðni í Föroyum. Enn er ikki komin nökur endalig frágreiðing um hesa kanning. Tað kann upplýsast, at tær stóru trafikkmaskinurnar, ið lond nú nýta, krevja so langar start- og lendingarvöllir, at tað t. d. vil krevja einar 20 mill. kr. at útbyggja flogvöllin í Vágum.

Annars kann sigast frá, at fraett er, at konstruktörar í Ameriku arbeiða uppá at byggja eitt nýtt slag av flogförum, sum krevur nógv stytri flogvöll enn tey flogför, ið bigartil hava verið nýtt. Möguligt verða tað hesi flogför, sum loysa okkara flogsamband við útheimin.

Telefonverkið.

Tráðleysa telefonsambandið til Klakksvíkar og Suðuroyar er nú soleiðis útbygt, at samtalur skuldi ikki kunna avlurtast. Viðkanin av automatstöðini í Tórshavn við einari 500 tals gruppu fer skjótt fram.

Somuleiðis vil antomatiseringin av stöðunum í Klakksvík og Runavík skjótt verða gjögnumförd í næstu framtíð.

Telefonverkið hevur í lötuni eina lániskuld uppá umleið kr. 2.383.292,88, harav meginparturin er innanlanda lán.

Inntökur telefonverksins vóru seinasta ár kr. 1.685.111,76, meðan

útreiðslurnar eru uppgjördar til kr. 1.271.100,14. og gevur hetta eitt avloop uppá kr. 414.014,62 (+ avskriving kr. 409.234,54 — kr. 1.780,08), haraav avdráttur av lánum er goldin við kr. 237.219,25.

Strandferðslan.

Til siglingina í Norðoyggjum letur landsstýrið sambrt. lögtingssamtykt í lötuni byggja ein bát uppá 35 tons.

"Smiril" er ikki longur tíðarhóskandi, og verður tí neyðugt skjótt at fara undir at byggja skip til at loysa "Smiril" av.

"Ternan" verður bert nýtt til strandferðslu, tá "Smiril" er til ketilreinsing ella umvöling.

Sjúkahúsini.

Sjúkahúsið í Klaksvík verður nú umbygt, umframt at nýggj funktionerhús verða bygd. Útreiðslurnar verða tilsamans um 2,5 mill. kr., haraav ríkiskassin letur helvtina í studningi, meðan hin helvtin, sum landskassin skal gjalda, verður fingin tilvega sum ríkislán.

Sjúkahúsið á Tvöroyri er nú afturbött, og hava entreprenörur og ríkiskassin goldið útreiðslurnar.

Til projektering av sinnissjúkahúsi í Tórshavn er úr ríkiskassanum játtað um 800.000 kr.

Í samband við hetta stendur ein átroðkandi umbygging av Dronning Alexandrines hospitali, ein umbygging, sum kann væntast at fara fram við tí allarfyrsta.

Studningurin til rakstur av teimum föroysku sjúkahúsunum varð hækkaður frá 9 kr. pr. sjúkadag til 13 kr. pr. sjúkadag, og nú er tilsögn um 18 kr.

Aldurs- og avlamisrentan.

Galdandi frá 1. oktober 1957 er aldursrentan hækkað við 12½ %, samstundis sum satsurin fyri, hvör egininntöka er loyvd uttan frádrátt í aldursrentu, er hækkaður til 100 %.

Tær samlaðu útreiðslurnar til aldursrentu og avlamisrentu hava býtt seg soleiðis síðani 1953/54:

	Aldursrenta:	Avlamisrenta:
1953/54	2.981.000	950.000
1954/55	3.115.550	1.038.062
1955/56	3.188.540	1.146.870
1956/57	3.215.262	1.211.368
1957/58	3.562.832	1.342.202
1958/59	3.900.000	1.480.000

Helvtin verður goldin av ríkiskassanum og hin helvtin her heima.

Málið um at lata aldursrentuna avloysa av einari fólkatrygging, soleiðis sum nú er skipað í Danmark, er til kanningar.

Landsstýrið er ógvuliga áhugað fyri at tryggja tey gomlu og sjúku best möguligt, men er ikki fullvist í, at hetta verður best loyst við einari fólkatrygging sum tann, tey hava í Danmark.

M. a. er tað ivingarsamt, um tað er hóskandi hjá okkum, at öll, eisini tey, ið ráð hava, fáa eina minstutrygging uppá 1200 kr. um árið.

Sum eg fyrr havi sagt, vil skulu skipa okkara socialforsorg soleiðis, sum tað best hóskar okkara viðurskiftum.

Útvarpið.

Útvarpið hevur nú eitt lurtaratal uppá um 5.415, og gevur hetta við tí gjaldi, ið ásett er, um 108.320 kr.

Umframt hetta hevur útvarpið eina inntöku uppá 38.500 kr.

Útreiðsturnar eru mettar til 128.600 kr. og skuldi útvarpið so stutt kunna hvilt í sær sjálvum.

Skúlamálið.

Tey seinastu 4 áriní er úr landskassanum latin fylgjandi studningur til bygging av nýggjum skúlum:

1954/55	63.960
1955/56	68.570
1956/57	69.960
1957/58	56.100

Í lötuni eru fleiri stórir nýggir skúlar í gerð, t. d. í Klaksvík, á Toftum, á Glyvrum, í Miðvági og í Sörvági.

Kostskúlin er ikki enn útbygdur. Vegna ymiskar trupulleikar er ikki enn farið undir byggingina.

Fólkaskúlin krevur óivað eina umskipan samsvarandi nútiðini. Hetta ið er ógvuliga umfatandi, er til nærri kanningar og stendur eisini fyri ein part í samband við eina umskipan av læraraskúlanum.

Föroya fólkaháskúli hevur tronglig húsaviðurskiftir, men peningaviðurskiftini hava ikki hígartil gjört tað möguligt at fremja ta umbygging, sum sökt er um.

Tann *nýggi sjómansskúlin* er nú í gerð og væntast at kosta 1,5 mill. kr.

Nýtt lögtingshús.

Tað hevur leingi verið tosað um at byggja nýtt lögtingshús.

Tað lögtingshús, vit hava, er alt annað enn tiðarhóskandi og fellur beldur ikki væl inn í bílætið, nú Havnará er afturlatin og vegurin reguleraður.

Kanningar fara fram um, hvar nýtt lögtingshús kann byggjast, og hevur her serstakliga verið hugsað um Tinganes, sum nú er ogn lögtingsins.

Hvalaveiðan.

Hvalaveiðan gav hall seinasta ár, róast tað eydnaðist við samráðing við oljufelögini at fáa tað afturgoldið, ið felögini hövdu í eykavinningi vegna Suezkreppuna. Nú í lötuni verður veiðan bert eikin við einum hvalabáti, av tí at ongin stórhvalur tykist at vera nærhendis Föroyum.

Skansin.

Skansin er framvegis undir afturböting. Tað, sum higartil er gjört, hevur kostað um 60.000 kr., sum eru goldnar av ríkiskassanum (tipsmiddlerne), landskassanum og býráðnum.

Eftir eru arbeiðir fyri umleið 80.000 kr.

Skattalóggávan.

Landsstýrið hevur líka síðani 1949 lagt fram uppskot til nýggja skattalóggávu við ásannan um, at tann skattalóggáva, vit hava, hevur týðandi brek og tí krevur broytingar.

Lögtingið hevur ikki hildið seg til at fremja hetta uppskotið ella eina hóskandi broyting av uppskotinum.

Nú eru 9 ár gingin, síðani uppskotið varð gjört, og hava viðurskiftini tey farna árini broytt seg so mikið, at landsstýrið heldur tað vera neyðugt at taka skattalógaruppskotið til nýggja kanning.

Tað er ógvuliga umráðandi, at skattalóggáva okkara er soleiðis skipað, tú skatturin er ein munandi útreiðsla hjá tí einstaka, at byrðan so vítt gjörligt felur eins á eins sterkar herðar.

Annar idnaður enn fiskaidnaður.

Föroyar goyma ikki so vítt higartil kunnugt nógv av virði í undirgrundini burtursæð frá koli og möguligum idnaðarleiri í Suðuroy. Ein modernisering av kola- og leirvirki er til kanningar.

Tað skuldi verið gjörligt, meira enn tað er í löturni, at virka lutir burtur úr tí ull, vit sjálvir framala.

Landsstýrið hevur higartil styðjað umsóknum um lán til virkir, ið miðja ímóti at útnytta ullina. Men ikki er komið á mál, fyrrenn öll ullin verður virkað her í Föroyum.

Handil okkara.

Vit hoyra til tey lond, sum í hægsta stigi eru avbrengig av eksporti, og er tí okkara samfelag ógvuliga viðbrekið, hvat viðvíkir öllum teim figgjarligu broytingunum, ið henda í okkara marknaðarlondum. Eg kann her nevna Brasilia og Spaniu.

Sum kunnugt er okkara eksportur tryggjaður gjögnum teir handilssáttmálar, sum ríkismyndugleikarnir gera við marknaðarlondini, og förir hetta við sær, at Danmark fyri största partin importerar tar matvörur, sum tryggja skulu okkum pening fyri okkara eksport, og vit harvið fáa fría valuta til nýtslu fyri importi okkara.

Hetta er ein góð skipan fyri okkum, men kann tó sjálvandi ikki vinna á öllum teim trupulleikum, ið standast av broytingum og kreppum í okkara marknaðarlondum.

Seinasta ár var okkara eksportur uppá 91.493.000 kr., meðan importurin er uppgjörður til um 91.600.000 kr., haruppií skipakeyp.

Honda lögtingssetan verður tann seinasta í hesum valskeiði. Lögtingsval var sum kunnugt í november 1954 og skal so statt verða aftur til heystar.

Eg vóni, at tað eisini í hesi tingsetu skal eydnast at fáa tingflokkar at fremja mál, sum vegna ta hættisligu tíðina, vit eru í í lötuni, kalla á allar góðar kreftir at virka saman, so besta úrslit fæst burturúr fyri land og fólk.

Fastar nevndir og aðrar.

Fíggjarnevndin: Djóni í Geil, Poul Petersen, Andreas Djurhuus, Joh. M. Fr. Poulsen, P. M. Dam, Erlendur Paturssson og Kjartan Mohr. Tiltaksmenn: Rikard Long, Knút Nygaard, Trygve Samuelsen, Hans Iversen, J. P. Davidsen, Frederik Hansen og J. F. Øregaard.

Umsóknarnevndin: Frederik Bláhamar, Leon Joensen og Frederik Hansen.

Landsstjórnarmálanevndin: Knút Nygaard, Hans Iversen og J. F. Øregaard.

Hava- og veganevndin: Samuel Ellefsen, Knút Nygaard, Hans Iversen, Arnhold Nielsen, P. M. Dam, Olaf Ellingsgaard og J. F. Øregaard.

Búnaðarnevndin: Samuel Petersen, Poul Petersen, Hans Iversen, Olaf Ellingsgaard og J. P. Davidsen.

Fiskimarksmálanevndin: Hákun Djurhuus, Samuel Petersen, Trygve Samuelsen, Jens Chr. Olsen, Erlendur Paturssson, P. M. Dam og D. P. Danielsen.

Fiskivinnunevndin: Frederik Bláhamar, Samuel Ellefsen, Johan Simonsen, Einar Waag og Jens Chr. Olsen.

Sociala nevndin: Rikard Long, Samuel Petersen, Erlendur Paturssson, P. M. Dam og Trygve Samuelsen.

Skúlanevndin: Poul Petersen, Samuel Petersen, Arnhold Nielsen, J. H. Danbjörg og Hanus við Högadalsá.

Lógarnevndin: Rikard Long, Poul Petersen, D. P. Danielsen, J. F. Øregaard og Trygve Samuelsen.

1. Fíggjarløgtingslóg 1959/60.

Ár 1958, 1. august legði lögmaður fram uppskot til fíggjarlögtingslóg 1959/60 (smbr. skjal 2).

---

2. Løgtingslóg um flaggið.

Ár 1958, 31. juli legði Edw. Mitens landsstýrismaður fram soljóðandi skriv:

Vísandi til lögtingsmál nr. 72/1957 loyvir landsstýrið sær at leggja fram aftur lógaruppskot samsvarandi burtursað frá litinum í § 1: "azur" í staðin fyri "myrka-" og "mörke-", § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis: Henda lóg kemur í gildi beinanvegin. Denne lov træder i kraft straks, og samsvarandi uppskoti nevndinnar í álitinum frá 16. april 1958 gongur út: "til 5 áradagin" og "til 5 aarsdagen" o. s. v. í § 10, stk. 2 in fine.

1. viðgerð 19. september og 1. oktober legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Í seinastu lögtingssetu varð uppskot til lögtingslóg um flaggið lagt fram á ting av landsstýrinum. Málið fór í lógarnevndina, ið gav frá sær álit í málinum, men undir 2. viðgerð varð málið tikið aftur av landsstýrinum til nýggja viðgerð.

Landsstýrið hevur tann 31. juli 1958 lagt málið fram av nýggjum við uppskoti til fylgjandi broytingar á lógaruppskotinum:

1. Í § 1 verður sett í báðum tekstunum í staðin fyri "myrka-" og "mörke-" "azur-".
2. § 10 í lógaruppskotinum gongur út og í staðin verður sett sum nýggj § 10 í føroysku tekstini:

"Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Tó skulu tey, sum hígartil hava nýtt föroyskt flagg sum felagsmerki, framvegis kunna nýta tilikt flagg." og í donsku tekstini:

"Denne lov træder i kraft straks.

Dog skal de, der hidtil har benyttet færösk flag med mærke som foreningsbannere, vedblivende kunne benytte saadant flag."

Málið var til 1. viðgerð 19. september 1958 og tingið beindi tað í lógarnevndina.

Ein meirilati í nevndini (D. P. Danielsen, R. Long og P. Petersen) mælir tinginum til at samtykkja lógaruppskotið við teimum av landsstýrinum nú gjördu broytingum.

P. M. Dam, ið varð möttur fyri J. Fr. Öregaard, og Trygve Samuelsen seta ouki uppskot fram.

2. viðgerð 3. og 3. viðgerð 8. oktober 1958.

Lógaruppskotið við nevndinnar broytingum samtykt 21 0.

---

3. Forboð fyri gerð og sølu av mjólk frá mjólkamaskinum.

Ár 1958, 31. juli legði Ole J. Jensen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
löglingsskip um forboð fyri gerð og sölu av mjólk frá mjólkamaskinum.

§ 1

Tað er forboðið fyri fyrst at gera og selja mjólk, sum gjörd er við maskinu.

Maskinur til nýtslu umborð á skipi koma ikki undir hesa reglu.

§ 2.

Hann, sum brýtur hesa reglu, kemur undir bót, sum fer í landskassan. Tílík mál fara fram sum lögreglumál.

§ 3.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

§ 1

Det er indtil videre forbudt at producere og forhandle mælk, der er fremstillet ved maskine.

Maskiner til brug ombord i skibe omfattes ikke af bestemmelsen.

§ 2.

Overtrædelse af nærværende beslemmelse straffes med böde, der tilfalder landskassen, og behandles som politisager.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerking:

Í skrivi frá 16. mai í ár hava Föroya bóndafelag og Föroya búnaðarfelag heitt á landsstýrið at seta forboð fyri innflutningi av mjólkamaskinum.

Tey vísa til í skrivinum, at koma tílíkar maskinur í nýtslu í Föroyum kunnu tær hava ein lægri mjólkapris við sær serliga nú smörprísurin í Danmark er so lágur, at tað fer ikki at loysa sig at hava mjólkneyt, og eru mjólkneytini fyrst avlikin, tekur tað eini 10 - 15 ár at fáa neytahaldið uppaftur.

Tílíkar maskinur, sum produrera mjólk, verða gjördar í Danmark, men har er onki forboð fyri gerð av tátíkari mjólk, eftirsum maskinan er ikki för at kappast við neytini um mjólkaprísin.

Landsstýrið hevur hildið tað tænt endamálinum best at fyriseta reglu, sum forbýður gerð og sölu av tílíkari mjólk uppi á landi.

Til fess at siga frá, at nakað tílíkt var í umbúna, fekk útvarpið at vita, at landsstýrið hevði tikið til umhugsunar, hvussu tað best kundi bera til at koma felaganna áreitan til mötis.

1. viðgerð 19. september 1958 og málið beint til búnaðarnevndina.

---

4. *Broyting í løgtingsvallógini.*

Ár 1958, 2. august legði tingmaðurin Poul Petersen fram soljóðandi skriv:

Vísandi til löglingsmál nr. 60/1957: Broyting í löglingsvallógini loyva vit okkum at leggja uppskotið fram aftur á ting í sama líki til tingsins vælvild.

1. viðgerð 20. september og 1. oktober legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Hin föroyski fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin lögdu í seinustu tingsetu inn á ting löglingsmál nr. 60/1957 um broyting í löglingsval-

lógini við uppskoti til lögtingslóg. Uppskotið varð ikki samtykt av lögtinginum.

Tann 2. august 1958 varð málið av nýggjum lagt fram av sotum uppskotsstillarum í sama líki og fór 1. viðgerð fram 20. september 1958, har málið varð beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur býtt sig sundur. Ein meiriluti (P. M. Dam, ið mátti fyri J. Fr. Øregaard, D. P. Danielsen og Trygve Samuelsen) mælir tinginum frá at gera nakrar broytingar í lötuni og setur tí onki uppskot fram.

R. Long vísir til viðmerkingarnar í nevndaráliti í lögtingsmálum nr. 60 og 62/1957: Broyting í tí kommunalu- og lögtingsvallógini um at senda landsstýrinum til nærri kanningar og möguligt fyrileggja kommunustýrunum til ummælis málið viðvíkjandi broyting í reglunum um kommunal val. Hansara principala stöða er tann, at broytingar eftir sonnu princippum, sum nevnt í tí fyriliggjandi uppskoti til broyting í lögtingsvallógini eiga at gerast samstundis í etim kommunalu vallógunum, nevnliga í bekendtgörelse (nr. 200) af regler om kommunale valg frá 17. juli 1931 og lóg (nr. 126) frá 27. mai 1908 om byen Thorshavns kommunale styrelse.

Í aðru syftu mælir hann tinginum til at samtykkja uppskotið frá fólkaflokkinum og sjálvstýrisflokkinum.

Poul Petersen mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá fólkaflokkinum og sjálvstýrisflokkinum.

Uppskot
frá R. Long.

Principalt:

Lögtingið samtykkir at biðja landsstýrið gera uppskot til broyting í bekendtgörelse (nr. 200) af regler om kommunale valg frá 17. juli 1931 og lóg (nr. 126) frá 27. mai 1908 om byen Thorshavns kommunale styrelse eftir sonnu princippum sum í tí fyriliggjandi uppskoti til broyting í lögtingsvallógini og leggja uppskotini fyri lögtingið.

2. viðgerð 3. oktober 1958.
Lógaruppskotið fall 9—0.
Uppskot R. Longs (principalt) fall 9—0.

---

5. *Broyting í skipagjøldum.*

Ár 1958, 2. august legði tingmaðurin Poul Petersen fram soljóðandi skriv:

Vísandi til lögtingsmál nr. 79/1957: Lögtingslóg um broyting í skipa-

gjöldum loyva vit okkum at leggja fram sama lógaruppskot bert við broyting í § 3, at lógin kemur í gildi 1. januar 1959 og stk. 2 fer út.

1.viðgerð 20. september 1958 og málið beint til lógarnevndina.

6. *Yvirtøka av skipaeftirlitinum.*

Ár 1958, 4. august legði tingmaðurin Poul Petersen fram soljóðandi

Uppskot til avgerðar.

Í skrivi frá 27. januar 1950 reisti fólkaflokkurin spurningin um yvirtøku av skipaeftirlitinum sum sermál.

Uppskotið fekk bert 8 atkvøður tá. (smbr. lögtingsmál nr. 98/1949 — tingtíðindi bls. 331).

Sum kunnugt er skipauppmálingin á föroyskum bondum og skipaskrásetingin við, hartil kemur royndarkamar fyri kompassir. Eftir stendur skipaeftirlitið.

Skipaeftirlitið verður ikki nakar dýrur stovnur í rakstri, eftirsum tað hevur ikki so lítlar inntøkur av gjöldum, og haraftrat kemur, at reglur um gjöld fyri skipauppmáling eru í umbúna nakað eftir sama reglum sum í øðrum norðurlondum.

Vísandi hertil seta vit fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Tingið samtykkir, at skipaeftirlitið í Föroyum verður föroyskt sermál frá 1. januar 1959 at rokna.

Landsstýrinum er heimilt at stíla fyri umskiftinum.

1. viðgerð 20. september og 1. oktober legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarátit:

Hin föroyski fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin hava lagt fram á ting uppskot til avgerðar um, at skipaeftirlitið í Föroyum verður föroyskt sermál frá 1. januar 1959 at rokna, og at landsstýrinum verður heimilt at stíla fyri umskiftinum.

Málið er framlagt 4. august 1958 og kom til 1. viðgerð 20. september 1958, har tingið beindi málið í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og hevur býtt seg sundur í 3 minnihlutar.

Poul Petersen og D. P. Danielsen mæla tinginum til at samtykkja uppskotið frá uppskotsstillarunum, vísandi til tað í málinum framförda.

P. M. Dam, ið mótti fyri J. Fr. Øregaard og Trygve Samuelsen mæla lögtinginum frá at yvirtaka skipaeftirlitið sum sermál og föra millum annað fram, at yvirtökan vil föra við sær stórar útreiðslur fyri landskassan og seta í onki uppskot fram.

R. Long förir fram, at tað í málinum ikki eru nakrar frágreiðingar um, hvussu stórar útreiðslur fyri landskassan yvirtökan av skipaeftirlitinum ber í sær, og mælir hann tí til, at landsstýrið fær málið til nærri kanningar hesum viðvíkjandi og setur fram fylgjandi

Uppskot

(frá R. Long):

Tingið samtykkir at biðja landsstýrið kanna málið serliga viðvíkjandi kostnaðin fyri landskassan, ið stendst av yvirtöku av skipaeftirlitinum sum sermál.

2. viðgerð 3. oktober 1958.
Lógaruppskotið fall 10—0.
Uppskot R. Longs fall 11—0.

---

7. *Studningur til útróðrarmenn við dekksførum.*

Ár 1958, 4. august legði tingmaðurin Frederik Hansen fram soljóðandi

UPPSKOT
til
lögtingslóg um prísviðbót til útróðrarmenn við dekksförum.

§ 1.

Úr landskassanum verður veitt útróðrarmonnum við dekksförum prísviðbót eftir somu reglum sum galdandi eru fyri aðrar fiskimenn. Fyri fisk, sum seldur verður sum ráðfiskur, verður veittur studningur

uppá 5 oyru pr. kg. Studningur verður goldin fyri allan rundan fisk vigaður við høvdinum.

§ 2.

Vektin av ti fiski, sum studningur verður latin til eftir § 1, skal prøvførast við útskrift av innhandlingsbók viðkomandi keypara.

Útskriftin, váttað av viðkomandi vrakieftirlitsmanni, verður send fiskivinnuskrivstovu landsstýrisins.

§ 3.

Studningur eftir hesi lóg verður av landsstýrinum ávístur rætta viðkomandi til gjaldingar, tá ið landsstýrið hevur fingið sær prógv fyri beinleika uppgerðinnar.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1959.

1. viðgerð 22. september 1958 og málið beint til figgjarnevndina.

---

8. *Garanti fyri láni til Tórshavnar kommunu.*

Ár 1958, 6. august legði Edw. Mitens landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um ábyrgd fyri láni til Tórshavnar kommunu til útbyggjan av vatnveitingum.

§ 1.

Landsstýrið verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Tórshavnar kommunu upp í kr. 800.000.— til útbyggjan av vatnveiting í Tórshavn.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til Tórshavn kommune til udbygning af vandforsyning.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for laan til Tórshavn kommune for indtil kr. 800.000. — til udbygning af vandforsyning i Tórshavn by.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Tórshavnar kommuna hevur sent landsstýrinum soljóðandi skriv dagfest 10. juli í ár:

"Sum landsstýrinum óivað kunnugt hava vatnveitingarviðurskiftini í Havnini tey seinastu árini verið út av lagi ring.

Tórshavnar býur er í miklum vökstri, nýggj virki verða bygd, sjúkahúsbyggingin er fyri hond o.s.fr., og við tí stöðugt vaksandi vatnnýtslu, sum har av fylgir, fara nevndu viðurskifti, sum tíðin líðir, bert at versna soleiðis, at tað verður ógjörligt hjá kommununi við teimum verandi vatnbrunnunum at tryggja býnum nóg mikið av drekkivatni.

Tað er tí neyðugt hjá býráðnum at fáa skjóta loysn á henda átroðkandi spurning soleiðis, at vatnveitingarviðurskiftini kunna verða munandi hött, og býurin fáa nóg mikið av góðum drekkivatni.

Býráðið hevur nú samtykt, at kommunan fer undir at byggja vatnverk í Havnardali, og eftir kostnaðarætlan, sum býarverkfröðingurin hevur gjört, kemur 1. stig av hesum arbeiði at kosta kommununi um 800.000 kr., og ætlanin er at hava byggingina av 1. stigi lidna til várs aftur soleiðis, at longu tá fæst drekkivatn úr Havnardali.

Men Tórshavnar kommuna er ikki för fyri at fara undir hetta arbeiði uttan gjögnum lántöku, og ætlanin er at sökja Kreditforeningen af kommuner i Danmark um eitt lán til nevnda endamál uppá 800.000 kr. Treytirnar fyri slíkari lánveitan kennir býráðið ikki enn, men óivað fara teir at krevja garanti bæði frá stati og lögtingi.

Sostatt verður her sbr. gr. 30 í "Lov om byen Thorshavns kommunale styrelse" sökt um landsstýrisins loyvi til, at Tórshavnar kommuna fekur upp eitt lán uppá 800.000 kr. frá Kreditforeningen af kommuner i Danmark til útbygging av 1. stigi av vatnverki i Havnardali við teimum treytum, sum settar verða fyri lántökuna."

Býarverkfröðingurin upplýsir eftir áheilan, at tað í skrivinum nevnda 1. stig av ætlanini er byrging av ánni, so mikið at vatnið verður savnað til rörini, og útvegan og niðurlegging av rörum úr Havnardali til Havnar. Rörini verða 35 cm við nakað suður og síðan 25 cm og eru roknaði at ganga inn í heildarútbygging seinri, tá verulig byrging verður gjörd.

Uttan serliga byrging gevur Sandá eftir mátingum í fjör í turrastu tíðini um 1.500 tons um sandögrið, meðan hinir brunnarnir geva um 1.400 tons í turrveðri. Nýtslan í Havnini er nú 2.000 tons um sandögrið soleiðis at roknað verður við, at henda fyrsta útbygging gevur nóg mikið av vatni tey fyrstu 5 árini ella meira. Seinri eru so möguleikar fyri at kalla óavmarkaðari útbygging, sum kann verða gjörd í fleiri stigum.

Sum lánimöguleikarnir eru í Föroyum, má helst roynast at fáa hetta lán aðrastöni og her verður serliga hugsað um Kreditforeningen af kommuner i Danmark. Lán til föroyskar kommunur hagani krevja rikiskassa og landskassagaranti, smbr. rikislóg nr. 172 frá 24. mai 1955, og sökir býráðið tí um garanti landskassans fyri hesum láni.

Landsstýrið ásannar, at neyðugt er hjá Tórshavnar býráð at fáa endaligt og varigt skil á vatnviðurskiftunum í býnum, og er tí sinnað at geva kommununi loyvi at taka nevnda lán.

1. viðgerð 6. 2. og 3. viðgerð 7. august 1958.
Lógartuppskotið samtykt 18 0.

---

9. *Hægri skúli.*

Ár 1958, 4. august legði Edw. Miteus landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT

A. Farið verður undir at byggja hægri skúla sunnan fyri viðalundina í Tórshavn.
B. Landsstýrinum verður heimilað at útbjóða arbeiðið og fremja málið: Bygging av hægri skúla og kostdeild.

Viðmerkingar:
Lögtingið samtykti 21. februar 1958 soljóðandi:
1. Lögtingið samtykkir, at farið verður undir bygging av hægri skúla við kostdeild av viði sunnan fyri viðalundina í Tórshavn eftir uppskoti og tilboð frá Linghed Saagverk í Svöriki við teimum broytingum, sum skúlastjórnin og landsverkfröðingurin halda vera neyðugar.
2. Landsstýrið fær heimild at læna neyðturviligan pening til, at byggingin sum skjótast kann verða sett í verk.
3. Samtykt verður, at neyðturviligur peningur til hesa bygging verður at nýta av rakstraravlopi landskassans.
4. Til rentur og avdráft av láni verður at seta árliga á fíggjarlóg lögtingsins 300.000 kr.

Landsverkfröðingurin sendi landsstýrinum brev frá 18. marts 1958. Hann flytir fram, at ökið, sum landið ræður yvir sunnan fyri viðalundina, er ov lítið til at eisini næmingabústaðurin kann vera har. Hann mælir til at keypa frá Linghed Saagverk, skúlabygningar og fimlelkarhöllina, og at næmingabústaðurin verður projekteraður av nýggjum.

Landsstýrið royndi at fáa lán frá Eftirlönargrunni læraranna, men skúlastjórnin vildi ikki samtykkja hesum.

Á fíggjarlögtingslóg 1958/59 er játtað til skúlabygging 125.000 kr., og landsstýrið mælir til játtan av somu stödd fyri 1959/60. Eitt er ikki tikin stöða til, hvussu nógv kann veitast av rakstraravlopi landskassans.

Harnæst hevur landsstýrið umlugsað at útbjóða 1 mill. kr. sum hrævlán til heystar.

Mótmæli vóru komin frá Havnar Handverkarafelag, Havnar Handverksmeistarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag undan lögtingssamtyktini 21. februar móti at innflyta skúlan liðugt tilgjördan.

Síðan kom bræv frá meistarafelagnum í Klaksvík frá 2. marts um tað sama og bræv frá Havnar Arbeiðsmannafelag frá 14. marts við mótmæli og áheitan um, at lögtingið tekur málið uppaftur til viðgerðar.

Málið varð tikið uppaftur á tingi, men ongin nýggj samtykt gjörd.

Landsstýrið hevur ikki heimild at ogna sær grundstykkið til næmingabústað.

So statt hevur landsstýrið samtykt í framhaldi av landsstýrisins samtykt frá 1955 og 1956 at fáa tilvega skitsuprojekt og kostnaðarætlan fyri skúlabygningar og næmingabústað og at leggja málið fyri tingið.

Lögmaður hevur ta áskoðan, at skúlin skuldi heldur ligið í Hoydölum enn sunnan fyri viðalundina.

Ole Jacob Jensen heldur, at lögtingsviðtökan skuldi verið fraud, tó so, at kostdeildin varð projekterað og útboðin av nýggjum.

Olaf Mortensen arkitektur er biðin um at gera skitsuteikning og kostnaðarætlan til skúlabygningar og kostdeild at byggja á ökinum sunnan fyri viðalundina í Tórshavn. Eftir uppskotinum eru útreiðslurnar til skúlabygningarnar ætlaðar til 1,95 mill. kr. og byggiútreiðslurnar viðvíkjandi kostdeild ætlaðar til 550.000 kr.

1. viðgerð 22. september og 15. oktober legði skúlanevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Nevndin hevur býtt seg í 5 minnilutar.

Ein minniluti (Poul Petersen) mælir tinginum frá at samtykkja uppskot landsstýrisins soleiðis at farið verður undir bygging eftir svenska tilboðnum beinanvegin og setur tí onki uppskot fram.

Ein minniluti (J. H. Danbjörg) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýsisins við teirri broyting, at skúlin verður bygdur undir viðalundini ella aðrastaðnís av betong, og setur fram broytingaruppskot samsvarandi.

Ein minniluti (Arnold Nielsen) skal loyva sær at biðja allar tingmenn, sum vilja málinum væl, gjölla hugsa um ikki skjólast og bíligast er at byggja skúlan uppi í Hoydölum, hvar frammanundan eru hús, ið kunnu nýtast til næingabústað. Hartil kemur, at plássið er vakurt og rúmligt til framtiðarbygging. Um bygging av hægri skúla í Hoydölum sigur fyristöðumaður studenta- og preliminerskúlans harra Thomas Nygaard m. a. fylgjandi:

"Tí hvussu eg enn hugsi aftur og fram um spurningin, kann eg ikki koma til annað úrslit, enn at Hoydalar eru besta plássið at leggja skúlan á."

Ein minniluti (S. Petersen) heldur fram:

Av tí at tað í landsstýrisins uppskoti verður vist á trupulleikar við at fáa til vega nóg mikið av peningi til at fremja alla ta tilætlaðu byggingina, verður neyðugt at taka hana í stigum.

Eisini er ivasamt um lendið er nóg stórt til allar bygningarnar og til eina möguliga viðkan í framtíðini, tí verður neyðugt fyribils at steðga við einum parti til dömis: höll, fimleikarhöll og kostdeild II, til tann neyðturviligi peningurin til byggingina av hesum partinum er tökur og víst kann verða á eitt lendi, sum skúlin kann fáa afturat, deils til at byggja á og deils til ítróttarvöllir o. a. m.

Byggingin má verða treytað av, at Havnar kommuna luttekur við munandi studningi, og verður landsstýrið tí at taka upp samráðingar við Havnar býráð.

Tað er umráðandi, at kostdeild I verður bygd, so teir yngstu og teir næmingar, ið hava eingast ráðini at lesa, kunnu fáa innivist.

UPPSKOT

1) Minnilutin (J. H. Danbjörg): principalt:
   Uppskot landsstýrisins stykki A) verður orðað soleiðis:
   Farið verður undir bygging av hægri skúla sunnan fyri viðarlundina í Tórshavn ella aðrastaðni av betong.

2) Minnilutin (Arnold Nielsen) og J. H. Danbjörg subsidiert:
   1. Brósisjúkrahúsið í Hoydölum verður beinanvegin at nýta til hægri skúla við kostdeild, tá ið sjúklingarnir eru fluttir til Dronning Alexandrines hospital.
   2. Neyðturviligir bygningar verða beinanvegin at byggja við Dronning Alexandrines hospital at taka ímóti tuberklasjúklingunum og teimum kronisk sjúku úr Hoydölum.
   3. Tann neyðturviligi peningur til at byggja teir undir 2 nevndu bygningar og til umvæling av húsunum í Hoydölum verður tikin úr byggigrunninum.
   4. Lögtingið heitir á landsstýrið um beinanvegin at fyrireika bygging av skúlahúsum í Hoydölum, soleiðis at báðir teir núverandi bygningarnir í Hoydölum kunnu verða nýttir til næmingabústað, tá ið skúlahúsini eru liðug.

3) Minnilutin (S. Petersen):
   I. Farið verður undir at byggja hægri skúla (skúlabygning og kostdeild I eftir uppskoli frá Olaf Mortensen, arkitekti) sunnan fyri viðarlundina í Tórshavn.
   II. Landsstýrinum verður heimilað at útbjóða arbeiðið og fremja málið: Byggjan av hægri skúla.

4) Minnilutin (Hanus við Högadalsá):
   Landsstýrið verður biðið at kanna gjölligari skitsuprojektið hjá Olafi Mortensen, arkitekti, til byggingar av hægri skúla við kostdeild sunnanfyri viðalundina og harafturat kanna líkindini at byggja skúlan millum Bókasavnið og Skiparaskúlan.
   Úrslitið av hesum kanningum verður lagt fyri komandi ting.

2. viðgerð 16. og 3. viðgerð 17. oktober 1958.

Punktini 1 og 2 tulku 9—0,
— 3 fall 11—0,
— 4 fall 7—0,
Uppskot landsstýrisins fall 12—0.

---

10. Sjúkrasystrar.

Ár 1958, 4. august legði Edw. Mitens landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT

Við heimild í § 16, 4. stk. í lóg nr. 127, 25. mai 1956 om sygeplejersker verður henda lóg sett í gildi í Föroyum við kongiligari fyriskipan við hesum broytingum:

1. Í § 2, 5. stk. verður í staðiu fyri: 'gennem indenrigsministeriet udvirket kongelig anordning" sett: "af indenrigsministeriet udfærdiget bekendtgörelse efter at landsstyret har faaet lejlighed til at udtale sig".
2. Í § 16, 1. stk. verður í staðin fyri: "1. juli 1956" sett: "1. januar 1959".
3. § 16, 1. stk. gongur út.
4. Har tað í lógini verður nýtt orðið: "lov" ella "lovs" sum sipandi til hesa lóg verður sett í staðin: "anordning" ella "anordnings".

Viðmerkingur:

Landsstýrið hevur fingið til ummælis spurningin um at seta í gildi í Föroyum lóg nr. 127, 25. mai 1956 om sygeplejersker. Henda lóg, sum er sett í gildi í Danmark frá 1. juli 1956, og sum kemur í staðin fyri lóg nr. 140, 26. april 1933 om autoriserede sygeplejersker, sum broytt við lóg nr. 133, 30. marts 1942 og lóg nr. 286, 18. juni 1951, inniheldur reglur um hvörji hava rætt at arbeiða sum sjúkrasystrar, hvör læra verður kravd av næmingum, hvörjar skyldur liggja á sjúkrasystrum, eftirlit við teimum, straff, lærnráð o. t.

Hövuðsendamálið við lógini er at geva sjúkrasystrunum eina dyggari læru enn higartil.

Málið er viðgjört av serligari nevnd, sum stýrið fyri Dronning Alexandrines hospital hevur sett. Nevndin hevur 8. marts 1958 givið viðlagda álit frá sær við tilmæli um, at lógin verður selt í gildi í Föroyum

so at siga óbroytt. Annars visir nevndin, tvussu læran kann leggjast til rettis, næmingarnir fáa læru sína ikki bert á Dronning Alexandrines hospitali, men eisini á Klakksvíkar sjúkahúsi og Suðuroyar sjúkahúsi, skúlin verður tó á Dronning Alexandrines hospitali.

Um vit ikki í Föroyum hava möguleikar fyri at geva sjúkrasystranæmingum ta læru sum nútíðin heldur vera neyðuga, er vandi fyri, at föroysku sjúkahúsini ikki fáa tær sjúkrasystrar, sum törvur er á. Soleiðis hevur tað verið higartil, meginparturin av teimum sjúkasystrum, ið eru her, hava fingið læru sína í Föroyum.

Viðvíkjandi broytingunum er at siga, at nr. 2—4 eru formellir. Broytingin nr. 1 ger tað möguligt eftir avtalu við landsstýrið at laga læruna soleiðis, at hon hóskar til viðurskiftini her og er mögulig at fremja.

1. viðgerð 23. september 1958 og málið beint til lógarnevndina.

---

11. Útróður í Grønlandi.

Ár 1958, 4. august legði tingmaðurin Kjartan Mohr fram soljóðandi

UPPSKOT TIL SAMTYKTAR

Lögtingið samtykkir at biðja landsstýrið beinanvegin taka upp samráðingar við ministeriið fyri Grönland og grönlendska landsráðið um at útvega loyvi fyri útróður í Grönlandi komandi árini frá landi ella frá skipi við bátum í hesum fjarðum og plássum:

Föroyingahavnin
Ravns Stóroy
Graedefjörðin
Kookoyggjarnar
Fiskenesterens Hava
Tovkussak
Hellefiskeoyggjarnar
Anders Olsenssund
Norðan fyri Söndre Strömfjord í fjörðin sunnan fyri Kingatriak.
Fjörð um Umanackleiðina.

Hesar fjarðar hava vit nevnt burtur úr og eru ivaleyst fleiri fjarðir, ið landsstýrið fær upplýsingar um frá könum monnum, ið eru vel kendir í Grönlandi.

1. viðgerð 23. september og 9. oktober legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Fiskivinnunevndin hevur havt málið til umhugsunar og eisini eitt skriv frá I/f Samvinnufelag fiskimanna um friari ræstur hjá útróðrarmonnum í Grönlandi.

Nevndin er samd at mæla landsstýrinum til at taka samráðing við ríkisstýrið so sum tilskilað í málinum og eisini at taka til umhugsunar at gera líkindir fyri stöðum til útróður eisini í Eysturgrönlandi.

So statt setur nevndin fram soljóðandi

UPPSKOT

Málið verður sent landsstýrinum til viðari viðgerð.

2. viðgerð 10. oktober 1958.
Uppskot nevndinnar samlykt 22—0.

---

12. Lóg um kanning viðv. fiskasølum og fiskaprísum.

Ár 1958, 5. august legði tingmaðurin Erlendur Patursson fram soljóðandi

UPPSKOT

1. §.

Saltfiskaprísnevndini, sum sett er eftir lógarkunngerð nr. 16 frá 25. juni 1954, verður álagt at kanna fiskasölumál landsins og alt sum kann haldast hava týðuing fyri tey.

Nevndin skal serstakliga kanna fiskasölusáttmálar, sum gjördir hava verið, har ímillum uni söluprovisiónir ella provisiónir av öðrum slagi hava verið latnar og tá hvussu miklar og til hvörjar.

Nevndin skal somuleiðis bera saman teir prísir, sum föroysk fiskivinna hevur fingið fyri vörur sínar og teir prísir, sum fiskivinna í öðrum loudum hevur fingið fyri tilsvarandi vörur, og tá munur hevur

verið — at fáa fram í dagin orsökirnar til slíkan prismun á föroyskum fiski og öðrum fiski.

Kanningin skal fevna alla saltfiska-, klippfiska- og sildarsölu frá ti hesar sölur vórðu upp aftur tiknar aftan á seinna heimsbardaga og til í dag.

2. §.

Allir teir einstaklingar og öll tey felög, sum hava flutt út fisk í hesum tíðarskeiði, hava skyldu til at lata nevndini í hendi allar upplýsingar, har imillum öll skjöl, sum tökir eru og sum nevndin heldur vera neyðugar fyri hesa kanning. Sama skyldu hava bankar, skipaavgreiðslur, almennar stovnanir og annars allir teir, sum upplýsingar hava um hesi mál.

3. §.

Nevndin byrjar starv sítt beinan vegin. Hon skal lata landsstýrinum greinargerð um kanning sína ikki seinni enn 15. oktober 1958.

4. §.

Henda lög kemur straks í gildi.

Greinargerð:

Tjóðveldisflokkurin reisti hetta mál í fjör (Tingmál nr. 81/1957), men uppskotið varð ikki samtykt. Málið verður nú av nýggjum lagt fyri tingið.

1. viðgerð 30. september 1958 og málið beint til figgjarnevndina.

---

13. Lóg um kanning fiskivinnurakstursins.

Ár 1958, 5. august legði tingmaðurin Erlendur Paturssson fram soljóðandi

UPPSKOT

1. §.

Sett verður 3 manna nevnd við ti verkevni:

a t kanna fíggjarligu rakstrarviðurskifti fiskivinnunar og lönarúlkomuna í henni,

a t bera fram uppskot, sum miða móti at bóta um hesi viðurskifti.

2. §.

Nevndin skal serstakliga leggja áherðslu á, at vísa á leiðir til at minka og lætta um útreiðslur vinnunar og fiskimanna av fiskasölu, útgerð, landing, vinnu og fiskaviðgerð á landi, umvælingum, trygging, rentum, umsiting og øðrum kostnaði.

3. §.

Landsstýrið útnevnir nevndarlimirnar: ein eftir tilmæli Föroya útgerðarmannafelags, ein eftir tilmæli Föroya skipara- og navigatörfelags og ein eftir tilmæli Föroya fiskimannafelags.

Nevndin tekur sær skrivara og aðra hjálp sum törvur er á.

Landskassin rindar tær útreiðslur, sum standast av starvi nevndarinnar.

4. §.

Henda lóg kemur straks í gildi.

Greinargerð:

Tjóðveldisflokkurin reisti hetta mál í seinastu tingsetu (Tingmál nr. 90/1957), men uppskotið varð ikki samtykt. Málið verður nú av nýggjum lagt fyri tingið.

1. viðgerð 30. september 1958 og málið beint til figgjarnevndina.

---

14. Frítíð og frítíðarløn til fiskimenn.

Ár 1958, 5. august legði tingmaðurin Erlendur Patursson fram soljóðandi skriv:

Í seinastu tingsetu legði undirritaði tingmaður uppskot um frítíð og frítíðarlön til fiskimenn eftir sonu reglum sum gilda fyri vinnandi lönarfólk á landi. Uppskotið varð ikki samtykt, men verður nú av nýggjum lagt fyri tingið, og verður víst á tingmál nr. 30/1957.

1. viðgerð 27. september 1958 og málið beint til figgjarnevndina.

---

15. Radar í føroyskum ferðaskipum.

Ár 1958, 6. august legði Ole J. Jensen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

løgtingslóg um radar í føroyskum ferðaskipum.

§ 1.

Föroysk skip omanfyri 25 brutto reg. tons, sum rökja ferðamannasigling skulu hava radar.

Í serstökum förum kann landsstýrið geva undantaksloyvi frá reglunni.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi 1. januar 1959.

§ 3.

Hann sum heldur ikki hesa treyt kemur undir bót, sum fer í landskassan.

lagtingslov om radar i færøske passagerfartøjer.

§ 1.

Færöske fartöjer over 25 brutto reg. tons, der anvendes i passagerfart skal være forsynet med radar.

I særlige tilfælde kan landsstyret dispensere fra bestemmelsen.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1959.

§ 3.

Overtrædelser straffes med böde, der tilfalder landskassen.

Viðmerkingar:

Tað má haldast at vera beint, at skip, sum rökja post- og ferðamannasigling, eiga at hava radar.

Strandfaraskip lögtingsins hava nú öll radar og tann nýggi Norðoya báturin fær sjálvandi eisini radar.

Landsstýrið loyvir sær at seta fram lógaruppskot samsvarandi hesum.

1. viðgerð 27. september og 1. oktober legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Landsstýrið hevur tann 6. august 1958 lagt fram á ting uppskot til lögtingslóg um radar í föroyskum ferðaskipum. Sama dag varð framlagt skriv frá javnaðarflokkinum um sama mál.

Málini vóru til 1. viðgerð 27. september og beindi tingið tey í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málini.

Í § 1 í lógaruppskotinum frá landsstýrinum verður mælt til, at öll föroysk skip omanfyri 25 brutto reg. tons, sum rökja ferðamannasigling

skulu hava radar, meðan javnaðarflokkurin í sínum skrivi mælir til at setn markið til 20 br. reg. tons.

Öll nevndin (P. M. Dam, ið møtti fyri J. Fr. Øregaard, D. P. Danielsen, R. Long, Poul Petersen og Trygve Samuelsen) er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við tí broyting í § 1, at tað í báðum tekstunum í staðin fyri "25" í 1. regla verður sett "20".

2. viðgerð 3. og 3. viðgerð 8. oktober 1958.

Uppskot landsstýrisins við broyting nevndinnar samtykt 26 -0.

---

16. Broyting í bjargingarreglunum.

Ár 1958, 6. august legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi skriv:

Undirskrivaði Føroya javnaðarflokkur loyvir sær hervið at leggja inn á Føroya løgting mál um at fáa broytt bjargingarlógina hagar, at bjargingarpeningurin, sum ognast føroyskum fiskiskipum, verður býttur millum skip og manning eftir sáttmátunum millum skipseigarin og manningina.

1. viðgerð 27. september 1958 og málið beint til lógarnevndina.

---

17. Gummibátar á føroyskum skipum.

Ár 1958, 6. august legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi skriv:

Allir menn ásanna, at tað er rætt og neyðugt at hava gummibátur í so stórum tali umborð í hvørjum skipi, at teir kunnu taka bæði manning og ferðafólk.

Tá ið tað fessverri eru ikki er í lagi hesum spurningi viðvikjandi umborð í okkara skipum, loyvir undirritaði Føroya javnaðarflokkur

sær at biðja háttvirda lögting skipa fyri við lóg, at öll föroysk skip og motorbátar verða skyldug at hava nóg nógvar gummibátar umborð til manning og ferðafólk.

1. viðgerð, 29. september og 9. oktober legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Undir 1. viðgerð av hesum máli var tað upplýst, at landsstýrið hevur stílað fyri einum uppskoti til reglur eftir tilmæli frá serstakari nevnd fyri sjóvinnu, skipaeftirlit v. m.

Nevndin er so slatt samd at senda landsstýrinum málið og setur fram soljóðandi

UPPSKOT

Málið verður sent landsstýrinum.

2. viðgerð 10. oktober 1958.
Uppskot nevndinnar samtykt 21—0.

18. Radar í ferðaskipum.

Ár 1958, 6. august legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi skriv:

Mannalivið er dýrasta hjá okkum at verja. Teir, ið flyta fólk eftir havinum, megu tí hava tær bjargingagreiðir og heutleikar, ið eru neyðug fyri at byrgja ímóti vannlukkum og mannaskaða. Sum eitt lið í at gera okkum so fullfíggjað útbúnar sum möguligt á hesum föri loyvir undirskrivaði javnaðarflokkur sær at reisa spurningin um við lóg at skipa fyri, at öll post- og ferðafólkaskip og bátar yvir 20 br. tons skulu hava skyldu at hava radar umborð.

1. viðgerð 27. september 1958 og málið beint til lógarnevndina (sml. tingmál nr. 15).

19. Frítíð við løn til fiskimenn.

Ár 1958,6. august legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi skriv:

I seinastu tingsetu reisti undirskrivaði Føroya javnaðarflokkur málið um frítíð við lön til fiskimenn.

Tað uppskotið, sum Tjóðveldisflokkurin aftaná aftur í somu setu og nú aftur í hesi setu hevur lagt fram viðvíkjandi sama spurningi, dugir ikki til at loysa málið, og loyvir tí javnaðarflokkurin við hesum at taka uppaftur flokksins uppskot frá seinastu setu í málinum um frítíð við löu til fiskimenn, soleiðis at teir í frítíðarpeningi veruliga verða at fáa 6 % av vinnu sini.

1. viðgerð 27. september 1958 og málið beint til fíggjarnevndina. (smbr. tingmál nr. 14).

---

20. Lóg um fólkatrygging.

Ár 1958, 6. august legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi skriv:

Føroya javnaðarflokkur reisti seinasta heyst og í vár málið um at fáa somu fólkatryggingarlóg, sum er í gildi niðri í Danmark setta í gildi í Føroyum.

Uppskot javnaðarflokksins fall.

At fáa fólkinum í Føroyum hesa umröddu fólkapensjón er eitt hitt týdningarmesta mál, ið er uppi her á landi í dag, og loyvir tí javnaðarflokkurin sær við hesum at taka sítt uppskot til fólkapensjón upp aftur og streingir á háttvirda lögting um at fremja tað í hesi setu. Fjöldin tolir ikki at drála verður í hesum máli.

1. viðgerð 29. september 1958 og málið beint til sosialu nevndina.

---

21. Nýggj havnaætlan.

Ár 1958, 7. august legði Ole J. Jensen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT

Í lögtingsmáli nr. 108/1957: Nýggj havnaætlan, setti havna- og veganevndin fram lógaruppskot, sum landsstýrið loyvir sær at sela fram aftur við fylgjandi broytingum:

§ 1 verður orðað soleiðis:

Úr landskassanum verður veittur studningur til útbygging av havnunum í niðanfyri nevndu søknarkommununum, soleiðis, at studn. verður til stöddar 50 % av byggipeninginum, tó hægst 50 % av niðanfyri tilskiladu upphæddum, og rindaður við eins stórum ársgjöldum í 10 fylgjandi fíggjarár:

		kr.
Klakksvíkar kommuna		2.500.000
Fuglafjarðar	—	625.000
Leirvíkar	—	400.000
Götu	—	500.000
Nes	—	2.500.000
Skála	—	1.500.000
Sjóvar	(við Hulkin)	600.000
Eiðis	—	300.000
Kollafj.	— (á Langas.)	300.000
Vestmanna kommuna		1.200.000
Miðvágs og Sandavágs kommunur		2.750.000
Sörvágs kommuna		600.000
Skopunar	—	500.000
Sands	—	1.000.000
Hvalbiar	—	250.000
Froðbiar	—	750.000
Porkeris	—	700.000
Vágs	—	1.700.000
	tils. kr.	18.675.000

Af landskassen ydes tilskud til udbyguing af havnene i nedenfor anförte sognekommuner, saaledes at tilskuddet andrager 50 % af anlægsudgifterne, dog höjst 50 % af nedenfor angivne beløb, og udredes med lige store aarsrater gennem 10 paa hinanden följende finansaar:

		kr.
Klaksvíkar kommune		2.500.000
Fuglafjarðar	—	625.000
Leirvíkar	—	400.000
Götu	—	500.000
Nes	—	2.500.000
Skála	—	1.500.000
Sjóvar	— (við Hulkin)	600.000
Eiðis		300.000
Kollafj.	— (ved Langas.)	300.000
Vestmanna kommune		1.200.000
Miðvágs og Sandavágs kommuner		2.750.000
Sörvágs kommune		600.000
Skopunar	—	500.000
Sands	—	1.000.000
Hvalbiar	—	250.000
Froðbiar	—	750.000
Porkeris	—	700.000
Vágs	—	1.700.000
	ialt. kr.	18.675.000

§ 2 gongur út og § 3 verður § 2 o. s. fr.

1. viðgerð 7. august og 15. oktober legði havna- og veganevndin fram soljóðandi

ALIT

1. Frá meirilutanum (Hans Iversen, K. Nygaard, S. Ellefsen og A. Nielsen):

Í tingsetuni í vár reisti og viðgjörði nevndin málið um nýggja havnaætlan; men við tað at tíðin til viðgerðina varð sera stutt og ikki allir limir kundu góðtaka uppskotið, sum nevndin í samráð við landsstýrið hevði biðið landsverkfröðingin gera, setti nevndin fram uppskot til tingið um at lata landsstýrið kanna gjöllari tann av landsverkfröðinginum tilætlaða nýggja havnaplan og leggja úrslitið fyri tingið til komandi tingsetu. Málið varð av tinginum beint til landsstýrið uttan atkvöðugreiðslu. (Jvh. lögtingsmál nr. 108/1957).

Tann 6. august í ár varð málið av landsstýrinum lagt fram aftur á ting sum lögtingsmál nr. 21/1958.

Landsstýrið legði tá fram sama lógaruppskot, sum nevndin hevði viðgjört, við hesum broytingum: ökt var um studningsupphæddina úr landskassanum til nakrar av havnunum við tilsamans 1.100.000 kr., og gr. 2, sum handlaði um Tórshavnar havn, var strokin, tí viðvíkjandi studningsveitan til hesa havn var serstök tingsamtykt gjörd í vetrartingsetuni.

Nevndin hevur síðani viðgjört málið, og er ein meiriluti samdur í at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, meðan ein minniluti ynskir nakrar av studningsupphæddunum hækkaðar.

Minnilutin setir eisini fram uppskot um serstaka lögtingslóg um studningsveiting til lendingar og smærri havnir.

UPPSKOT

I. frá meirilutanum (Hans Iversen, K. Nygaard, Sámal Ellefsen og A. Nielsen):

Lögtingslóg um havnabygging	Lagtingslov om havnebyguing
§ 1.	§ 1.
Úr landskassanum verður veitt ur studningur til úthygging av havnunum í niðanfyri nevndu sóknarkommunum, soleiðis at studningurin verður til stöddar 50 % av byggipeninginum, tó hægst 50 % av niðanfyri tilskilaðu upphæddum, og rindaður við eins stórum ársgjöldum í 10 fylgjandi fíggjarárum frá og við fíggjarárinum 1959/60 at rokna:	Af landskassen ydes tilskud til udbygning af havnene i nedenfor anförte sognekommuner, saaledes at tilskudet andrager 50 % af anlægsudgifterne, dog höjst 50 % af nedenfor angivne beløb, og udredes med lige store aarsrater gennem 10 paa hinanden fölgende finansaar fra og med finansaaret 1959/60 at regne:

Kommuna	kr.
Klakksvíkar	2.500.000
Fuglafjarðar	625.000

Kommune	kr.
Klakksvíkar	2.500.000
Fuglafjarðar	625.000

Leirvíkar	400.000
Götu	500.000
Nes	2.500.000
Skála	1.500.000
Sjóvar (við Hulkin)	600.000
Eiðis	300.000
Kollafjarðar (á Langasindi)	300.000
Vestmanna	1.200.000
Miðvágs og Sandavágs	2.750.000
Sörvágs	600.000
Skopunar	500.000
Sauds	1.000.000
Hvalbiar	250.000
Froðbiar	750.000
Porkeris	700.000
Vágs	1.700.000
tilsamans kr.	18.675.000

§ 2.

Studningsupphæddirnar, sum, áðrenn fíggjarárið 1958/59 er endað, av lendingarkonto landskassans eru goldnar til Miðvágs og Sandavágs kommunur til havnabyggingarnar í Miðvági í Miðvági í 1952 og 1956 og til Skála kommunu til havnabyggingina í 1954/55 á Skála, verða roknaðar sum ein partur av teim sambært § 1 veittu studningum til áðurnevndu kommunur.

1/10 av hesum útgoldnu studningsupphæddum til Miðvágs og Sandavágs kommunur verður drigin frá hvörjum av teim sambært § 1 úr landskassanum játtaðu 10 ársgjöldum til hesar kommunur, sama verður at galda fyri Skála kommunu.

Tær tilsagnir um studning, sum undir játtanunum til lendingar fyri fíggjarárið 1959/60 og fylgjandi fíggjarár eru givnar omanfyri nevndu kommunum falla burtur.

§ 3.

Eingin studningur verður gold-

Leirvíkar	400.000
Götu	500.000
Nes	2.500.000
Skála	1.500.000
Sjóvar (ved Hulkin)	600.000
Eiðis	300.000
Kollafjarðar (ved Langasand)	300.000
Vestmanna	1.200.000
Miðvágs og Sandavágs	2.750.000
Sörvágs	600.000
Skopunar	500.000
Sands	1.000.000
Hvalbiar	250.000
Froðbiar	750.000
Porkeris	700.000
Vágs	1.700.000
ialt kr.	18.675.000

§ 2.

De tilskudsbeløb, der indtil udgangen af finansaaret 1958/59 af landskassens konto for landingssteder er udbetalt til Miðvágs og Sandavágs kommuner til havnebygningsarbejderne i Miðvági 1952 og 1956 og til Skála kommune til havnebygningsarbejdet 1954/55 i Skála, indgaar som en del af de i henhold til § 1 bevilgede tilskud til ovennævnte kommuner.

1/10 af disse udbetalte tilskud beløb til Miðvágs og Sandavágs kommuner vil være at fradrage hver enkelt af de i henhold til § 1 af landskassens midler bevilgede 10 aarsrater til disse kommuner, det samme vil være tilfældet for Skála kommunes vedkommende.

De tilsagn om tilskud, som i henhold til bevillingerne til landingssteder for finansaaret 1959/60 og følgende finansaar er givet ovennævnte kommuner, bortfalder.

in ella bundin til gjaldingar, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett fyri eini góðkenning av byggiætlanini, eru loknar (jfr. eisini § 7).

§ 4.

Projekteringin av öllum teim undir § 1 nevndu havnabyggingum verður at útinna av ella fremja í samráð við landsverkfröðingsstovnin.

Hvat teim projekteringararbeiðum viðvíkir, sum ikki verða útint av landsverkfröðingsstovninum, so má ikki verða gjörd avtala um at útinna tey, fyrr enn samtykki landsstýrisins fyriliggur.

Viðvíkjandi arbeiðum, sum verða gjörd sum entreprisur á tilboðs- ella rokningargrundarlag liggur eftirlitið hjá landsverkfröðingsstovninum; men kommunur, sum hava egnu verkfröðingsskrivstovu, kunna tó sjálvar hava tað um hendur.

Hvat teimum arbeiðum viðvíkur, sum ein kommuna fær loyvi til sjálv at gera við egnari fyriskipan, skal arbeiðisleiðslan um hon ikki verður hjá landsverkfröðingsstovninum, verða góðkend haðani. Í slíkum föri skal arbeiðið í öllum hövuðslinjum verða skipað í samráð við landsverkfröðingsstovnin, sum annars eisini til eina og hvörja tíð kann krevja tær broytingar í arbeiðisgongdini, sum tykjast gagnligar.

Öll projekt og allar broytingar í teim verða at góðkenna av landsverkfröðingsstovninum.

§ 5.

Til uppmáling og onnur forarbeiði, projektering, eftirlit, ferðaútreiðslur o. a. verður roknað 8 % av byggipeninginum.

§ 3.

Intet tilskud bliver udbetalt eller stillet som sikkerhed, förend alle betingelser, landsstyret maatte stille for en godkendelse af udbygningsplanen, er opfyldt (jfr. tillige § 7).

§ 4.

Projekteringen af samtlige de under § 1 omhandlede havneanlægsarbejder vil være at udföre af eller at fremme i samraad med landsingeniörkontoret.

Med hensyn til projekteringsarbejder der ikke udföres af landsingeniörkontoret, da maa der ikke træffes aftale om deres udförelse forinden landsstyret har samtykket heri.

Med de arbejder, der udföres som entrepriser paa tilbuds- eller regningsbasis, har landsingeniörkontoret tilsynet, dog kan en kommune, der har eget ingeniörkontor, selv varetage dette.

Med hensyn til de arbejder, som en kommune faar tilladelse til at udföre i egen regie, skal arbejdsledelsen, saafremt denne ikke udöves af landsingeniörkontoret, godkendes af dette. I saadant tilfælde skal arbejdet i alle hovedlinjer tilrettelægges i samraad med landsingeniörkontoret, der iövrigt til enhver tid kan forlange foretaget saadanne ændringer i arbejdets gang, som synes hensigtsmæssige.

Samtlige projekter samt ændringer i disse skal godkendes af landsingeniörkontoret.

§ 5.

For opmaaling og andre forarbejder, projektering, tilsyn, rejseudgifter m. v. beregnes 8 % af anlægsudgifterne, der afholdes af landskasse og kommune med

Av hesum útreiðstum rindar landskassi og kommuna hvör sína helvt, og verður partur landskassans fyri tey av omanfyri nevndu arbeiðum, sum lands verkfröðingsstovnurin útinnir, veittur sum studningur til avvarðandi kommunu afturat tí undir § 4 tilskilaðu studningsupphæld.

Avrikar skrivstova landsverkfröðingsins allar omanfyri nevndu tettir viðvíkjandi einum arbeiði, verða tey 4 %, kommunan skal lata, afturhildin við 8 % av hvörjum ársgjaldi av studningínum; men hevur kommunan (havnin) sjálv goldið ein part av hesum arbeiðum verður tað, sum hildið verður aftur, procentvis tilsvarandi minni.

§ 6.

Allir byggisáttmálar skulu verða góðkendir av landsstýrinum, áðrenn teir eru gyldugir.

§ 7.

Landsstýrið ásetir, hvörji öki, kommunan (havnin) skal ogna sær í sambandi við útbyggingina.

Keypspeningin ella, um ognartöka verður framd, viðurgjaldið skal kommunan (havnin) sjálv rinda t. e. henda útreiðsla verður ikki iroknað tær byggiútreiðslur, studningurin verður útroknaður eftir.

Eingin studningur verður rind aður ella bundin til gjaldingar, fyrr enn kommunan hevur ognað sær hesi öki, t. e. eisini goldið fyri tey ella gjört avtalu við seljaran (ekspropriatus) um gjaldingina, sum landsstýrið kann góðtaka.

§ 8.

Á öki, havnin eigur, og öki

halvdelen hver; landskasseens andel for de af ovenfor nævnte arbejder, der udföres af landsingeniörkontoret, ydes som tilskud til vedkommende kommune i tilgift til det under § 1 anförte tilskudsbeløb.

Saafremt landsingeniörkontoret udförer samtlige ovenfor nævnte arbejder vedrörende et projekt, vil de 4 %, kommunen skal udrede, blive tilbageholdt med 8 % af hver aarsrente af tilskudet; i tilfælde hvor kommunen (havnen) selv har afholdt en del af udgifterne til disse arbejder, bliver det tilbageholdte beløb procentvis tilsvarende reduceret.

§ 6.

Samtlige byggekontrakter er först bindende, naar de er godkendt af landsstyret.

§ 7.

Landsstyret fastsætter, hvilke arealer kommunen (havnen) skal erhverve i forbindelse med udbygningen.

Köbesummen eller i tilfælde af ekspropriation erstatningssummen, skal kommunen (havnen) selv udrede, d. v. s. denne udgift indgaar ikke i de anlægsudgifter, som tilskudet beregnes efter.

Intet tilskudsbeløb kommer til udbetaling eller stilles som sikkerhed, förend kommunen har erhvervet omhandlede arealer, d. v. s. tillige erlagt betalingen eller indgaaet en af landsstyret godkendt aftale om betalingens erlæggelse med sælgeren (expropriatus).

§ 8.

Paa arealer tilhörende havnen og tilgrænsende arealer indenfor

nærindis havnini innan fyri eitt umráði, hvörs mark landsstýrið ásetir, mugu bert verða bygd hús til ídnað, goymslu o. l., sum náttúrliga hoyra heima við ella nærindis eini havn.

So leingi eingin byggisamtykt er góðkend fyri kommununa ella hefta öki samræmt lóg um býarplan og byggisamtyktir, skulu öll loyvi til bygging á hesum ökjum verða góðkend av landsstýrinum fyri at verða gildug.

Fyri hesi öki verður skjólast gjörligt at gera vega- og kloakkplan, sum skal verða góðkendur av landsstýrinum.

§ 9.

Landsstýrið verður at taka upp samráðingar við ríkisstýrið um studning til byggingarnar undir hesum plani.

§ 10.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

et omraade, hvis udstrækning landsstyret fastsætter, maa kun opföres bygninger til industri- og lagerformaal o. desl. som har naturlig tilknytning til et havneanlæg.

Saa længe der ikke foreligger godkendt byggevedtægt for kommunen eller omhandlede areal i h. t. lov om byplan og byggevedtægter, skal alle byggetilladelser, der vedrörer disse omraader, approberes af landsstyret for at være gyldige.

For vedkommende arealer vil der snarest muligt være at udarbejde vej- og kloakplaner, der skal godkendes af landsstyret.

§ 9.

Landsstyret optager forhandlinger med regeringen om tilskud til de i denne plan omhandlede projekter.

§ 10.

Denne lov træder i kraft straks.

II. Frá minnilutanum (P. M. Dam og J. Fr. Øregaard):

BROYTINGARUPPSKOT

§ 1 í uppskotinum til lóg um havnabygging verður broytt og orðað soleiðis:

§ 1.

Úr landskassanum verður veittur studningur til útbygging av havnunum í niðanfyri nevndu sókna-kommununum, soleiðis at studningurin verður til stöddur 50 % av byggipeninginum, tó hægst 50 % av niðanfyri tilskilaðu upphæddum, og rindaður við eins stórum ársgjöldum í 10 fylgjandi fíggjarár frá og við fíggjarárinum 1959/60 at rokna:

§ 1.

Af landskassen ydes tilskud til udbygning af havnene i nedenfor anförte sognekommuner, saaledes at tilskudet andrager 50 % af anlægsudgifterne, dog höjst 50 % af nedenfor angivne beløb, og udredes med lige store aarsrater gennem 10 paa hinanden følgende finansaar fra og med finansaaret 1959/60 at regne:

Kommuna	upphædd kr.
Klakksvíkar	2.500.000
Fuglafjarðar	1.000.000
Leirvíkar	1.000.000
Götu	1.000.000
Nes	2.500.000
Skála	1.500.000
Sjóar (við Hulkin)	600.000
Eiðis	600.000
Kollafjarðar	300.000
Vestmanna	1.200.000
Miðvágs og Sandavágs	2.750.000
Sörvágs	1.000.000
Skopmar	500.000
Sands	1.000.000
Hvalbiar	250.000
Froðbiar	1.000.000
Þorkeris	700.000
Vágs	1.700.000
tilsamans	21.100.000

Kommune	Beløb kr.
Klakksvíkar	2.500.000
Fuglafjarðar	1.000.000
Leirvíkar	1.000.000
Götu	1.000.000
Nes	2.500.000
Skála	1.500.000
Sjóar (ved Hulkin)	600.000
Eiðis	600.000
Kollafjarðar	300.000
Vestmanna	1.200.000
Miðvágs og Sandavágs	2.750.000
Sörvágs	1.000.000
Skopmar	500.000
Sands	1.000.000
Hvalbiar	250.000
Froðbiar	1.000.000
Þorkeris	700.000
Vágs	1.700.000
ialt	21.100.000

III. Frá minnilutanum (P. M. Dam og J. Fr. Øregaard):

UPPSKOT
til

Lagtingslóg um lendingar og smærri havnir.

§ 1.

Til lendingar- og smærri havnaarbeiði í niðanfyri nevndu kommunum verður úr landskassanum at veita stuðning svarandi til ¾ av byggipeninginum, tó í mesta lagi ¾ av niðanfyri tilskilaðu upphædduni:

Kommuna	kr.
Hvannasunds	500.000
Fugloyar	50.000
Klakksvíkar (Norðoyri)	50.000
Klakksvíkar (Árnafjörður)	50.000
Viðareiðis (Leitið)	100.000
Svínoyar	50.000

Lagtingslov om landingssteder og mindre havne.

§ 1.

Til arbejder vedrørende landingssteder og mindre havne i nedennævnte kommune vil der af landskassens midler være at yde tilskud svarende til ¾ af anlægsudgifterne, dog højst ¾ af nedenfor anførte beløb:

Kommune	kr.
Hvannasunds	500.000
Fugloyar	50.000
Klakksvíkar (Norðoyri)	50.000
Klakksvíkar (Árnafjörður)	50.000
Viðareiðis (Leitið)	100.000
Svínoyar	50.000

Sunda	150.000
Sjóar (Selatrað)	150.000
Nes (Æðuvík)	20.000
Fuglafjarðar (Hellurnar)	50.000
Oyndarfjarðar	75.000
Elduvíkar	10.000
Elduvíkar (Funningsfjörð)	50.000
Funnings	60.000
Gjáar	50.000
Mikines	30.000
Skálavíkar	500.000
Húsavíkar	100.000
Skúvoyar	30.000
Hvalbiar (Sandvík)	50.000
Hovs	150.000
Fámjins	150.000
Sumbiar	600.000
tilsamans	3.055.000

§ 2.

Studningurin verður veittur við 1/5 um árið í teim 5 fyrstkomandi figgjarárum.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Sunda	150.000
Sjóar (Selatrað)	150.000
Nes (Æðuvík)	20.000
Fuglafjarðar (Hellurnar)	50.000
Oyndarfjarðar	75.000
Elduvíkar	10.000
Elduvíkar (Funningsfjörð)	50.000
Funnings	60.000
Gjáar	50.000
Mikines	30.000
Skálavíkar	500.000
Húsavíkar	100.000
Skúvoyar	30.000
Hvalbiar (Sandvík)	50.000
Hovs	150.000
Fámjins	150.000
Sumbiar	600.000
ialt	3.055.000

§ 2.

Tilskudet ydes med 1/5 om aaret i de 5 förstkommende finansaar.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Tingformaðurin legði fram soljóðandi

GREINT UPPÍSKOYTISUPPSKOT

frá Dam og Dambjörg:

Av tí at skipatrot og fartrot í heila tíkið her í Föroyum er so stórt, at menn eru stórliga í ótta um, at mangir fiskimenn verða farleysir komandi summar, og at arbeiðsloysi so stóft verður störri enn á nökrum sinni áður og harav fylgjandi peningatrot og afturgongd í mongum heimi í Föroyum, eru vit undirritaðu av teirri áskoðan, at alt má gerast, sum gjörligt er, til frama fyri útiróður bæði úr Grönlandi og hiðani úr Föroyum.

Eitt av allrabestu útiróðrarplássum er Vágsciði. Men okkum er kunnugt, at bátadrátturin har er í slíkum ólagi, at ógjörligt er at rógva til haðani uttan so, at drátturin verður umvöladur og settur í nýtiligan stand.

Tessvegna loyva vit undirritaðu okkum at framsela fylgjandi

UPPÍSKOYTISUPPSKOT:

"Úr landskassanum verða veittar kr. 100.000,00 – eitt hundrað túsund krónur – til bölan av lendingarviðurskiftunum og bátadráttinum á Vágseiði."

GREINT UPPÍSKOYTISUPPSKOT

frá Dam og Øregaard til minniluta- og meiriluta uppskotini:

Av tí at summi pláss komu at verða fyri tí býti viðvikjandi seinastu havnaætlan, at tey ikki fingu byrjað arbeiðið ella ikki fingu arbeiðið fullgjört tessvegna, at landsstýrið og tingsins meiriluti fóku peningajáttanina aftur, loyvir undirskrivaði minniluti sær at setu fram fylgjandi

UPPÍSKOYTISUPPSKOT:

Sum nýtt punktum í § 1 verður aftan á seinastu reglu setf:
"Peningurin til Sands-, Eiðis- og Porkeris kommunur verður tó at rinda í 5 ár við eins stórum ársgjöldum".

Uppskot meiralutans samtykt 25 -0.

---

22. Fyrispurningur til landsstýrismann Ole J. Jensen.

Ár 1958, 6. august lögdu tingmenninir Fr. Bláhamar og Djóni í Geil fram soljóðandi fyrispurning:

Vísandi til áheitan frá fleiri lögtingsmonnum til landsstýrið í seinastu tingsetu viðvíkjandi Oyggjarvegnum loyva vit undirritaðu okkum hervið at taka áheitanina uppaftur.

Vit kenna okkum vísar í, at allir íbúgvarar á Streymoynni sakna

Oyggjarvegin og halda fremjanina av hesum máli vera hill mest átroðkandi, íð fyriliggur, av vegagerð í Føroyum.

Loyvi og viðgerð 6. august 1958 og yvir til næsta mál á dagsskránni.

23. *Fyrispurningur til Ole J. Jensen landsstýrismann.*

Ár 1958, 6. august legði tingmaðurin Kjartan Mohr fram soljóðandi fyrispurning:

Í sambend við fyrispurning frá Fr. Bláhamar og Jjóna í Geil fyri Fólkaflokkin (radikalt sjálvstýri) og Gamla Sjálvstýri, hvar teir spyrja teirra egna mann í landsstýrinum, um hvussu liggur fyri við Oyggjarvegnum, vil eg, íð ikki eri í samgongu við nevndu flokkar, og valdur sum lögtingsmaður fyri Havnina, spyrja lögmannin og Óla Jákup Jensen, landsstýrismann, nær verður farið undir at gera Oyggjarvegin?

Loyvi og viðgerð 6. august 1958 og yvir til næsta mál á dagsskránni.

24. *Ábyrgdartrygging fyri hundar.*

Ár 1958, 22. september legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lagtingslóg um uppískoyti til kgl. anordning nr. 88 frá 31. marts 1928 om hundeafgift m. v.	**lagtingslov om tilføjelse til kgl. anordning nr. 88 af 31. marts 1928 om hundeafgift m. v.**
§ 1.	§ 1.
Aftrat § 1 verður sett:	Til § 1 föjes:
Hunn, íð hevur hund, hevur	Det paahviler besidderen af en

skyldu at hava hann ábyrgdartryggjaðan. Samstundis tilmeldingini skal hann prófvöra, at ábyrgdartrygging er teknað fyri hundin.

Landsstýrið fyriseturgjøllligari reglur tryggingini viðvíkjandi.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1959. Innan ta tíð skulu allir hundar, sum eru undir reglunni í nevndu kgl. fyriskipan, vera ábyrgdartryggjaðir.

hund at holde den ansvarsforsikret. Samtidig med anmeldelsen skal han godtgøre, at der er tegnet ansvarsforsikring for hunden.

Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser forsikringen vedrørende.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1959. Inden den tid skal alle hunde, der omfattes af nævnte kgl. anordning være ansvarsforsikret.

Viðmerkingar:

Tað eru longu fleiri, sum hava ábyrgdartryggja hundar sínar og ynskir hava nú verið frammi um tvingna ábyrgdartrygging fyri hundar her sum í øðrum londum eitt nú í Danmark. Bæði Tórshavnar býráð og landfútin hava mælt til.

Landsstýrið hevur hildið tað verið heinast í serstakari kunngerð at fyriseta minstamarkið fyri tílíkari trygging v. m.

Samsvarandi hesum loyvir landsstýrið sær at seta fram lógaruppskot sum uppískoyti til galdandi kgl. fyriskipan nr. 88 frá 31. marts 1928 (smbr. lögtingslóg nr. 5 frá 18. marts 1955 um hundaavgjald v. m.)

1. viðgerð 29. september 1958 og málið beint til lógarnevndina.

---

25. Val av nevnd í fiskimarksmálinum.

Ár 1958, 19. september legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Lögtingið velur serliga 7-mannanevnd til saman við landsstýrinum at viðgera fiskimarksmálið.

Viðmerkingar:

Í eykatingsetuni í juni í ár viðtók lögtingið, aftanà at Ísland hevði samtykt at flyta fiskimarkið út á 12 fjórðingar pr. 1. september 1958, eisini at flyta fiskimarkið undir Føroyum eins út frá sama degi.

Síðani hesa viðtøku eru samráðingar og ymiskt annað farið fram í málinum, sum landsstýrið vil greiða nærri frá. Sum málið liggur fyri verður hildið beinast, at lögtingið velur serliga 7-mannanevnd at taka imóti hesi frágreiðing og annars at viðgera málið saman við landsstýrinum.

20. september fór val fram.

---

26. *Bygging av seksaringum.*

Ár 1958, 23. september legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um bygging av seksaringum.	lagtingslov om bygning av 12-mandsfarere.
§ 1.	§ 1.
Lögtingið letur byggja 50 útróðrabátar til útróðurs í Grönlandi.	Lagtinget lader bygge 50 baade til fiskeri i Grönland.
§ 2.	§ 2.
Landsstýrinum verður givið í hendi saman við figgjarnevndini at avhenda bátarnar til fiskimenn ella fiskimannasamtökur.	Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets finansudvalg at afhænde baadene til fiskere eller fiskersammenslutninger.
§ 3.	§ 3.
Landsstýrið fær heimild til úr landskassanum ella við láni úr tingsins grunnum ella úr penningastovnum ríkisins at fáa til	Landsstyret bemyndiges til af landskassen eller ved laan fra lagtingets fond eller fra rigets pengeinstitutioner at tilvejebrin-

vega tann til byggingina neyðuga pening.

Tann ella teir, sum yvirtaka ein bát, skylda at einda 10 % sjálvir og kunnu fáa áður ásetta studningshald.

ge den til bygningen nödvendige kapital.

Den eller de, der overtager en baad, skal have 10 % i egenkapital og kan opnaa at faa tidligere foreskreven garantiordning.

Viðmerkingar:

Tað er hvörjum manni greitt í dag, at útróðurin í Grönlandi er av allrastörsta týðningi. Men rætt nú stendur á förunum. Föroya javnaðarflokkur loyvir sær ti at seta fram uppskot um, at löglingið letur byggja 50 stórar útróðrabátar til föroyskar fiskimenn at yvirtaka til útróður í Grönlandi.

Tað er rætt og ímiligt, at teir ella tann, ið yvirtekur ein bát, fær sama studning sum áður er ásettur.

Peningin til bygging av bátunum eigur landsstýrið at fáa heimild at læna úr landskassanum ella við láni frá tingsins grunnum ella/og við lánum aðra staðni.

1. viðgerð 30. september og 17. oktober legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Málið hevur verið til viðgerðar í figgjarnevndini, ið hevur býtt seg í ein meirifluta og ein minniluta. Minnilutin (P. M. Dam og Johan Simonsen, sum var möttur fyri Erlend Patursson) mælir tinginum til at samtykkja uppskot javnaðarflokksins.

Meirilutin (A. Djurhuus, Dj. í Geil, Kj. Mohr, Poul Petersen og Johan Poulsen) setur onki uppskot fram, tá meirilutin er av teirri ætlan, at spurningurin um at stuðla bygging av útróðrabátum til fiskiskap í Grönlandi hevur fingið ein hóskandi stuðul í löglingsmáli nr. 36/1958: Studningur til bátar til útróður í Grönlandi og her heima við tað, at tann samlaði studningspeningur til hetta endamál verður hækkaður við kr. 50.000,— nevnliga frá kr. 50.000,— til kr. 100.000,—.

2. viðgerð 17. oktober 1958.

Lógaruppskotið fall 9—0.

27. Ábyrgd fyri láni til Miðvágs kommunu.

Ár 1958, 1. oktober legði Edw. Mitens landsstýrismaður fram sóljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um ábyrgd av láni til Miðvágs kommunu til skúlabygging.

§ 1.

Landsstýrið verður heimlað landskassans vegna at taka ábyrgd av lánum til Miðvágs kommunu uppí 350.000 kr. hjá Kreditforeningen af kommuner i Danmark til gerð av felagsskúla Miðvág-Sandavág.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for laan til Miðvágs kommune til skolebyggeri.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for laan til Miðvágs kommune indtil 350.000 kr. hos Kreditforeningen af kommuner i Danmark til opførelse af fællesskole Miðvág-Sandavág.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Miðvágs og Sandavágs kommunur hava lagt fyri skúlastjórnina uppskot til gerð av felagsskúla millum Sandavág og Miðvág.

Skúlastjórnin hevur góðtikið uppskotið og er byggikostnaðurin mettur til 1.418.000 kr.

Miðvágs kommuna hevur í vár fingið loyvi til at taka fyribils lán í Føroya Banka 100.000 kr. til arbeiðið, við teirri ætlan seinri at býta tað við meira langfrestað lán í Kreditforeningen af kommuner i Danmark.

Kommunan hevur nú fingið fyribils játtan frá kommunukreditfelagnum um lán, men tá treyt er fyri láni úr hesum felag til føroyskar kommunur, at landskassin og ríkiskassin veðhalda fyri tíllíkum lánum, sókir kommunan í skrivi 29. august í ár um landskassaábyrgd fyri láni upp til 350.000 kr.

Landsstýrið hevur haft málið um byggingina til viðgerðar og kann tilmæla ætlaninar, soleiðis sum tær eru góðtiknar av skúlastjórnini og verður tí her lagt fyri lögtingið uppskot til lögtingslóg um heimild landsstýrisins landskassans vegna at taka ábyrgd av umsókta láni.

Viðlögd er figgjarstöða kommunnar pr. 31. december 1956 og yvirlit yvir lán pr. 18. juli 1958.

Uppskot landsstýrisins samtykt 22—0.

28. *Lán til vegabygging.*

Ár 1958, 1. oktober legði tingmaðurin Fr. Blíhamar fram soljóðandi

UPPSKOT
til

löglingslóg um lán til gerð av oyggjarvegnum.	lagtingslov om lån til anlæg af oyggjarvegnum.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at læna upp í 8 mill. kr. at nýta til gerð av oyggjarvegnum.	Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at optage laan indtil 8 mill. kr. til anlæg af oyggjarvegnum.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tað man vera hvörjum manni greitt, at gerð av oyggjarvegnum í Streymoy kann ikki koma undir vanligar treytir fyri gerð av samferðsluvegum í Föroyum.

Til tess er peningurin ov nógvur at játta um fíggjarlógina. Vit hava tí hugsað okkum, at landsstýrið ger útvegir fyri einum langfrestaðum láni, soleiðis at aftur-rindingin kann fara um fíggjarlógina.

Tað er eisini ein spurningur, sum kemst aftur til seinni, um hesin vegur eins og aðrir störri samferðsluvegir, kunnu gerast sum kommunanlir vegir, soleiðis at kommunurnar sum vegurin fer íggjögnum ella tær sum beinleiðis fáa nýtslu av honum skulu bera ein part av útreiðslunum, til gerð og umsiting. Helst skuldu tílíkir vegir verið landsvegir, sum landið má byggja og eisini halda.

Enn fyriliggur ongin endalig meting av kostnaðinum, og nakað velst um, hvussu hann verður gjördur, um tunell skal vera á honum.

Vit hava sett uppskot um at læna upp í 8 mill. kr. sum er eftir einari leysari ætlan.

1. viðgerð 7., 2. viðgerð 8. og 3. viðgerð 10. oktober 1958.
Uppskotið samtykt .... 20—0.

29. *Ábyrgd av láni til keyp av agnsild.*

Ár 1958, 14. oktober legði tingmaðurin Poul Petersen fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um ábyrgd av láni til keyp av agnsild.	lagtingslov om garanti for laan til köb af agnsild.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrið er heimilt landskassans vegna at taka ábyrgd av lánum uppí kr. 250.000. tilsamans til keyp av agnsild í Föroyum.	Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for laan op til kr. 250.000. tilsammen til köb af agnsild paa Færöerne.
§ 2.	§ 2.
Henda lög kemur í gildi beinnan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Stýrir í frystihúsum hava heitt á tingmenn um hjálp til finansieringar av keypi av föroyskari havsild til agns.

Landsstýrið hevur mælt frystihúsunum frá at lita á russiska agnsild, men afturímóti fáa sær so mikið niðurfyri sum gjörligt av föroyskari sild.

Tað er ein veruleiki, at heimafiskiskapurin verður álitið hjá fiskivinnu okkara frá várinum, tí ongin kann fara til Ísland.

Tílík keyp niðurfyri uppí eini 1.000 tons binda nógvan pening, og serliga tey smærru frystihúsini hava ikki so lett at reisa so miklan pening og halda sín rakstur gangandi við skiptum v. m.

Menn hava hildið tað verið so umráðandi at tryggja útróðrinum nóg mikið agn av föroyskari havsild, og at skapa líkindir fyri so mikluri peningaileggingi, at frystihúsini gerast för at keypa alt tað sum törvar nakað á sama hátt sum peningaileggingin í fisk á goymslu.

Her er ongin samskiping sum í fiskaútflutningínum at standa imóti við. Tessvegna er tað neyðugt, at landskassin skoytir eitt sindur uppí hjá frystihúsum og at viðkomandi banki ansar eftir, at peningurin gongur innaftur, bráðfongis í eini ábyrgd eftir reglum, sum landsstýrið fyrisetur, til ein lóggáva fæst eins og í Noregi.

Vísandi hertil loyva vit okkum at leggja lógaruppskot fram við tilmæli.

1. viðgerð 15. oktober og 17. oktober legði figgjarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Hin föroyski fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin hava lagt fyri

tingið uppskot til lögtingslóg um ábyrgd av láni til keyp av ngnsild.

Málið var undir 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina, ið hevur viðgjört málið.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið við hesi broyting:

I § 1 millum "heimild" og "landskassans" og í danska tekstinum millum "vegne" og "at" verður sett "í fíggjarárinum 1958/59" "i finansaaret 1958/59".

2. og 3. viðgerð 17. oktober 1958.

Uppskot við fíggjarnevndinnar broyting samtykt 20 -0.

....

30. Umskipan og bøtan av vanlukkutryggingarlógini.

Ár 1958, 3. oktober legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi skriv:

Undirritaði Føroya javnaðarflokkur loyvir sær við hesum at biðja hitt háttvirda lögting at taka til viðgerðar eina umskipan og bøtan av vanlukkutryggingarlógini samsvarandi tað í eftirfylgjandi viðmerkingum framflutta.

Viðmerkingar:

Javnaðarflokkurin hevur ferð eftir ferð haft frammi spurningin um at fáa broytt vanlukkutryggingina soleiðis, at hon verður at umfata t. d. allar einkjur, eisini einkjuna eftir hann, ið deyður er av sjúku, sóttardeyðaeinkjuna, hon sum er verst stillað av öllum einkjum, tí sjúkdómstíðin hjá manninum, áðrenn hann slóknaði, hevur ofta útarmað heimið, so hon situr ikki bara við ongum rætti til vanlukkutryggingarpening eftir mannin, men skuld og armóð niva hana og börnini.

Onnur broyting, ið krevd er, er at fáa bíðingartíðina (karenstíðina) setta frá 13 vikum niður í 1 viku.

Tríðja, sum er kravt í hesum sambandi, er at fáa ársinntökuna, ið menn hava lagt til grund fyri skaðabótini, hækkaða frá kr. 2700 til kr. 7000 sum niðri í Danmörk. Hetta vildi givið tí, ið verður fyri skaðavannlukku, tvær og eina hálva ferð so stóra skaðabót sum ta, ið nú verður givin.

Tessverri er eingin av hesum broytingum til ábötur fraud.

Sóttardeyðaeinkjan situr enn við ongum!

13 viku biðingartíð eftir dagpeningi hjá honum, ið er komin til skaða, er enn óbroytt!

Og enn fáa vanlukkufólk 2½ ferðir so lítla skaðabót sum niðri í Danmörk!

Hvat vil meirkostnaðurin av t. d. stytting av biðingartíðini eftir dagpeninginum frá 13 vikum til 1 viku og nevnda hækking av skaðabótini tilsamans verða, og hvussu kundi rin hugsa sær henda meirkostnaða goldnan?

Sambært úrdrátt formans Föroya Arbeiðarafelags Ónnars Petersens av vanlukkutryggingarroknskapinum fyri 1956 er goldið í dagpening við 6 kr. um dagin kr. 36.032,50 og skaðabótin av vanlukku var fyri sama árið kr. 43.861. Tilsamans eru hesi tól kr. 79.893,50.

Stytta vit biðingartíðina til 1 vikn, og hækka vit harafrat dagpeningin frá teimum 6 kr. til 2/3 av eini daglön = um leið 22 kr., verður meirkostnaðurin av hesum ikki at fara uppum kr. 180.000, av tí at summir arbeiðssáttmálar geva tí, ið er komin til skaða, lön fyri fyrstu tvær vikurnar, ella um kr. 70-75.000 meiri enn nú.

Hin samlaða útreiðsluökingin av hesum báðum so týðningarmiklu ábötum verður so staff av liggja um 255.000 kr.

Sambært föstlögdu skipan millum ríkisstýrið og hitt föroyska heimastýrið skal hvör helmingurin av teimum socialu útreiðslunum verða borin av hvörjum teimum föroyingum og dönum.

Tað er tí eisini í hesum föri rímligt, at statsin tekur helmingin av meirútreiðslunum. Viðvíkjandi dagpenings- og skaðabótahækkingini verður so til okkara at rinda um kr. 128.000 meiri enn vit gera nú um árið.

Tryggingargjaldið (kontingentið) var um kr. 300.000 fyri 1956. Hesin peningur kom við eini eginpremin uppá 15 kr. Hækka vit heimapremiuna eins og aðra premiu, ið fer í vanlukkutryggingargrunnin við 50 %, t. v. s. viðvíkjandi egin- ella heimapremiuni um 21 kr., vilja vit harvið vinna um kr. 75.000 meiri í grunnin. Hinar eftirverandi ca kr. 80.000 er náttúrligt at landskassin verður at taka.

Hvussu nógv, ið javnaðarmannauppskotið um hækking av tí til grundliggjandi inntökuheld fyri skaðabótaútrokningina frá 2700 til 7000 vil geva afturímóti nú, síggja vit av eini talvu, ið er úrarbeidd av tryggingarstjóranum H. O. Hansen, sí lögtingstíðindi 1956, blaðsíðu 26:

	Nú	Eftir uppskoti javnaðarmanna:
	kr.	kr.
Til einkjur	9.200	25.200
Til börn (skiftandi eftir tali og aldri upp til	3.645	9.160
Til foreldurleys börn (eftir tali og aldri) upp til	7.920	18.900

Samlað til einkjur og börn og mögnlig omnur ..		17.010	14.900
5 % avlamis		675	11.750
10 % —		1.350	3.500
25 % —	14 ár	1.665	11.316
	80	2.236	5.798
100 % --	14 ár	34.632	89.786
	80 --	8.919	23.193

Ökingin av teimum socialu útreiðslunum við at taka sóttardeyðaeinkjuna við fær ein við at telja allar tær einkjur, ið ikki hava fingið einkjutryggingarpening. Hetta hava vit ikki haft hövi til, men má verða gjöet av teimum almennu autoritetunum og tað má verða gjört, tí sóttardeyðaeinkjan kan ikki longur sita við ongum.

1. viðgerð 8. oktober og málið beint til socialu nevndina.

---

31. Studningur til útbygging og dýping av pollinum í Sumba.

Ár 1958, 3. oktober legði tingmaðurin Arnold Nielsen fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um útbygging og dýpan av Pollinum í Sumba.	lagtingslov om udbygning og uddybning af Pollinum i Sumba.
§ 1.	§ 1.
Til útbygging og dýpan av Pollinum í Sumba verður úr landskassanum játtað 3/4 av kr. 600.000.- seks hundrað túsund krónum at rinda við 3/4 av kr. 120.000,— um árlið í 5 ár.	Til udbygning og uddybning af Pollinum i Sumba bevilges af landskassen 3/4 af kr. 600.000.- seks hundrede tusind kroner -- at udrede 3/4 af kr. 120.000.- om aaret i fem aar.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi 1. apríl 1959.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1959.

Viðmerkingar:

Sumba man vera eitt hitt besta útróðrarpláss í landinum. Statt út fyri bygdini liggja Føroya bestu fiskimið. Heimaútróðurin hevur tí stór an týðning fyri Sumbiar bygd. Í 1957 gav heimaútróðurin um 200.000 kr. Men leudingarviðurskiftini eru vánalig. Nakað er gjört, men ovlítið. Kósin er so grunn, at tað er vónleyst hjá bátum at sleppa frá landi ella koma aftur til lands, meðan fjöra er. Fyri at kunna leuda mugu bátarnir til lands, áðrenn tíð er. Hetta tarnar sjálvandi útróðrinum nógv. Tað er tí största yuski hjá öllum Sumbingum at fáa útbygl og dýpt Pollin í Sumba sum skjótast.

1. viðgerð 8. oktober og 10. oktober legði havna- og veganevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Tann 30. september 1958 legði lögtingsmaður Arnold Nielsen fram á ting uppskot til lögtingslóg um útbygging og dýpan av pollinum í Sumba, hareftir verður játtað úr landskassanum 3/4 av kr. 600.000. –.

Málið varð undir 1. viðgerð beint í havna- og veganevndina, ið hevur viðgjört málið.

Ein meiriluti í nevndini (Arnold Nielsen, Hans Iversen, Knud Nygaard, Sánal Ellefsen og Olaf Ellingsgaard mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá Arnold Nielsen óbroytt.

2. viðgerð 10. og 3. viðgerð 16. oktober 1958.

Uppskotið samtykt 21—0.

---

32. *Ravmagnsverk í Skúvoy.*

Ár 1958, 3. oktober legði tingmaðurin Hákun Djurhuus fram soljóðandi skriv:

Í longri tíð hevur talan verið um at fingið ravmagnsverk her í Skúvoy, men hava vil fyrst nú frá teimum sakkönu fingið eina heildarmynd av, hvussu eitt slikt verk, ið kann sigast ikki bert at vera tíðarhóskandi men eisini framtíðarhóskandi helst eigur at verða gjört.

Vit koma tí nú til heiðraða lögtingið við umsókn um figgjarhjálp fyri at kunna loysa hetta mál, ið er av största týdningi fyri bygdina her.

Ætlanin er at nýta vatnmegi, og siga sakkönir menn, ið hava verið á staðnum, at umslöðurnar eru stakgóðar fyri at gera eitt slíkt verk her.

Nú hevur meginparturin av Föroyum fingið ravmagnsmegina, og tá vit millum teir fáu í seinra endanum biðja um figgjarhjálp frá heiðraða lögtinginum, vóna vit, at hon verður veitt okkum eftir sonnu prinsippum, sum hjálp er veitt störri ravmagnsverkum til dömis S.E.V. og el-verkinum "Suðuroy" og samsvarandi lyfti lögtingsmanna, at tær oyggjar og bygdir, ið lógu soleiðis fyri, at tær ikki kundu fáa samband við meginverkini, ikki skuldu verða fyri verri býti enn tey, men áttu at verða styðjað meira.

Sostatt sökeja vit um at fáa samsvarandi tí S.E.V. hevur fingið og el-verk "Suðuroy" hevur fingið lyfti um, rentustuðning ley fyrstu 10 árini av helvtini av byggikostnaðinum og haraftrat 25 prosent av byggikostnaðinum í studningi. Her hava áðurnevndu verk fingið 20 prosent, men vóna vit, at heiðraða lögtingið gevur okkum hesi umbidnu 5 prosentini meira í studningi, samsvarandi lyfti um, oyggjarnar og bygdirnar, ið ikki skuldu verða fyri verri býti, men áttu at verða styðjaðar meira.

Hjálagt verður send kostnaðarætlan frá Hjalgrimi Winther, stjóra S.E.V.'s, ið metir verkið at kosta tilsamans 230.000 kr.

Honda kostnaðarætlan og hansara hugsan um vatnorkuna eru viðmerkingar til frágreiðing frá Ólavi Rasmussen, elektromekanikara um vatnorkumöguleikar í Skúvoy, og er tað, báðir menninir siga, hjálagt.

Eitt ravmagnsverk av tí stödd her er talan um, vildi givið bygdini ravmagn til ljós, kóking, baking og aðrar hentleikar, nakað av hita og megi til kölihús og einkultar smámotorar.

Um týdningin av at fáa ravmagn til ljós, kóking, baking og nakað av hita förva ikki nógv orð, tað vita flestir menn nú á dögum, men at fingið ravmagnsmegina til kölihús á eini slíkari oyggj, tað er av störri týdningi enn fólk kanska við tey störru og góðu havnalöginí kunnu hugsa sær.

Á sumri fæst nógvur fuglur í Skúvoy. At hesin ferskmatur ikki kann verða goymdur í kölihúsi ger mangan, at stór virði fara til spillis. Um heystarnar er sama sögan, og viðvíkjandi aguinum er tað ofta hugstoytt at siggja úrslitið av góðveðurdögunum, bert tí onki agn er at fáa.

Soleiðis kundi dömi verið tikið aftaná dömi, ið öll prógva tað kenda orðalagið, ið nú er á hvörjum munni.

Verða avbygdirnar ikki stuðlaðar og hjálp veitt teimum, so har verður livandi samsvarandi múliðarinnar krövum, verða tær avloftaðar. Tí vóna vit góða undirtöku við hesi okkara áheitan.

Fyri at geva eina talmynd av, hvussu vit hava hugsað okkum ta figgjarligu siðuna av hesum máli loysla, geva vit hetta yvirlit:

Samlaður kostnaður	230.000 kr.
Studningur 25 %	57.500

At útvega við láni og eginpeningi	172.500 kr.
Eginpeningur	32.500
At útvega við láni við lögtingsábyrgd	140.000 kr.

Rakstraryvirlitið av verkinum vil fyrsta árið við einari slíkari lántöku verða hetta:

Útreiðslur:	
Avdráttur av 86.225 á 30 ár	2.874,00
Renta og ársavdrög av 53.725 á 15 ár	6.806,00
Viðlikahald	1.000,00
Lön	3.000,00
Ymist	2.320,00
	16.000,00
Inntøka:	
Götuljós, telefonstöð og húsarhald svarandi til 40 gjaldarar á 400 kr.	16.000,00 kr.

Tá vit hava sett lönarútreiðslurnar bert til 3.000 kr. er tað av teirri grund, at vit rokna við sum givið, at lögtingið skipar so fyri, at öll hesi smáu ravmagnsverkini, ið liggja á útoyggjunum verða lögd undir tekniska leiðslu meginverkanna og Skúvoy til dömis undir S. E. V. og beita vit hervið á Löglingið og umsitingina at hjálpa okkum við at fáa hetta í lag. Stórar lönir kunnu slík verk ikki bera, men samstundis er ætlandi so lítið arbeiði av slíkum fullautomatiskum smáverkum, at tað mátti borið til, at tekniska leiðslan av stórverkinum tók sær av teim.

Samsvarandi omanfyri framförda verður sökt um:

1. 25 prosent í studningi av byggikostnaðinum.
2. Rentustudning av helvlini av byggikostnaðinum í 10 ár.
3. Veðhald fyri 140.000 kr. í lántöku.
4. At tað almenna tekur samráðingar upp við tey stóru verkini um, at tekniska leiðsla teirra tekur tekniska ábyrgdina av smáverkunum í hesum föri fyri okkara viðkomandi biðja vit um, at tað verður S.E.V., tað almenna vendir sær til.

Skúvoy, hin 1. oktober 1958.

SÖKNARSTÝRIÐ

Til harra Hákun Djurhuus, landsstýrismann,
her.

Eg sendi her eina lítla frágreiðing viðvíkjandi vatnkraftsverkinum á Skúvoy, sum vit hava tosað um.

Grundarlagið fyri hesum er tær kanningarnar, sum vit gjördu 14. apríl í ár, mátingar á generalstabskortinum og regnnögdin, sum er máld í Traðardali á Sandoy.

Eftir niðanfyri standandi tölum at döma, skuldi tað verði góður möguleiki fyri einum el-verki sum kann veita ljós, kóking og stóra hjálp til hita í 30 húsarhaldum.

Regnöki	2,5	km²	—	2500.000 m²
Meðal regnnögd um árið....	1,1	m	—	1100 mm
Loddrött nyttuhædd	75	m		
Byrging	8×20	m		
Brunnur	1000	m³		
Börlongd	750	m		
Bör d.	300	mm.		

Um verkið hevur eina "max" orku upp á 35 kw., svarandi til 1.17 kw/húsarhald, hugsi eg at tað kostnaðarliga kemur at falla frægast út.

Generatorurin liggur í hesum föri mest sum javnur við meðalregnið. Hetta skal skiljast soleiðis, at um alt regnið sum fellur á ökið, fall javnt ígjögnum alt árið, so hevði tað verði passaligt til fulla orku hjá generatorinum.

Av tí at tað ikki eru tiknar regluligar vatnmátingar á staðnum, skal eg greiða eitt sindur frá sammetingini ímillum vatnnögd og el-megi, soleiðis at tit kunnu hava eina föling við teimum vatnmátingum sum verða tiknar í framtiðini.

Í tí hædd sum her verður roknað við (75 m nyttuhædd) svara 8 m³ til 1 kvt., tá öll tap eru íroknaði.

1,1 m av regni um árið á 2.5 km² við vanligum frádrátti, 5-10 %, gevur 2.500.000 m³. Hetta svarar til 312.000 kwt. ella 28.5 kwt. pr. húsarhald pr. samdögur hjá 30 húsum. Sostatt er hetta tað avgjörda mestamál, sum kann drívasl burturúr regnökinum.

Um regnnögdin fyri eitt meðal ár verður hugsað sum ein javnur streym ur, hevði hann givið 87.5 1/sek. Vatnmátingin sum vit tóku 14. apríl í ár gav 12.5 1/sek. ella 1/7 av meðalregninum, roknað sum effekt. 12.5 1/sek. svara til 4,5 kwt. pr. húsarhald um samdögrið.

Hvussu mikið tað hevði regnað frammanundan 14. apríl í ár, veit eg ikki at siga, men eg haldi tað var liggjandi turt veður.

Við einum brunni sum tekur 1.000 m³ fari eg leysliga at rokna við at 50 % av regninum kunnu koma til nyttu, um avrokningsmátin verður gjördur soleiðis at tað kann brúkast mest möguligt tá yvirskot av vatni er til.

Prísirnir skuldu í dag upp á eitt verk við 3×220 v veksilstreym og 35 k.v.a., fallið nakað soleiðis út:

1	55 hk. peltonturbin, 1000 umdr./min. "max" 77 1/sek. kr.		28.000.
	við regulatori.		
1	generator, 3×220 v., 35 kva, 1000 umdr./min.	—	11.000.—
750	m 300 mm stálrör á 67		50.250.
	expansjónir, ventilar, ristir o. a.	—	10.000.—
	tilfar til montering innanhýsis av el.verkinum.	—	5.000.

linjur og pelar í bygdini.	--	6.000.
tilfar til eitt hús ca. 4 × 4 m	--	6.000.-
fakligt arbeiði av rörum, linjum og elverki.	--	10.000.-
ymist.		5.000.
		kr. 131.250.

Alt sum viðvíkir brunninum og vanligum arbeiðsmannaarbeiði, er ikki íroknað hesar prísir.

Eternitrör, sum er eitt nakað nýtt produkt, kosta um kr. 10. pr. m, so tað var vert at tikið til umhugsingar, um hesi rör ikki vóru vel egnaði til hetta formál.

ÓLAVUR RASMUSSEN
Elektromek. verkstaður
Tórshavn.

VATNKRAFTMÖGULEIKAR Á SKÚVOY

Viðmerkingar til uppstilling frá harra Ólavur Rasmussen

Harra Ólavur Rasmussen hevur í skrivi til harra Hákun Djurhuus, landsstýrismann, dagsett hin 30. oktober h. á. gjört eitt yvirlit yvir vatnkraftmöguleikar og kostnaðarætlan fyri eitt elverk á Skúvoy. Landsstýrismaðurin hevur sambart avtalu við Ó. Rasmussen biðið meg um nakrar viðmerkingar til hetta skriv.

Av tí, at eg ikki havi havt hövi til at vera á staðnum og heldur ikki á annan hátt havi havt líkindi til at kanna málið gjölla, ber ikki til at taka avgjörda stöðu í hesum. Tær tekniska data tykjast ógvuliga rimuligar, men kostnaðarætlanin, haldi eg, er í minna lagi.

Eg kundi kanska lýst málið við einum öðrum uppstillingarhátti, sjálvandi við omanfyri nevnda fyrivarni.

1. Neyðugt effekt og energi

Skúvoyarbygd hevur 110 íbúgvarar og o. u. 40 hús. Samanborið við royndum í teimum föroysku vatnkraftökjum kann ársnýtslan í meðal hóskandi setast til 500 kwh. pr. íbúgvara. Hetta gevur eina ársproduktión upp á o. u. 70.000 kwh. Brúkstíðin fyri eitt sovorði elverk kann roknast at vera umleið 3000 timar, og gevur hetta ein tubogenerator upp á 24 kW. Verður lagt upp fyri kölihúsi og einkultum smámotorum við 12 kW, fáa vit sostatt, at hóskandi verður at uppstilla ein tubogenerator upp á 36 kW ella o. u. 40 kVA í bygdini.

2. Vatnorkan.

Omanfyri er kannað, hvat ein má rokna fyri neyðuga effekt, um streymurin skal nýtast, sum Ó. Rasmussen skilur til. Nakað annað er, um vatnorkan er stór nokk til hesa effekt ella kanska störri. Tað er

soleiðis, at sum frá líður, tykist einki mark at verða fyri, hvussu stóra nögd av streymi fólk kunna nýta. Tá valnorkan ikki er störri enn í hesum föri, tykist tað rímuligt, at hon avmarkar maskineffektina, hvört ein roknar við at uppstilla eina ella tvær turbinur.

Ó. Rasmussen roknar við, at tað lilsamans regnar 1,1 m árliga. Hetta talið er sikkurt á leið. Á Mykineshólmi er meðalaffallið mált til 700—800 mm árliga, og affalsöki á Skúvoy liggur væl hægri. Eg veit tó ikki, um bakslátturin frá björgunum, tá hann er vestaneftir, hevur nakað at týða fyri regnmongdina.

Niðanfyri er roknað við sonu data, sum Ó. Rasmussen gevur upp, T.V.S. A = 2,5 km², Regn = 1 m árliga, H = 75 m,

hetta gevur í meðal 0,08 m³/sek.

Roknast við einum vatnspilli upp á 40 %, fær ein

Q = 0,048 m3/sek. í meðal.

Henda vatnorka svarar til 25 kW í meðal.

Við einari brúkstíð upp á gott 3000 tímar má ein sostatt rokna við, at tað falt skulu uppstillast 70 kW, um 60 % av vatnorkuni einaferð skal koma til nyttu. Hetta svarar til ein tubogenerator upp á 75 kVA.

3. Kostnaðarætlan.

Tað ber ikki væl til at siga nakað avgjört um hetta, tá ein ikki kennir treytirnar fyri arbeiðið, men eg skal tó royna at gera nakrar viðmerkingar til uppstillingina.

a. Kraftstöð v. m.

Prísurin fyri turbinu og generator má roknast at verða sambart tilboð og er sostatt í lagi.

Hvussu tað er við rörleiðinginum, veit eg ikki rætturliga. Er tað ætlanin at bolta rörini saman, verður kostnaðurin væl störri, enn roknað er við. Um ætlanan er at sveisa saman, verður rörleiðingurin bíligari, men kemur tó helst at kosta meira enn í uppstillingini.

Nakað annað er, at eg haldi, at rörini eru nóg so sver, 200—250 mm mátti verið nokk. Spurningurin um eternilrör ælti at verið tikin til umhugsan.

Leysliga vildi eg roknað við hesari kostnaðarætlan ekskl. vatnbrunninum:

35 kVA turboaggregat komplet ..	kr. 40.000	
Talvuanlegg v. m.	— 5.000	
Byggningur	— 20.000	
Rörleiðingur (300 mm) upplagdur	— 90.000	falt kr. 155.000

b. Leiðslur o. a.

Ó. Rasmussen ætlar at brúka 3 × 220 Volt.

Eg vildi hildið, at betri var at býta 3 × 220 Volt, av tí at hetta er tann vanligi spenningur, sum uýttur er í Föroyum, samstundis sum ein fær eitt bíligari lágsp. net. Sum kunnugt nýtist bert 50 % av tí koparnögd, ein skal brúka til 3 × 220 Volt, tá 3×380/200 Volt verða nýtt, og kopar er dýrt í lötuni.

6000 kr. kemur at verða alt ov lítið, nu fullfíggja 3 fasa lágsp. net skal byggjast í bygdini, tá roknað verður við, at brúkararnir fáa linjuna ókeypis til húsvegg. Tað er mær ikki heilt greitt, hvussu long linjan kemur at verða, men samhart karlinum vil eg meta útreiðslurnar til:

Lágsp. net (700 m hövuðslinja)	kr. 15.000.--
Mátarar uppsettir	3.000.--
	kr. 18.000.

c. Samanstilling.

Ein brunnur upp á 4000 m3 kemur óivað at verða ov lítið, men tað ber sjálvandi til at ökja um hann seinni, tá neyðugt verður. Sela vit í hesari uppstilling kostnaðin fyri byrgingini til kr. 30.000 fær ein:

Kraftverk o. a. m.	kr. 185.000.--
Leiðslur do.	18.000.
Projektering, óvæntað o. a.	27.000.--
Tilsamans	kr. 230.000.--

H. WINTHER

1. viðgerð 8. oktober og 10. oktober legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Nevndin er samd um í hesum föri at ganga umsökjarunum á móti og mæla landsstýrinum til at veita 25 % í studningi og samstundis útvega törvandi fíggjarheimild, sjálvt um tað ikki er beint, at slik mál koma inn á ting, áðrenn tey eru góðkend av elektricitetsnevndini, og er henda játtan treytað av, at el-nevndin góðtekur tað endaliga projektið.

Nevndin vil samstundis ganga inn fyri, at Mikinesar kommuna, sum eisini starvast fyri at byggja eitt slíkt vatnverk, fær somu sömdir, bæði hvat viðvíkir ábyrgd og renturstudningi.

Samsvarandi fyriliggjandi umsókn og tí, nevndin er samd um, setir hon soljóðandi uppskot fram og mælir tinginum til at samtykkja hetta uppskot.

UPPSKOT
til

lögtingslóg um ábyrgd av láni til Skúvoyar kommunu til byggingar av vatnkraftverki.	lagtingslov om garanti for lån til Skúvoy kommune til bygning af vandkraftanlæg.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum er heimilt lands	Landsstyret bemyndiges til paa

kassans vegna at taka ábyrgd av láni upp í kr. 140.000 til byggingar av valukraftverki í oynni. Eisini er landsstýrinum heimilt at veita rentustudning eftir somu reglum, sum játtað er el-verkinum Suðuroy og SEV.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi beinanvegin.

landskassens vegne at garantere for laan op til kr. 140.000,— til bygning af vandkraftanlæg paa öen. Ligeledes bemyndiges landsstyret til at give rentetilskud efter samme regler, som el-værket Suðuroy og SEV har har faaet tilsagn om.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 10. og 3. viðgerð 14. oktober 1958.
Uppskot nevndinnar samtykt 15 -0.

---

33. *Handilskamar.*

Ár 1958, 3. oktober legði tingmaðurin Poul Petersen fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um handilskamar

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt at geva nevnd fyri handil og ídnað góðkenning sum Föroya handils kamar at vera landsstýrinum og tess stovnum til handa í handilsmálum, v. m.

Landsstýrið fyrisetur gjölligari reglur um rættindir og skyldur v. m. í kunngerð.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi heinan vegin.

lagtingslov om handelskammer

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at autorisere et udvalg for handel og industri som Föroya handilskamar som raadgivende for landsstyret og dets indstitutioner i merkantile anliggender m. v.

Landsstyret fastsætter de nærmere regler om rettigheder og forpligtelser m. v. i en kundgörelse.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sum lið í eini ætlan at leggja fyrisitingina av prísum og valuta undir eina Føroya hagstovu, sum soleiðis skal hava eftirlitið við handli og valuta í hondum, verður tað hildið umráðandi at hava eitt umboð fyri handilin at vera hesum almenna stovni til handa.

Í löturi er ongin tílík samskiping av handli og ídnað, men eitt tiltak sum helta fer ivaleyst at skunda undir eitt tílíkt samtak av föroyskum vinnulívi.

Tað hevði tí verið umráðandi at fingið landsstýrinum eina tílíka heimild longu nú.

So statt loyva vil okkum at seta fram lógaruppskot.

1. viðgerð 8. oktober og málið beint til fíggjarnevndina.

---

34. Søla burturav matr. nr. 470 í Tórshavn

Ár 1958, 7. oktober legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslög um sölu burturav matr. nr. 470 Tórshavn.	lagtingslov om salg af en mindre del af matr. nr. 470 Tórshavn
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað at selja burturav matr. nr. 470 Tórshavn.	Landsstyret bemyndiges til at sælge en mindre del af matr. nr. 470 Tórshavn.
§ 2.	§ 2.
Henda lög kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Tá ið dómhúsið varð bygt og garður gjördur vestanfyri, varð hesin garður ikki settur í mark, men eitt sindur inni á dómhúsgrundstykkinum, matr. nr. 470, Tórshavn, so at ein ál til stödduar um 8 m² kom at liggja uttanfyri móti eigarunum av matr. nr. 469 a og 469 b.

Hesir sökja nú um at fáa hetta stykki til keyps.

Stykkið er dómhúsinum óneyðugt og dýrt verður at flyta garðin í mark.

Eftir § 19 í lögtingslóg um stýrisskipan Föroya í sermálum krevst lóg til sölu av fastognum landsins.

1. viðgerð 9., 2. 15. og 3. 17. oktober 1958.
Uppskotið samtykt 21—0.

---

35. Havnaætlan í Skálavík.

Ár 1958, 8. oktober legði tingmaðurin J. P. Davidsen fram soljóðandi skriv:

Skálavíkar kommuna loyvir sær við hesum at heita á tað heiðraða lögting og landsstýri um at veita okkum studning til framhald av lendingsarbeiðinum her. Sum flestum monnum kunnugt varð fyri 12 árum síðan byrjað at gera brimgarð við aflögubryggju her, hesin garður er nú komin út á 10 fötur dýpi við endan, so at smærri dekslör kunnu leggja at í góðum líkindum, men fyri at t. d. Smiril og sluppir skulu kunna leggja at, má hann fáast 20 til 30 m út aftrat.

Hetta halda vit og nógvir við okkum vera avgjört neyðugt, tí hetta er einasta pláss á Sandoynni, ið Smiril kemur at og ógvuliga ofta koma fiskiskip higar við og eftir fólki, í sildatíðini eru til dömis skip her, næstan á hvörjum degi. Aftrat hesum mega vil fáa gjört ein bátahyl innanfyri brimgarðin. Uttan at skerja aflöguplássið við brimgarðin er her pláss til at gera ein bátahyl, stórun ca. 40 × 50 m fyribils til stórar installeringar.

Bátarnir, ið nú verða brúktir her eru so stórir, at ikki kemst at landi við ta gomlu stönna uttan á högum vatni, so nú má ein bátahylur gerast, um útróður skal verða drivin, og at heimaútróðurin kemur at nærast munandi nú sjómarkið verður útflutt, er eingin her í iva um.

Loyva vit okkum tí at heita á tað heiðraða lögting og landsstýri um at taka Skálavík við á komandi 10 ára ætlan við 500.000 kr., soleiðis at hesi bæði arbeiði kunnu verða gjörd komandi 10 árini, bygdini til stóran frama.

1. viðgerð 9. oktober 1958, og málið beint til vega- og havnanevndina.

---

36. Studningur til bátar til útróður í Grønlandi v. m.

Ár 1958, 9. oktober legði tingmaðurin Leon Joensen fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóv um studning til bátar til útróður í Grönlandi og her heima.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilað í figgjarárinum 1959/60 at veita upp í kr. 100.000,-- í studningi til opnar bátar, sum bygdir verða til útróður í Grönlandi, tó ikki upp um 20 % av kostnaðinum.

Um játtanin rökkur til, er landsstýrinum eisini heimilað av nevnda peningi at veita studning til störri opnar bátar, sum bygdir verða til útróður heima í Föroyum.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om tilskud til baade til fiskeri i Grönland og her hjemme.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til i finansaaret 1959/60 at yde indtil kr. 100.000,-- i tilskud til aabne baade, der bliver bygget til fiskeri i Grönland, dog højst 20 % af omkostningerne.

Saafremt bevillingen strækker til, bemyndiges landsstyret til af samme beløb at yde tilskud til større aabne baade, der bygges til fiskeri hjemme ved Færöerne.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir lögtingslög nr. 16 frá 27. marts 1958 var landsstýrinum m. a. heimilað í fíggjarárinum 1958/59 at veita upp í kr. 50.000,- í studningi til opnar bátar, sum bygdir verða til útróður í Grönlandi og heima í Föroyum, tó ikki upp um 20 % av kostnaðinum. Henda játtan var so tepur, at hon ikki rakk longur enn, tá ið allar umsóknirnar til grönlandsbátarnar vóru innkomnar, til at veita í studningi um 15 %. Tá ið tað óivað eisini komandi ár verður störur törvur á at byggja bátar til útróður í Grönlandi, vit eru helst bert byrjaðir við hesi fiskivinnu, verður tað neyðugt ikki bert at endurnýggja játtanina, men eisini at seta hana upp.

Heitt verður á háttvirda lögting um at taka vel undir við hesum máli.

1. viðgerð 10. oktober og 17. oktober legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Málið hevur verið til viðgerðar í figgjarnevndini. Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (A. Djurhuus, Dj. í Geil, Kj. Mohr, Poul Petersen, Johan Poulsen og Johan Simonsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá lögtingsmanni Leon Joensen, meðan minnilutin (P. M. Dam) í fyrstu syftu setur fram eitt serligt uppskot, í aðru syftu gongur hann saman við meirilutanum.

UPPSKOT

frá

minnilutanum (P. M. Dam) í fyrstu syftu:

Lögtingslóg um studning til bátar til útróður í Grönlandi og heima í Föroyum.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað úr landskassanum at veita fiskimonnum 20 % í studningi til opnar bátar, sum bygdir verða til útróðurs í Grönlandi og heima í Föroyum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om tilskud til baade til fiskeri i Grönland og her hjemme.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til af landskassen at yde fiskere 20 % tilskud til aabne baade, der bliver bygget til fiskeri i Grönland og hjemme pan Færöerne.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð og 3. viðgerð 17. oktober 1958.
Uppskotið samtykt 21 0.

---

37. Smærri havnir og lendingar.

Ár 1958, 9. oktober legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi

UPPSKOT

til

lögtingslóg um studning til lendingar og havnir í Sumba, Fámjin, Hovi og Sunda kommuna.

lagtingslov om tilskud til landingspladser og havne i Sumba, Fámjin, Hovi og Sunda kommune.

§ 1.

Tingið játtar:

¾ av 600.000 kr. til dýpan og bötan av Pállinum í Sumba.

¾ av 150.000 kr. til útbygging og bötan av lendingarviðurskiftunum í Fámjin.

¾ av 150.000 kr. til dýpan og víðkan av havnini í Hovi.

¾ av 100.000 kr. til bötan av lendingarviðurskiftunum í Sunda kommunu.

¾ av 500.000 kr. til framhald av havnagerðini í Skálavík.

§ 1.

Lagtinget bevilger:

¾ af 600.000 kr. til uddybning og forbedring af Pállinum i Sumba.

¾ af 150.000 kr. til uddybning og forbedring af landingsforholdene i Fámjin.

¾ af 150.000 kr. til uddybning og udvidelse af havnen i Hovi.

¾ af 100.000 kr. til forbedring af landingsforholdene i Sunda kommune.

¾ af 500.000 kr. til fortsættelse af havnebygningen i Skálavík.

§ 2.

Peningurin verður latin á vanligar treytir og verður at rinda í 6 ár við ⅙ um árið av ti til smærri havnir og lendingar árliga á fíggjarlógini avlagda peningi.

§ 2.

Beløbene vil være at erlægge til sædvanlige betingelser og betales i löbet af 6 aar med ⅙ om aaret af det til mindre havne og landingspladser aarlig paa finansloven afsatte beløb.

Viðmerkingar:

Her er talan um útbygging og bötan av havna- og lendingarviðurskiftum, sum eru so átroðkandi, at eingin rættvísur tinguaður kann við góðum huga skjóta eina fullfíggjaða studningsjáttan til tey út.

Undirskrivaðu vóna tí, at ein meiriluti á tingi vil samtykkja lógaruppskotið.

1. viðgerð 10. oktober, og málið beint til havna- og veganevndina.

---

38. *Lán til húsabygging.*

Ár 1958, 9. oktober legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi skriv:

Ein hin störsti vansin hjá tí unga fólkinum í Föroyum í dag eru leyringu lániviðurskiftini til húsabygging. Ungur maður á bygd, ið vil seta búgv, kann ikki væenta sær hægri lán enn 25 % av byggivirðinum og í Havn og í hinum störru plássunum hægst ⅓, meðan í hinum partinum kunnu menn fáa langfreistað lán upp til 90 % av byggivirðinum.

Aftrat tí at lánihæddin hjá okkum er so lág, er hon vanliga stutt-

freistað 15 hægst 20 ár. Hetta er so hart, at tey ungu nýgiftu verða at sita undir einum peningalígum trýsti, sum örkinlar öll teirra bestu ár.

Tað er eyðsæð, at hetta lag gongur ikki. Her má broyting henda og tað skjótt.

Staturin hevur finansieringsskyldu í öllum málum Föroyum viðvikjandi eisini í hesum máli. Spurningurin um statsstuðning sum niðri í Danmark eigur at verða kannaður.

Kredittforeiningarnar niðri lúka ein stóran part av byggifinansieringini. Tað liggur beint fyri, at teirra virki verður viðkað til húsabygging í Föroyum. Men okkum kunnugt hava samráðingar við kredittforeiningarnar strandað uppá, at tær fyri lað fyrsta eru ókunnugar við lániviðurskiftini her uppi, og at tær harnæst halda möguleikarnar fyri sölumi av lániobligatiónum úr Föroyum vera ótryggar. Men vit hava skilt, at um statsgaranti verður givið fyri hesar obligatiónir, vildi sölan gingið eins væl og niðri, og vildu tá kredittfelögini fegin lænt pening til húsabygging í Föroyum. Um so er, at kredittfelögini ikki kundu lænt procentliga eins stóra peningahædd, sum fæst til húsabygging í Danmark, halda vit tað vera rímuligt, at staturin, ið sum sagt tekur so stóran part í húsabyggingini í hinum partinum av ríkinum, eisini skoytir uppí við láni, so at ung fólk í Föroyum ikki verða verri farin húsabygging viðvíkjandi enn niðri.

Undirritaði javnaðarflokkur heitir tí á Föroya lögting um at skipa fyri, at beinanvegin verða tiknar upp samráðingar við ríkisstýrið og donsku kredittforeiningarnar um eina lániskipan til húsabygging, soleiðis sum her er skotið upp.

UPPSKOT

Lögtingið samtykkir at heita á ríkisstýrið og donsku kredittforeiningarnar at fáa í lag eina lániskipan til húsabygging í Föroyum, ið ger lánilíkindini eins góð og í hinum partinum av ríkinum.

Landsstýrinum verður álagt at taka upp samráðingar við ríkisstýrið og kredittforeiningarnar hesum máli viðvíkjandi.

1. viðgerð 10. oktober, og málið beint til figgjarnevndina.

39. Fyrispurningur til landsstýrið frá Dam o. fl. um veg til Hvalba v. m.

Ár 1958, 9. oktober legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi

FYRISPURNING TIL LANDSSTÝRIÐ

Sum kunnugt varð samtykt heimild til landsstýrið at taka lán til byggjan av akvegi og tunnel millum Tvöroyri og Hvalba og Sandvik.

Tá ið hetta málið hastar, og enn onki liggur fyri um tað frá landsstýrinum, loyvir undirritaði javnaðarflokkur sær at biðja háttvirdu landsstýrið um frágreiðing um málið.

. . . .

40. Smærri havnir og lendingar.

Ár 1958, 10. oktober legði tingmaðurin Samuel Petersen fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um studning til Hvannasunds, Fugloyar og Klaksvíkar kommunum til bötan av lendingar og havnaviðurskiftunum.

§ 1.

Úr landskassanum verður játtað:

¾ av 500.000 kr. til bötan av havnarviðurskiftunum í Hvannasunds kommunu, ¾ av 50.000 kr. til uppábót av fjörunni á Kirkju, ¾ av 50.000 kr. til víðkan av lendinginl og brúgv á Norðoyri.

lagtingslov angaaende tilskud til Hvannasunds, Fugloy og Klaksvik kommune til forbedring af landingspladserne og havneforholdene.

§ 1.

Af landskassen bevilges:

¾ af 500.000 kr. til forbedring af havneforholdene i Hvannasund kommune, ¾ af 50.000 kr. til forbedring af strandbred ved Kirkju, ¾ af 50.000 kr. til udvidelse og anløbsbro ved Norðoyri.

§ 2.

Peningurin verður latin í 6 ár við ⅙ um árið av lí til smærri havnir og lendingar árliga á figgjarlógini setta peningi.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi 1. mai 1959.

§ 2.

Beløbene bevilges over 6 aar med $^1/_6$ om aaret af de midler, der aarlig bevilges paa finansloven til mindre havne og landingspladser.

§ 3.

Denne lov træder i kraft 1. maj 1959.

Viðmerkingar:

Av stöðum í Norðoyum uttan fyri Klaksvík er Hvannasundið lað staðið, sum hevur bestu umstöður til havnabygging, men har er enn ov lítið gjört. Fyri bygdirnar eystan Mátlan: Viðareiði, Múla, Norðtoftir, Haftarvík, Kirkju og Svínoy vil Hvannasund í framtíðini koma at hava enn störri sýdning, so hvört útbyggingin fer fram, tí er það nógv umráðandi, at havnaviðurskiftini har verða gjörd til lítar. Báðumegin sundið hava teir í mong ár havt dekksför, men tey havnaviðurskiftini, sum eru, uppfylla langt frá tey kröv, sum nútíðin setur. Óneyðugt er at vísa á, at Fugloyggj, sum úloyggj hevur fyri neyðini at fáa la hjálp, ið veitast kann fyri at böta um lendingina. Eisini Norðoyrar hava eitt dekksfar, men lendingin har er ikki so frøg, at bátur teirra fær lagt at, ló at hann ein stóran part av árinum kann liggja út fyri bygdini.

Tað er tí at vóna, at allir tingmenn taka vel undir við at böta um hesi viðurskifti, og vóna vit tí, at hetta lógaruppskot verður samtykt.

1. viðgerð 10. oktober og málið beint til havna- og veganevndina.

41. Studningur til lendingar.

Ár 1958, 10. oktober legði tingmaðurin Poul Petersen fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um studning til lendingar.

§ 1.

Fylgjandi studningur verða veittur úr landskassanum:

Fuglafjarðar kommunu:

¾ av kr. 45.000.— til víðking av lendingini á Helluium,

lagtingslov om tilskud til landingssteder.

§ 1.

Følgende tilskud bevilges af landskassen:

Fuglafjarðar kommune:

¾ af kr. 45.000. til udvidelse af landingsstedet paa Helluum.

Oyndarfjarðar kommunu:
¾ av kr. 75.000,– til leingingar av brimgarði og drátti til hansara.

Elduvíkar kommunu:
¾ av kr. 30.000,– til bötingar av gjónni í Elduvík,
¾ av kr. 50.000,– til leingingar av bryggju í Funningsfirði,

Funnings kommunu:
¾ av kr. 60.000,– til leingingar av brimgarðinum,

Gjáar kommunu:
¾ av kr. 40.000,– til bötingar av gjónni.

§ 2.

Studningurin verður veittur við ⅕ um árið í 5 ár.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1959.

Oyndarfjarðar kommune:
¾ af kr. 75.000,– til forlængelse af dæknole samt baadeoptræk til denne.

Elduvikar kommune:
¾ af kr. 30.000,– til forbedringer ved gjónna.
¾ af kr. 50.000,– til forlængelse af bro i Funningsfirði.

Funnings kommune:
¾ af kr. 60.000,– til forlængelse af dæknolen.

Gjáar kommune:
¾ af kr. 30.000,– til forbedringer af gjónni.

§ 2.

Tilskudene udredes med ⅕ aarlig over 5 aar.

§ 3.

Denne lov træder i kraft 1. april 1959.

Viðmerkingar:

Nú tað tykir so, at hvör er farin at taka til sín her á tingi, so fari eg at loyva mær at seta fram uppskot til lendingarbötur v. m. fyri norðan á Eysturoynni.

Hann sum er vanur at sigla henda vegin sær lívussu neyðugt tað er at fáa uppískoyti.

Vit siggja á Hellunum, afdjúpt og reint, men alleggingin ov stutt. Hon ger lítið stóra nyttu. Tað sama í Oyndarfirði. Eitt uppískoyti ger stóra nyttu. Harafturat förva teim drátt framvið út af brimgarðinum. Gjógvin í Elduvík fekk ikki tað hon skuldi hava. Hon eigur at fáa tað sum vantar í. Funningsfjörður má hava eina leinging av bryggju, tí so skjótt saman er komið millum Fjarða, so koma krövini til tess. Í Funningi er tað sum í Oyndarfirði, brimgarðurin er ov stuttur til sítt brúk. Gjónni förvar böting av lending og uppdrátti og möguligt eisini burtnurspreinging av skeri.

Eg fari sum tingmaður fyri Eysturoynna at leggja hetta mál fyri nú og væntti tingsins vælvild.

1. viðgerð 10. oktober, og málið beint til havna- og veganevndina.

42. *Fyrispurningur til landsstýrið um studning til lesandi v. m.*

Ár 1958, 10. oktober legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi

FYRISPURNING TIL FÖROYA LANDSSTÝRI

Sum kunnugt er studningur til lesandi og lærlingar av bygd so lítil, at fátækur maður ikki orkar at láta börn sín at læra. Undirskrivaði Föroya javnaðarflokkur reisti tí málið um eina skipan, ið veitir lesandi og lærlingum somu studningssöndir, sum verða veittar lesandi og lærlingum niðri í Danmark.

Tá ið enn einki er komið burtur úr hesum máli, og tað er av stórsta týdningi, at handlað verður í bræði, loyvir Föroya javnaðarflokkur sær at spyrja háttvirda landsstýri, hvat ið gjört er frá landsstýrisins hálvu hesum spurningi viðvíkjandi.

43. Fyrispurningur til landsstýrið um útvarpið.

Ár 1858, 10. oktober legði tingmaðurin P. M. Dam fram soljóðandi

FYRISPURNING TIL FÖROYA LANDSSTÝRI

Sum kunnugt hava kærur verið framfördar yvir, at Útvarp Föroya mangastaðni í Föroyum hoyrist nógv ov illa, skilst viðhvört als ikki. Tá ið landsstýrið hevur tingið áheitan um at greiða spurningin um bótan av hoyrilíkindum útvarpsins og okkum kunnugt enn onki er gjört hesum viðvíkjandi, loyva undirritaðu tingmenn sær við hesum at biðja háttvirda landsstýri um frágreiðing í málinum.

Vetrartingið 1958.

Ár 1958, hósdagin 4. december kl. 17 var Föroya lögting sett. Elsti tingmaður Hans Iversen úr Kvívík fór í formansessin og tók við fundarstýrinum eftir § 1 í tingskipanini. Hann lýsti, at lögtingið var sett og gjördi kunnugt, at lögmaður í bræví frá 28. november 1958 eftir lögtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan í sermálum hevði boðsent tingmonnum til vetrartings.

Aldursformaðurin bað J. H. Danbjörg og Jens Chr. Olsen vera fyribils tingskrivarar.

Valbrövini vóru kannað eftir § 1 í tingskipanini og hesir góðkendir sum tingmenn:

Hákon Djurhuus, Klaksvík, ff.
Johan Simonsen, Klaksvík, tf.
Poul Jacob Olsen, Klaksvík, jv.
Samuel Petersen, Klaksvík, sj.
Joh. M. Fr. Poulsen, Strendur, sb.
Jens Chr. Olsen, Toftir, sb.
Frederik Hansen, Söldarfjörð, tf.
Jógvan Högnesen, Fuglafirði, tf.
J. Fr. Øregaard, Götu, jv.
Poul Petersen, Tórshavn, ff.
Hans Iversen, Kvívík, sb.
Sigurð Joensen, Tórshavn, tf.
Leon Joensen, Sörvági, sb.
Haldor Hansen, Sörvági, jv.
Vilhelm Nielsen, Sandavági, ff.
Trygve Samuelsen, Tórshavn, sb.
Marius Johannesen, Tórshavn, sj.
Hanus við Högadalsá, Tórshavn, tf.
Kjartan Mohr, Tórshavn, fb.
Jacob Lindenskov, Tórshavn, jv.
Knút Wang, Tórshavn, ff.
Erlendur Patursson, Tórshavn, tf.
J. P. Davidsen, Tórshavn, jv.
J. H. Danbjörg, Porkeri, jv.
P. M. Dam, Tvöroyri, jv.
Dion Nolsöe, Vági, jv.
Hemming Jespersen, Tvöroyri, tf.
Niels Holm Jacobsen, Hvalba, ff.
Kr. Djurhuus, Tvöroyri, sb.
Andreas Djurhuus, Vági, sb.

Aldursformaðurin gjørdi kunnugt, at javnaðarflokkurin hevur 8 tingmenn, sambandsflokkurin 7, tjóðveldisflokkurin 7, fólkaflokkurin 5, sjálvstýrisflokkurin 2 og framburðsflokkurin 1.

Eftir uppskoti var J. F. Øregaard valdur til tingformann og Joh. M. Fr. Poulsen til næstformann.

So tók tingformaðurin formanssessin.

Eftir uppskoti vórn Jacob Lindenskov og Jens Chr. Olsen valtir sum tingskrivarar.

Tingformaðurin bað tingmenn rópa eitt nýggju-falt hurra fyri kongi og eitt trifalt hurra fyri Føroynum.

Tingið góðkendi 1. apríl Hilmar Petersen úr Fuglafirði sum varamann fyri Joh. M. Fr. Poulsen, 3. Joen H. Joensen úr Sumba fyri Hemming Jespersen, 10. apríl Robert Joensen úr Klaksvík fyri Hákun Djurhuus, 10. apríl Karsten Hoydal úr Havn fyri Hanus við Högadalsá og 9. januar D. J. Sørensen úr Hvalba sum varamann fyri J. H. Danbjørg.

Fastar nevndir og aðrar.

Figgjarnevndin: J. F. Øregaard, Samuel Petersen, Andreas Djurhuus, Joh. M. Fr. Poulsen, Erlendur Paturssson, Sigurð Joensen og Poul Petersen.

Tiltaksmenn: J. P. Davidsen, Poul J. Olsen, Tr. Samuelsen, H. Iversen, Frederik Hansen, Hanus við Högadalsá og Hákun Djurhuus.

Umsóknarnevndin: J. H. Danbjörg, Leon Joensen og Frederik Hansen.

Landsstýrismálanevndin: J. F. Øregaard, Hans Iversen og Erlendur Paturssson.

Fiskimarksmálanevndin: J. F. Øregaard, Poul Jacob Olsen, Erlendur Paturssson, Jógvan Högnesen, Jens Chr Olsen, Trygve Samuelsen og Hákun Djurhuus.

Havna- og veganevndin: J. P. Davidsen, Haldor Hansen, Hans Iversen, Andreas Djurhuus, Johan Simonsen, Frederik Hansen og Hákun Djurhuus.

Sociala nevndin: Jacob Lindenskov, Dion Nolsöe, Joh. M. Fr. Poulsen, Hemming Jespersen og Knút Wang.

Lógarnevndin: Trygve Samuelsen, Sigurð Joensen, Niels H. Jacobsen, J. Fr. Øregaard og Marius Johannesen.

Búnaðarnevndin: J. H. Danbjörg, Haldor Hansen, Jens Chr. Olsen, Jógvan Högnesen og Vilhelm Nielsen.

Skattanevndin: J. F. Øregaard, Poul J. Olsen, Tr. Samuelsen, Hanus við Högadalsá og Hákun Djurhuus.

Kirkjunevndin: Poul J. Olsen, Jacob Lindenskov, Leon Joensen, Johan Simonsen og Vilhelm Nielsen.

Flognevndin: Knút Wang, Erlendur Paturssson, Leon Joensen, Haldor Hansen og J. P. Davidsen.

Fiskivinnunevndin: Poul J. Olsen, P. M. Dam, Jens Chr. Olsen, Jógvan Högnesen og Niels Holm Jacobsen.

Skúlanevndin: Marius Johannesen, J. H. Danbjörg, Hanus við Högadalsá, Joh. M. Fr. Poulsen og Hákun Djurhuus.

Elektricitetsnevndin: Henning Jespersen, J. P. Davidsen, J. H. Danbjörg, Leon Joensen og Hákun Djurhuus.

Radarnevndin: Hákun Djurhuus, Sigurð Joensen, Hanus við Högadalsá, M. Johannesen, Haldor Hansen, Trygve Samuelsen og Leon Joensen.

I. Figgjarløgtingslóg 1959/60.

Ár 1959, 10. februar legði K. Djurhuus landsstýrismaður uppskot til figgjarlögtingslóg 1959/60.

1. viðgerð 6. mars og 21. mars legði figgjarnevndin fram uppskot í staðin fyri landsstýrisins uppskot (smbr. skjal 2).

Tingformaðurin legði fram soljóðandi minnilutauppskot frá Poul Petersen:

Minnilutin (Poul Petersen) heldur fyri:

1) Tað er neyðugt at fáa eina meira hóskandi toll-lóg. Hon hevur verið í umbúna leingi. Ikki minst nú tollurin er so stór landskassaintöka. Mangir skeivleikar eru í henni ikki bert socialt, men eisini í ti, at heimaidnaðurin hevur lítlan og ongan lætta eftir henni.

   Landsstýrið verður sostatt biðið at skunda undir uppskotið, sum nevnd hevur í hondum, so tað kann koma fyri tingið á komandi ólavsöku.

2) Almennar lönir eiga at skipast soleiðis í lóg, at tær hóska til viðurskiftini í landinum, leggja meira deut á dugnaskapin og fylgja livikostnaðinum í landinum eftir einum gjaldtali, sum er í samljóð við rörsluna í lönarlagnum her á landi yvirhövur og skjýtur sostatt upp at heita á landsstýrið at sála fyri uppskoti til broytingar ikki bert í galdandi skipan hjá landsins tænastumonnum og starvsfólki, men eisini hjá tænastumonnum v. m. undir felagsmálum eftir heimastýrislógini.

3) Tingið hevur samtykt at byggja vaktarskip. Tað er neyðugt at lúa

törvandi pening til tað so skjótt til her, so tað kann fara í gerð. Tað verður tí skotið upp at veita kr. 500.000,-- um árið í 5 ár til hetta endamál.

4) So sum longu skotið upp í lögtingsmáli nr. 28/1958 um bygging av fiskiförum er tað neyðugt at útvega so miklan pening sum yvirhövur gjörligt tey fyrstu árini at nýta sum studning til endurnýggingar og skotið verður sostatt upp at ökja studningin undir § 21 8 við 1 mill. kr. at nýta til forrenting og avdrátt av láni uppí 5 mill. kr., sum landsstýrið fær heimild at læna landskassanum, sum ætlandi fara at törva tey fyrstu 2 á 3 árini.

Sostatt setur minnilutin (Poul Petersen) fram soljóðandi

UPPSKOT

1) Heitt verður á landsstýrið at stíla so fyri, at uppskot til nýggja toll-lóg verður liðugt at leggja fyri tingið komandi ólavsöku.
2) Heitt verður á landsstýrið at stíla fyri uppskoti til broytingar í galdandi lönarskipan, so sum skila til omanfyri.
3) Í § 21—6 verður skotið inn sum nýtt p. 3:
"Til byggingar av vaktarskipi verða at veita um árið í 5 ár kr. 500.000.—".
"Til bygning af vagtskib bevilges om aaret i 5 aar kr. 500.000.—".

4) A. UPPSKOT til

lögtingslóg um lán til landskassan.	lagtingslov om laan til landskassen.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at læna upp í 5 mill. kr. at nýta sum studningslán til endurnýgging fiskiskipaflotans.	Landsstyret bemyndiges til paa landskasseens vegne at optage laan op til 5 mill. kr. at anvende som tilskudslaan til fornyelse af fiskerflaaden.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

4) B. Í § 21—8 í föroyska og danska tekstinum verða "3.560.000" broytt-ar til "4.560.000".
5) Í § 22—5 verður skotið inn sum nýtt pelti 6:
"Lán til hösnagarðar kr. 10.000" og
"Laan til hönsehier kr. 10.000.".

Tingformaðurin legði fram soljóðandi minnilutauppskot frá Sigurð Joensen og Erlendi Patursson:

Minnilutin (Sigurð Joensen og Erlendur Patursson) heldur fyri:

Tað yvirlit yvir inntøkur og útreiðslur landskassans, ið kallað verður fíggjarlóg, uttan tó at vera það í innihaldi sínum, hevur haraftrat tað meginbrek, at uppá seg ov lítið av peningimum verður nýttur til flógu-endamál, meðan ov nógv gongur til nýslu, uttan tó at gera satt gagn, har verulig hjálp er neyðug.

UPPSKOT

1) Eingin hækking av almennum lønum av nökrum slagi má fara fram í fíggjarárinum 1/1 1959 - 31/3 1960.
2) Prísstopp verður sett á allar neyðsynjarvörur fólksins og vinnunnar.
3) Til lønjavningargrunn skipsfiskimanna verða settar kr. 2,5 mill., so minstalønin ikki verður lægri enn kr. 1.000,00 per mánað per túr.
4) Til óvinnuföra fiskimenn verða setlar kr. 50.000,00.
5) Til byggingar ella keyp av sjóverjuskipi verða settar kr. 0,5 mill.
6) Til bacnastyrk verða settar kr. 100.000,00.
7) Til avlamispening verður seff 1 mill. kr.
8) Til fólkatrygging verða settar 2 mill. kr.

Tingformaðurin legði fram fylgjandi broytingaruppskot:

1) frá Leon Joensen:

I § 18: Samferðslumál, verður at seta sum nýtt punkt:
"5. Flogvöllurin 100.000 kr.". "5. Flyvepladsen 100.000 kr.".

2) frá Knút Wang o. fl.:

I gr. 20. 1 3 bókakeyp og innbinding verður ístaðin fyri kr. 20.000 settar kr. 30.000.

3) Frá Hákun Djurhuus o. fl.:

Sum nýtt pkt. 4 í grein 18 verður sett:
Til uppdyrkingarvegir ..... 300.000.
(Fall 13—0).

4) Frá Hanus við Högadalsá o. fl.

I gr. 20 stk. 6—3—2: 11.500 kr. verður broytt til 25.000 kr.

Viðmerking til sama stykki verður broytt til:
Peningurin verður eftir landsstýrisins avgerð nýttur til samsýning fyri handrit til og útgávu av skúlabókum.

5) frá Niels Holm Jacobsen o. fl.:
Í grein 23. Handil idnaður o. t. verður ístaðin fyri pkt. 6:
Kolagrevstur 75.000
sett pkt. 6:
Kolagrevstur 150.000

6) frá Joh. M. Fr. Poulsen o. fl.

Viðmerking til § 21.10 gongur út.

Atkvöðugreiðsla undir 2. viðgerð:

Uppskot nevndinnar
§§ 1 — 14 samtyktar 18—0.
§§ 15 — 16 — 17 samtyktar 17—0.
Broytingaruppskot (1) frá Leon Joensen fall 15—0.
Broytingaruppskotið var sett undir atkvöðu við navnakalli:
Ja atkvöddu: Poul Petersen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Leon Joensen, Johan Simonsen, Vilhelm Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, Erlendur Paturssen, H. v. Högadalsá, H. Jespersen og Haldor Hansen.
Atkvöddu ikki: Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, Jacob Lindenskov, Jens Chr. Olsen, Samuel Petersen, M. Johannesen, J. P. Davidsen, H. Iversen, Dion Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, J. F. Öregaard. Burturstaðhur: J. H. Danbjörg.
§ 18 samtykt 18—0.
§ 19 samtykt 18—0.

Broytingaruppskot (4) frá H. v. Högadalsá fall 15—0.

Broytingaruppskot (2) frá K. Wang burturdottið.
§ 20 samtykt 18—0.

Minnilutauppskot frá Poul Petersen til § 21 — nýtt petti 3 í stk. 6:
Uppskotið var sett undir atkvöðu við navnakalli:
Ja atkvöddu: P. Petersen N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Møhr, Fr. Hansen, H. Jespersen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. v. Högadalsá.
Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. C. Olsen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen, J. F. Öregaard, burtur: J. H. Danbjörg. Uppskotið fall 13—0.

Minnilutauppskot frá S. Joensen og E. Paturssen til § 21. stk. 8.
Uppskotið var sett undir atkvöðu við navnakalli:
Ja atkvöddu: N. H. Jacobsen, K. Wang, J. Simonsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. v. Högadalsá, H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. C. Olsen, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, V. Nielsen, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. M. Dam og J. F. Øregaard. Atkvöddu nei: J. P. Davidsen, P. J. Olsen og Haldor Hansen. Uppskotið fall 9—3.

Minnilutauppskot frá Poul Petersen til § 21.8 og 9. fall 13—0.

Broytingaruppskot frá Johan Poulsen o. fl. til § 21. 10. samtykt 17—0.
§ 21 - so broytt samtykt 21—0.

Minnilutauppskot frá Poul Petersen til § 22. 5. fall 11—0.
§ 22 samtykt 18—0.

Broytingaruppskot frá Niels Holm Jacobsen o. fl. til § 23. 6. var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. Holm Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, A. Djurhuus, J. Simonsen, D. Nolsöe, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, K. Djurhuus, P. M. Dam, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssson, H. v. Högadalsá, H. Jespersen. Atkvöddi nei: Haldor Hansen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. C. Olsen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, P. J. Olsen, J. F. Øregaard. Burturur: J. H. Danbjörg.

Uppskotið samtykt 17—1.
§ 23 so broytt samtykt 21—0.
§ 24 samtykt 21—0.
§§ 25—37 samtyktar 18—0.
Minnilutauppskotið frá Poul Petersen (stk. 1 og 2) fall 13—0.
3. viðgerð 24. mars 1959.

Tingformaðurin legði fram broytingaruppskot frá P. M. Dam og K. Djurhuus:

Í § 14 ymiskar inntökur verður í staðin fyri kr. 25.000,00 sett kr. 100.000. Tann endaliga niðurstöða á fíggjarlógini verður í inntöku og útreiðslu soslatt ..... kr. 18.065.000,00.

Uppskotið samtykt 19—0.

Fíggjarlógin so broytt samtykt 18—0.

2. *Landsstýrismál.*

Ár 1959, 11. februar legði tingformaðurin fram landsstýrismál. 4. april legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Eftir tingskipan lögtingsins § 10 hevur nevndin til kannan av landsstýrismálum granska avrit av landsstýrisins gerðabók fyri tíðarskeiðið 1. august 1957 til 28. juli 1958.

Tað hava verið hildnir 82 fundir. Ymisk mál hava verið til viðgerðar og í flestu förum hava landsstýrismenninir verið samdir, tá avgerðir eru tiknar, undantók hava tó givist, hvar hugsanir ikki hava borið saman, men ivaleyst hevur hvör gjört eftir sínt bestu hugsan.

Tá man lesar hetta rúgvismikla mál íggjögnum, vil tað ofta verða okkurt ein kundi yuskt var samtykt annarleiðis, og lóyvir nevndin sær tí at gera nakrar viðmerkingar.

Viðvíkjandi samsýning uppá kr. 15.000.— fyri veitta hjálp við avtöku gamla landshandilsins frá februar 1955 til januar 1956, so er hetta ikki smálig samsýning. Í hesum sambandi kann verða spurt, hvussu gingið hevur við innkrevjing av eftirstöðnum frá gamla landshandilstíðini. At 14 skúrar í Tovkusakk í Grönlandi eru seldir til ein mann fyri kr. 4.350.— má haldast vera bíligt og ivasamt um tað er beint, at ein maður fær allar at ráða yvir. Er tað neyðugt at seta ein hjálparlækna afturat á bróstsjúkrahúsinum, nú sjúklingatalið er so nógv minkað? Tað má haldast vera óneyðugt at gjalda eyka fyri 23 tímar eftirlit til ein mann, sum frammanundan situr löntur í offentligum starvi, eins og at samsýning verður latin fyri 26 fridagar til ein annan mann í almennari tænastu. Tá maður frá ingeniörskrivstovuni ella öðrum offentligum stovni átekur sær eftirlit við arbeiði, sum ikki beinleiðis hoyrir undir lögtingið, má tað vera lögtinguum óviðkomandi at gjalda fyri, at maður kemur í manns stað.

Ein minniluti (J. Fr. Øregaard) setur onki uppskot fram, men skal gera hesar viðmerkingar:

Tað tíðarskeið gerðabókin umfatar, hevur landsstýrið havt 6 fundir um radarstöð á Sandfelli og av gerðabókini sæst, at hetta mál nú í fleiri ár hevur verið fyrireika, uttan at eitt orð er grett fyri lögtinguum. Eisini hevur landsstýrið samtykt at senda verkfröðing Helmsdal til Keypunannahavnar í sama örindum. Og má tað haldast at vera skeiv mannagongd, at landsstýrið tekur slík stig, uttan at orientera lögtingið, tí hesar fyrireikingar hava ætlandi eisini kosta landskassanum hópin av peningi. Av gerðabókini sæst eisini, at landsstýrið tann 27. september 1957 kl. 11 hevur havt fund, har allir landsstýrismenninir hava verið til staðar. Á hesum fundi hevur samlaða landsstýrið samtykt at áttala, at tað einki hevur at viðmerkja til, at lógin um deyðstraff av 1952 verður kunngjörd í Föroyum. Hesin spurningur átti avgjört at verið lagdur fyri lögtingið til stöðutakan, áðrenn lógin var kunngjörd í Föroyum.

Aðrar viðmerkingar hesum máli viðvikjandi vil minnilutin föra fram á tingfundi.

Ein annar minniluti (E. Patursson) tekur undir við atfinningunum frá minnilutanum Hans Iversen, men heldur annars ikki, at málið hevur so stóran týdning aftaná at landsstýrið, sum sat í hesum tíðarskeiði (1. august 1957 til 28. juli 1958) er fráfarið. Í hesum sambandi mælir minnilutin til, at landsstýrismálini í komandi tingsetum koma til viðgerðar á ólavsökutingsetuni og ikki bíða til vetrartingsetuna.

Minnilutin skal tó átala, at fráfarandi landsstýri hevur viðgjört E.W.-málið uttan at hava givið tinginum nakra sum helst frágreiðing um hetta stóra og týdningarmikla mál.

UPPSKOT
frá

minnilutanum (E. Patursson):

Tingið átalar, at landsstýrið hevur viðgjört E.W.-málið uttanum tingið.

UPPSKOT
frá

minnilutanum (Hans Iversen):

Tingið góðtekur tær av landsstýrinum tiknu avgerðir í tíðarskeiðinum 1. august 1957 til 28. juli 1958.

2. viðgerð 8. apríl 1959.

Uppskot minnilutans (E. Patursson) fall 7—0.

Uppskot minnilutans (H. Iversen) fall 14—0.

---

3. Broyting í lógini um fiskiskap undir Føroyum.

Ár 1959, 10. februar legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram sóljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um broyting av lóg nr. 59, 23. apríl 1881 "om fremlagtingslov om ændring i lov nr. 59, 23. april 1881 om fremmedes

medes fiskeri under Færöerne", sum broytt við lögtingslóg nr. 12 frá 8. marts 1951.

§ 1.

I § 1 verða ordini: "bót frá 200 kr. til 5.000 kr." broytt til: "bót, sum í minsta lagi má vera 5.000 kr."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

fiskeri under Færöerne som ændret ved lagtingslov nr. 12 af 8. marts 1951.

§ 1.

I § 1 ændres ordene: "Böder fra 200 kr. til 5.000 kr." til "böder, der ikke maa andrage mindre end 5.000 kr."

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við löglingsmáli nr. 28/1957 (Verjan av föroyskum fiskiskapi) varð álagt landsstýrinum at gera lógarbroytingaruppskot, ið setur hægstamarkið og lægstamarkið á bótunum fyri ólögligum fiskiskapi og öðrum broti móti galdandi lógarreglum, ið verja okkara sjóöki, munandi upp.

Landsstýrið er av teirri áskoðan, at onki hægstamark, sum nú kr. 5.000.— eigur at vera á sektunum fyri ólögligum fiskiskapi, og er hetta eisini samsvarandi útlðar straffiretti. Harafturímóti verður hildið, at eitt lægstamark, ið higartil hevur verið kr. 200.—, framvegis eigur at vera, og verður skotið upp, at hetta verður sett til kr. 5.000.

1. viðgerð 13. februar, og 11. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Landsstýrið hevur lagt fram fyri lögtingið uppskot til lögtingslóg um broyting av lóg nr. 59 frá 23. april 1881 "om fremmedes fiskeri under Færöerne", sum broytt við lögtingslóg nr. 12 frá 8. marts 1951.

Málið varð framlagt tann 10. februar 1959 og 1. viðgerð fór fram tann 13. februar 1959.

Tingið beindi málið við 1. viðgerð í lógarnevndina.

Eftir § 1 í lóg frá 23. april 1881 var lægstamark bót uppá kr. 20.— og hægstamark kr. 100.—. Við lögtingslóg frá 8. marts 1951 vórðu hesi mark hækkaði til kr. 200.— og kr. 5.000.—.

Við lögtingsmáli nr. 28/1957 samtykti tingið at áleggja landsstýrinum at gera lógarbroytingaruppskot um núverandi hækking av lægsta- og hægstamarkinum á bótunum, og samsvarandi hesum hevur landsstýrið sett hetta uppskot fram, ið hækkar lægstamarkið til kr. 5.000.—, meðan hægstamark samsvarandi galdandi straffiretti verður avtikið.

Nevndin samdist um at mæla lögtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 17. mars og 3. viðgerð 20. mars 1959.

Uppskot landsstýrisins samtykt 26—0.

4. Kommunanna partur í útreiðslum av landsvegabygging.

Ár 1959, 10. januar legði Poul Petersen lögtingsmaður fram sí-ljóðandi

UPPSKOT

til

lögtingslóg um kommunanna part í útreiðslunum av landsvegabygging v.m.	lagtingslov om kommunernes andel i udgifterne til anlæg af landsveje m. v.
§ 1.	§ 1.
Landskassin ber útreiðslurnar ávegis av bygging av landsvegum, og viðkomandi kommuna ella kommunur endurrinda landskassanum vanliga fjórðing tilsamans, sum tó eftir landsstýrisins avgerð eftir förimuni kann setast niður, men ikki niðurum 10 % tilsamans av öllum byggikostnaðinum.	Landskassen afholder forholds udgifterne til anlæg af landsveje, og vedkommende kommune eller kommuner refunderer landskassen normalt 1 fjerdedel tilsammen, der dog efter landsstyrets bestemmelse under hensyn til evne og forhold kan nedsættes, men ikke under 10 % tilsammen, af de samlede anlægsudgifter.
Landsstýrinum er eisini heimilt at gera sáttmála við kommunur um endurrindingar.	Landsstyret bemyndiges tillige at træffe aftale med kommuner om refusioner.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eiðis, Funnings og Gjáar kommunur hava gjört sáttmála sínamillum um gerð og umsiting av tí sum eftir er av landsvegnum Eiði—Gjógv—Funning og haraftrat ymiskar ábótur á eldri veg við 1/3 hvör, men sera sera seta seg ikki förar at bera og rinda fjórðing tilsamans av byggikostnaðinum so hvört undir byggingini (sbr. skjal).

Tær hava so statt deitt á meg sum tingmann fyri Eysturoynna at bera umsókn teirra fram á ting.

Hesar kommunur eru ikki stórar, Eiðis kommuna hevði í 1958 261, Funnings 71 og Gjáar 91 skattaborgarar.

Tær hava eisini stórar uppgávur at rökja, Eiði nýggjan skúla, bygg-

ing av havn v. m., Gjógv nýggjan skúla, lendingaábötur v. m. og Funningur serliga lendingaábötur.

Eftirsum ongin avgerð mær vitandi er gjörd um kommunanna part í öðrum landsvegagerðum, Götuneið — Skálafjörð, Skála — Skálafjörð, Fjarðarvegnum, Hvalvík — Hósvík og Hov — Óravík, havi eg loyvt mær at bera umsóknina frá Eiðis, Funnings og Gjáar kommunum fram á ting við einum lógaruppskoti, hareftir landskassin ber útreiðslurnar av vegagerðini ávegis og kommununar endurrinda landskassanum sín part, sum er settur til 1/4 hægst, men at landsstýrinum verður heimilt at seta kommununar ella kommunanna part niður eftir förimuni, men ikki niður um 10 % av öllum byggikostnaðinum tilsamans, og haraftrat í serstökum förum at gera sáttmála um endurrindingina.

Her er tað serstaklíga tær smáu kommununar, eitt nú hesar og Elduvíkar kommuna, sum verður ikki för at taka sín part í kostnaðinum av gerð av Fjarðavegnum. Henda kommuna hevur eisini stórar uppgávur, útbygging av gjónni í Elduvík, skúli og kirkjugarður í Funningsfirði og haraftrat atleggingarbryggja.

Tá ið landsvegur fer gjögnum meira enn eina kommunu verður sínamillumsáttmálin um bygging og viðlikahald ætlandi grundarlag undir stöddini av kommunanna parti tilsamans og býtinum av honum viðkomandi kommunu ímillum.

So statt loyvi eg mær at bera umsóknina frá Eiðis, Funnings og Gjáar kommunum d. í december 1958 fram á ting við einum lógaruppskoti til tingsins vælvild og so skjóta viðgerð og avgerð sum yvirhövur gjörligt.

Tórshavn, 17. december 1958.

Poul Petersen
lögtingsmaður.

Til Föroya lögting.

Vit undirskrivaðu sóknarstýrir fyri Eiðis, Funnings og Gjáar kommunur loyva sær at sökja lögtingið at fáa kommunanna part í útreiðslunum til gerð av vegnum Eiði—Gjógv—Funning og til neyðuga styrking, breiðking og ábötur av teim higartil gjörðu vegalongdum av hesum vegasambandi settan niður í eini 10 % av kostnaðinum og haraftrat fáa eina lugaliga gjaldskipan av hesum kommununna parti.

Kommununuar eru smáar, so tær verða ikki förar at rinda sín part, so bývört sum arbeiðið fer fram.

Henda umsókn kemur sum lið í einum sáttmála, sum kommununar hava gjört sínamillum um býti av útreiðslunum til gerð og viðlikahald av hesum landsvegi 1. december 1958 hjá landsverkfræðinginum.

Tað er óneyðugt at skila til, at ein tílík skipan, sum her er sökt um,

er treytin fyri hesum landsvegi, sum fólk í hesum bygdum so leingi hevur longst eftir.

Við hávirðing

Eiði, Funningi, Gjógv í december 1958.

Fyri Eiðis kommunu - fyri Funnings kommunu - fyri Gjáar kommunu
Eivin Kruse. Leivur Jóanesarson. Carl J. Sigvardsen.

1. viðgerð 12. februar, og 23. april legði havna- og veganevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Hetta mál byrjaði við, at Poul Petersen, lögtingsmaður, í december mánaða í fjör legði fram uppskot til lögtingslóg um kommununna part í útreiðslunum av landsvegabygging v. m., sum beint varð í havna- og veganevndina.

Hetta uppskot var elyt av umsókn frá Eiðis, Funnings og Gjáar kommunum til tingið um, at partur kommununna í útreiðslunum til gerð av vegnum Eiði-Funning-Gjógv og til neyðuga styrking, breiðking og ábölur av teim higartil gjördu vegalongdunum av hesum vegasambandi verður 10 %, og at tingið fær í lag eina lagaliga gjaldskipan viðvíkjandi hesum parti kommununna.

Síðan eru í málið komnar umsóknir frá Götu og Skála kommunum um at fáa part teirra í útreiðslunum av vegabyggingini inni í Skálafirði lækkaðan, tí tær eru ikki förar fyri at rinda fjórðingin.

Málið hevur verið hjá landsstýrinum til kanningar og umnælis, og hevur nevndin frá landsstýrinum fingið annað uppskot: «Reglur fyri býti landskassa og kommununna millum viðvíkjandi útreiðslum til bygging av samferðsluvegum».

Eftir tí, sum nú í málinum liggur og teim frágreiðingum, nevndin annars hávur fingið, at döma, er okkum greitt, at broyting má verða gjörd í reglunum um býti av umröddu vegabyggingútreiðslum; sjálvt tær störru kommununnar eru ikki förar fyri at rinda fjórðingin av útreiðslunum av eini heldur stórari bygging.

At nýggj regla ikki fyriskrivar eins býti í öllum förum, men lagar býtið eftir förimuni kommununnar, soleiðis sum ætlað eftir uppskotinum frá landsstýrinum, heldur nevndin vera rímligt og ein fyrimun.

Nevndin er tí samd um at tilmæla at samtykkja hetta seinast nevnda uppskot.

Hvörjar reglur, ið enn verða ásettar fyri, hvussu stóran part av byggiútreiðslunum, avvarandi kommuna skal rinda, verða lað tó föri, har ynskjandi — í oukrum föri neyðugt — er, at tvær ella fleiri kommunur ganga saman um arbeiðið og útreiðslupart kommununna, og vónar nevndin tí, at landsumsitingin og kommunustýri í tílíkum föri virka fyri, at slíkar avtalur millum avvarandi kommunur koma í lag.

At gera generellar fyrisetingar hesum viðvíkjandi heldur nevndin vera ógjörligt.

Til uppskotið skal nevndin annars loyva sær at viðmerkja, at hon er av tí áskoðan, at útreiðslurnar, ið standast av ognan av lendi undir veg, eigur avvarandi kommuna einsamöll ella — um fleiri kommunur eru komnar ásamt um býti av hesum útreiðslum — hesar kommunur einsamallar at gjalda, og tí vónar, at tann heimild, landsstýrið hevur fingið við tí í uppskotinum nevndu lög (nr. 17 frá 7. mars 1957: um ognartöku til samferðsluvegir), til at álíkna landskassanum ein part av hesum útreiðslunum, ikki verður nýtt uttan í undantaksföri.

Ein minniluti í nevndini (Vilhelm Nielsen) hevur sett uppskot um, at allar útreiðslurnar til bygging av samferðsluvegum verða í fyrstu syftu rindaðar av landskassanum, og at kommunurnar síðan endurrinda landskassanum teirra eftir galdandi reglum álíknaða part.

Hesum kann meirilutin ikki samtykkja í, men heldur mótmæla, tí við teim reglum, sum nevndin setir uppskot um at samtykkja, skuldi partur kommunanna í útreiðslunum nú verið settur til so sámuliga stódd, at einki órímuligt er at krevja, at kommunurnar sjálvar útvega hann og rinda hann so hvört arbeiðið fer fram.

Sjálvt um tað ikki beinleiðis viðvíkur hesum lögtingsmáli, skal nevndin tó loyva sær at heita á landsstýrið at taka upp til umhugsunar at gera broyting á — ella rettani gera á joursföring í reglunum frá 1952 um studning til vegviðlíkahald, soleiðis at möguleiki verður fyri meiri studningi til hetta endamál. Tað er nevndini kunnugt, at fleiri kommunur nú ikki eru förar fyri at halda sínar vegir, sum teir eiga at verða hildnir, tí útreiðslurnar eru so nógv öktar síðani 1952, at studningsveitingin eftir teim tá ásettu reglum ikki munar nóg mikið.

Vísandi til tað, ið frammanfyri er tilskilað skal nevndin loyva sær at sela fram soljóðandi

UPPSKOT

A. Frá allari nevndini:

Tingið samtykkir uppskotið frá landsstýrinum, ið er soljóðandi:

REGLUR
FYRI
BÝTI LANDSKASSA OG KOMUNNANNA MILLUM VIÐVÍKJANDI ÚTREIÐSLUM TIL BYGGING AV SAMFERÐSLUVEGUM

1. Er miðalskattaálikning kommununnar í byggiárunum við skattaprocenti 8 verður partur kommununnar av kostnaðinum av tí einkultu byggiuppgávuni:

av	1. upphædd av byggipeninginum av stödd S				20 %
	2. — —				17,5 %
	3. — —				15,0 %
	4. — —				12,5 %
	5. — —				10,0 %
	6. — —				9,0 %
	7. — —				8,0 %
	8. — —				7,0 %
	9. —				6,0 %
	10. og fylgjandi				5,0 %

Uppí kostnaðin verður roknað: allar beinleiðis byggiútreiðslur og útreiðslur til hald av lönarrokuskapi alt við 10 % tilleggi fyri útreiðslur til uppmálingar og onnur foraðleiði, projektering, leiðslu, eftirlit, administrasjón, ferðaútreiðslur o. a. t.

Tær byggiðgar, ið koma undir hesar reglur, eru bert störri nýgerðir og umbyggingar av samferðsluvegum; tó kunnu neyðugar styrkingar og umvæðingar av áður bygdum strekkjum av sama millumbygda vegi (millum tvær bygdir), sum nýgerðin er ein partur av, roknast sum partur av hesi, um hesi arbeiði verða framd samstundis ella hvört beint aftaná annað.

Nevnda býti av útreiðslunum verður roknað út fyri hvörja bygging og hvörja kommunu sær, og hvat hvör bygging skal umfata verður ásett frammanundan, og kann hon bert umfata arbeiði, sum verða framd í einum.

Nýgerðir og umbyggingar, sum fara fram í smáum, verða framvegis undir tí higartil galdandi 25 % regluni.

2. Útreiðslur, ið standast av ognan av lendi undir veg og av ognan av tí, á lendinum stendur, og sum forðar fyri vegagerðini, verða ikki roknaðar uppí byggipeningin; men gev landsstýrið av soleiðis sum ásett í § 3 í lögtingslóg nr. 17 frá 7. mars 1957 um ognartöku til samferðsluvegir, um henda útreiðsla skal býtast millum landskassa og kommunu ella, avvarandi kommuna (kommunur) skal rinda alt einsamöll.

3. Útreiðslur til hegu fram við veg ella til vegristir, sum eru neyðug tiltök fyni at tryggja ognirnar fram við vegnum móti inngongu av seyði og öðrum fenaði eins væl og tær vóru frammanundan, rindar avvarðandi kommuna (kommunur) einsamöll, og somuleiðis allar útreiðslur, ið standast av flyting av el- og telefonlinjum (har verkini ikki sjálvi kosta flytingina) og öðrum.

4. Hesar reglur verða at galda frá 1. april 1955.

B. Frá minnilutanum (Vilhelm Nielsen):

Landskassin ber útreiðslurnar ávegis av bygging av samferðsluveg-

um, og viðkomandi kommuna (kommunur) endurrindar landskassanum sín (teirra) eftir galdandi reglum álíknaða part.

2. viðgerð 23. april 1959.
A. Uppskot nevndinnar samtykt 28 0.
B. Uppskot minnilutans (V. Nielsen) fall 1 0.

5. Val av løgmanni og landsstýrismonnum.

Ár 1959, 9. januar stóð val av lögmanni.
Valið fór fram skrivliga.
Petur Mohr Dam fekk 17 atkvöður.
Hanus við Högadalsá fekk 7 atkvöður.
So statt var Petur Mohr Dam valdur lögmaður.

Sama dag stóð val av landsstýrismonnum.
Eftir uppskoti frá lögmanni vóru hesir valdir:
Kristian Djurhuus og Niels Winther Poulsen á Skopun við 17 atkvöðum fyri og 0 ímóti.

6. Val av nevnd í fiskimarksmálinum.

Ár 1959, 10. januar legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar.

Lögtingið velur serliga 7-mannanevnd til saman við landsstýrinum at viðgera fiskimarksmálið.

Viðmerkingar:
Í Ólavsökutingsetuni samtykti lögtingið at seta serliga 7-mannanevnd til saman við landsstýrinum at viðgera fiskimarksmálið aftaná sam-

ráðingin hevði verið millum danska og bretska ríkisstýrið um hetta mál.

Aftaná nevndin var gjörd kunnug við málið, sum tað tá fyritá, hava samráðingar aftur verið millum nevndu nyndugleikar.

Landsstýrið er av teirri áskoðan, at tað tilfar, sum nú liggur fyri, í hvussu er í fyrsta umfari, eins og áður eigur at verða viðgjört av landsstýrinum saman við serligari lögtingsnevnd.

21 februar legði nevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Í skrivi 10. januar 1959 legði landsstýrið fyri tingið uppskot um at velja serliga 7 mannanevnd til saman við landsstýrinum at viðgera fiskimarksmálið.

Nevndin, ið var vald, hevur fingið málið frá landsstýrinum og hevur síðan havt fleiri fundir. Landsstýrismennirnir K. Djurhuus og Niels Winther Poulsen og skrivstovustjóri Johan Djurhuus hava verið við á fundi.

Av teimum skjölum, sum liggja í málinum, sæst, at síðan málið í september 1958 var viðgjört í nevnd, vald av lögtingi, saman við landsstýrinum, fíggjarmálaráðharra V. Kampmann og donskum tenastumonnum, hevur málið verið viðgjört á fundi í London av donskum og enskum tenastumonnum. Frá Föroyum hava verið við sum ráðgevarar Sverri Joensen og Poul Adrian Andreasen. Samráðingarúrslitið, ið nú liggur fyri, er í stuttum hetta:

Fiskimarkið undir Föroyum verður 12 fjórðingar, tó skulu tær sum javnan og í longri tíð hava rikið fiskivinnu undir Föroyum innan fyri hetta mark, hava rætt til at veiða inn til umleið 6 fjórðingar úr landi, við undantak av teimum ökjum, har bein linja er drigin, og markið sostatt verður ytri.

Á Norðhavinum, Munkagrunninum og vestur úr Mikinesi verður eitt ávist öki úr landi millum 6 og 12 fjórðingar feiðið ávisa tíð á árinum.

Við tí tilætlaða sáttmálanum fer sáttmálin av 1955 úr gildi. Nýggi sáttmálin verður í gildi í 3 ár, og kann tá av hvørjum pörtum sigast upp við eitt árs ávaring.

Um so skuldi verið, at millumlanda skipan fyri fiskimarkið kom í lag í tí tíðarskeiði, tann tilætlaði sáttmáli var galdandi, og henda skipan loyvir ella ásetur víðari fiskimark enn tað í sáttmálanum ásetta, skal nýggja skipanin verða at galda fyri Föroyar.

Um tað skuldi hent, at Bretland í sama tíðarskeiði skuldi gjört sáttmála við annað land her á okkara leiðum viðvíkjandi fiskimarki, og hesin sáttmáli gav viðkomandi landi fyrimunir fram um okkum, verða samráðingar at taka upp við Bretland um broytingar í tí sáttmála, vit hava.

Tann sáttmáli, sum gjördur verður, verður bert gjördur við Bretland men verður gjördur öðrum londum kunnugur.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilutu og ein minnilutu.

Meirilutin (J. Fr. Óregaard, Poul Jacob Olsen, Tr. Samuelsen og Jens Chr. Olsen) heldur fast um lögtingsviðtökuna frá 6. juni 1958 og sum-

tykt var, at fiskimarkið við Föroyar er 12 fjórðingar beinar linjur. Men bretar, ið vit eru sáttmálabundnir við, hava svarað uppá hesa samtykt, at teir halda fast uppá sáttmálan av 1955. Bretar vilja tó falla frá hesum sáttmála, um teir kunnu fáa nýggjan sáttmála uppá 3 ár við eitt áru uppsagnartíð, og fiskimarkið, sum eftir sáttmálanum av 1955 er 3 fjórðingar verður við nýggja sáttmálanum sett til 6 fjórðingar, tó ongastaðni minni enn eftir sáttmálanum av 1955. Eisini vilja teir binda seg til at viðurkenna 3 friðaði ökir, eitt á Norðhavinum, eitt vestur úr Mikinesi og eitt á Munkagrunninum uttanfyri 6 fjórðingamarkið og út á 12 fjórðingar ávisa tíð av árinum.

Meirilutin heldur, at tað er av stórsta týdningi at fáa Föroyar loystar úr sáttmálanum av 1955 og í staðin fáa fyriliggjandi uppskot til fyribilssáttmála millum Danmark og Bretland samtykt.

Ein minniluti (Hákun Djurhuus) flytir fram:

Aftaná at lögtingsnevnu eftir áheitan frá fólkaflokkinum og gl. sjálvstýri vóru boðaðir til eykatingsetu til viðgerðar av sjómarksmálinum 6. juni 1958 samtykti Föroya lögting soljóðandi uppskot í sjómarksmálinum:

Nú Ísland hevur samtykt at flyta fiskimark sítt út á 12 fjórðingar frá 1. september 1958, hevur hesin veruleiki broytt forútsetningin undir sjómarksmálinum so frá grundini, at Föroyar mugu kenna seg loysar av sáttmálanum við Bretland av 24. juni 1901 sum broyttur í fyribilssáttmálanum av 22. april 1955.

Landgrunnur Föroya er föroysk ogn og samtykkir lögtingið, at frá 1. september 1958 verður fiskimarkið um Föroyar sett 12 fjórðingar frá ytstu skerjum og oddum út frá beinum basislinjum, og allur trollfiskiskapur bannaður á ökinum innanfyri fiskimarkið.

Hetta uppskot til samtyktar fekk 23 atkvöður.

Samstundis var samtykt soljóðandi uppskot av Hákuni Djurhuus o. fl.:

Föroya lögting góðtekur ongan endaliga avgerð viðvíkjandi fiskimarkinum um Föroyar, sum ikki er samtykt á Föroya lögtingi.

Hetta uppskot fekk 19 atkvöður.

Aðrenn hesar samtyktir vóru gjördar hevði lögmaður K. Djurhuus landsstýrisins vegna lagt uppskot fyri lögtingið, ið segði nakað tað sama sum fyrripartur av tí uppskoti, ið samtykt varð, men sigur landsstýrið í viðmerkingunum til uppskotið millum annað hesi orð:

Henda samtykt Íslands hevur broytt stöðuna í fiskimarksspurningínum so frá grundini, at Föroyar mugu vera loysar av sínum sáttmálabindingum við Bretland og flyta sítt fiskimark so langt og samstundis sum Ísland flytir út til tess at fáa nakað aftur fyri tað, sum mist verður undir Íslandi og fyri ikki at liggja undir ovurfisking á Föroya grunnum, sum ivaleyst fer at standast av samtykt Íslands.

Tað verður neyðugt at halda seg til teir 12 fjórðingarnar, ið hvussu er fyri fyrst, so sum samtykt á tingi í tingmáli nr. 103/1957, men tað má strikast undir, at henda samtykt fer ikki at skerja okkara geografiska, sögulign og vinnuligu rettindi til grunnin undir Föroyum sí

langt út sum til «land í eygsjón» (smbr. m. a. lögtingsmál nr. 21/1957: Alheimsreglur um sjómark).

Javnaðarflokkurin legði soljóðandi uppskot fram í sama máli:

1. Lögtingið samtykkir, at frá 1. januar 1959 verður sjómarkið við Föroyar sett 12 sjómíl frá ytstu skerjum og oddum úr frá basislinjum, og gýtingargrunnar okkara at friða móti trolfiskiskapi.
2. Ríkisstýrið danska verður biðið um at fremja hesa samtykt og kunngera öðrum tjóðum hana.
3. Um ikki sáttmálin við hretar viðvíkjandi föroyska sjómarkinum av nýggju umstöðunum er farin úr gildi, verður heitt á danska ríkisstýrið og Föroya landsstýri at taka sær av at fáa sáttmálan úr gildi innan 1. januar 1959.
4. Viðvíkjandi fiskiskapi innanfyri sjómarkið og verjuni av tí verða at gera serligar reglur.

Og í viðmerkingunum verður sagt millum annað:

Tað, ið nú meiri enn á tökrum sinni leikar fyrst á hjá okkum, er at skipa fyri, at vit við okkara strendur og í okkara sjóöki ikki halda okkum minni rætt enn Íslendingar og aðrar tjóðir halda sær við leirra strendur og sjóöki. Vit mega nú beinanvegin lýsa tað sum tingsins stöðu, at hitt föroyska sjómarkið ikki eigur at fara styttri enn hitt íslendska og russiska, og at okkara gýtingargrunnar verða at friða móti trolfiskiskapi.

Eisini tjóðveldisflokkurin legði lógaruppskot fram og var tað soljóðandi:

1. gr. Landgrunnur Föroya er föroysk ogn og Föroya lögting hevur lóggávu um landhalgi og fiskimark og vernd fiskistovnsins í honum.

2. gr. Landsstýrið gevur út reglugerð, sum setur fiskimark, ið gongur ikki styttri enn 16 fjóðingar úr yfstu nesum, skerum og flúrum, sum eru undan á flóð, og skal öll fiskiveiða innan fyri hetta mark vera undir föroyskari rætturskipan og föroyskum eftirliti.

3. gr. Brot á fyrimælum, ið givin verða út eftir hesi lög skulu revsast við bótum frá 1.000 kr. upp í 100.000 kr. og eftir tí sum tilskilað verður í fyrnevndu reglugerð.

4. gr. Henda lög kemur í gildi beinan vegin. Reglugerðin, sum nevnd er í 2. gr. skal koma í gildi 1. september 1958.

Og í viðmerkingunum verður sagt millum annað:

Tað eru nevniliga öll tekin til, at tíðin er okkum, eins og öðrum smánum fiskiveiðuljóðum til vildar. Rætt er tað, at hesar tjóðir fingu ongan lógformiligan rætt á altjóðafundinum í Genéve. Men soleiðis sum atkvöðurnar fullu har, er tað týðiligt, at tað hungursband, sum hesar smátjóðir hava verið heftar í higartil, nú er farið at dragna.

Sum tað sæst av flokkanna stöðum var tað í grundini eitt samlað ting, ið stóð aftanfyri samtyktirnar av 6. juni 1958.

Í frágreiðing frá samráðingum um sjómarksmálið millum landsstýrið og danska stjórnina 17. juni 1958 í Köbenhavn verður sagt í hesum broti:

Stats- og udenrigsministeren erindrede om, at regeringen saavel under den nylig afsluttede konference i Genéve om retsordenen paa havet som senere har indtaget det standpunkt, at befolkninger som Færøernes,

Grönlands og Islands, der paa grund af isoleret beliggenhed i usædvanlig grad er herocende paa havet, bör have adgang til at hævde et fiskeriterritorium paa indtil 12 sömil fra grundlinier, der danner udgangspunkt for söterritoriets beregning. I overensstemmelse hermed er regeringen enig i, at öernes fiskeriterritorium bör være 12 sömil og den er fuldt ud indstillet paa i overensstemmelse med hjemmestyrets aand og bogstav at söge de færöske önsker, som de er kommet til udtryk i lagtingets vedtagelse af 6. juni 1958 opfyldt.

Í föroyska útvarpinum fyrst í juli 1958 tekur danski stats- og utanríkisministari H. C. Hansen uppaftur stöðuna hjá danskri stjórnini: at den er enig i den paa Færöerne raadende opfattelse, at öernes fiskeriterritorium — som et udslag af den hævdede undtagelsesregel — bör være 12 sömil, og sigur viðari: ..... Det er imidlertid klart, at den situation, der er opstaaet efter den islandske regerings erklæring maa göre det færöske lagtings forbeholdsbeslutning af 1955 aktuel, og jeg opfatter det britiske svar som en bekræftelse heraf.

Aftaná at H. C. Hansen stats- og uttanríkisministari hevði nevnt, at danska stjórnin hevði kravt nummfligar samráðingar við bretar, endaði hann við hesum orðum: Disse drøftelser maa givetvis have til maal at söge gennemført det færöske önske om en 12-milegrænse, saaledes som det har fundet udtryk i lagtingets vedtagelse den 6. juni d. aa.

Í dag verður íslendska 12 fjórðinga fiskimarkið aktað av öllum ijóðum, ið fiska undir Íslandi, bretar undantiknir, ið verja teirra fiskiför við herskipum.

Kanada hevur samtykt at flyta sítt fiskimark út á 12 fjórðingar og Noreg hugsar um tað sama.

Sostatt sær tað út til, at 12 fjórðinga fiskimark er — og verður sett á öllum leinum veiðiökjum okkara fiskimenn sökja til undanfikið kanska Grönland, ið vit eru í ríkisfelagsskapi við.

Soleiðis eru nuastöðurnar uttanum okkum.

Nú liggur fyri uppskot frá bretum og dömum um 3 ára fyribilssáttmála um 6 fjórðinga fiskimark um Föroyar við trinum mánni til ávisa tíð friðaðum ökjum út á 12 fjórðingar.

Í hesum uppskoti er gingið burtur frá beinum basislinjum útmarkinum viðvíkjandi. Tað vil siga, at her verður boðið okkum at góðtaka eitt prinsipp, ið allur tær ijóðir, ið hava sonn áhugamál sum vit, hava barst hart ímóti.

Eisini í hesum uppskoti er eitt fyrivarni, ið sigur, at um Bretland í 3 ára tiðarskeiðinum skuldi gjört sáttmála við annað land, ið gevur hesum landi fyrimunir fram um tað, okkum verður boðið, skulu samráðingar verða tiknar upp aftur. Tað sigur ikki, at vit skulu fáa sonnu fyrimunir.

Tá avgerð varð tikin um Föroya stöðu á fundinum í Genève, vóru samráðingar fördar við fiskivinnufelögini.

6. juni samtyktin svarandi til tu stöðu, ið var okkara á Genève fundinum, og halda vit tí, at tað er avgjört neyðugt, at löglingið kemur stöðuna hjá fiskivinnufelögunum til uppskotið, ið nú liggur fyri.

6. juni samtyktin stendur við makt til tingið hevur broytt hana, og í henni liggur uppsögn av 1901 sáttmálanum broytur við 1955 sáttmál-

anum. Við 23 atkvöðum hevur lingið sagt seg loysan av hesum sáttmála og kravt fiskimarkið flutt út á 12 fjórðingar. Hesa avgerð eigur lögtingið ikki at broyta, uttan so er, at fiskivinnufelögini eru fyri stöðuskifti í hesum átvarsama máli.

Samsvarandi hesum setur fólkaflokkurin fram uppskot.

Ein annar minniluti (Jógvan Högnesen og Erlendur Paturssson) flytir fram:

Minnilutaálit.

(Jógvan Högnesen og Erlendur Paturssson).

Eftir uppskoti frá landsstýrinum 10. januar í ár valdi lögtingið seestaka 7 manna nevnd til saman við landsstýrinum at viðgera fiskimarksmálið. Í viðmerkingum landsstýrisins varð sagt frá tilfari, sum nú lá fyri í hesum máli, uttan tó at nevnt varð, hvat tilfarið var.

Tá nevndin kom saman til fundar sýndi tað seg, at hetta «tilfar» einki annað var enn nýggj royna til at bróta la samtykt, sum Föroya lögting gjördi 6. juni 1958. Henda samtykt var sum kunnugt tann, at dansk-enski sáttmálin var farin úr gildi, at landgrunnur Föroya var föroysk ogn og at 12 fjórðinga fiskimark skuldi setast. «Tilfarið», ið nevndin fekk til viðgerðar, var hin vegin tann, at rettarreglurnar á hesi föroysku ogn skuldu setast við nýggjum donsk-enskum sáttmála og viðvíkjandi fiskimarkinum serstakliga soleiðis, at 6 fjórðinga mark skuldi setast.

Minnilutin átalar hesa royna til at broyta lógligu samtykt tingsins.

Hann átalar samtíðis ætlan landsstýrisins viðvíkjandi viðgerðarháttinum, sum var tann, at hetta «tilfar» skuldi fáast í gjögnum og setast í gildi uttan viðgerð tingsins.

Minnilutin mælir tinginum til at vísa öllum hesum «tilfari» frá sær og til nú at gera neyðug tiltök til at fáa sett samtykt tingsins frá 6. juni 1958 um 12 fjórðinga mark í gildi.

Sum grund fyri hesi stöðu sini loyvir minnilutin sær at föra fram:

Sjómarksmálið hevur verið til viðgerðar á Föroya lögtingi á hvörjum ári síðani 1952, og nú tað aftur er á tinghorði lykir rett at tríva í elstu tilburðirnar. Henda söga kann býtast í tvey, nevnligu tíðin frammam undan 6. juni 1958 og tíðin aftaná hendu dag. Tað er júst fyrrnevnda samtykt henda dag, ið setur markaskjal í sögu sjómarksmátsins á tingi. Hjá föroyskum fiskimonnum og fólkinum annars hava aldri verið tvær meiningar um hetta mál.

TÍÐIN FRAMMAN UNDAN 6. JUNI 1958

Tað var á vári *1952* at tjóðveldisflokkurin reisti sjómarksmálið á Föroya lögtingi. Vist var m. a. á eiumeltar samtyktir frá útróðrarmonnum í Klakksvík og Skopun. Aftur á ólavsöku sama ár tók tjóðveldisflokkurin málið upp og setti nú fram beinleiðis uppskot um at sigla upp sjómarkssáttmála Dana og Bretlendinga frá 1901 um sjómarkið við Föroyar.

Hetta uppskot fekk bert atkvöður tjóðveldisflokksins, meðan allir

aðrir flokkar mæltu frá at siga henda sáttmála upp. Sum tikið varð til í nevndarálitinum frá hinum flokkunum skuldu vit ganga «spakuliga um hurðarnar» og «útnytta lötuna» meðan Íslendingar lógu og stríddust við Bretland og Bretlendingar royndu at svölta Íslendingar til lýdni.

Í *1953* skorar javnaðarflokkurin á landsstýri og lögting um at bera fram uppskot um at siga dansk-enska sáttmálan frá 1901 upp. Málið sovnaði í nevnd.

Aftaná at loynisamráðingar hövdu verið í London legði landsstýrið á ólavsöku *1954* fram uppskot um broytingar í sáttmálanum frá 1901 og framleinging hans til 1967.

Stöða tjóðveldisflokksins var framvegis tann at siga 1901 sáttmálan upp, soleiðis at föroyski mark kundi setast, tá hesin sáttmáli um 2 ár fór úr gildi.

Eftir yvski danska forsætisráðharrans gingu hinir flokkarnir undir henda sáttmála «við fyrivarni». Samtyktin varð gjörd 6. september 1954.

Brett er at skila til, at öll sjóvinnufelög mótmæltu hesum sjómarkssáttmála og at tey flestu kravdu 1901-sáttmálan uppsagdan.

Aftaná valið í november 1954 kemur sjómarkstmálið aftur til viðgerðar í tinginum 1955. Tjóðveldisflokkurin setti tá fram 2 uppskot. Hitt fyrra var, at tingið aftukalladi samtykt sína frá 6. september 1954 og at það kravdi 1901-sáttmálan uppsagdan. Hitt var at biðja dansku ríkisstjórnina um at stöðga við at undirskriva og ratificera nýggja sjómarkssáttmálan og at leggja sjómarkstmálið undir föroyska fólkaatkvöði.

Hvörki av hesum uppskotum vóru samtykt. Meirluti tingsins segði í áliti í málinum, at ikki var beint í lötuni at siga 1901-sáttmálan upp.

Nýggi sáttmálin kom so í gildi 1. juli 1955, og er hetta tann sáttmáli, vit hava enn í dag.

Í *1957* heldur landsstýrið, at «fyrivarnið» eigur at gerast galdandi. Lögtingið samtykti tá at setast skuldi nevnd við 3 mönnum úr vinnulívinum og 1 fyri landsstýrið at samráðast við Bretlendingar um fiskimark og landingarviðurskifti.

Stöða tjóðveldisflokksins var framvegis tann at krevja 1901 sáttmálan uppsagdan. Samstundis skuldi setast serstök 3 manna millintinganevnd í landhalgis- og fiskimarksmálum. Loksins skuldi lögtingið fyrireika og gera uppskot um serstaka lóggávu um landhalgi og fiskimark og vernd fiskistovnsins á föroyska landgrunninum.

Hesi uppskot tjóðveldisflokksins vóru ikki samtykt, men landsstýrið tilnevndi fyrrnevndu sendinevnd, sum var úlfarlands, men kom aftur við ongum úrslit.

Í *1958* reisir tjóðveldisflokkurin sjómarksmálið av nýggjum við hesum uppskoti: Lögtingið tekur undir við krávum Föroya fólks um at gera landið leyst av dansk-enska sáttmálanum um sjómark Föroya, so at vit fáa sjómark so langt út sum altjóðarrettur-in heimilar.

Uppskotið fekst onga tíð til atkvöðugreiðslu í tinginum.

Tá Genevefundurin skuldi byrja heita sama ár lat tjóðveldisflokkurin frá sær hesa yvirlýsing: Tjóðveldisflokkurin krevur föroyskan lóggávurætt um landhalgi og fiskimark og vernd fiskistovnsins á föroyska landgrunninum, og það er í ongum föri trengri mark enn fá fjórðingar.

Seinni samtykti lögtingið at í Genève skuldi haldast upp á 12 fjórðingar sum minsta mark.

Beint tvörtur í móti hesi einmaltu samtykt lögtingsins greiddi danska sendinevndin í Genève atkvöðu móti 12 fjórðinga marki men við 6 fjórðinga marki.

Genevefundurin endaði tó við ongum sjómarkinum viðvikjandi, men tað er at geva tí gætur, at júst hetta sama 6 fjórðingamark, tð danska sendinevndin gav atkvöðu sína, nú gongur aftur.

TÍÐIN AFTANÁ 6. JUNI 1958.

Í juni 1958 kemur lingið saman til eykasetu til at viðgera sjómarksmálið. Málið varð viðgjört á vanligan hátt í nevnd og komu frá nevndini 2 minnilutauppskot (tjóðveldisflokkinum) og 1 meirilutauppskot (hinum flokkunum). Har afturat legði Hákun Djurhuus o. fl. fram serstakt uppskot. Skal nú verða sagt frá hesum uppskotum.

Uppskot tjóðveldisflokksins kallaðist «uppskot til lög um landhalgi og fiskimark». Í tí varð sagt:

> Landgrunnur Föroya er föroysk ogn og Föroya lögting hevur lóggávuvald um landhalgi og fiskimark og vernd fiskistovnsins á honum.
>
> Landsstýrið gevur út reglugerð, sum setur fiskimark, ið gongur ikki styttri enn 16 fjórðingar úr ytstu nesum, skerum og flúrum, sum eru undan á flóð, og skal öll fiskiveiði innan fyri hetta mark vera undir föroyskari rættarskipan og föroyskum eftirliti.
>
> Brot á fyrimælum, ið givin verða út eftir hesi lög, skulu revsast við bótum frá 1.000 upp í 100.000 kr. og eftir tí sum tilskilað verður í fyrrnevndu reglugerð.
>
> Henda lög kemur í gildi beinan vegin. Reglugerðin, sum nevnd er, skal koma á gildi 1. september 1958.»

Hitt uppskot tjóðveldisflokksins ljóðaði so:

> «Föroya lögting mótmælir, at landhalgis- og fiskimarksmál Föroya verða viðgjörd og avgjörd á tí regionala fundi, sum Bretland, Danmörk og onnur lond hava í umbúnaði at hava um hesi mál.»

Bæði hesi uppskot fullu, tí tey fingu einans 6 atkvöður.

Uppskot meirilutans var hetta:

> «Nú Ísland hevur samtykt at flyta fiskimark sítt út á 12 fjórðingar frá 1. september 1958, hevur hesin veruleikj broytt fyrisetingin undir sjómarkssáttmálanum so frá grundini, at Föroyar mugu kenna seg leysar av sáttmálanum við Bretland frá 21. juni 1901 sum broyttur í fyrihilssáttmála frá 22. april 1955.
>
> Landgrunnur Föroya er föroysk ogn, og samtykkir lögtingið, at

frá 1. september 1958 verður fiskimarkið um Föroyar sett 12 fjórðingar úr ytstu skerjum og oddum úr frá beinum basislinjum, og allur trolfiskiskapur bannaður á ökinum innan fyri fiskimarkið».

Hetta uppskot var samtykt við 23 atkvöðum.

Loksins setti Hákun Djurhuus o. fl. fram hetta uppskot:

«Föroya lögting góðtekur onga endaliga avgerð við fiskimarkinum um Föroyar, sum ikki er samtykt á Föroya lögtingi.»

Hetta uppskot varð samtykt við 19 atkvöðum.

Tó at uppskotið um föroyskt lóggávuvald í landhalgis- og fiskimarksmálinum og um 16 fjórðinga mark fekst ikki samtykt, er tað skilligt, at frá hesum degi er vend komin í gongd sjómarksmálsins á tingi. Föroya lögting, sum öll árini síðani 1952 hevði staðið móti krövum Föroya fólks um at gera seg leysan av útlendskum yvirvaldi á landgrunni okkara og um at flyta sjómarkið út, boyggir seg nú fyri hesum krövum. Tað samtykkir:

a. t. vit er leysir av dansk-enska sáttmálanum,
a. t. landgrunnurin er föroysk ogn,
a. t. fiskimarkið verður 12 fjórðingar.

Hetta 12 fjórðinga fiskimark skuldi setast 1. september 1958, men tað varð ikki gjört. Tað vald, sum skuldi seta hesa samtykt í verk, nevniliga danska ríkisvaldið, vildi ikki. Tvörtur móti hevði danska ríkisstjórnin beinan vegin sum samtyktin frá 6. juni fyrilá og til 1. september starvast fyri at fáa í lag trengri fiskimark enn 12 fjórðingar.

Lögtingið kom saman á ólavsöku 1958, men tó at tað longu tá var greitt, at danska ríkisstjórnin ætlaði at seta samtykt tingsins til viks, vildi meiriluti tingsins einki gera við málið. Tí skil kom 1. september uttan at markið varð flutt út — og er tað ikki flutt út enn. Tingið tók tá upp aftur gamlan sið, nevniliga at «velja serstaka 7 manna nevnd til at viðgera fiskimarksmálið».

Hin 12. september hevði danski figgjarmálaráðharrin, Viggo Kampmann, havt samráðingar við enskt stjórnarvöld um föroyska sjómarksmálið, og í september kom hann til Föroya við fyribils uppskoti frá hesum samráðingum. Hetta uppskot varð eisini lagt fyri sjómarksnevnd lögtingsins. Tað gekk beint tvörtur móti 6. juni samtykt lögtingsins, tí tað ásetti 6 fjórðinga mark.

Hetta uppskot — samráðingauppskot — kom als ikki til viðgerðar í tinginum, men einans í sjómarksnevndini. Samráðingarnar við danska figgjarmálaráðharran stóðu 22.—24. september.

Tá innihald uppskotsins gjördist kunnugt tóku störstu fakfelög land-

sins til mótmælis og kravdu flyting fiskimarksins út á 12 fjórðingar uttan dvöl.

Meirihluti lögtingsnevndarinnar góðtók tó uppskotið sum samráðingargrundarlag og at danska ríkisstjórnin helt fram við samráðingum sínum við Bretland.

Nevndarlimir tjóðveldisflokksins góvu hetta álit í málinum:

> «Tjóðveldisflokkurin vísir á samtykt tingsins 6. juni í ár um flyting fiskimarksins út á 12 fjórðingar 1. september og krevur hesa samtykt setta í verk uttan nakra sum helst dvöl longur.
>
> Samtíðis mótmælir og átalar flokkurin harðliga tí broti, sum gjört er á hesa samtykt, fyrst við tí, at fiskimarkið ikki varð flutt út tá tað skuldi, og síðani við at lögtingsnevnd uttan um tingið lekur sær myndugleika til at loyva at drátað verður við hesi útflyting, og at nevndin samtíðis tekur sær myndugleika til at góðtaka samráðingar um Trávik frá samtykt Föroya lögtings.»

D a n s k-e n s k a r s a m r á ð í n g a r um sjómarksmálið byrjaðu so aftur, og endaðu í semju. Hetta nýggja sjómarksuppskot var landsstýrinum í hendi 12. novembar í fjör, men ikki fyrr enn 10. januar í ár ker lögtingsnevnd tað um hendi. Sama dag fór lögtingið heim.

Eftir hesum uppskoti skal n ý g g j u r d a n s k-e n s k u r f y r i b i l s s j ó m a r k s s á t t m á l i koma í gildi í staðin fyri 1955-sáttmálan. Hesin sáttmáli skal vera í gildi hagar til almennur altjóðasáttmáli um sjómark er komin í gildi. Tó verður tilskilað, at er ikki sliknr altjóðasáttmáli komin í lag 2½ ár aftaná at hesin fyribilssáttmáli er undirritaður, skulu Danmörk og Bretland umhugsa broytingar í honum. Er so eingin avtala gjörd um broytingar tá 3 ár eru liðin frá undirskrift, kann fyribilssáttmálin sígast upp við 1 árs ávaring.

Hesin fyribilssáttmáli skal leggjast fyri öll lond í NATO, men Bretlendingar siga, at samtykt teirra skal ikki vera neyðug, tó teir halda hana vera ynskiliga.

Eftir hesum sáttmála skal 6 f j ó r ð i n g a f i s k i m a r k setast. Hetta 6 fjórðinga mark er ikki drigið eftir beinum grundlinjum, men a r b i t r æ r t, t. e. soleiðis sum samráðingamenninir komu á saml um. Norðan, cystan og sunnan fyri gongur henda nýggja linja yvirhövur 3 fjórðingar uttan fyri núverandi linju, men tó ikki í öllum förum. Á longum strekki vestan fyri verður eingin útflyting. Nýggja linjan fylgir lur núverandi linju.

So statt viðurkenna Bretlendingar e i n k i f i s k i m a r k sum g o n g u r y t r i e n n 6 f j ó r ð i n g a r og e i h e l d u r h a v a t e i r v i l j a ð v i ð u r k e n t b e i n a r g r u n d l i n j u r.

Hin vegin vilja Bretlendingar l o y v a a t v i s s ö k i á landgrunni okkara millum hesa 6 fjórðinga linju og 12 fjórðinga linju, sum gongur samsíða henni verða f r i ð a ð v i s s a r t í ð i r á á r i n u m.

Hesi öki eru trý:

N o r ð a n f y r i: Millum 7° vestl. longd og striku sum gongur

úr Norðbergi í beinan norðan. Hetta øki loyvist at friða 15. februar – 15. apríl.

Vestan fyri: Millum striku, sum gongur í beinan vestan úr Mykinesvita og bogalinju, sum mótir núverandi marki norðan fyri Skallarnar. Hetta øki loyvist at friða 15. november – 1. apríl.

Sunnan fyri: Óðru megin strika 253° frá vitanum á Akrabergi til punkt har 12 fjórðingalinjan og 100 favna dýptarlinja skerast – hinu megin strika 146° frá vitanum til punkt, har 12 fjórðinga linjan og 100 favna dýpingarlinja skerst. Hetta øki loyvist at friða 1. oktober – 31. mai.

Síðan Føroya lögting gjørdi samtykt sína 6. juni 1958, hevur tað hvörki góðtikið ella biðið um dansk-enskar samráðingar um föroyska sjómarkið. Hesar samráðingar, ið vóru heystið 1958, eru gjørdar uttan um tingið – og úrslit teirra gongur so eisini beint tvörtur í móti samtykt tingsins hetta dag.

Tað er valla trúligt, at Bretlendingar bjóða okkum hetta nýggja sáttmála fyri okkara skuld. Heldur kundi tað verið, at teir bjóða okkum hann fyri sínar egnu sakir. Vit vita at enskum sjómarmiðum í sjómarksmálum liggur vátt undir fóti. Meiritutin av londunum, sum vóru umboðað á Genevefundinum 1958, viðurkendu bæði 12 fjórðingar fiskimark og eisini beinar grundlinjur. Síðan tá er tað hent, at Íslendingar hava flutt markið út á 12 fjórðingar, at kanadiska tingið einmælt hevur samtykt at flyta fiskimarkið út á 12 fjórðingar, og at líkt er til at Noreg fer at ganga somu leið.

Föroyar sýnast vera vón Bretlendinga í sjómarkspolitikkinum. Vit hava verið vístir fram sum fyrimynd. Hugsast kann, at Bretlendingar eisini í framtíðini ætla at nýta okkum sum fyrimynd, nevnitiga tá lond aftur mótast til at royna at fáa semju um almert fiskimark. Fyrimyndin fyri altjóðamarki verður tá júst hetta 6 fjórðingamark utfan beinar grundlinjur, ið teir nú ætla at skamta okkum.

Fryvilssáttmálin um hetta 6 fjórðinga mark kann tá lætliga koma at verða hin endaliga loysn í sjómarksmálinum.

Í röðu á aðalfundi Sameindu Tjóða 25. september 1958 lók enski uttanríkismálaráðharrin, Selwyn Lloyd m.a. soleiðis til:

«Vit vilja hava skipan við Danmark um fiskimarkið í Föroyum, so tað verður lættari hjá okkum at fáa loyst íslendsku fiskimarkstrætuna».

Hetta eru tolliga greið orð: Fyrst skulu vit nýtast móti Íslendingum og síðan móti okkum sjálvum.

Taka vit við hesum tilboði, kann tað bera á, at vit missa meir fyri minni.

Fiskimenn okkara hjálpast als ikki við 6 fjórðinga markið. Tað kann illa hugsast, at nakar veruligur bati fæst í hesum máli fyrr enn fiskimarkið er komið út á í minsta lagi 16 fjórðingar, og man tað tó fara at vísa seg, at eisini tað verður ov lítið. Tað beinasta var at seta 16 fjórðinga mark nú. Hetta er okkara gamla söguliga mark. Seinni kundi so

verið tikið til umhugsunnar at flyta markið upp aftur longur út.

Takið er og kann ikki vera annað, enn at friða sjálvan fiskistovnin á landgrunni okkara móti tí oyðileggingarumboði, sum frolið er. Fyr enn vit ikki komnir á mál.

Í tingsetuni í juni 1958 fingu hesi sjónarmið ikki sándir og eingi likindi sýnast vera til at öðrvísi verður nú. Men tingið hevur samtykt, at 12 fjórðinga mark skal setast. Vit koma tí ikki longur við hesum máli nú enn at fáa hesa 12 fjórðinga samtykt setta í verk.

Vit kunna ikki leypa frá hesi samtykt. Her er ætra Föroya lögtings og rettur Föroya fólks í váða.

UPPSKOT

frá minnilutanum (Hákun Djurhuus):

Í fyrstu syftu:

1. Lögtingið steðgar viðgerðini av hesum máli til fiskivinnufelögini hava fingið hövi til at siga sína hugsan um uppskotið, ið nú liggur fyri.

Í aðru syftu:

2. Lögtingið heldur fast um, at Íslands útflytan av sínum fiskimarki á 12 fjórðingar frá 1. september 1958 og undirtökan av hesari útflytan av öðrum londum, hevur broytt forútsetningin undir sjómarksmálinum so frá grundini, at Föroyar kenna seg leysar av sáttmálanum við Breiland av 24. juni 1901 sum broyttur í fyribilssáttmála av 22. apríl 1955.

3. Lögtingið vísir aftur uppskot frá dönum og bretum um 6 fjórðinga fiskimark og heldur fast um samtyktirnar í lögtingsmáli nr. 1/1958 (eykating): Fiskimarksspurningurin.

UPPSKOT

frá minnilutanum (Jógvan Högnesen og Erlendur Patursson):

1. Samtíðis sum tingið vísir frá sær öllum uppskotum um 6 fjórðinga fiskimark krevur tað av avvarandi myndugleikum, at 12 fjórðinga mark verður sett.
2. Er fiskimarkið ikki flutt út á 12 fjórðingar, so sum Föroya lögting samtykti 6. juni 1958, í seinasta lagi 1. apríl í ár, tekur lögtingið stig til at landhalgis- og fiskimarksmál verða lögd undir föroyskt löggávu- og útinningarvald, so at samtyktin um útflytingina sum skjótast fær frama.

UPPSKOT

frá meirilutanum (J. Fr. Öregaard, Poul J. Olsen, Tr. Samuelsen og Jens Chr. Olsen):

Lögtingið samtykkir fyriliggjandi uppskot til fyribilssgtímála millum Danmark og Bretland um fiskimark undir Föroyum.

7-MANNANEVNDIN TIL VIÐGERÐAR AV FISKIMARKSMÁLUM

UDENRIGSMINISTERIET

Den 26. januar 1959.

Oversættelse af
udkast til den midlertidige dansk-britiske
overenskomst om Færöernes fiskerigrænse.

Sir,

Jeg har den ære at henvise til forhandlingerne mellem repræsentanter for Danmarks regering og regeringen i Det forenede Kongerige Storbritanien og Nordirland vedrörende den midlertidige ordning for fiskeriet omkring Færöerne, som skal være gældende, indtil en almindelig konvention, der fastsætter territorialfarvandets bredde og fiskerigrænser, træder i kraft, og har den ære at fremsætte följende forslag:

I. Regeringen i Det forenede Kongerige skal ikke göre nogen indvending imod, at de kompetente danske eller færöske myndigheder udelukker fartöjer indregistreret i Det forenede Kongerige fra fiskeri i området mellem Færöernes kyst og den paa vedlagte kort viste blaa linie.

II. Under hensyn til det fiskeri, som traditionelt drives i farvandene omkring Færöerne af fartöjer indregistreret i Det forenede Kongerige, skal den danske regering ikke göre nogen indvending imod, at sammenne fartöjer fortsat driver fiskeri i området mellem den i ovennævnte stk. I nævnte blaa linie og en linie tolv sömil fra lavvandsmærket langs Færöernes kyst tegnet som vist ved den röde, punkterede linie paa vedlagte kort.

III. Under hensyn til den færöske ökonomis særlige afhængighed af fiskeri bestemmes följende: I de tre områder, der er skraveret med rödt paa det vedlagte kort, og som ligger i det område, der nævnes i stk. II, maa fiskeri fra fartöjer indregistreret paa Færöerne eller i Danmark og fartöjer indregistreret paa Færöerne eller i Danmark og fartöjer indregistreret i Det forenede Kongerige i de tidsrum, der angives nedenfor i litra (a), (b), og (c), i nærværende stykke, kun finde sted med langline og haandline. De områder og tidsrum, der refereres til, er:

(a) mod vest: Området sydvest og syd for Myggenæs, mod nord begrænset af den stiplede, blaa linie, der er trukket efter 270° retvisende pejling fra Myggenæs fyrtaarn hvert aar fra den 15. november til den 1. april;

(b) mod syd: Området syd for Syderö, mod nord begrænset af den stiplede blaa linie, der er trukket efter 253° retvisende pejling fra Akraberg fyrtaarn, og mod öst ved den tilsvarende linie, der er

trukket efter 116° retvisende pejling fra samme fyrtaarn — hvert aar fra den 1. oktober til den 31. maj;

(c) mod nord: Omraadet, mod vest begrænset af den stiplede, blaa linie, der danner den 7. længdegrad vest for Greenweh, og mod øst af den stiplede, blaa linie, der er trukket stik nord fra det nordligste punkt af Nordberg paa Fuglö — hvert aar fra den 15. februar til den 15. april.

IV. Den danske regering skal tilstaa fiskefartöjer indregistreret i Det forenede Kongerige en behandling, der ikke er mindre gunstig end den, som tilstaas fiskefartöjer fra et hvilket som helst andet fremmed land.

V. Det vedlagte kort skal udgöre en integrerende bestanddel af nærværende overenskomst og skal anses for at være afgörende med hensyn til de i stk. I, II og III nævnte linier og omraader.

VI. Danmark og Det forenede Kongeriges regeringer skal foranledige, at sagkyndige hvert aar afgiver en beretning om, hvilke foranstaltninger udover de allerede gældende, som eventuelt maatte være nödvendige til beskyttelse af fiskebestanden omkring Færöerne, og de to regeringer skal sammen overveje eventuelle instillinger om saadanne foranstaltninger, som de sagkyndige maatte afgive.

VII. Intet i nærværende overenskomst skal anses for at præjudicere de synspunkter, som hver af de to regeringer har, forsaavidt angaar folkeretteus regler om afgrænsning af og grænser for det ydre territoriale farvand eller for den eksklusive jurisdiktion i fiskerispörgsmaal.

VIII a) Nærværende overenskomst skal træde i kraft dags dato og skal med forbehold af bestemmelserne i litra (b) i dette stykke forblive i kraft, indtil en almindelig konvention, der fastsætter territorialfarvandets bredde og fiskerigrænser, træder i kraft.

Saafremt en konvention som nævnt i litra (a) i dette stykke ikke er trraadt i kraft (her indföjes en dato $2^1/_2$ aar efter undertegnelsesdatoen), skal regeringerne i Danmark og i Det forenede Kongerige overveje, om nærværende overenskomst burde ændres, og med forbehold af saadanne ændringer, som der maatte blive opnaaet enighed om, skal nærværende overenskomst fortsat være i kraft, idet dog hver af regeringerne paa et hvilket som helst tidspunkt efter (en dato fre aar efter undertegnelsen) skal kunne bringe overenskomsten til ophör ved skriftlig meddelelse herom til den anden regering, hvilken meddelelse skal faa virkning ét aar efter den dato, paa hvilken den er afgivet.

2. Saafremt de i denne note indeholdte forslag kan godkendes af .... regering, foreslaar jeg, at denne note og Deres be-

kræftende svar betragtes som udgörende en overenskomst mellem vore to regeringer, som træder i stedet for de bestemmelser om fiskerigrænsen omkring Færöerne, der findes i de noter, der udveksledes mellem vore to regeringer den 22. april 1955, og som i overensstemmelse hermed ændrer konventionen af 24. juni 1901 som ændret ved de noter, der udveksledes mellem vore to regeringer den 23. juli 1951 og den 22. april 1955.

2. viðgerð 24. februar 1959.

Minnilutauppskot frá J. Högnesen og E. Patursson var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Johan Simonsen, Vilhelm Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.
Nei atkvöddu: J. Lindenskov, J. P. Davidsen, D. Nolsöe og P. M. Dam.
Atkvöddu ikki: Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, H. Iversen, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Öregaard. Burtur P. Petersen.
Uppskotið fall 11—1.

Minnilutauppskot frá H. Djurhuus (principalt) var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Johan Simonsen, Vilhelm Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.
Nei atkvöddu: J. Lindenskov og J. P. Davidsen.
Atkvöddu ikki: Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, H. Iversen, Dion Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Öregaard. Burtur: P. Petersen.
Uppskotið fall 12—2.

Minnilutauppskot frá H. Djurhuus (subsidiert) var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Johan Simonsen, Vilhelm Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.
Atkvöddi nei: Jacob Lindenskov.
Atkvöddu ikki: Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, Dion Nolsöe, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. M.

Dam, P. J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Óregaard. Burtur: P. Petersen.

Uppskotið fall 11—4.

Meirahlutauppskotið frá J. F. Óregaard og fl. var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: Jacob Lindenskov, Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, Dion Nolsöe, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Óregaard.

Nei atkvöddu: Johan Simonsen, Frederik Hansen, Jógvan Högnesen, Sigurð Joensen, Erlendur Paturssson, Hanus við Högadalsá og Hemming Jespersen.

Atkvöddu ikki: Niels Holm Jakobsen, Knút Wang, Håkun Djurhuus, og Vilhelm Nielsen. Burtur: P. Petersen.

Uppskotið samtykt 18—7.

---

7. Veðhald av útgerðarláninum til Portugalstrolararnar.

Ár 1959, 10. januar legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
lögtingslóg um veðhald av útgerðarlánum til portugalstrolararnar.

§ 1.

Landsstýrinum er heimill landskassans vegna at taka ábyrgd av lánum til 1. útgerð av teim 3 portugalstrolnrunum uppi kr. 400.000.— fyri hvönn.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om garanti for driftslaan til portugalstrawlerne.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for laan til den første udrustning af de 3 portugalstrawlere op til kr. 400.000. for hver.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

A/S Föroya banki og p/f Sjóvinnubankin hava í skrivi 11. november 1958 sagt frá, at teir hava givið tilsögn til Suðuroyar norðara trolarafelag og Fuglafjarðar samvinnufelag um rakstrarlán til teir portugalstrolarar, hesi felög hava keypt. Lánini verða goldin við helvt úr hvörjum banka og eru hesi til hvönn trolaran: Kr. 200.000.— at gjalda aftur í tvey ár, hetta lánið verður at nýta til rindan av troli og aðrari trolútgerð og kr. 200.000.— í vanligum útgerðarláni fyrsta árið móti 1. veðhaldi á veiðuni. Bæði lánini eru treytað av kaution landskassans. Bankin leggur afrat, at henda kaution sum nevnt er treyt fyri tilsögn bankanna fyri rakstrarláni og er tilsögn um rakstrarlán aftur ein treyt fyri byggilláni og endiligari prioritering.

Bankin biður landsstýrið í um at vátta, at tað landskassans vegna álekur sæe nevndu kaution.

Hertil er at siga:

Tá ið samtykt var við tey nevndu trolarafelög og eisini við tað triðja felagið p/f Rúdafelli, Vági, um söln av trolarunum, sögdu hesi felög, at tað var teinum neyðugt, at landsstýrið hjálpti teinum við at útvega lán til fyrstu útgerð av trolgreiðum og annars vanligum útgerðarláni. Landsstýrið sendi so felögunum skriv, har landsstýrið sigur, at tað vil arbeiða fyri, at felögini fáa lagalig útgerðarlán til keyp av fiskigreiðum at afturgjalda yvir tvey ár, og at landsstýrið annars skuldi hjálpa til at fáa trolararnar til Föroyar, soleiðis at fata, at er felagið ikki fört fyri hesum, skal landsstýrið royna at útvega tann törvandi peningin (til flyting av manning, fyrstu bunkarar, o. f.). Onki er beinleiðis sagt um vanligt útgerðarlán til sall, olju, proviant o. f., men hevur ætlanin verið, at hjálp eisini skuldi veitast til hetta endamál.

Sum tilskilað í skrivinum frá bankunum er tað ein treyt fyri byggilánunum og endaligu prioriteringini, at landskassin til sína fíð garanterar fyri útgerðarlánum v. m. Henda treyt hevur alla tíðina verið tilskilað frá bankanum og frá realkreditstovninum. Landsstýrið hevur ikki heimild at garantera fyri hesum lánum og má tí málið leggjast fyri lögtingið.

1. viðgerð 12. februar, og 18. s. m. legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Ár 1959, 10. januar legði landsstýrismaður Kr. Djurhuus málið fram á ting. 12. februar 1959 var málið til 1. viðgerð og varð beint í fíggjarnevndina.

Sum tað sæst av viðmerkingunum hava bæði bankarnir og realkreditstovnurin sett sum treyt fyri lángeving, at landsstýrið tekur ábyrgd av útgerðarlánunum kr. 200.000.— til keyp av trolgreiðum o. l. og kr. 200.000.— til vanliga útgerð. Tær fyrstu kr. 200.000.— til trolgreiðir o. l. verða at gjalda aftur í tvey ár. Hinar kr. 200.000.— , sum vera at nýta til vanliga útgerð, fær landsstýrið 1. veðhald í veiðuni og er ábyrgdin bert fyri fyrsta árið.

Figgjarnevndin, sum hevur viðgjört málið er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. og 3. viðgerð 24. februar 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 19—0.

---

8. *Tyngin jarðarfarstrygging*

Ár 1959, 11. februar legði lögmaður fram soljóðandi:

Eftir áheitan frá landsstýrinum hevur ríkisumboðsmaðurin fyrilagt Direktoratet for sygekassevæsenet spurningin, hvörjar broytingar törva í galdandi fyriskipan fyri föroyskar sjúkakassar frá 21. februar 1930 í sambandi við möguligari fremjing av lvunguari jarðafarstrygging av sjúkakassalimum í Föroyum.

Til tess hevur konsulenturin í tryggingartekniskum spurningum hjá direktoratinum gjört uppskot til broytingar í § 18 í föroysku sjúkakassafyriskipanini, til redaktionellar broytingar í fyriskipanini, sum standast av hesum og til samtykt fyri «De færöske sygekassers udligningskasse for begravelseshjælp».

Eftir ynski frá Centralforeningen af sygekasser paa Færöerne í skrivi frá 7. februar 1957 — smbr. skriv frá 3. juni s. á. er skotið upp í § 18, st. 4 at seta jarðafarsstyrk hjá tilkomnum til kr. 100,—. Haraftrat er skotið upp, at jarðafarsstyrkur verður veittur börnum og eisini uppskot, sum Centralforeningen af sygekasser paa Færöerne kann taka nærri avgerð um.

Við lað, at reglur eru ikki í föroyskari lóggávu um prístalsviðgerð yvirhövur, er regla skotin inn eins og í § 33 í lög um avlamistrygging í Föroyum, at styrkur kann broytast, um so er, at livikostnaður í Föroyum fer upp ella niður. Skotið er upp, at Centralforeningen gevur tilráðing. Skilað verður til, at jarðafarsstyrkur verður ein veiting frá sjúkakassa, sum fær ikki almennan studning.

Um endurtrygging ella útjavning (smbr. § 18, stk. 5) er at siga, at lað verður hildið hóskiligast at stovna serstakan útjavningarkassa í staðin fyri at leggja hann undir «De danske sygekassers udligningskasse for begravelseshjælp» m. a. av teirri grund, at miðal livialdur í Föroyum eftir tí sum fyriliggur er ikki eins og í Danmark og eisini av fyrisetingartigum grundum. Í hesum sigur formaðurin í Centralforeningen seg samdan.

Direktoratet for sygekassevæsenet hevur eisini umhugsað, hvussu vera skal við teim sum hava tryggjað sær jarðafarsstyrk eftir § 30, stk. 1 í fyriskipanini um góðkendar jarðafarskassar. Tá ið hesir kassar tessamillum hava ikki limir, sum ikki eisini eru ómúgvandi njótandi limir í sjúkukassa, hevur tað ikki bildið grundir vera, um onkur skuldi yvskt tað, at sett reglu inn um hövi hjá teim at hava hesa trygging javnbjóðis hesi nýggju, og heldur bildið tað verið neyðugt at vissa teim aftirkeypsvirðið, eftirsum limagjaldið hevur verið so lítið og tryggingin yvirhövur so fá ár gomul, men skotið spurningin til jarðafarskassarnar sjúlvar, at leggja teir niður eftir teirra samtyktum, tá ið tær nýggju reglurnar koma í gildi.

So statt loyvir landsstýrið sær at leggja fyri tingið við tilmæli sínum:

1) UDKAST TIL ÆNDRING AF § 18 I DEN FÆRÖSKE SYGEKASSEANORDNING.
2) UDKAST TIL ÆNDRINGER I DEN FÆRÖSKE SYGEKASSEANORDNING SOM FÖLGE AF NY § 18, STK. 4 - 5 OM BEGRAVELSESHJÆLP.
3) UDKAST TIL VEDTÆGT FOR DE FÆRÖSKE SYGEKASSERS UDLIGNINGSKASSER FOR BEGRAVELSESHJÆLP.

Udkast til ændring

af

§ 18 i den færöske sygekasseanordning.

Som nyt stk. 4 og 5 indsættes:

Stk. 4.

Ved dödsfald blandt sygekassens nydende samt bidragydende medlemmer (med hvilende medlemsret, jfr. § 23) skal kassen yde en begravelseshjælp paa 400 kr. Ved dödsfald blandt saadanne medlemmers börn under 15 aar skal der ydes fölgende hjælp:

Hvis dödsfaldet indtræffer inden det fyldte	1. aar:	50	kr.
i alderen 1 - 4	aar:	100	
- 5 - 10	aar:	150	
- 11 - 14	aar:	250	

Saafremt levemiddelpriserne paa Færöerne stiger eller falder kan direktören for sygekassevæsenet efter indstilling fra den færöske centralforening fastsætte tilsvarende forhöjelser eller nedsættelser af fornævnte beløb.

Stk. 5.

Til sikkerhed for sygekassens risiko for udbetaling af begravelseshjælp skal sygekassen være tilsluttet en udligningskasse for begravelseshjælp, der undergives tilsyn af direktören for sygekassevæsenet. De

nærmere regler for udligningskassens virksomhed fastsættes i en af socialministeren godkendt vedtægt.

Udkast til ændringer
i
den færöske sygekassebekendtgörelse som följe af ny § 18, stk. 4—5, om begravelseshjælp.

Til § 6.

I stk. 1 indföjes i sidste linie efter «herunder»: «begravelseshjælp, men».

Til § 11.

I stk. 6 ændres i 7. linie «sygehjælp» til «hjælp».

Til § 12.

I stk. 1 indföjes i sidste linie efter «udgifter»: « bortset fra udgifterne til begravelsesforsikringen - ».

Til § 30.

I stk. 1 udgaar i 2. linie ordene: «begravelseshjælp og».
Stk. 4—5 udgaar.

Udkast til vedtægt
for
de færöske sygekassers udligningskasse for begravelseshjælp.

§ 1.

Kassens formaal er at udligne de færöske sygekassers aarlige udgifter til begravelseshjælp, afholdt i medför af § 18, stk. 4, i den færöske sygekassebekendtgörelse af .....

Udligningskassens hjemsted er Thorshavn.

§ 2.

Hvert aar inden 15. februar fremsender de enkelte sygekasser til udligningskassen paa dertil af udligningskassen affattede skemaer oplysning om störrelsen af den i det foregaaende aar udbetalte begravelseshjælp og antallet af nydende og bidragydende medlemmer (med hvilende medlemsret) ved aarets udgang.

Oplysningerne om den udbetalte begravelseshjælp skal vedlægges dödsattest for hvert af de afdöde medlemmer samt kvittering for den udbetalte begravelseshjælp.

Oplysningeskemaerne skal være underskrevet af sygekassens formand og kasserer samt kassens revisorer.

§ 3.

Naar udligningskassen har gennemgaaet de indsendte oplysningsskemaer og dödsattester og har befundet disse rigtige, udarbejder kassen et udligningsregnskab og foretager udligningen.

I udligningsregnskabet indgaar udligningskassens i det forlöbne aar

afholdte administrationsudgifter samt eventuelle indtægter (f. eks. indvundne renter).

Den fremkomne samlede udgift divideres med sygekassernes samlede medlemstal. Den saaledes beregnede gennemsnitlige udgift pr. medlem, afrundet opefter til det nærmeste med 5 delelige beløb, lægges til grund for afregningen med den enkelte sygekasse, som til udligningskassen skal svare det beløb, der fremkommer ved at multiplicere det pr. 31. december opgivne medlemstal med gennemsnitsudgiften pr. medlem (sygekassens aarsbidrag), medens kassens udgifter til begravelseshjælp skal godtgöres denne af udligningskassen.

Den herved opstaaede forskel skal enten udbetales sygekassen af udligningskassen, eller, saafremt sygekassens udgifter til begravelseshjælp er mindre end det beregnede aarsbidrag, af sygekassen indbetales til udligningskassen.

§ 4.

Udligningskassens virksomhed ledes af bestyrelsen for centralforeningen af sygekasser paa Færöerne.

Bestyrelsen leder virksomheden i overensstemmelse med vedtægten. Den antager den for virksomhedens udförelse fornödne medhjælp og fastsætter dennes lönninger.

Udligningskassens midler bortset fra den til enhver tid fornöden kontante kassebeholdning anbringes i sparekasse eller bank.

Over bestyrelsens möder föres en forhandlingsprotokol, der underskrives af samtlige bestyrelsesmedlemmer, der har deltaget i mödet.

Rejseudgifter og dagpenge for bestyrelsens medlemmer samt kassens personale afholdes af udligningskassen efter samme regler, som er gældende for centralforeningen.

§ 5.

Udligningskassens regnskabsaar er kalenderaaret. Over dens indtægter, udgifter og formue föres nöjagtigt regnskab.

Regnskabet revideres af 2 af centralforeningens generalforsamling valgte revisorer.

Aarsregnskabet med status indsendes inden 1. april med revisionens bemærkninger til godkendelse af direktören for sygekassevæsenet, hvorefter det offentliggöres i «Sygekassetidende».

§ 6.

Denne vedtægt er vedtaget af de færöske sygekassers centralforenings generalforsamling den ..... og under .... godkendt af socialministeriet.

1. viðgerð 13. februar, og 19. mars legði sociala nevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Ár 1959, mikudagin 11. februar, legði landsstýrið málið fram á ting.

Tað kom til 1. viðgerð friggjadagin 13. februar og beint í serliga 5-mannanevnd (sosiala nevnd).

Nevndin hevur umhugsað málið og fingið til vega ymsar upplýsingar í viðvíkjandi og heldur m. a., at tryggingin eisini eigur at fevna um limir, sum eru í framhaldssjúkakassa. Tað hevur eisini verið til viðgerðar á aðalfundi í centralforeiningini í ár, og varð har samtykt at heita á tingið um at samtykkja lógina, tó við tí broyting, at limir í framhaldskassa eru við.

Tá málið ikki hevur nakran skund, verður hildið, at tað eigur at verða sent landsstýrinum aftur, og at lógin verður broytt soleiðis, at limir í framhaldssjúkakassa eisini koma undir skipanina.

Sostatt mælir nevndin til, at málið verður sent aftur til landsstýrið, so tað kann senda teimum einstöku sjúkakössunum málið til ummælis, soleiðis at svar verður landsstýrinum í hendi í so góðari tíð, at tað av nýggjum kann verða lagt fyri tingið á ólavsöku.

21. mars legði tingformaðurin fram soljóðandi broytingaruppsokt frá nevndini:

Upp í álit nevndarinnar verður sett soljóðandi

UPPSKOT

So sum skilað til í álitinum verður málið sent landsstýrinum.

2. viðgerð 2. april 1959.
Uppskotið fall 14 - 0.

---

9. *Kgl. fyriskipan um svangerskab.*

Ár 1959, 11. februar legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
kgl. anordning for Færöerne om foranstaltninger i anledning af svangerskab m. v.

§ 1.

Lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m. v. sættes i kraft paa Færöerne med fölgende ændringer:

Indtil der paa Færöerne oprettes mödrehjælpsinstitutioner eller dertil svarende institutioner skal svangerskabsafbrydelse paa Færöerne i de i § 3, stk. 3 omhandlede tilfælde kunne ske efter samraad mellem den autoriserede læge, der foretager indgrebet og en anden autoriseret læge.

Viðmerkingar:

Yvirlæknin P. Dahl, sigur m. a. í ummæli sínum frá 8. februar 1957, at tað fyrikemur honum óneyðugt at móðrahjálparinstitutión eftir lóg frá 16. mai 1939 verður sett í gildi, eftirsum henda lóg fer at stuðla til fleiri fyrispurningar um abortus provocatus. Bert í tveimum förum hevur hann fingið lálíkar fyrispurningar í starvstíð sínari.

Yvirlæknin mælir eisini frá, at lógirnar § 3, stk. 3 verður sett í gildi í Föroyum av góðum grundum.

Tá ið talan hevur verið um psykiatriskar indikatiónir hava teir læknar verið til handa, sum hava besta lærdómin í psykiatri. Tað hava altíð verið læknar uttanfyri hospitalið, sum aftrat yvirlæknunum hava givið indikatión fyri abortus provicatus.

At enda sigur yvirlæknin, at hetta talar fyri, at lógin verður orðað sum tilskilað í lóginnar § 13, stk. 4.

Landslæknin hevur í ummæli sínum tikið undir við tilmæli yvirlæknans.

So statt loyvir landsstýrið sær at seta fram uppskot til kgl. fyriskipan samsvarandi hesum.

Lógin fylgir við í serprenti.

1. viðgerð 13. februar, og 27. februar legði sociala nevndin fram saljóðandi

NEVNDARÁLIT

Landsstýrið framlegði málið 11. februar 1959, tað kom til 1. viðgerð á tingi tann 13. februar 1959 og beint í ta sosialu nevndina.

Nevndin hevur havt fund og viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

2. viðgerð 28. februar og 3. viðgerð 9. mars 1959.

Uppskot landsstýrisins samtykt 23 - 0.

---

10. Ábyrgdartrygging fyri hundar.

Ár 1959, 11. februar legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram saljóðandi

UPPSKOT

til

lögtingslóg um uppískoyti til kgl. anordning nr. 88 frá 31. marts 1928 om hundeafgift m. v.	lagtingslov om tilføjelse til kgl. anordning nr. 88 af 31. marts 1928 om hundeafgift m. v.

§ 1.

Aftrat § 1 verður sett:

Hann, ið hevur hund, hevur skyldu at hava hann ábyrgdartryggjaðan. Samstundis tilmeldingini skal hann prógvföra, at ábyrgdartrygging er teknað fyri hundin.

Landsstýrið fyrisetur gjølligari reglur tryggingini viðvíkjandi.

§ 1.

Til § 1 føjes:

Det paahviler besidderen af en hund at holde den ansvarsforsikret. Samtidig med anmeldelsen skal han godtgøre, at der er tegnet ansvarsforsikring for hunden.

Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser forsikringen vedrørende.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1960. Innan ta tíð skulu allir hundar, sum eru undir reglunni í nevndu kgl. fyriskipan, vera ábyrgdartryggjaðir.

§ 2.

Denne lov træden i kraft 1. januar 1960. Inden den tid skal alle hunde, der omfattes af nævnte kgl. anordning være ansvarsforsikret.

Viðmerkingar:

Tað eru longu fleiri, sum hava ábyrgdartryggja hundar sínar og ynskir hava nú verið frammi um tvungna ábyrgdartrygging fyri hundar her sum í øðrum londum eitt nú í Danmark. Bæði Tórshavnar býráð og landfútin hava mælt til.

Landsstýrið hevur hildið tað verið beinast í serstakari kunngerð at fyriseta minstamarkið fyri tilíkari trygging v. m.

Samsvarandi hesum loyvir landsstýrið sær at seta fram lógaruppskot sum uppískoyti til galdandi kgl. fyriskipan nr. 88 frá 31. marts 1928 (smbr. lögtingslóg nr. 5 frá 18. marts 1955 um hundaavgjald v. m.).

Málið var lagt fyri tingi á ólavsøku (smbr. tingmál nr. 24/1958).

1. viðgerð 13. februar, og 2. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Í § 1 í kgl. anordning nr. 88 frá 31. marts 1928 om hundeafgift m. v. verður ásett, at tann, ið hevur hund í Tórshavn ella í einari kommunu, har reglurnar um hundaavgjald sambart § 1 í nevndu kgl. fyriskipan eru settar í gildi, hevur skyldu at geva hundin upp innan ein í fyriskipanini ásettan freist, soleiðis at hann kann verða skrásettur.

Nevnda § 4 er við lögtingslóg nr. 5 frá 18. marts 1955 um hundaavgjald v. m. nú orðað soleiðis:

«Í kommunum utanfyri Tórshavn kann søknarstýrið við landsstýrisins góðkenning seta reglurnar í §§ 2 og 3 (um støddina á avgjaldinum) í gildi. Gjaldið verður fyrisett samsvarandi § 2.»

Landsstýrið hevur lagt fyri lögtingið uppskot til lögtingslóg um uppískoyti til kgl. anordning nr. 88 frá 31. marts 1928 om hundeafgift m. v., ið áleggur eigara av hundi ella hundum, sum eru undir reglunni í nevndu kgl. fyriskipan, skyldu at hava hund ábyrgdartryggjaðan.

Málið er framlagt 11. februar 1959 og 1. viðgerð fór fram 13. februar 1959. Tingið beindi málið í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla lögtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 3. mars og 3. viðgerð 7. mars 1959.

Uppskot landsstýrisins samtykt 19—0.

11. Sjúkrasystrar

Ár 1959, 11. februar legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

Við heimild í § 16, 1. stk. í lóg nr. 127 frá 25. mai 1956 om sygeplejersker verður henda lóg sett í gildi í Föroyum við kongligari fyriskipan við hesum broytingum:

1. Í § 2, 5. stk. verður í staðin fyri: «gennem indenrigsministeriet udvirket kongelig anordning» sett: «af indenrigsministeriet udfærdiget bekendtgörelse efter at landsstyret har fået lejlighed til at udtale sig».
2. Í § 16, 1. stk. verður í staðin fyri «1. juli 1956» sett: «1. januar 1959».
3. § 16, 4. stk. gongur út.
4. Har tað í lógini verður nýtt orðið: «lov» ella «lovs» sum sipandi til hesa lóg verður sett í staðin: «anordning» ella «anordnings».

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur fingið til ummælis spurningin um at seta í gildi í Föroyum lóg nr. 127, 25. mai 1956 om sygeplejersker. Henda lóg, sum er sett í gildi í Danmark frá 1. juli 1956, og sum kemur í staðin fyri lóg nr. 140, 20. april 1933 om autoriserede sygeplejersker, sum broytt við lóg nr. 133, 30. marts 1942 og lóg nr. 286, 18. juni 1951, inniheldur reglur um hvörji hava ræt at arbeiða sum sjúkrasystrar, hvör læra verður krevd av næmingum, hvörjar skyldur liggja á sjúkrasystrum, eftirlit við teimum, straff, læruráð o. t.

Hövuðsendamálið við lógini er at geva sjúkrasystrunum eina dyggari læru enn higartil.

Málið er viðgjört av serligari nevnd, sum stýrið fyri Dronning Alexandrines hospital hevur sett. Nevndin hevur 8. marts 1958 givið við-

lagda álit frá sær við tilmæli um, at lógin verður sett í gildi í Föroyum so at siga óbroytt. Annars vísir nevndin, hvussu læran kann leggjast til rættis, næmingarnir fáa læru sína ikki bert á Dronning Alexandrines hospitali, men eisini á Klaksvíkar sjúkahúsi og Suðuroyar sjúkahúsi, skúlin verður tó á Dronning Alexandrines hospitali.

Um vit ikki í Föroyum hava møguleikar fyri at geva sjúkasystranæmingum ta læru sum nútíðin heldur vera neyðuga, er vandi fyri, at Föroysku sjúkahúsini ikki fáa tær sjúkasystrar, sum tørvur er á. Soleiðis hevur tað verið hígartil, meginparturin av teimum sjúkrasystrum, ið eru her, hava fingið læru sína í Föroyum.

Viðvíkjandi broytingunum er at siga, at nr. 2-4 eru formellir. Broytingin nr. 1 ger tað møguligt eftir avtalu við landsstýrið at laga læruna soleiðis, at hon hóskar til viðurskiftini her og er møguligt at fremja.

Málið var lagt fyri tingið á ólavsøku (sml. tingmál nr. 10-1958).

1. viðgerð 11. februar, og 11. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Landsstýrið hevur lagt hetta mál fyri lógtingið við uppskoti um, at lóg nr. 127 frá 25. mai 1956 om sygeplejersker við heimild í lógarinnar § 16 verður sett í gildi í Föroyum við kongiligari fyriskipan við nøkrum fáum, meira at kalla formellum broytingum, og við í broyting í lógarinnar § 2, stk. 5, at reglur fyri læru sjúkrasystranna, harundir góðkenning av sjúkaplejuháskúla, sjúkaplejuskúla v. m. verða gjørdar við kunngerð frá innanríkismálaráðnum eftir avtalu við landsstýrið.

Málið var framlagt tann 11. februar 1959 og 1. viðgerð fór fram tann 14. februar 1959.

Málið varð við 1. viðgerð beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og hevur havt samráðingar við landslæknan og Bonnevie, sjúkahúsumsjónarmann. Hesir hava greitt frá málinum og föra fram, at tað er beinleiðis neyðugt at lógin verður sett í gildi í Föroyum, soleiðis at tað verður gjørligt at lata sjúkasystranæmingar læra í Föroyum. Hetta er millum annað eisini ein stórur figgjarligur spurningur fyri raksturin av teim føroysku sjúkahúsunum, tí um næmingarnir noyðast at fara til sjúkahús í hinum partinum av ríkinum at søkja sær læru, so verða ikki næmingar at fáa til tey føroysku sjúkahúsini og hesi koma so at noyðast bert at hava útlærdar sjúkasystrar.

Í hesum sambandi kann vísast á hesa uppstilling, ið nevndin hev er fingið frá landslæknanum og Bonnevie.

Dronning Alexandrines hospital:

		Spart verði::
10 sjúkrasystrar á 12.000.—	120.000,00	
í staðin fyri 24 næmingar á 1.750.--	42.000,00	78.000,00

Klaksvíkar sjúkahús:

3 sjúkasystrar á 12.000.	36.000,00

Í staðin fyri 6 nærmingar á 1.750.	10.500,00	25.500,00
Tvöroyra sjúkahús:		
3 sjúkrasystrar á 12.000,-	36.000,00	
Í staðin fyri 6 nærmingar á 1.750, ...	10.500,00	25.500,00
Sparf verður tilsamans ..... kr.		129.000,00
Útreiðslur til sjúkaplejuskúlan aftrat teimu útreiðslum til undirvising, ið nú eru:		
1 fyrístöðukvinna	13.500,00	
1 sjúkaplejulærarinna	11.500,00	
lærararlønir	3.000,00	
aðrar útreiðslur	3.500,00	31.500,00
Sparf verður netto ..... kr.		97.500,00

Tann 28. december 1957 setti sjúkahússtýrið fyri Dronning Alexandrines hospitali eina nevnd til at kanna hetta mál. Í hesi nevnd vóru: Th. P. Dahl, yvirlækni, H. Debes Joensen, landslækni, Johan Peter Joensen, landsskúlaráðgevari, Jona Joensen, deildarsjúkrasystir og E. Bonnevie, sjúkahúsumsjónarmaður.

Henda nevnd hevur givið frá sær eitt álit og mælir til, at lógin frá 25. mai 1956 verður sett í gildi í Føroyum.

Vísandi til tað, ið er føt fram, mælir lógarnevndin lögtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við teimum av landsstýreinum nevndu broytingum.

2. viðgerð 16. mars og 3. viðgerð 17. mars 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 19 0.

12. Endurnýgging av skipaflotanum.

Ár 1959, 15. apríl legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

lögtingslóg um endurnýgging av lögtingslóg nr. 8, 6. marts 1958 um endurnýgging av fiskiflotanum.

§ 1.

Lögtingslóg nr. 8, 6. marts 1958 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum verður í gildi til 31. marts 1964. Tað veðhald, landsstýrið eftir § 13 hevur heimild at veita til umbygging av skipum, má ikki fara upp um kr. 500.000. hvört fíggjarárið fyri seg.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1959.

Lagtingslov om forlængelse af lagtingslov nr. 8, 6. marts 1958 om fornyelse af fiskerflaaden.

§ 1.

Lagtingslov nr. 8, 6. marts 1958 om fornyelse af fiskerflaaden forbliver i kraft til 31. marts 1964. De garantier, landsstyret efter § 13 har hjemmel til at yde til ombygning af skibe, maa ikke overstige kr. 500.000. inden for hvert finansaar.

§ 2.

Denne lov faar virkning fra 1. april 1959.

Viðmerking:

Við lögtingslóg nr. 8, 6. marts 1958 fekk landsstýrið heimild í fíggjarárinum 1958/59 úr grunninum til endurnýgging af fiskiskipaflotanum at veita:

1. Studningslán til nýbygging av fiskiskipum.
2. Studningslán til nýggjar maskinur og aðrar tekniskar innleggingar í fiskiskap.
3. Studningslán til umskiftingar av gomlum fiskiskipum fyri bygging av nýggjum.
4. Studning til farmagjald av tilfari til byggingar av fiskiskipum á føroyskum skipasmiðjum.
5. Veðhald fyri láni til modernisering og leingjan av skipum.

Í 1958/59 eru tvey nýbygd línuskip komin til landið. Í 1959/60 koma landsstýrinum kunnugt 4 nýggir trolarar og ið hvussu er 2 nýggj línuskip.

Uppskotið frammanfyri er, at tann lógin, ið var galdandi fíggjarárið 1958/59 verður í gildi tey fylgjandi 5 fíggjarárini frá 1959/60 at rokna; tá hesi ár eru farin, verður lógin at kunna út frá teimum royndum, ið gjördar eru. Einasta broytingin nú verður, at tann heimild landsstýrið fær at veðhalda fyri lánum til umbyggingur og leingjan av skipum ikki

sum í 1958/59 verður maksimeraður til 1 mill. kr., men til kr. 500.000. hvört fíggjarárið.

Í grunninum til endurnýgging av fiskiskipaflotanum standa í dag kr. 1.502.315,45, afturat hesum eru játtaðar á fíggjarlögtingslóg 1959/60 kr. 2.060.000. . Við lögtingslóg nr. 29 frá 26. apríl 1956 um landskassalán hevur landsstýrið heimild at læna 2 mill. kr. til studningsveitan.

1. viðgerð 20. apríl, og 22. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Tann 15. apríl í ár var málið lagt fram á ting av landsstýrinum og var undir 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Nevndin, sum hevur viðgjört málið, hevur býtt seg í 3 minnilutar.

Minnilutin (Hans Iversen og J. Fr. Øregaard) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Poul Petersen, A. Djurhuus og Sámal Petersen) mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot við tí broyting, at § 10 í lóg nr. 8 frá 6. marts 1958 gongur út.

Ein annar minnilutí (Erlendur Patursson og Johan Simonsen) vísir á stöðu tjóðveldisflokksins í tingsetuni 1957/58, smbr. lögtingstíðindi 1957, bls. 124, har ikki verður hildið ráðiligt, at bitt almenna veðheldur fyri lánum til skip, sum eru eldri enn 30 ár, og at ikki er grund til, at menn sum eiga ónýtilig fiskiskip, skulu hava stórri studningslán enn aðrir. Í hesum sambandi verður vísl á tað skriv frá skipasýninum, ið tá varð lagt fram í málinum.

Hin vegin heldur minnilutin ikki, at hámarkið fyri veðhaldinum eftir § 13 í lóg nr. 8 frá 6. marts 1958 eigur at lækkast niður í ½ milj. kr., men vera óbroytt 1 milj. kr.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Johan Simonsen) setur tí fram hetta

UPPSKOT

§ 13, 1. stk. í lóg nr. 8, 6. marts 1958 verður orðað soleiðis:

Landsstýrinum er í fíggjarárinum 1958/59, 1959/60, 1960/61, 1961/62, 1962/63 og 1963/64 heimilað landskassans vegna hvört árið at veðhalda fyri lánum til modernisering og leinging av skipum ikki eldri enn 30 ár, her uppi í til keyp av nýggjum maskinum og öðrum tekniskum innleggingum, tá ið hetta verður gjört í sambandi við modernisering ella leinging.

§ 13, 3. stk. verður orðað soleiðis:

Veðhaldið eftir 1. stk. í hesi grein má ikki fara upp um 1 milj. kr. hvört fíggjarárið.

§§ 8 — 11 í somu lóg ganga út.

UPPSKOT

frá minnilutanum (Poul Petersen, Andr. Djurhuus og Sámal Petersen).
§ 10 í lögtingslóg nr. 8 frá 6. marts 1958 gongur út í báðum tekstum.

2. viðgerð 23. april og 3. viðgerð 25. april 1959.

Minnilutauppskot frá Erlendi Patursson o. fl. fall 7 0.
Minnilutauppskot frá Poul Petersen fall 12 0.
Uppskot landsstýrisins samtykt 28 0.

---

13. Frágreiðing frá millumlandafundi í Geneve.

Ár 1959, 10. februar legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi framlöguskriv:

Samstundis sum landsstýrið loyvir sær at leggja fyir tingið: BERETNING AFGIVET TIL UDENRIGSMINISTERIET AF DEN DANSKE DELEGATION TIL DE FORENEDE NATIONERS KONFERENCE I GENÈVE FRA DEN 24. FEBRUAR TIL DEN 27. APRIL 1958 OM RETSORDENEN PAA HAVET OG
BILAG TIL BERETNING
ynskir tað sær tingsins umnæli til ratifikatión av 4 millumlandasáttmálum frá hesum fundi:
1) Convention on the Territorial Sea (skjal 2),
2) Convention on the High Seas (skjal 3),
3) Convention on Fishing and Conservation of the Living Resources of the High Seas (skjal 5),
4) Convention on the Continental Shelf (skjal 6).
Landsstýrið gevur málinum sítt viðmæli.

1. viðgerð 14. februar, og 24. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Landsstýrið hevur lagt fyri lögtingið frágreiðing frá millumlandafundinum í Genève í dögunum frá 24. februar til 27. april 1958 og hevur samstundis sent lögtinginum til umnælis fylgjandi 4 millumlandasáttmálar:

1) Convention on the Territorial Sea,
2) Convention on the High Sea,
3) Convention on Fishing and Conservation of the Living Resources of the High Seas, og
4) Convention on the Continental Shelf.

Málið varð framlagt 10. februar og 1. viðgerð fór fram 11. februar, har málið varð beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at geva málinum tingsins viðmæli og setur so statt fram fylgjandi

UPPSKOT

Tingið samtykkir at viðmæla, at tær í álitinum nevndu 4 konventiónir verða ratificeraðar.

2. viðgerð 3. apríl 1959.
Uppskot nevndinnar samtykt 21 — 0.

---

14. Skattalóggávan.

Ár 1959, 12. februar legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi framlöguskriv v. m.:

Í 1945 varð uppskot til nýggja skattalóg lagt fyri tingið; málið hevur verið í fíggjarnevndini og er ikki komið á ting aftur.

Tann 11. august 1955 legði lögmaður málið fyri aftur tingið við broyttum uppskoti, jmf. lögtingstíðindi 1955, bls. 37, og varð tað beint í fíggjarnevndina, jmf. eisini lögtingstíðindi 1957 bls. 14.

Landsstýrið hevur síðan tá á hvørjum ári minnt tingið á hetta lógaruppskot, men er tað ikki komið aftur á lingborð enn.

Nú hevur landsstýrið av nýggjum kannað uppskotið og gjört einstakar smærri broytingar, hitvís fyri at gera orðalagið lettari og hitvís orsakað av broyting í vinnulívinum og broytingum á skattareglum og skattalagi í hinum Norðurlondum, serstakliga í dansku skattalóggávuni, sum framvegis byggir á sama grundarlagi, sum föroyska lógin og hetta uppskot til nýggja lóg, meðan Noreg og Svíríki hava broytt grundarlag sitt til at líkna skattin við kelduna, t.v.s. heinleiðis av inntøkuni tað árið, hon er vunnin.

Henda skipan er eisini umhugsa, men lykjast viðurskiftini í Föroyum at liggja heldur tvørligari fyri enn í hinum Norðurlondum og tá upplýst er, at umsitingin av kelduskattingini er væl størri og dýrari, er ikki hildið beint at gera broyting í hvussu er fyribils, men landsstýrið um-

hugsar í staðin fyri at fáa skipa fyri skattainnkrevjing sum fer at geva skattalógini um leið sonna fyrimunir, sum við keldunskatting, uttan at umsitingin verður viðkað munandi.

Við tí liggjarlóg, sum nú liggur fyri er umráðandi, at möguleikarnir fyri rettvísari skatting verða gjördir so góðir, su mgjörligt er, og má tí nú lykjast átroðkandi neyðugt at fáa skattalógina gjörda so fraegt tiðurhóskandi, at lann álíknaði skatturin kann verða býttur so javnt sum gjörligt, serliga við at geva líkningarvaldinum möguleika til eftirmæsing, ikki bert av inntökum hjá löntakarum, men eisini hjá öðrum.

Viðlagt er uppskot til lær broytingar og rettingar, sum landsstýrið heldur neyðugar vera at gera í uppskotinum, ið lagt varð fyri tingið í 1955, herundir uppskot til nýggjan stiga (skala) hvr fey 30 % eykaskattur, sum nú mestsum er blivin fastur og sum helst ikki verða avtikin aftur, er tikin inn í sjálvan stigan.

Hesin eykaskattur varð fyrstu ferð álíknaður fyri skattaárið 1952/53 eftir lögtingslóg nr. 17 frá 28. mars 1952.

Rætingar og broytingar í uppskoti til nýggja skattalóg fyri Föroyar, fremlögd á tingi 11. august 1955.

Tekstur í uppskotinum:	verður broyttur til:
§ 2, 1): av sigling, fiskiskapi, hvalaveiði, landbúnaði, fuglaveiði, idnaði, ...	av sigling, fiskiskapi, hvalaveiða, landbúnað, fuglaveiða, idnað, ...
§ 2, 4). regla: «.. ellis-..»	«.... aldurs ....»
§ 3, 2. stk verður broytt til: Setur ella avhendir hin skattskyldugi skip, maskinur, innbúning og líknandi rakstraramboð, sum hann hevur nýtt í virki ella vinnu sinari og sum hava fingið avskriving, fyri meira enn fey eru niðurskrivað til, skal helvtin av vinningínum verða tald uppí skattskyldugu inntokuna undir einum, tó ikki meira enn helvtin av avskrivingini. Verður søluperningurin nýttur til keyp av líknandi ella nðrum rakstraramboðum at nýla í sonna vinnu ella av sama virki, er landsstýrinum heimilt, tá lö søkt verður um lað, at slepja viðkomandi heilt ella lutvís frá at svara skatt av ágóðanum.»	«Stk. 2. Sælger eller afhænder den skattepligtige skib, maskiner inventar og lignende driftsmidler, som han har anvendt i sin erhvervsvirksomhed eller bedrift og som har været undergivet afskrivning, for et større beløb end de er nedskrevet til, medregnes halvdelen af avancen i den skattepligtige indkomst, dog ikke med mere end halvdelen af afskrivningerne. Såfremt afståelsessummen benyttes til erhvervelse af lignende eller andre driftsmidler til benyttelse i vedkommendes erhvervsvirksomhed eller bedrift, skal landsstyret være bemyndiget til efter ansøgning at indrømme hel eller delvis fritagelse.»
§ 3, 3., 4., 5. og 6. stk. gongur út.	

§ 4. 2) «ognareyki»	«ognarvokstur»
§ 4. 3), 5. regla: «aeltleiðingarforeldur»	«ætleiðingarforeldur»
§ 4. 4) «ognareyki»	«ognarvokstur»
§ 7. 2. stk. 4. og 6. regla: «nafnvirði»	«tilskilaða virði»
§ 7. 2. stk. 8. regla: «nafnvirði part annan»	«tilskilaða virði á partabrevum»
§ 7. 3. stk. 7. og 10. regla: «nafnvirði»	«tilskilaða virði»
§ 8. 1. stk. 6. regla: «halda teinum við»	«viðlikahalda ter»
§ 8. 1. stk. b., 4. og 8. regla: «rakstrargogn»	«rekstrarandbóð»
§ 8. 1. stk. c., 5. regla: «sambæriligt»	«rímligt»
§ 8. 1. stk. d., 6. regla: «rekstrargogn við sama tari»	«rekstrarandbóð av sama góðsku»
§ 8. 2. stk., næstseinasta regla: «ríkisdagsmenn»	«fólkatingsmenn»
§ 9. 2. 3. regla: «ellis-»	«aldurs-»
§ 9. 4. 3. regla: «skildan til borð og seng»	«separeraðan»
§ 9. 4. 6. regla: «lata uppihaldspening til ella foða upp.»	«hjálpa ella lata uppihaldspening til.»
§ 9. 4. aftast: «skild til borð og seng»	«separerað»
§ 9. 5. 7. regla: «skuldbindingin»	«bindingin»
§ 10. 1. stk., 2: Uppfskeyti nýtt stk.	«Partafelag hvørs endamál eru beinleiðis peningaflogging, eru fó umlantlkin»
§ 13. 2. stk. seinasta regla: «sbr. áselingarnar. . . .»	«sbr. fó fyrisetingarnar. . . .»
§ 14. 5 c. fremst: «fastognalánsfeløg, útlánsfeløg og onnur veðhaldsfeløg.»	«kreditfelog, kreditkassar og hypotekfelog»

§ 14, 5 c, 7. regla og resl: gongur út	«í tann mun ley rokja vinna, ið er utanfyri samtyktir teirra, harundir rakstur ella burturleigu av fastogn .»
§ 15, 1. stk., 3. regla: «ásetningarnar»	«fyrisetingarnar»
§ 15, 1. stk. a): «sum handhavi ella sandhandhavi»	«sum eigari ella sameigari»
§ 15, 1. stk. c): «hevur ikki tilhald ella bústað í Føroyum»	«hevur tilhald ella bústað uttanfyri Føroyar»
§ 15, 2. stk., 1. regla: «Skattskyldan fatar einans um.»	«Skattskyldan umfatar einans...»
§ 16, 1. stk., 1. regla: «Undantikin.... eru»	«undantikin skattskyldu eru:»
§ 18, 1. stk., 2. regla: «ættleidd barn»	«adoptivbarn»
§ 21, 1. stk., 1. regla o. fr.: «...skild lit....hjúnaskilnaði»	«separerað ella skild....»
§ 21, 2. stk., 2. og 3. regla: «skild .... hjúnaskilnaði»	«separerað ella skild»
§ 21, 2. stk., 6. regla o. fr.: «...treytarnar .... hendi»	«...treytirnar eru fyri, at ley mugu roknast at liva hvørt sær, sbr. 17. gr. 3. stk., ...»
§ 22, 2. stk., 2. regla: «figgjarfelag við hlit deyða hjúnið.»	«samlúgv»
§ 22, 2. stk., 7. regla: «eintkjunans»	«einkjunanns»
§ 22, 2. stk., 9. og 10. regla «hilt hjúnið er fallið frá»	«annað teirra er deyt»
§ 22, 3. stk., 2. regla: «hjúnið» gongur út	
§ 24, 1. stk., 2. regla: «her á landi»	«í Føroyum»
§ 24, 2. stk., 2. regla: «her á landi»	«í Føroyum»
§ 25, 1. stk., 3. regla: «her á landi»	«í Føroyum»
og í 20. reglu, «høvd»	«likin»

§ 26, 1. stk., 5. regla: «sítt, er»	«...sítt, sbr. 18. gr., er...»
og verðu «50 kr., 40 kr. og 30 kr.»	«75 kr., 60 kr. og 45 kr.»
sama grein og stk. 15. regla: «ættleidd barn»	«uloplivbarn»
§ 27, 2. stk., 5. regla: «bæði av ...» og restin av stk. gongur út, í staðin kemur: «eftir tí í 1. stk. nevnda stiga.	§ 27, stk. 2, 5. regla: donsk tekst: «ifels som...» og resten af stk. 2 udgår, «efter den i stk. 1 nævnte skala»
§ 28, 2. stk., 10. regla: «í landinum»	«í Føroyum»
§ 28, 3. stk., 10. regla: «uttanoyggja»	«uttan fyri Føroyar»
§ 29, 7. regla: og 15. regla: «í landinum»	«í Føroyum»
§ 30, 1. og 2. stk. broyta mánaða til ársfjórðing. (felur so saman við nýggju dansku reglurnar)	
§ 30, 3. stk., 8. regla: «her á landi»	«í Føroyum»
§ 32, 1. stk., seinasta orð: «líkningarvoldunum»	«líkningarvaldunum»
og í 2. stk.: «líkningarvoldini»	«líkningarvaldini»
§ 32, 4. stk., 6. regla: «sum samsvara ....hennara».	«líkur teknum, í galdandi eru fyri Tórshavnar líkningarnevnd.»
§ 33, 2. stk., 2. og 3. punktum: ganga út og í staðin kemur	«Frádráttur skal verða gjordur í tí útroknaða skattinum og skal hann í minnsta lagi vera 50 kr. fyri barnið og má ikki verða meira enn 70 kr. Hann skal vera eins fyri øll uttan onn til inntøkuna.»
§ 35, 2. stk., 3. regla: «....vøldini allar..»	«..valdini við serstakari kunngerð allar..»
§ 35, 2. stk., 2. punktum: verður strikað	
§ 35, 5. stk., seinasta punktum: gongur út úr lógartekstini og verður flutt til vlðmerkingarnar.	

§ 35, 6. stk., 3. regla: «... av hvörjum slagi hon er ...»	verður strikað
§ 37, 2. stk., 2. regla: «... hava mist fíggjarráði...»	«gjördir eru ómyndingar...»
§ 38, 2. stk., 10. regla: uppískoyti aftaná rakstrarroknskap	«... og fíggjarstand...»
§ 39, b, 8. regla: «skattanevndarinnar»	«líkningarvaldanna»
§ 41, 1. stk., 2. regla: «í 39. gr.»	«í 38. og 39. gr.»
§ 42, 1. stk., 1. regla; o. fr.: «Fyri 1. februar .... sendir út»	«Innan 15. januar ger kommunala líkningarvaldið á eitnum av líkningarráðnum stílað og útsendum eyðublað manntalslista...»
og í donsku tekstini «landsstyret»	«ligningsraadet»
§ 42, 2. stk., 4. regla: «her á landi»	«í Föroyum»
§ 43, 3. stk., 10. regla: «her á landi»	«í Föroyum»
§ 43, 6. stk., 2. regla: «trongligt hússetur»	«tungt hús»
§ 44, 1. stk., 4. regla: «hansara endalign útkomu inntöku og skattainntöku»	«hansara inntöku, endaligu útkomu skattainntöku...»
§ 44, 2. stk., 2.- 6. regla: «er tann .... kommununi.»	«verður tann í 1. stk. umrædda listi lagdur fram til alment eftirlit á högligum stað fyri ibúgvararnar, aftaná at hetta frammanundan er kunngjört soleiðis, sum vanligt er í kommununi»
§ 45, 2. stk., 9. regla og 3. stk. 1. regla: «áðrenn	«innan»
§ 45, 3. stk., seinasta orð: «sannanir»	«právförslu»

§ 45, 2. stk., uppískoyti í dansku tekstini	«,jfr. § 60.»
§ 48, 1. stk., 2. og 3. regla: «skattgjaldið» og «býtt»	«skattarin» og «býttur»
§ 48, 2. stk., 1. regla: «her á landi»	«í Föroyum»
§ 48, 3. stk., 1. regla: «málir undir..»	«málið fyri..»
§ 49. Yvirskrift. «atvinnukommunana»	«vinnukommununa»
«atvinna verður í öllum förum	broytt til «vinna»
§ 49, 1. stk., 1. regla: «her á landi»	«í Föroyum»
6—7. regla: «málsgrein»	«grein»
10. regla: «í útlondum»	«utanfyri Föroyar»
§ 49, 2. stk., 1) 1. regla: «handhavi ella samhandhavi»	«eigari ella sameigari»
7. regla: «vinnu við»	«vinnu av»
11. regla: «útibúgv»	«filialur»
§ 55, 1. stk. gongur út	«Eftirlit við skattaálikningini er í hondum Likningarráð Föroya.»
§ 55, 2. stk., 1. regla: «Likningarráðið»	«Likningarráð Föroya»
§ 56, 1. stk., 3. og 4. regla «í öllum kommununum» og «á rettau og samlikan hátt og»	verður strikað.
§ 56, 2. stk., 8. regla: «skattgjald»	«ein álíkning»
§ 57, 1. stk., næstseinasta orð: «úrskurð»	«avgerð»
§ 57, 2. stk., 1 2. regla: «kommunustýrið (likningarnevndin)	«tað kommunala likningarvaldið»

§ 58, 3. stk., 1. regla: danska tekstin: aftaná «stk. 3» verður sett	«1 og 5»
§ 59, 1. stk. b: 2. 1. og 5. regla: «aftur» «ættleidd börn» «ættleiðingar-»	«upp» «adoplivbörn» «adoptiv-»
§ 60, 1. stk., 3. regla: «inntöku»	«í skattskyldugu inntökuni»
og í donsku tekstini aftaná «af» i 3. reglu:	«den skattepligtige»
§ 61, 1. stk., 1. regla: «skattanevndin»	«landsskattanevndin»
3. regla: «sannunnarskjöl»	«prövskjöl»
§ 61, 2. stk., 1. regla: «leitar»	«fær»
§ 63, 1. stk., 5. regla: donsk tekst: aftaná «ligningsraadet»	«. . jfr. § 35, 5. og 6. stk.
§ 63, 2. stk., 1. regla: donsk tekst: «skattepligtig»	verður strikað.
§ 64, 1), næstseinasta regla: «hvörji atferð»	«hvörju mannagongd»
§ 64, 2), 2. regla: «við metingina.»	«Sum leiðbeinandi við metingina. .»
§ 64, 4), 2. og 6. regla: «rakstraregögn»	«rakstrarumboð»
3. og 5. regla: «skattfrælsa» «skattfrælsar»	«skattafría» «skattfrían»
§ 64, 7), 2. regla og 9), 2. regla: «navnvirði»	«tilskilaða virði»
§ 64, 8), 1. regla: «gang. .»	«kurs. .»
§ 64, 10), 1. regla: «Avhendilig»	«Sonn»

§ 70, 1. og 2. regla: «skiljast til borð og song ella við fullum hjúnaskilnað, tá innsendir hvört hjúnið sær..»	«verða separerað ella skild, tá innsendir hvör sær..»
8. regla: «lutaðar eru»	«tilkoma»
§ 73, 3. stk., 8. regla: «boðbrevi»	«fyriskipan»
§ 78, 1. stk., 7. regla: «1 %»	«6 %»
§ 81, Jarðaskattur: jmt. § 11, 1. stk. 2. punktum um húsaskatt í Tórshavn. Umhugsa at strika henda skatt.	
§ 82, 4. stk., 1. regla: «sum hevur»	«sum ikki hevur»
§ 82, nýtt 5 stk. «Landsstýrið hevur heimild til við serligari kunngerð at broyta reglurnar um skattainnkrevjingina.»	«Landsstyret er bemyndiget til ved særlig kundgörelse at ændre reglerne for skatteopkrævningen.»
§ 85, 1. stk., 25. regla: «fyri»	«áðrenn»
§ 89, 1. stk., 1. regla: «Eingin»	«Ongin»
§ 89, 3. stk., 7. regla« «1 %»	«6 %»
§ 96, 5. regla: «trongum hússetri»	«tungum húsi»
§§ 97 og 99: Öll árstöl verða sett 4 hægri.	1956/57 til 1960/61; 1955 til 1959; 1956 til 1960.
§ 98, 2. stk. 1) uppískoyti «lögtingslóg nr. 32 frá 22. okt. 1951.»	«lagtingslov nr. 32 af 22. okt. 1951.»
§ 99, 2. stk. gongur út.	
/ 99, 3. stk.:	«2. stk.»
föroysk «3. stk.»	«Stk. 2.»
dansk «Stk. 3.»	

Uppskot til landsskattastiga samsvarandi lögtingslóg nr. 17 frá 28. mars 1952, har eykaskatturin 30 % er uppíroknaður, og prosentini sett hareftir.

Er inntökan	meira minni enn	verður goldið	av og av hinum
2.000 kr.	3.000 kr.	20 kr.	2.000 3 %
3.000	4.000	50	3.000 1 %
4.000	5.000	90	4.000 5 %
5.000	6.000	140	5.000 8 %
6.000	7.000	220	6.000 11 %
7.000	8.000	330	7.000 13 %
8.000	10.000	460	8.000 11 %
10.000	15.000	740	10.000 16 %
15.000	20.000	1.540	15.000 26 %
20.000	30.000	2.840	20.000 33 %
30.000	40.000	6.140	30.000 41 %
40.000	50.000	10.240	40.000 58 %
50.000	75.000	16.040	50.000 62 %
75.000	100.000	31.540	75.000 65 %
100.000	200.000	47.790	100.000 68 %
200.000	400.000	115.790	200.000 71 %
meira enn 400.000 kr.		257.790	400.000 71 %

Tey 30 % eru uppítald inntökunum frá 5.000 kr. og uppeftir soleiðis, at yvirgongdin er gjörd liðandi. Stigin er gjördur við heilum prosentum. Til samanetingar er niðanfyri hin núgaldandi stigin, har prosentini av inntökum meira enn 5.000 kr. eru beinleiðis uppíroknaðar.

2.000 kr.	3.000 kr.	20 kr	2.000 kr.	3 %
3.000	4.000	50	3.000	1 %
4.000	5.000	90	4.000	5 %
5.000	6.000	182	5.000	6 % (30%)
6.000	7.000	260	6.000	7½ %
7.000	8.000	357,50	7.000	9 %
8.000	10.000	474,50	8.000	10 %
10.000	15.000	734,50	10.000	12 %
15.000	20.000	1.514,50	15.000	20 %
20.000	30.000	2.814,50	20.000	25 %
30.000	40.000	6.064,50	30.000	31 %
40.000	50.000	10.094,50	40.000	44 %
50.000	75.000	15.814,50	50.000	47 %
75.000	100.000	31.089,50	75.000	50 %
100.000	200.000	47.339,50	100.000	52 %
200.000	400.000	114.939,50	200.000	54 %
meira enn 400.000 kr.		255.339,50	400.000	56 %

1. viðgerð 18. februar, og 13. april legði skattanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Hetta mál var av landsstýrinum lagt inn á ting 11. februar 1959, var til 1. viðgerð 18. februar og var tá heint í skattanevndina. Nevndin hevur síðani viðgjört málið, men við tað, at hetta mál er so stórt og umfatandi og setlanin er í næsta viku at enda hesa tingsetu, verður tað ikki möguligt í hesi tingsetu at seta fram endaligt uppskot. Skotið verður ti upp, at nevndin heldur áfram við viðgerðini og leggur málið aftur fyri tingið á ólavsöku.

UPPSKOT

Nevndin, ið vald var til viðgerðar av skattalógini, verður sitandi til tingið kemur samanaftur á ólavsöku.

2. viðgerð 15. april 1959.

Tingformaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Erlendi Patursson og K. Wang:

Uppi uppskot nevndarinnar verður sett:
«og leggur tá fram fullfíggjað uppskot».

Uppskot nevndinnar samtykt 26 0.

---

15. Broyting í reglunum um serforsorg.

Ár 1959, 16. februar legði Poul Petersen löglingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

löglingslóg um uppiskoyti til galdandi reglur um serforsorg.

§ 1.
Persónar, sum á 16. ári sínum

lagtingslov om tillæg til gældende bestemmelser om serforsorg.

§ 1.
Personer, som ved deres fyldte

sleppa ikki ella hava ikki sloppið í sjúkakassa orsakað av lamilsi eftir § 7 í kgl. fyriskipan nr. 59 frá 21. februar 1930 um góðkendar sjúkrakassar í Føroyum, eiga rætt til avlamisstyrk eftir sonnu reglum, sum vóru teir undir lóg um avlamisrentu v. m.

Annars galda reglurnar í bráðfongis kunngerð frá 1. oktober 1910.

§ 2.

Landskassin ber meirnútrejðslurnar eftir hesi lóg (smbr. lögtingslóg nr. 21 frá 7. februar 1950).

§ 3.

Henda lögtingslóg kemur í gildi 1. apríl 1959.

15. naar ikke kan blive optaget eller har kunnet optages i en anerkendt sygekasse paa grund af vanførhed ifølge § 7 i kgl. anordning nr. 59 af 21. februar 1930 om anerkendte sygekasser paa Færøerne, faar ret til invalideunderstøttelse efter samme regler, som om de var omfattet af lov om invaliderente m. v.

Iøvrigt gælder bestemmelserne i midlertidige bestemmelser nr. 31 af 1. oktober 1910.

§ 2.

Merudgifterne i henhold til denne lov udredes af landskassen (jfr. lagtingslov nr. 21 af 7. februar 1950).

§ 3.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. april 1959.

Viðmerkingar:

Tað, sum ynskist broytt, er, at persónar, sum eru so fyri, tá ið teir fylla sini 15 ár, og sum eiga rætfindi av sjúkrakassa til tann dagin av foreldranna lívaskapi, eiga at hava javnbjóðis rættindir til almenna forsorg, hóast teir ikki lúka treytina eftir § 7 í kgl. fyriskipan nr. 59 frá 21/2 1930 um góðkendar sjúkakassar, sum er soljóðandi:

«Personer, der paa grund af, at de lider af en hyppig tilbagevendende sygdom eller aandsvaghed, ikke kan anses for arbejdsdygtige, kan ikke optages i en anerkendt sygekasse.»

Eg eri biðin at fáa regluna rúmkaða fyri teir, sum eru ikki arbeiðsfærir orsakað av lamilsi. Hesir persónar eru eina ringast fyri. Teir eru tíbetur fáir, men tað má kennast fungt hjá teim ikki at eiga rætfindir til almenna forsorg, eftirsum teir bert kunnu njóta gott av reglum um styrk í heimarókt (smbr. lóg nr. 122 frá 15. maes 1939, bráðfongis kunngerð nr. 31 frá 1. oktober 1910 og lögtingslóg nr. 21 frá 7. februar 1950).

Tað hevði verið ynskiligt, um reglan kundi rúmkast at koma fleiri til góðar, eftir uppgávu frá ríkisumboðnum eru í lötuni 35, sum koma undir galdandi skipan.

So stutt loyvi eg mær at leggja lógaruppskot fram til tingsins vælvilja.

1. viðgerð 20. februar, og 6. apríl legði sociala nevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Ár 1959, tann 16. februar, legði Poul Petersen, lögtingsmaður uppskot fram á ting um uppískoyti til galdandi reglur um serforsorg.

Málið varð beint í Sosialu nevndina varð til 1. viðgerð 20. februar 1959 og málið hevur verið til viðgerðar í nevndini, ið er samd um, at tað sum verður sipað til við hesum lógaruppskoti, eigur at verða framt í mest möguligum mun.

Tá ið tað er nevndini kunnugt, at landsstýrið hevur í ætlan at skipa eina nevnd at umhugsa og seta uppskot um at fáa bött um og ájourført her umræddu og aðrar sosialar lattir við viðurskiftini á hesum ökjum í hinum partinum í ríkinum, heldur meiriluti í nevndini (J. Lindenskov, D. Nolsöe og H. Petersen), at uppskotið eigur at verða sent landsstýrinum til kanningar í nevndu ætlaðu nevnd.

Ein minniluti í nevndini (K. Wang og J. H. Joensen) heldur, at tað er stórur mismunur í teirri sosialu löggávuni, sjálvt um bæði uppskotini um fólkapensjón og avlamistrygging verða samtykt, og áttu hesir mismunir at verið rettaðir samstundis. Minnilutin má viðgangga, at uppskotið frá Poul Petersen bert fevnir um ein part av nevndu mismunum, men tað kann onki skaða, um uppskotið frá Poul Petersen verður samtykt, tvörturímóti vil tað hjálpa nökrum, sum eru illa stödd. Minnilutin (K. Wang og J. H. Joensen) mælir tí til, at tingið samtykkir uppskotið frá Poul Petersen, men er annars samdur við meirilutan um, at fáa bött um og á jourført sosialu löggávuna skjótast gjörligt, sum í áliti meirilutans tilskilað.

UPPSKOT

Málið verður sent landsstýrinum til umhugsunar, so sum tilskilað í álitinum.

2. viðgerð 9. apríl og 3. viðgerð 15. apríl 1959.

Tingformaðurin framlegði broytingaruppskot frá Poul Petersen o. fl.:

Í staðin fyri «hamilsi eftir § 7» «vanförhed ifölge § 7» verður sett «óarbeiðsförleika eftir § 7, stk. 2» «uarbejdsförhed ifölge § 7, stk. 2»

Broytingaruppskotið fall 13 - 0.
Lógaruppskotið fall 15 - 0.
Uppskot nevndinnar samtykt 16 - 0.

16. Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin 1959/60.

Ár 1959, 16. februar legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin fyri fíggjarárið 1959/60.

INNTØKUR:

1. Endurgjald fyri fíggjund	7.800,00	7.800,00
2. Studningur úr landskassanum	50.000,00	75.000,00
3. Ogn Grunsins pr. 1/4 1957	+ 3.429,75	
4. Ætlað ogn grunsins pr. 1/4 1959		
	54.370,25	82.800,00

ÚTREIÐSLUR:

A. vanligar umvælingar av kirkjum	22.639,15	50.000
B. kirkjugarðar	0,00	10.000
C. prestaflutningur	8.962,00	9.500
D. brunatrygging v. m.	5.073,75	5.500
E. studningur til nýggjar kirkjur	10.000,00	
F. ogn grunsins pr. 31/3-1958	7.695,35	
G. ætlað ogn grunsins pr. 1/4-1960		7.800
	54.370,25	82.800,00

Viðmerkingar:

Inntøkur 1958/59:

1. endurgjald fyri fíggjund	7.800.	
2. studningur úr landskassanum	70.000.	77.800

Útreiðslur 1958/59	pr. 1/2-1959	ætlað pr. 31/3-59
A. vanligar umvælingar ..... ca.	11.700.	
B. kirkjugarðar	10.057.	
C. prestaflutningur	9.800.	
D. brunatrygging v. m.	6.008.	
E. studningur til nýggjar kirkjur	5.000.	
F. ogn grunsins pr. 1/4-1959		0,00

Ad. A. vanligar umvælingar:

1955/56 ..... kr. 22.922.

1956/57	15.104.
1957/58	22.639.

Miðal cu. kr. 30.000.-

Við skrivi frá 13. í hesum hevur kirkjustjórnin sent landsstýrinum yvirlit yvir játtaðar studningar til umvælingar og hvussu mikið ávist er av teim.

Eftir yvirlitinum eru til dato játtað kr. 66.810,99 av teim eru kr. 43.962,92 ávistar.

Haraftrat sigur kirkjustjórnin at umsóknir eru inni fyri einar kr. 15.000. sum eru enn ikki endaliga viðgjørdar.

So stuttt verður skotið upp at játta kr. 50.000. 1959/60.

Ad. B. studningur til kirkjugarðar:
Frá 1/4-1958 til 1/2-1959 hava útreiðslurnar verið kr. 10.057. Fyri komandi figgjarár ætlast útreiðslurnar til kr. 10.000.

Ad. E. studningur til nýggjar kirkjur:
Fyri játtaðir studningar eru allir rindaðir. Tessvegna onki avsett á figgjarætlanini.

1. viðgerð 20. februar, og 17. mars legði kirkjunevndin fram soljóðandi

ALIT

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið uppskot til figgjarætlan fyri kirkjugrunnin fyri figgjarárið 1959/60.

Málið varð undir 1. viðgerð beint í kirkjunevndina.

Nevndin, ið hevur viðgjört málið, er samt um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 18. mars og 3. viðgerð 19. mars 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 23 0.

17. Flogsamband við útheimin.

Ár 1959, 19. februar legði Kjartan Mohr lögtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
avgerðar: flogsamband við útheimin.

At fáa flogsamband millum Föroyar og útheimin er eitt mál, sum leingi hevur verið átroðkandi at fáa framt, og er flogsambandið knýtt saman við gerðan av flogvöllum, hvar kanningar verða gjørdar, um hvar best er at gera flogvöll.

Nú eru líkindi hjá Föroya lögtingi gjögnum landsstýrið at taka upp samráðingar við ríkisstýrið um at knýta tað ætlaða flogsamband við Grönland, sum nú er í umbúna, við flogsamband yvir Föroyar, tá hugsað verður um ikki at hava ferðafólk við skipum á vetrardegi til Grönlands.

Hetta mál verður nú um dagarnar tikið upp í danska fólkatinginum, og verður tí lögtingið at biðja landsstýrið um at reisa spurningin samstundis, sum málið kemur fyri í fólkatinginum.

UPPSKOT

Lögtingið biður landsstýrið reisa spurningin um flogsamband við útheimin, samstundis sum málið kemur fyri í fólkatinginum.

1. viðgerð 21. februar, og 19. mars legði flognevndin fram soljóðandi

ÁLIT

19. februar 1959 legði Kjartan Mohr, lögtingsmaður, vegna Föroya Framburðsflokk, uppskot til avgerðar: Flogsamband við útheimin.

Málið var undir 1. viðgerð beint í serstaka 5 manna nevnd.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja fylgjandi

UPPSKOT

Landsstýrið verður biðið um at kanna og um mögulígt at framskunda málið viðvikjandi flogsambandi Föroyar-útheimin.

2. viðgerð 21. mars 1959.

Uppskot nevndinnar samtykt 20 0.

18. Sjómannsløgtingslóg.

Ár 1959, 20. februar legði lögmaður fram soljóðandi framlöguskriv:

Landsstýrið loyvir sær at biðja tingið taka uppskot til sjómannslögtingslóg til viðgerðar og loyvir sær at vísa til löglingsmál nr. 38/1956, tingtíðindi 1956, bls. 111 og skjal 3, og löglingsmál nr. 1/1957, tingtíðindi 1957, bls. 16.

1. viðgerð 23. februar 1959 og málið beint til lógarnevndina.

---

19. Tollfrítt tubbak.

Ár 1959, 20. februar legði Erlendur Patursson löglingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
lóg um tollfrítt tubbak til langfarafiskimenn.

§ 1.
Langfarafiskimenn eins og útróðrarmenn til lands í Grönlandi eiga rætt til tollfrítt tubbak og tollfríar tubbaksvörur, meðan teir eru til fiskiskap.

§ 2.
Landsstýrið setir nærri reglur eftir hesi lóg.

§ 3.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

GREINARGERÐ:
Í 1954 heitti Föroya fiskimannafelag á Föroya lögting um at fáa slíka skipan setta í gildi, at langfarafiskimenn og útróðrarmenn til lands í Grönlandi fingu tollfrítt tubbak og tollfríar tubbaksvörur, meðan teir vóru til fiskiskap.

Málið varð ikki framt tá og ikki síðani. Tað verður nú av nýggjum lagt fyri tingið við hesum lógaruppskoti.

Nærri reglur um hetta eiga at setast í reglugerð, sum landsstýrið setur.

Í henni eigur at verða gjörd skipan, sum sigur hvussu stóra nögd av tubbakki hvör maður skal hava um dagin ella um vikuna, og at so verður útroknað eftir hesi skipan av skiparanum á byrjun fiskifari, sum kemur her undir, hvussu stóra nögd hann skal hava í alf til alla manningina fyri fiskitúrin, og so at skiparin til tann handil, hann ætlar at keypa tubbakkið frá, sendir inn bileggingina. Hesin handil skal kanna, hvört bileggingin er eftir reglunum, og er hon tað, skal tubbakkið sendast til tollstöðina á staðnum, sum so skal ansa eftir, at tubbakkið kemur umborð og verður innsigluð. Aftaná innsigling skulu gilda vanligar treytir, sum eru í slíkum málum. Hesin handil, sum sell hevur tubbakkið, hevur óivað frammanundan goldið innflutningsgjaldið, og skal hesin samstundis sum vörun er niðurpakkað, hava rætt til at fáa endurgoldið frá gjaldstovuni innflutningsgjaldið, ið goldið er, og skipið skal saleiðis bert gjalda fyri söluprís + innflutningsgjald.

Slík skipan kann ikki gjögnumföras uttan tolleftirlitið, og verður tí óivað neyðugt, at hetta tubbak einans fæst til keyps á teimum stóru plássum í landinum har tollstöð er.

Ymiskar meiningar kunna vera um, hvussu stóra nögd menn skulu fáa tollfría, men hóskandi kundi verið sum hámark 25 sigarettir um dagin og at menn so sjálvir kunna velja, hvört teir vilja hava lidnar sigarettir ella tubbak og pappír. Eisini eigur reykitubbak, snús og skrá at koma undir hesa skipan.

Skipanin er hugsað fyri langfarafiskinum, t. e. teir sum fiska við Island, Grönland, New Foundland, eystanfyri og á öðrum fjarleiðum, og so eisini fyri Grönlandsútróðrarmenn.

1. viðgerð 23. februar, og 6. april legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Ár 1959 tann 20. februar var lagt fram á ting uppskot um tollfrítt tubbakk til langfarafiskinum. Málið kom til 1. viðgerð 23. februar og var beint í figgjarnevndina. Figgjarnevndin hevur viðgjört málið og hevur biðið gjaldstovuna upplýsi, hvussu nógv landskassin verður at fáa minni í inntöku, um hetta uppskot verður sett í gildi. Frá gjaldstovuni hevur nevndin fingið upplýsingur, har millum annað verður sagt: «Snarfremt de danske beslemmelser blev indført paa Færöerne, vilde det dreje sig om 22.059.000 cigaretter aarlig, svarende til et indtalbeløb paa kr. 2.205.900. En saa stor indtægtsnedgang vil der dog ikke blive tale om, da

1) man maa antage, at det ikke er alle fiskere, der vil köbe rationen,
2) adskillige vil i stedet for cigaretter köbe tobak, skraa m. v., der er billigere i told,
3) og endvidere kan det anföres, at i Torvejen bliver ikke alle saadanne varer köbt her paa öerne, da fiskerne ofte köber disse varer under fiskeriet ved Grönland eller i England, saaledes at en even-

tuel proviantering af tobaksvarer ikke i fuldt omfang gaar fra den fortoldede handel her paa öerne.

Naar foranstaaende er taget i betragtning, vil man anslaa den direkte nedgang i landskassens indtægter til mellem 400.000 og 500.000 kr. Beløbet kan dog ikke beregnes, hvorfor der her kun kan blive tale om et skön.»

Minnilutin (J. Fr. Øregaard) heldur, at tað í Föroyum eins og aðrar staðir eigur at vera ein frígoymsla, har ið skip kunnu fáa ótollaðar vörur, og har stór handilsvirkir eisini kunnu hava sínar tollvörur, til tess tær verða nýttar.

Hvörjar vörur föroyskir fiskimenn skulu kunna fáa tollfríar, og hvussu stórar nögdir, má tingið taka stöðu til. Men skal ein slík skipan koma í lag, má goymsluhús verða bygt, og um ikki umsitingarútreiðslurnar skulu verða líka stórar sum sjálvur tollmissurin, verður tað altandi neyðugt, at henda frígoymsla bert verður á einum plássi í Föroyum.

Tað uppskot sum fyriliggur, miðar ímóti umvegis at veita summum fiskimonnum eitt tilskot til inntökur teirra. Minnilutin (J. Fr. Øregaard) er samdur við uppskotsstillararnar í, at fiskimenn fáa ov lítið burtur úr arbeiði sínum, og leggur tí javnaðarflokkurin í fyrstu syftu alla orku í at ökja um inntökur fiskimansins fyrst og fremst við at veita teimum betri skip, soleiðis at teir beinleiðis vegna ökta framleiðslu kunnu vinna meira. Men fyri at fremja hesi stóru tiltök fiskimonnum til frama, verður neyðugt at nýta tingsins figgjarorku út í ætir, so endurnýggingin av skipaflotanum við nýmótans fiskiförum kann verða framd í beiskundi. Hetta er av hinum mest avgerandi týdningi, fer fram um alt, og er tann altavgerandi spurningurin, og til tess hann er loystur, má annað bíða, ið ikki er so avgerandi fyri fiskimannin.

Minnilutin vil tí skjóta upp, at landsstýrið umhugsar spurningin um at tað á einum ella öðrum stað í Föroyum verður bygt goymsluhús, har tollvörur kunnu verða lagdar upp. Tað verður neyðugt, at hetta goymslu hús liggur soleiðis fyri, at skip kunna koma til í öllum veðri og at húsið liggur væl fyri avgreiðslu.

Ein minniluti (Sigurð Joensen og Johan Simonsen) nælir til at samtykkja uppskot tjóðveldisflokksins við tí broyting, at tað í § 1 verður sett í fyrstu reglu millum «Grönland» og «eiga»: «útróðrarmenn heima í Föroyum, sum eru mynstraðir».

Ein minniluti (Poul Petersen) heldur fyri:

Eftir hondini koma nógv skip henda vegin millum ár og dag. Tað er ikki so lítið m.a. farma- og ferðaskipini nýta av tubbakki, rúsdrekka og öðrum högt tollaðum vörum. Föroyskur handil er avskorin frá hesum vinningi, tí ongin frígoymsla er her á landi.

Treytin fyri tollfríum tubbakki v.m. til fiskimenn og aðrar hvussu mikið siglandi menn kunnu hava aftur við sær av tollfríum tubbakki v.m., tá ið teir koma aftur av ferð — má vera ein frígoymsla.

Tað er tí skotið upp, at landsstýrið fær heimild at útvega pening til eina tollbúð, fyri fyrst í Tórshavn og har gera frígoymslu, so skjólt likindir eru til tess.

So statt setur minnilutin (Poul Petersen) fram soljóðandi

UPPSKOT

til

lögtingslóg um frígoymslu í Tórshavn.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt at gera og rökja frígoymslu av spirituosa, vini, öli og tubbakksvörum og um til ber eisini av öðrum sum duga til tess.

§ 2.

Endamál lóginnar er at gera fristað hjá vörum sum hesum soleiðis, at tær kunnu flytast inn beinleiðis á frígoymslu har at goymast og farast um sum vóru tær yvirhövur uttanfyri föroyskt territorium, uttan fyri tær at rinda annað gjald, so leingi tær eru á goymsluni, enn lað avgjald, sum fyrisett er fyri frígoymsluna og uttan skerjing í frígoymslutíð, so leingi avgjald verður rindað ræffstundis.

Ikki fyrr enn vöra verður latin út av frígoymsluni, kemur hon undir fyrisett innflutningsgjald, uttan so vöran fer útaftur av landinum.

Landsstýrið fyrisetur gjöllari reglur fyri nögdir og treytir fyri útflýgging av tollvörum av frígoymsluni sum skipsvislir og tílíkt.

§ 3.

Landsstýrinum er heimilt at læna töryandi pening til gerð av frígoymslu og eftir samráð við lögtingsins fíggjarnevnd gera gjölligari reglur fyri rakstur og fyriseting av gjaldinum eftir § 2 o. t.

lagtingslov om frilager i Tórshavn.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til for landskassens regning at oprette og drive et frilager i Tórshavn for oplag af spirituosa, vin, öl og tobaksvarer og om muligt tillige andre dertil egnede toldvarer.

§ 2.

Lovens formaal er at oprette et fristed for de paagældende varer saaledes, at disse kan indföres direkte til frilageret for der at opbevares og i alle maader behandles som om de befandt sig udenfor det færöske territorium og uden derfor at erlægge anden afgift, saa længe de forbliver paa lageret, end den for frilageret fastsatte lagerafgift og uden indskrænkning i lagertiden, saalænge den fastsatte afgift erlægges rettidigt.

Först ved udlevering af en vare fra frilageret erlægges de tarifmæssige indförselsafgifter, medmindre varen genudföres.

Landsstyret fastsætter de nærmere bestemmelser vedrörende kvantu og betingelser iøvrigt for udlevering af toldvarer fra frilageret til skibsproviant og lignende.

§ 3.

Landsstyret bemyndiges til at optage de nödvendige laan til oprettelse af et frilager og efter samraad med lagtingets finansudvalg fastsætte de nærmere bestemmelser vedrörende driften samt fastsættelsen af afgiften efter § 2 o. l.

§ 4.

Landsstýrinum er eisini heimilt at fyriseta förvandi reglur um umseting og pantseting av tilikum vörum, sum kunnu fara í umfar her á landi.

§ 5.

Brot móti reglunum í hesi lög koma undir reglurnar í löglingslög nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broylingum um innflutningsgjöld v. m.

§ 6.

Henda löglingslög kemur í gildi 1. januar 1960.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges endvidere til at træffe de fornödne bestemmelser med hensyn til omsætning og pantsætning af saadanne varer, der kan göres til genstand for omsætning her i landet.

§ 5.

Overtrædelser af de her givne bestemmelser behandles efter reglerne i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 med senere ændringer om indförselsafgift m. v.

§ 6.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1960.

Minnilutin (J. Fr. Öregaard) setur fram fylgjandi

UPPSKOT

Landsstýrið verður biðið um at kanna spurningin um frigoymslur í Föroyum og leggja málið aftur fyri tingið við gjöllari lýsing av umsitingarmöguleikum og inntökumissionum við umrödda tollfría fubbakki.

UPPSKOT

frá minnilutanum (Sigurð Joensen og Johan Simonsen):

Í § 1 í uppskoti tjóðveldisflokksins í fyrstu reglu millum «Grönland» og «eiga» verður sett: «og áttróðrarmenn heima í Föroyum, sum eru myndstraðir.»

Ein annar minniluti (A. Djurhuus, Hans Iversen og S. Petersen) setur onki uppskot fram.

2. viðgerð 9. april 1959.

Minnilutauppskot frá Sigurð Joensen og Johan Simonsen fall	6	0.
— — J. F. Öregaard	8	0.
— — Poul Petersen	10	0.

Uppskot tjóðveldisflokksins § 1 var sett undir atkvöðu við navnakalli:
Ja atkvöddu: Johan Simonsen, Vilhelm Nielsen, Frederik Hansen, Jógvan Högnesen, Sigurð Joensen, Erlendur Paturssen, J. H. Joensen.

Atkvöddu ikki: Jacob Lindenskov, Jens Chr. Olsen, P. Petersen, Samuel Petersen, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, Hilmar Petersen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Øregaard.

Burtfarin: J. H. Danbjörg, J. P. Davidsen, Hans Iversen, Kj. Mohr og Hanus við Högadalsá.

Uppskotið fall 7-10.

20. Veðhald av láni til trolarin Jóannes Fonsdal.

Ár 1959, 21. februar legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

lögtingslóg um veðhald av láni til trolarin JÓANNES FONSDAL

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at taka veðhald av láni uppí kr. 800.000,- til keyp og ísetingar av nýggjum motori í trolarin Jóannes Fonsdal.

§ 2.

Henda lögtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om garanti for lån til trawleren JÓANNES FONSDAL

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for laan op til kr. 800.000,- til köb og indsættelse af ny motor i trawleren Jóannes Fonsdal.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir tí sum fyriliggur er tað neyðugt at trolarin Jóannes Fonsdal fær nýggjan og störri motor.

Eigararnir hava tilboð uppá 1500 hk. motor frá Kieler Howaldtwerke A-G í Kiel, sum ætlast at kosta ísettur um kr. 800.000,-. Ætlingin er at seta hann í í Sandefjord.

Tað verður eisini skilað til, at trolarin atlandi fer at hava eina skuld umleið 2,5 mill. krónur, tá ið hann er liðugur, men er hann lá vónandi eisini ein 1. flokks trolari.

Hesin trolari var sum kunnugt keyptur í Noreg, og landskassin skuldbant seg tá fyri eitt lán til keyp av honum. Lánið var upprunaliga kr. 2.250.000,— og er nú komið niður í 1.719.000,—.

Löglingið er soleiðis fíggjarliga sterkt interesserað í, at trolarin ikki fer úr vinnuni, men fær möguleika at halda fram og harvið vera förur at gjalda skuldina av sær.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri tingið til tingsins vælvild.

1. viðgerð 23. februar, og 26. februar legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Ár 1959 tann 21. februar legði lögmaður fram uppskot til lögtingslóg um veðhald av lání upp í kr. 800.000,— til keyp og íseting av motori í trolarin JóannesFonsdal.

Málið kom til 1. viðgerð 23. februar og var beint í fíggjarnevndina, sum hevur viðgjört málið.

Fíggjarnevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 27. februar og 3. viðgerð 2. mars 1959.

Uppskot landsstýrisins samtykt 22—0.

21. Bygging og rakstur av flaka- og frystivirkjum.

Ár 1959, 26. februar legði Erlendur Paturssson lögtingsmaður fram soljóðandi lógaruppskot:

1. §.

Landsstýrið letur, fyri rokning landskassans, byggja og reka frysti- og flakavirki, eitt í hvörji sýslu, og fær heimild til at taka lán til hesar byggingar og rakstur teirra.

Fyritökan kallast «Frystihús landsins».

2. §.

Yvirstjórn frystihúsanna, undir umsjón landsstýrismannsins í fiskivinnumálum, er hjá 3 manna stjórn, sum lögtingið velur fyri 1 ár í senn. Stjórnin velur sær sjálv formann. Landsstýrið ásetur lön og samsýning stjórnarlimanna. Undirskriftir frá 2 stjórnarlimum krevjast til at skuldbinda fyritökuna.

Stjórnin skipar forstjóra, sum hevur um hendur dagligu stjórn og umsjón við bygging og rekstri frystihúsanna. Hann hevur prokura og skuldbindur fyritökuna eftir reglunum um prokura. Stjórnin ásetur lön forstjórans.

3. §.

Rokuskapur frystihúsanna verður grannskoðaður av grannskoðarum lögtingsins.

4. §.

Stjórnin fyrireikar og tekur avgerðir um bygging frystihúsanna og skal samráðast við søknarstýri, útgerðarmenn (bátaeigarar) og fiskimenn (útróðrarmenn) hvar í hvörji sýslu tey skulu byggjast, so eisini um stödd teirra og innretting.

Endaligar avgerðir um bygging í hvörjum staði skulu verða tiknar í samráð við landsstýrismann í fiskivinnumálum.

Øll byggingar- og innrettingarvinna skal verða boðin út í almennari lisitation.

Grundökini, sum fingin verða til frystihúsini, skulu vera so stór, at góðir möguleikar verða til uppí- og afturatbyggingum í framtiðini.

5. §.

Frystihús landsins keypa ráfisk til flakingar og frystingar. Ráfiskaprísirnir verða ásettir av stjórnini og skulu vera hinir sonn sum í öllum frystihúsunum.

Frystihúsini skulu hava á goymslu ríviligar nögdir av agni og ísi. Teimum er heimilt at reka handil við vanligum útgerðarvörum. Stjórn frystihúsanna ásetur útsölupríslrnar á hesum vörum.

Í frystihúsunum skulu vera rúm har bátaeigarar og útróðrarmenn kunna goyma reiðskap og annan útlúnað.

Í frystihúsunum skulu vera rúm til lýsibræðing og mjölframleiðslu.

6. §.

Stjórn og forstjóri frystihúsanna skipa fyri sölu og útflutningi av framleiðsluni.

7. §.

Landsstýrismaður í fiskivinnumálum setur nærri reglugerð eftir hesi lög, har í millum starvsreglugerð fyri stjórn frystihúsanna.

8. §.

Henda lög kemur í gildi beinnan vegin.

Greinargerð:

Spurningurin um at reisa nútiðarhóskandi frysti- og flakavirki í landinum hevur leingi verið havdur á lofti miltum manna og eisini verið til umröðu á Føroya lögtingi. Einki veruligt er komið burtur úr hesum ætlanum. Nökur fá frystihús kunna skera og frysta flök, men framleiðsla til muns hevur ikki verið. Tó hevur tað verið öllum greitt, at slík framleiðsla gjördust neyðug fyri fiskiskap og fiskivinnu okkara.

Viðvíkjandi saltfiski og klippfiski eru viðurskiftini tey, at nógv av teim londum, sum keypa henda fisk, sjálv eru farin at framleiða meir og meir av honum. Sum heild sýnast mögulejkarnir fyri saltfiska- og klippfiskasölu at vera avmarkaðir. Hav aftur at koma serstakir trupulleikar við sölu í sunnanum marknaðarlondum okkara, nú seinast í Brasilia.

Hin vegin er reyndin tann, at eftirspurningurin eftir frystum fiskavörum, heilfrystum fiski, sild og flökum, er stöðugur og javnt vaksandi. Marknaðir fyri hesar vörur eru fyrst og fremst í Ameriku, Sviaríki, Mið-Europu og Eystur-Europu. Hesin fiskaídnaður er so eisini týðandi tátur í fiskivinnu Norðmanna og Íslendinga og sýnist at hera seg væl betur og geva störri úrtöku, bæði fyri skip og fiskimenn og fyri fyritökurnar á landi, enn saltfiska- og klippfiskaframleiðslan.

Rácvnið fáa vit fyrst og fremst frá fiskiskapinum undir Føroyum. M. a. skal verða beint á hýsuna og brosmuna sum rácvni. Men tralarar okkara kunna eisini fiska kongafisk og annan fisk og lata hesa veiðu til flakingar í föroyskum flakavirkjum. Loksins er at nema sildina.

Lógaruppskotið, ið her liggur fyri, setur sær sum mál at loysa hetta mál frá grundini og á rationellan hátt.

Hövuðsinnihaldið í uppskotinum er, at hitt almenna fer undir at byggja frysti- og flakavirki so mong, at bátar úr öllum landinum lögliga sleppa av við veiði sína til leirra. Bygt skal verða eitt frysti- og flakavirki í hvörji sýslu.

Við vissu ber ikki til nú frammanundan at ætla byggikostnað, men hann kemur at liggja um ½ til 1½ milj. kr. fyri hvört — alt eftir stödd og útbúnaði. Tað er tí eyðvitað, at landið verður at taka lán til hesar byggingar.

Í lógaruppskotinum verður sagt, at landið skal reka hesi frystihús, men einki skuldi tó verið til hindurs fyri, at frystihúsini uppkomin ella seinni verða seld fyritöku í viðkomandi sýslu, t. d. við luttöku frá útgerðarmonnum (bátaeigarum), fiskimonnum (útróðrarmonnum) og kommunum.

Viðvíkjandi stjórn frystihúsanna hevur tað verið hildið rettast, at lögtingið velur serstaka 3 manna stjórn fyri 4 ár í senn. Henda stjórn velur sjálv stjórnarformann. Yvirstjórn frystihúsanna verður tá í hondunum á hesi 3 mannastjórn, men sjálvsagt undir umsjón landsstýrisins, t. e. landsstýrismannsins í fiskivinnumálum.

Henda 3 manna stjórn skipar forstjóra, sum hevur í hondum dagliga

stjórn og umsjón við bygging frystihúsanna og fá ley eru uppkomin - - við rakstri teirra. Frystihúsini verða annars rikin sum vanlig vinnufyritöka og rokniskaparin verður grannskoðaður av grannskoðarum löglingsins.

Slík stórbygging sum henda, ið her er ætlað, krevur sjálvsagt mangar og miklar kanningar og fyrireikingar. Lógaruppskotið sigur fá, at stjórnin fyrireikar og tekur avgerðir um bygging frystihúsanna. Hon skal samráðast við sóknarstýri, útgerðarmenn og fiskimenn hvar í hvörji sýslu frystihúsini skulu byggjast, so eisini um stödd teirra og innrætting. Rættast verður hildið, at endanligar avgerðir um bygging í hvörjum staði skulu vera tiknar í samráð við landsstýrismannin í fiskivinnumálum.

Öll byggingar- og innrettingarvinna eigur at vera boðin út í almennari lisitatión, og ansað eigur at vera eftir, at grundökini sum frystihúsini verða bygd á, verða so stór, at góðir möguleikar verða til at byggja uppí og aftanat seinni. Umráðandi er at fáa góð grundöki, t. e. so nær við atlögubryggju sum gjörligt og við góðum til- og frákoyringarvegum.

Hesi frystihús skulu tá fyrst og fremst keypa ráfisk til flakingar og frystingar. Ráfiskaprisirnir skulu verða ásettir av frystihússtjórnini, og rætt verður hildið, at prisirnir sum veiðimenn fáa, verður eins í öllum frystihúsunum.

Tað kann bera so á, at hentari er at salta eitthvat av fiskinum, og skal hetta tá verða gjört. Frystihúsini verða tí eisini at hava goymslur fyri nakað av salti og saltfiski, men saltfiskaframleiðsla skuldi tó bert verið ítriv.

Frystihúsini verða at hava á goymslu ríviligar nögdir av agni og ísi, so at bátar og skip altíð kunna fáa tað teim törvar. Frystihúsunum eigur eisini at vera heimilt at hava handil við vanligum útgerðarvörum og tey skulu hava rúm har hátaeigarar og útróðrarmenn kunna goyma reiðskap og annað úthúnað.

Rúm eiga at verða gjörd til týsibræðing og til mjölframleiðslu.

Um söku og útflutning sigur lógaruppskotið, at stjórn og forstjóri frystihúsanna skipa fyri hesum máltum.

Tað hevur ikki verið hildið neyðugt - og er vatla gjörligt at seta nærri reglur í sjálva lógina um helta mál, og verður tí sagt, at landsstýrismaðnr í fiskivinnumálum gevur út reglugerð eftir lógini. Hon skal m. a. seta starvsreglur fyri frystihússtjórnina.

Ætlingin er, at lógin kemur í gildi beinan vegin.

1. viðgerð 27. februar, og 21. mars legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ALIT

Málið er lagt inn á ting av tjóðveldisflokkinum og kom til 1. viðgerð 27. februar og varð beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingunum verður vist á, at málið um flaka- og frystivirkir fleiri ferðir áður hevur verið til viðgerðar á tingi, uttan tó at nakað

verulígt er komið burtrúr, men at nökur virkir tó kunnu skera, frysta og goyma fryst flök.

§ 1 í lögaruppskotinum fyrisetur, at landsstýrið fyri landskassans rokning letur byggja og reka frysti- og flakavirkir eitt í hvörki sýslu og fær heimild til at taka lán til bygging og rekstur teirra.

Hvört virki verður mett at kosta millum ½ og 1½ millión krónur.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um tann stóra týðning, tað hevur, at á landi eru virkir, sum til eina og hvörja tíð kunnu viðgera tann fisk, sum fördur verður til lands, soleiðis sum keyparalondini ynskja tað.

Nevndin heldur tó, at hetta mál er so umfulandi og stillar so stór peningalig krög, at tað ikki er möguligt í ti tíð, ið eftir er av hesi lingsetu, at taka endaliga stöðu til málið, men mælir tinginum til at biðja landsstýrið kanna málið og leggja uppskot fyri tingið til komandi ólavsöku.

UPPSKOT

Málið verður sent landsstýrinum til kanningar, og uppskot lagt fram aftur á ólavsöku.

2. viðgerð 23. mars 1959.
Uppskotið frá Erlendi Patursson fall 7 - 0.
Uppskot nevndarinnar samtykt 22 - 0.

---

22. *Lán til byggingar av húsum til útróðrarmenn í Grønlandi.*

Ár 1959, 27. februar legði Henning Jespersen lögtingsmaður fram svljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um lán til byggingar av húsum til útróðrarmenn í Grönlandi.

1. §.

Landsstýrinum er heimilað úr landskassanum í fíggjarárinum 1959/60

í láni at veita uppí kr. 800.000.- til byggingar av húsum til útróðrarmenn í Grönlandi, tó ongantíð upp um 75 % av metingini.

2. §.

Lán, ið veitt verða eftir hesi lög, verða at vinda aftur eftir 4 árum og rentað við 4 % p. a.

3. §.

Henda lög kemur í gildi beinanvegin.

Greinargerð:

Soleiðis sum umstöðurnar eru hjá feinum flestu, ið ætla sær til Grönlands at rógva út í summar, er neyðugt at veita mótnum hjálp at reisa **búsini í Grönlandi.**

Föroya lögting hevur áður samtykt lög, hareftir kr. 100.000.- kunnu nýtast til at veita helvt av byggikostnaðinum í rentufrítum láni.

Bæði er henda veiting ov lítil og gjaldingarfreisturin 2 ár ov stuttur. — Skotið verður uppá, at lánini verða ikki rentufrí, men at vanlig inláusrenta verður latin, og at afturgjaldingarfreisturin verður 4 ár, og at lán kunnu takast uppí 75 % av metingini.

1. viðgerð 2. mars, og 23. mars legði fiskivinnunevndin fram svljóðandi

ÁLIT

Ár 1959, tann 27. februar legði tjóðveldisflokkurin fram á ting uppskot um lán til hús til útróðrarmenn í Grönlandi. Í § 1 verður skotið upp, at tað úr landskassanum í fíggjarárinum 1959/60 verður latið í láni uppí kr. 800.000.—, tó ikki upp um 75 % av metingini.

Á sama fundi setti J. H. Dambjörg í tingmáli nr. 21/1958 uppskot um at játta sum lán 50 % til bygging av skúrum til útróðrarmenn í Grönlandi.

Hesi mál vóru beind í fiskivinnunevndina, sum hevur viðgjört málini. Lögtingið hevur áður veitt lán uppí kr. 100.000.- til byggjan av skúrum í Grönlandi og hava hesi lán verið rentufrí og hevur treytin verið, at lánini skulu verða afturrindaði yvir 2 ár.

Í § 2 í uppskotinum frá tjóðveldisflokkinum verður skotið upp, at lántíðin verður 4 ár og at rentan verður 1 % p. a.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Haldor Hansen, Niels H. Jacobsen og Jens Chr. Olsen) heldur, at tað verður neyðugt at gera útvegir, so menn, sum fara til Grönlands at rógva út kunnu fáa lán til bygging av skurum, men meirilutin heldur ikki, at landskassin eigur at vera lángevari, men heldur taka ábyrgd av slíkum lánum og setur soslatt fram fylgjandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um veðhald av láni til bygging av skúrum til útróðrarmenn í Grönlandi

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd av lánum til skúrar, sum útróðrarmenn byggja í Grönlandi, tó onganlið upp um 75 % av byggikostnaðinum. Lánilidin verður 4 ár.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for laan til bygning af baadehuse til baadefiskeri i Grönland.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for laan til baadehuse, som baadfiskere lader opføre i Grönland, dog ikke over 75 % af byggeudgifterne. Laanene afdrages over 4 aar.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Minnilutin (Jógvan Högnesen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá tjóðveldisflokkinum óbroytt.

2. viðgerð 24. mars og 3. viðgerð 2. april 1959.
Uppskot tjóðveldisflokksins fall 7—0.
Uppskot nevndinnar samtykt 18—0.

---

23. *Studningur til bátar til útiróður í Grønlandi og Førovum.*

Ár 1959, 27. februar legði Hemming Jespersen lögtingsmaður fram saljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um studning til bátar til útróður í Grönlandi og Föroyum.

1. §

Landsstýrinum er heimilað úr landskassanum í fíggjarárinum 1959/60 í studningi at veita uppl kr. 200.000.— til opnar bátar, ið bygdir verða

til útróður í Grönlandi og í Föroyum, tó ikki upp um 20 % av melingini.

Studningur eftir hesi lög kann sonuleiðis í summum föroum veitast til eldri bátar og til tekniskar innsetingar av tólum, ekkolodd, fiskalupps, telefon o.s.fr.

2. §

Henda lög kemur í gildi beinanvegin.

Greinargerð:

Föroya lögtíng hevur longu í 1958 samtykt lögir, ið veita útróðrarmonnum, ið fyrst og fremst ella sær til Grönlands at rógva út hesar sömdir. Men tað er slíkur lugur at sleppa til hesa veiðu, at játtanir, ið givnar eru, rökka als ikki til. Haraftrat kemur, at Realkredittstovnurin fyri fyrst veitir ikki fleiri bátalán.

1. viðgerð 2. mars, og 23. mars legði fiskivinnunevndin fram sum ljóðandi

ÁLIT

Ár 1959 tann 27. februar legði tjóðveldisflokkurin fram á ting uppskot um studning til bátar til útróður í Grönlandi og heima í Föroyum. Á sama fundi legði J. H. Dahljörg fram tingmál nr. 21/1958: Lögtingslög um studning og lán til bygging av útróðrarföroum til Grönlands og heima eins og lán uppí 50 % til bygging av skúrum í Grönlandi.

Hesi mál koma til 1. viðgerð 2. marts og vóru beind í fiskivinnunevndina. Í ólavsökutingsetuni samtykti tingið at játta kr. 100.000.— í studningi til bátar til útróður í Grönlandi.

Nevndin er kunnug við, at hesin peningur ikki rökkur til allar teir sum hava bygt bát til útróðurs í Grönlandi og sum hava sökt um studning til hesar bátar. Nevndin mælir tí til, at hesin studningur verður hækkaður til kr. 200.000.— . Viðvíkjandi lán til skúrar verður víst til tingmál nr. 22/1958.

Ein meirihluti (Poul J. Olsen, Haldor Hansen, Niels H. Jacobsen og Jens Chr. Olsen) setur fram fylgjandi

UPPSKOT

til

lögtingslög um studning til bátar til útróður í Grönlandi og í Föroyum.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt úr landskassanum í fíggjarárinum 1959/60 í studningi at veita uppí kr. 200.000.— til opnar bátar, ið

lagtingslov om tilskud til bande til fiskeri ved Grönland og Færøerne.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til i finansaaret 1959/60 af landskassen at yde i tilskud op til kr. 200.000.— til aabne bande til

bygdir verða til útróður í Grönlandi og í Föroyum, tó ikki upp um 20 % av metingini.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi heinan vegin.

fiskeri ved Grönland og Færöerne, dog höjst 20 % af byggeomkostningerne efter vurdering.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Minnilutin (Jógvan Högnesen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot tjóðveldisflokksins.

2. viðgerð 24. mars

Tingformaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá nevndini:

Í lógaruppskotinum § 2 verður skoytt uppí:

«og fer samstundis úr gildi lögtingslög nr. 50, 3. november 1958 um studning til útróður í Grönlandi og her heima».

«samtidig ophæves lagtingslov nr. 50, 3. november 1958 om tilskud til baade til fiskeri i Grönland og her hjemme».

3. viðgerð 2. apríl 1959.

Uppskot tjóðveldisflokksins fall 6 - 0.
Broytingaruppskotið samtykt 16 - 0.
Uppskot meirilutans samtykt 18 - 0.

---

24. Studningur og lán til bátar og skúrar.

Ár 1959, 27. februar legði J. H. Danbjörg löglingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslög um studning og lán til bygging av útróðrarförum til Grönlands og heima eins og lán uppí 50 % til bygging av skúrum í Grönlandi.

lagtingslov om tilskud og laan til bygning af fiskebaade til Grönland og herhjemme og laan op til 50 % til bygning af baadehuse i Grönland.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilt úr landskassanum ella við láni at veita studning 20 % og uppískoytislán til bygging av útróðrarföruum til Grönlands og heima eins og til bygging av skúrum í Grönlandi.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi beinanvegin.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til af landskassen eller ved optagelse af laan at yde tilskud 20 % og tillægslaan til bygning af fiskebaade til Grönland og hechjemme og til oplörelse af baadehuse i Grönland.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Allir menn eru greiðir yvir, at útróður í Grönlandi hevur haft stóran týdning tey seinastu tidnu árini, og gjölla sæst, at í 1959 verða tað nógv fleiri menn enn nakrantið áður,ið fara til Grönlands at rógva út serliga av tí, at skipatrotið er so stórt í lötuni, og at lifa á veiðu við íslendskum skipum vísir seg ikki at bera til longur.

Vónandi fáa vit nú nakrar havnir aftrat í Grönlandi, og mangir menn seta sítt álit á veiðurætt okkara við Grönland.

Sum kunnugt eru bátar dýrir nú á dögum og serstakliga teir stóru bátar, sum hóska til útróðrarföe í Grönlandi. At byggja skúrar har yvirí er eisini peningaliga eitt tungt tak hjá vanligum fiskimonnum, uttan so er, at lagaligt lán kann fáast og eisini studningur.

Við tað at tíðin styttist, til menn skulu taka avgerð um at fara til Grönlands ella ikki, er at vóna, at tingið viðgerð hetta mál so skjótt sum gjörligt.

1. viðgerð 2. marts, og málið beint til fiskivinnunevndina (snubr. tingm. 22 og 23/1958).

---

25. Studningur til umvæling av lendingaviðurskiftunum og bátadráttinum á Vágseiði.

Ár 1959, 27. februar legði J. H. Danbjörg löglingsmaður fram soljóðandi skriv:

Eftir áheitan frá fleiri útróðrarmonnum í Vági loyva vit undirritaðu okkum við hesi umsókn at venda okkum til háttvirda ting og biðja um, at veittur verður studningur til umvölan av lendingarviðurskiftunum og bátadráttinum á Vágseiði.

Vit vísa annars til ta umsókn, sum var til viðgerðar á tingi í árinum 1958.

Útróður av Vágseiði hevur havt stóran týdning so leingi vit minnast og langt áður enn tað.

Eisini er mong grindin komin í drápið, t. d. í Fámjin, av teirra ávum, sum fóru við báti av Vágseiði.

Men nú í fleiri ár er neyvan bátur flotaður av Vágseiði, og er hetta eitt stórt spell og hevur fört mikið tap við sær.

Nú biðja útróðrarmenn úr Vági um studning, so at Vágseiði kann aftur verða eitt útróðrarpláss av teim bestu í Føroyum eins og hetta plássið áður var.

1. viðgerð 3. mars 1959, og málið beint til havna- og veganevndina.

26. *Val av álitismonnum og nevndum.*

Ár 1959, 3. mars og 2. apríl stóð val av álitismonnum og nevndum.

Eftir uppskoti vóru hesir valdir:

Kirkjustjórnin: Johan Simonsen, Johan Poulsen og J. Fr. Øregaard.

Í nevnd Føroya realskúla: G. L. Samuelsen.

Í nevnd p/f Skipafelag Føroya: J. P. Davidsen og E. Paturssøn.

Umboðsmaður tingsins á aðalfundi p/f Skipafelag Føroya: Jacob Lindenskov, sum tiltaksmaður Dion Nolsöe.

Umboðsmaður tingsins á aðalfundi í p/f Sjóvinnubankanum: Haldur Hansen, tiltaksmaður J. H. Danbjörg.

Stýrið fyri Mentunargrunn Føroya Løgtings: Bette Rasmussen, tiltaksmaður Sverri Egholm. Fyri P. M. Dam varð J. H. Danbjörg valdur.

Í nevnd Grønlandsfelagsins: J. Fr. Øregaard, P. H. Weihe, Fr. Hansen. Tiltaksmenn: J. Simonsen, J. C. Olsen, P. J. Olsen.

Stýrið í Føroya listasavn: Jacob Lindenskov, Tr. Samuelsen, Janus Kamban.

Tiltaksmenn: Johan Christiansen, Norðdepli, Einar Waag, Klakksvík, Lindenskov Samuelsen, Knút Wang.

Skattanevndina: Hans Iversen, Fr. Hansen, Vilhelm Nielsen, Poul J. Olsen.

Vanlukkutryggingarráðið: Poul K. Monritsen, G. L. Samuelsen, Fr. Hansen. Tiltaksmenn: J. Simonsen, J. Lindenskov, Poul Hansen.

Föroya Brunatrygging: Johan Poulsen, Olaf Ellingsgaard, J. P. Davidsen. Tiltaksmenn: Eiden Müller, Fr. Hansen og J. Fr. Øregaard.

Yvirpolitiraetturin: Tr. Samuelsen og Sigurð Joensen. Tiltaksmenn: Jacob Jacobsen, Erlendur Paturssøn.

Decisiónsnevndina: Jacob Lindenskov, Hans við Högadalsá, Andr. Djurhuus, Knút Wang.

Nevnd viðv. nýggjari skúlaskipan: Johan Djurhuus, skúlainspektørur, Vágur, Martin Holm, Tórshavn, Jacob Simonsen, Götu, Sigrid av Skarði Joensen.

Grannskoðarar til Faerö Amts Sparekasse: Jacob Sune Jacobsen og Jóannes Jensen.

Til lögtingsvalnevndir:

Suðurstreymoyar prestagjald: Poul Hansen, verkförari, Tórshavn, H. O. Hansen, stjóri, Tórshavn, Poul K. Monritsen, Tórshavn.
Tiltaksmenn: Ange Michelsen, bókhaldari, Tórshavn, J. Wenningstedt, Tórshavn.

Norðstreymoyar prestagjald: P. J. Djurhuus, Kollafirði, Jacob Samuelsen, Haldórsvík, Arni á Rógvi, Vestmanna.
Tiltaksmenn: Tórstein Grækarisson, Kvívík, Andrias Andreasen, lærari, Vestmanna.

Eysturoyar sýsla: Herluf Bertelsen, lærari, Fuglafirði, Johan M. Fr. Poulsen, lærari, Strendur, Jacob Simonsen, lærari, Götu.
Tiltaksmenn: Samuel P. Hansen, Norðagötu, Johs. Petersen, tresmiðjur, Saltnesi.

Norðoya sýsla: Johan Vilalis Hansen, Klakksvík, Meinhard Johansen, lærari, Klakksvík, Jacob Samson, jarnsmiðjur, Klakksvík.
Tiltaksmenn: Johan Christiansen, Einar Waag, Klakksvík.

Vága sýsla: D. Danielsen, lærari, Sörvágur, Jógvan á Ryggi, Miðvágur, Sigmund Frederiksen, vrakari, Miðvágur.
Tiltaksmenn: Sören Danielsen, brevsamlari, Miðvágur, Nap. Petersen, lærari, Sörvágur.

Sandoyar sýsla: Rósing Thorleifsson, sýslumaður, Sandur, Zach. Stórá, Skopun, Peter Joensen, fiskimaður, Skopun.
Tiltaksmenn: Símun Hansen Skopun, Chr. Viderö, Sandur, Th. P. Olsen, óðalsmaður, Húsavík.

Suðuroyar sýsla: Johan Djurhuus, lærari, Vágur, Dion Nolsöe, Vágur, Hemming Jespersen.
Tillaksmenn: Jaspur Holm, Tvöroyri, Johan Henize, Tvöroyri.

---

27. Førovsk frímerkir og staðarnøvn.

Ár 1959, 2. mars legði H. Djurhuus löglingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT TIL SAMTYKTAR

Landsstýrið verður biðið um at skipa fyri, at föroysk frímerkir við föroyskum motivum verða tikin í brúk í Föroyum frá 29. juli 1959.

Eisini verður landsstýrið biðið um at skipa fyri, at postverkið í Föroyum frá sama degi nýtir föroysk staðarnövn.

Viðmerkingar:

Longu í 1906 var málið um föroysk frímerkir frammi á tingi.

Aftur í 1910 lögdu fýra menn úr Havn málið fyri aftur. Hesir menn vörn C. C. Johansen, H. Wenningsted-Törgarð, Johs. Olavus Joensen og Jens Jensen.

Í umsóknini siga teir, at tað er av áhuga fyri teirra heimlandsoyggjum og fyri at gera tær meira kendar út um heimin, at teir reisa hetta mál, og skjóta teir upp, at frímerkini verða gjörd við föroyskum motivum.

Eisini vísa teir til ta fíggjarligu siðuna av hesum máli og halda, at fantökan av föroyskum frímerkjum vildi verið væl störri enn sölan av dönskum gav.

Teir enda umsóknina við at vísa til oynna Helgoland, ið hevði egnu frímerkir, tó at Stóra-Bretland hevði ræði yvir oynni.

Við 17 atkvöðum móti 0 samtykti tingið at biðja umsökjaraenar venda sær til generalpostdirektoratið.

Fleiri ferðir seinni er frímerkjamálið aftur á tingi, sbr. serliga nevndarálit í löglingsmáli nr. XIV-10/1910: Föroysk frímerkir, reist av fólkaflokkinum, men vinnur ongar söndir.

Í 1948 varð samtykt at yvirtaka postverkið, men er henda samtykt enn ikki framd.

Ætlandi verður hon heldur ikki framd av sitandi landsstýri, men skuldi grundir verið fyri tí at tikið hetta stigið úvegis at fingið föroysk frímerkir og föroysk staðarnövn í brúk á postverkinum í Föroyum.

1. viðgerð 4. mars, og 13. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Fólkaflokkurin hevur tann 2. mars 1959 lagt fram á ting uppskot til samtyktar, hari landsstýrið verður biðið um at skipa fyri, at föroysk frímerkir við föroyskum motivum verða tikin í brúk í Föroyum frá 29. juli 1959 og at postverkið í Föroyum frá sama degi nýtir föroysk staðarnövn.

Málið kom til 1. viðgerð tann 4. mars 1959 og varð tá av lögtinginum beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og hevur býlt seg sundur í 3 minnilutar.

Ein minniluti (Niels Holm Jacobsen, Marius Johannesen og J. Fr. Øregaard) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá fólkaflokkinum (sí framlöguskrivið).

Ein annar minniluti (Trygve Samuelsen) skal viðmerkja, at það sum kunnugt er generalpostdirektoratið, ið rekur og fyrisetur postverkið í öllum ríkinum, harundir eisini postverkið í Föroyum. Landsstýrið kann tí ikki skipa fyri nökrum postverkinum viðvíkjandi. Minnilutin heldur annars, at það var rímligt og náturligt, at generaldirektoratið av og á lat gera frímerkir við motivum frá Föroyum utlan at það skuldi verið neyðugt at gjört nakra lögtingsviðtöku um það og setur tí onki beinleiðis uppskot fram.

Ein triði minniluti (Sigurð Joensen) förir fram, at lögtingið í 1948 hevur samtykt at yvirtaka postverkið og heldur tí, at hann ikki kann mæla tinginum til annað enn at biðja landsstýrið fremja yvirtökuna. Minnilutin (Sigurð Joensen) setur so stall fram fylgjandi

UPPSKOT

Lögtingið biður landsstýrið fremja tingsamtyktina frá 1948 um yvirtöku av postverkinum.

2. viðgerð 15. apríl 1959.
Minnilutauppskot frá Sigurð Joensen fall 7 – 0.
Minnilutauppskot frá Niels H. Jacobsen o. fl. 15 – 0.

28. *Bygging av fiskiførum.*

Ár. 1959, 2. mars legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um bygging av fiskiförum.

§ 1.
Landsstýrið fær heimild til í samráð við figgjarnevndina við lántöku og á annan hátt at útvega figgjarligt grundarlag undir byggiætlan, ið kann veita Föroyum 20 nýggj fiskiför í 1959 og 20 í 1960.

§ 2.
Landsstýrið fær heimild til at lata byggja tey av fiskiförunum, ið einstakir menn ella felög ikki fara undir.

§ 3.
Tey av landsstýrinum bygdu skip skulu í samráð við figgjarnevndina verða latin monnum ella felögum, ið lúka galdandi lógartreytir viðvikjandi eginpeninginum, og eiga hesi fiskiför at verða býtt soleiðis, at flest mögulígar bygdir kunnu njóta gott av hesum tiltaki.

§ 4.
Heimild landsstýrisins til lántöku samsvarandi hesi lög er í fyrstu syftu avmarkað til 50 milj. kr. Gongur landsstýrið út um hetta mark, skal tað verða við nýggjari heimild frá lögtinginum.

§ 5.
Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om bygning af fiskefartöjer.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til i samraad med finansudvalget ved optagelse af laan og paa anden maade at tilvejebringe finansieringen for et byggeprogram, der kan skaffe Færöerne 20 nye fiske fartöjer i 1959 og 20 i 1960.

§ 2.
Landsstyret bemyndiges til at lade bygge de af fiskefartöjerne, som privatpersoner eller selskaber ikke lader bygge.

§ 3.
De af landsstyret byggede skibe skal i samraad med finansudvalget blive overdraget til private personer eller selskaber, som opfylder gældende lovbestemmelser vedörende egenkapitalen, og skal disse fiskefartöjer overdrages saaledes, at flest mulige bygder kan nyde godt af disse.

§ 4.
Landsstyrets bemyndigelse til optagelse af laan i overensstemmelse med denne lov er i förste omgang afgrænset til 50 mill. kr.. Er denne bemyndigelse ikke tilstrækkelig, skal landsstyret söge om ny bemyndigelse fra lagtinget.

§ 5.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Nú portugalstrolararnir eru komnir undir land, eigur ikki at verða drálað, men farið undir næstu stig av endurnýggjanini av okkara fiskiflota.

At henda útbygging er hjartatátturin í okkara samfelagsgongutverki, eru allir menn samdir um.

Tað er hann og tær trægrir, ið renna út frá honum, ið eru avgerandi fyri samfelagsins gróðis- og gróðralíkindi. Tí ræður tað fyrst og fremst um, at hann verður lagdur vel og virðisliga, so hann saman við øðrum vinnutáttum er føran fyri at bera ta stóðugt vaksandi tyngd, ið samfelagsins húsarhald er.

Tað er átroðkandi neyðugt, um nútíðarinnar krav til livihátt og tilfeld skulu uppfyllast, at allar hendur koma til arbeiðis og skulu allar hendur í arbeiði, mugu arbeiðstól til.

Av tíðarhóskandi arbeiðstólum hava vit ikki nóg mikið, sjálvt um gongd er komin á at útvega tey við privatari skipabygging, portugalstrolarunum og tilíkum.

Í dag eru einir 1000 føroyingar í vinnu hjá ístøndingum, og á hvørjum ári verða nógvar hendur arbeiðshúnar aftur.

Tað ræður tí um, at allar góðar kreftir samla seg um hesa høvuðsuppgávu samfelagsins: at útvega nýggj fiskifør til landið, og um neyðugt heldur steðga við onkrum øðrum.

1. viðgerð 1. mars, og 13. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjört málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirihlutin (J. Fr. Øregaard, Sámal Petersen, Andreas Djurhuus og Hans Iversen) vísir til skriv frá landsstýrinum 7. apríl í ár, sum er býtt út til allar tingmenn, har víst verður á, at landsstýrið við samráðing við ríkisstýrið hevur fingið tilsögn um eina finansieringsskipan, har ílögupeningurin tey fyrstu fimm árini verður ætlaður til umleið 190 milliónir. Uppá hesi ætlan er roknað við 50 milliónum til skipabygging í hesum tíðarskeiði, og er tá ikki tikin við møgulig bygging av stórum trolarum. Meirihlutin setur tí ikki fram serstakt uppskot.

Minnilutin (Poul Petersen) mælir til at samtykkja uppskot fólkaflokksins.

Ein annar minniluti (Erlendur Patursson og Sigurð Joensen) vísir til tingmál nr. 39/1957 — tíðindi 1957 bls. 125 og setur uppskot fram alfur og tað er soljóðandi:

§ 1.

Við tí endamáli at útbúgva landið við slíkum fiskiveiðiflota, at vinna verður til allar fiskimenn landsins á innlendskum fiskiskipum, letur landsstýrið gera fiskiskipa- og bátabyggiætlan — í fyrsta umfari 3—5 ár fram í tíðina fyri rokning landskassans — og fær samtíðis heimild

til fyri landskassans rokning, at lata byggja fiskiför innan- og uttanlandis eftir teirri ætlan.

§ 2.

Landsstýrið fær heimild til fyri landskassans rokning at taka upp í 100 milj. kr. í útlendskum lánum til hesa bygging.

§ 3.

Sett verður skipabyggingarráð. Landsstýrið útnevnir 3 av limum tess uttan tilmæli og skulu teir vera skipabyggikönir og maskinkönir. 1 verður útnevndur eftir tilmæli frá Föroya skipara- og navigatörfelagi og Föroya fiskimannafelagi og ein eftir tilmæli frá Föroya útgerðarmannafelagi.

4. §.

Byggiætlanin, nevnd í 1. gr., verður gjörd eftir tilmælum skipabyggingarráðsins og við samtykki fíggjarnevndar lögtingsins.

5. §.

Byggisáttmálar eftir 1. gr. og lánisáttmálar eftir 2. gr. skulu hava samtykki fíggjarnevndar lögtingsins.

6. §.

Fiskiför, ið bygd verða eftir hesi lög, verða boðin útgerðarfyritökum til keyps ella leigu. Í komandi tingsetu leggur landsstýrið og fíggjarnevnd lögtingsins fram lógaruppskot um skipan fyri slíkum sölum og leigum.

7. §.

Henda lög kemur í gildi alt fyri eitt.

2. viðgerð 15. april 1959.
Uppskot tjóðveldisflokksins fall 11 0.
Uppskot fólkaflokksins fall 12 0.

29. *Nýtsla av trolarum sum móðurskip.*

Ár 1959, 2. mars legði Kjartan Mahr lögtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT TIL SAMTYKTAR

Lögtingið heimilar landsstýrið sum skjótast at kanna mögulcikartar fyri at fáa teir gomlu koltrolararnar í rakstur sum móðurskip fyri bátafiskiskapi í Grönlandi komandi summar og tekur landsstýrið upp samráðingar sum skjótast við teir, ið eiga trolararnar: Rankin, Jupiter, Varðberg, Venus, Högafossur og Gullfinnur.

Viðmerkingar:

Sum kunnugt so liggja omanfyri nevndu trolarar fyri leyn, tí ikki er vinnandi rakstur fyri teir nú, og atlantin hevur verið ið hvussu er at selja nakrar av teimum til upphöggingur.

Vegna Grönlandsútróðurin tey seinastu árini hevur vist seg at horið vel til við móðurskipum, halda vit tað er óforsvarligt í lötuni at lata hesar trolararnar av landinum, um nakar möguleiki kundi verið fyri teimum til lönandi vinnu sum t. d. sum móðurskip í Grönlandi við 5 bátum fyri hvört skipið.

Trolararnir eru allir í tilikum standi, at teir hövdu fingið fartsertifikat til sigling út og aftur, og hava vit spurt okkum fyri um hetta hjá skipasýni og klassa, ið halda at skipini, hvar teir flestu eru í klassa, skulu hava botnsýn og möguliga smærri ábötur.

Trolararnir nýtast ikki hava meira við av koli enn fyri út og heimsigling, og við tað teir allir hava ljósmotor og kundu ligið við slöktum ella bakkaðum fyri.

Vit vilja meta hvönn trolara at taka av fiski við heimaftur umfram kol til heimferðina um 200 tons, og so kundi nakað verið landað í Grönlandi, um fiskað verður meira.

1. viðgerð 1. mars 1959 og málið beint til fiskivinnunevndina.

30. Skúlabókaútgáva.

Á 1959, 2. mars legði Erlendur Patursson lögtingsmaður fram soljóðandi uppskot:

§ 1.

Landsstýrið skipar fyri og leggur til rættis útgávu skúlabóka í fyrstu atlögu fyri barnaskúlan og síðan fyri millum- og realskúlan og aðrar hægri skúlar. Stavsetingin í skúlabókunum skal vera tann, sum tilskilað er í M. A. Jacobsen: Rættskrivingarreglur, 1. útgáva.

§ 2.

Ikki seinni enn við byrjan skúlaársins 1961 skulu allar skúlabøkur í barnaskúlunum vera á föroyskum máli.

§ 3.

Viðkomandi skúlamyndugleikum verður heimilað at veita skúlakennarum frí frá kenslu og við lön, meðan teir starvast við skriving og útgávu lærubóka.

§ 4.

Útreiðslurnar, ið standast av hesi lóg, verða bornar av skúlabókagrunninum, og um peningur grunsins ikki rökkur til, av landskassanum.

§ 5.

Henda lóg kemur í gildi alt fyri eitt.

Greinargerð:

Í lögtingssetuni 1956 setti undirritaði tingmaður fram uppskot til samtyktar, sum segði, at Föroya lögting álegði landsstýrinum beinan vegin at skipa fyri og leggja til rættis útgávu skúlabóka í fyrstu atlögu fyri barnaskúlan og síðan fyri millum- og realskúlan og aðrar hægri skúlar, smbr. Lögtingstíðindi 1956, bls. 164—65.

Uppskotið varð ikki fremt, men í staðin samtykti tingið at heimila landsstýrinum at seta nevnd við 3 limum til at fyrireika útgávu av föroyskum skúlabókum og gera reglugerð fyri nevndarstarvið.

Málið varð avgreitt úr tinginum 25. marts 1957, men nú 2 ár aftaná er eingin nýggj skúlabók komin. Eftir hesum at döma man tann leið, ið tingið tók tá, ikki föra á mál. Uppskot undirritaða verður tí nú upp aftur tikið — í eitt sindur broyttum liki og í lógarformi. Viðvíkjandi einstökum fyrimælum verður vist á sjálvt lógaruppskotið. Skúlabókaútgávan má nú fáast í gongd, og er viljin til staðar, eiga vit um 2 ár at kunna hava ið hvussu er allar lærubøkur í barnaskúlunum á föroyskum máli.

1. viðgerð 5. mars, og 8. apríl legði skúlanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Málið var 2. marts 1959 lagt fram av Erlendi Paturssyni, og undir 1.

viðgerð varð tað beint í serliga nevnd (skúlanevndina).

Uppskotið er í fimm greinum.

Í fyrstu greinini verður álagt landsstýrinum at skipa fyri og leggja til rættis útgávu av skúlabókum. Stavsetingin í bókunum skal vera sum í M. A. Jacobsen: Rætskrivingarreglur, 1. útgáva.

Grein 2 sigur, at ikki seinni enn við byrjan av skúlaárinum 1961 skulu allar skúlabókur í barnaskúlanum vera á föroyskum máli.

Í grein 3 verður heimilað viðkomandi skúlamyndugleikum at geva lærarum frí við lön, meðan teir starvast við skriving og útgávu av læribókum.

Grein 4 sigur, at útreiðslurnar, ið standast av hesi lóg, verða borgaðar av skúlabókagrunninum, og um hesin peningur rökkur ikki til, av landskassanum.

Grein 5 sigur, at henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Nevndin er samd um at ásanna, at okkum förvar bókur á föroyskum máli í skúlum okkara, men heldur seg ikki kunna mæla til at samtykkja uppskotið í ti líki, tað er framlagt í. Nevndin heldur tað t. d. ikki bera til at taka avgerð um rættskrivingina í hesum föri, men heldur at mögulígur spurningur um rættskrivingina eigur at vera eitt mál fyri seg. Somuleiðis heldur nevndin tað ikki bera til at seta fasta tíðarfreist fyri, nær útgávan til barnaskúlan skal vera lokin, eins og hon heldur tað illa bera til at geva lærarum frí við lön meðan teir starvast við skriving og útgávu av skúlabókum.

Útgáva av skúlabókum er lögd undir mentunargrunnin. Hesin grunnur verður stýrdur av eini 3-mannanevnd, og í hesi nevnd sita í löturni J. H. Danbjörg, Johan Poulsen og Bette Rasmussen. Men umfram hesa nevnd situr eisini Lögtingsins skúlabókaútgávunevnd. Í henni eru Rikard Long, Sverri Fon og Johs. Andr. Nes. Hesum nevndum áliggur tað at kanna handrit og fáa tey til prentingar.

Stovnsfe mentunargrunsins var 1/1 1959 kr. 276.500,00 og at ráða yvir ymis endamál, harímillum eisini til bókaútgávu hevði gruðturin eisini pr. 1/1 1959 kr. 23.215,22, og á fíggjarlógini eru játtaðar til bókaútgávu kr. 11.500,00, so fyri fíggjarárið 1959/60 skuldi grunnurin havt kr. 34.715,12 at rátt yvir, men hetta er, sum áður sagt, ikki einans til bókaútgávu.

Tað er ikki eiðasört, ið til er av föroyskum bókum í barnaskúlanum. Vit hava E. Vestergaard: Pisubókin, H. A. Djurhuus: Barnabókin, Lesibók II og III, Peter Andreasen: Avskrivingarbókin, Marius Johannesen: Skriviligt föroyskt til 4., 5., 6. og 7. skúlaár, M. A. Jacobsen: Rætskrivingarreglur, Jóhannes av Skarði: Föroyskur orðalisti til Jespersen: Engelsk begynderbog, H. A. Djurhuus: Föroya söga, J. Dahl: Biblíusöga, J. Joensen: Luthers katekismus, M. A. Jacobsen, R. Rasmussen og Z. Sörensen: Roknibók I og II, H. N. Jacobsen: Roknitalvur, J. Waagstein: Songbók Föroya skúla II, Rasmus Rasmussen: Plantulæra og Föroya flora, Mikkjal á Ryggi: Fuglabókin, og aftrat hesum hava vit teir hentu bóklingarnar Gróður og gróðrarvónir, Sjógvurin, Fiskalikamið, Gogufiskar, Firvaldar og Mannakroppurin, sum felagið Föroya náttúra Föroya skúli hevur givið út. Tíverri eru dýralæran og plantulæran hjá Mikkjali á Ryggi útseldar.

Tær bökur, sum serliga förvur er á á föroyskum máli til barnaskúlan, eru lærubökur í sögu og í landalæru.

Nevndin hevur fingið at vita, at til er eitt handrit til eina veraldarsögu, so fá er tað mest bara Norðanlanda sögan og landalæran, sum eftir eru at fáa handrit til.

Í greinagerð uppskotsstillarans verður sagt, at lögtingið í 1957 álagði landsstýrinum at skipa fyri og leggja til rættis útgávu av skúlabókum til barnaskúlan, men nú tvey ár aftan á er ongin bókin komin.

Hetta er ikki rættiliga beint, tí í 1958 kom E. Vestergaard: Pisubókin, og í fötum er bók til tornom börn eins og ein fyrisagnarbók báðar eftir Jørgen Henriksen til prentingar. Tað skuldi so borið til at fingið veraldarsögunna, norðurlandasögunna og landalæruna út, áðrenn langt umleið, og so vóru vit so dáut hjálpin í barnaskúlanum fyribils.

Nevndin skal sostatt mæla tinginum til at samtykkja fylgjandi

UPPSKOT
til

lögtingslög um útgávu av skúlabókum.	lagtingslov om udgivelse af skoleböger.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrið skipar fyri og hevur ábyrgdina av útgávu av skúlabókum. Hesa útgávu verður farið undir beinan vegin, í fyrsta syftu fyri barnaskúlan og síðan fyri hinar hægru skúlarnar.	Landsstyret foranstalter og indestaar for udgivelsen af skoleböger. Udgivelsen paabegyndes straks, i förste række for barneskolen og derefter for de höjere skoler.
§ 2.	§ 2.
Um peningurin, sum lökur er til hetta endamál, er ov lítil, verður landsstýrinum heimilað at taka lán at gjalda lið, ið neyðugt er í sambend við skúlabókaútgávuna, her uppií sansýning fyri handrit.	Skulle de dertil disponible midler være utilstrækkelige til formaalet, bemyndiges landsstyret til at optage de nödvendige laan i forbindelse med udgivelsen af skoleböger, derunder honorar for manuskripter.
§ 3.	§ 3.
Henda lög kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 10. april og 3. viðgerð 20. april 1959.

Tingformaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá nevndini

Í grein 1 verður millum orðini «landsstýrið» og «skipar» sett: Saman við Lögtingsins skúlabókanevnd.

og í danska tekstinum:

i millum orðini «Landsstyret» og «foranstalter» verður sett: i forening med Lögtingsins Skúlabókanevnd.

Uppskotið frá Erlendi Paturssoni fall 11-0.
Broytingaruppskotið samtykt 21-0.
Lógaruppskot nevndinnar so broytt samtykt 27-0.

31. *Lendingarábøtur í Fugloy*

Ár 1959, 2. mars legði Johan Simonsen lögtingsmaður fram soljóðandi uppskot:

Eg vísi til viðlagda skriv frá Fugloyar sóknar kommunu um ábøtur á lendingarnar norðuri í Vági á Kirkju og Tröllagjónni í Hattarvík.
Hjá Fuglingum er umráðandi at hesi bæði plássini verða gjørd so mikið góð, at óttaleyst lendisf har, táið ætlirnar eru til tað.
Sett verður hetta

UPPSKOT TIL SAMTYKTAR

Úr landskassanum verða veittar Fugloyar sóknar kommunu kr. 30.000.— tilábøtur á lendingunum norðuri í Vági á Kirkju og í Tröllagjónni í Hattarvík.

Kirkju taun 14/2-1959.
Hædra Johan simonsen, lögtingsmaður.

Vit fara hervið at biðja tygum gera okkum tann beina at greiða hesi mál fyri okkum. Tað fyrra er, at biðja tingið veita okkum studning til at gera tað orduliga gangandi norð í Vág. Sum nú er, er tað skjólt, at maður kann fara fyri einki, tá hann gongur har. Norð í Vági er sum oftast brúkt á lágeft, og tað er ofta langar tíðir, at postur bara kemur upp har. Sum nú er, er óforsvarligt at brúka norð í Vági, men brúkt má hon verða, um vit skulu fáa post.
Tað annað er Tröllagjógvin. Her ætla vit at biðja tingið um studning til at gera so mikið har, at bátur kann fakast upp, og at gera veg av Tröllagjónni og heim til hús.
Vónandi frætta vit frá tygum. Við tökk fyri ómakin.

1. viðgerð 5. mars, og málið beint til havna- og veganevndina.

32. *Broyting í lóg um eykaavskriving.*

Ár 1959, 4. mars legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi uppskot:

Uppiskoyti til löglingslóg nr. 3 frá 2/2 - 56 um eykaavskrivingar av skipum v. m.

Nýtt nr. 9 í deild II.

Felag ella persónur, sum leigar ella keypir skip frá felag her á landi, stovnað til endurnýggingar av föroyska fiskiskipaflotanum, hevur rætt til avskrivingar eftir hesi lóg. Skipið má, tá ið leigu-ella keypssáttmáli verður skrivaður ikki vera eldri enn 5 ár.

Avskrivingarrætturin kann ikki samstundis verða nýttur av eigarafelag og leigara.

Missir leigarin skipið í leigusáttmálin er ikki hildin ella av aðrari orsök og hann fær ikki eykaavskrivingina ella part av henni afturgoldna, eigur eigarafelagið ella hann, sum aftaná fær skipið til leigu ella keyps, rætt til at halda fram við avskrivingunum eins og hann hevði havt skipið alla tíðina, men verður eykaavskrivingin afturgoldin fyrra leigara eigur seinri leigari ella eigari rætt til fulla avskriving.

Reglurnar í § 1, 3. stk. A nr. 1 um loyvi frá likningarráðnum eru eisini galdandi har skipið er leigað, og skal likningarráðið góðkenna leigusáttmálan.

Tillæg til lagtingslov nr. 3 af 2/2 - 56 om ekstraordinære afskrivninger af skibe m. v.

Indsættes som nyt nr. 9 i afsnit II.

Selskab eller personer, som lejer eller köber skib fra selskab her i landet, oprettet til fornyelse af den færöske fiskerflaade, indrömmes ret til afskrivninger efter nærværende lov. Skibet maa ikke være over 5 aar gammelt ved leje- eller köbskontraktens oprettelse.

Afskrivningsrettighederne kan ikke samtidig benyttes af ejerselskabet og lejeren.

Mister lejeren skibet paa grund af misligholdelse af lejekontrakten eller af anden grund og han ikke faar ekstraafskrivningen eller del af denne tilbagebetalt, har ejerselskabet eller den, som derefter faar skibet til leje eller til köbs, ret til at fortsætte med afskrivningerne som om han havde haft skibet hele tiden, men tilbagebetales ekstraafskrivningen, erholder den senere lejer eller ejer ret til fuld afskrivning.

Reglerne i § 1, 3. stk. A. nr. 1 om tilladelse fra ligningsraadet gælder ogsaa ved udlejning af skib. Ligningsraadets godkendelse af lejekontrakten skal derfor indhentes.

Viðmerking:

Frá Ognarfelagunum hevur landsstýrið fingið soljóðandi skriv:

«Sum háttvirda löglinginum kunnugt er hövuðsendamál Ognarfelagsins at útvega monnum skip, ið teir kunnu leiga við forkeypsrætti ,móli,

at teir eru lutacigarar í felagnum við einum lutapeningi, ið er munandi minni enn tann eginpeningur, ið annars krevst til skipakeyp.

Ætlanin er, at menn fyri at fáa eitt minni línuskip skulu teknir seg fyri kr. 25.000,- fyri at fáa eitt stórri línuskip fyri 40.000,- og fyri at fáa ein trolara fyri kr. 100.000,- . Í fyrstu syftu er tó ætlanin at hjálpa seg til línuskip. Av teknaða peninginum skal helvtin gjaldast kontant, meðan hin helvtin verður at gjalda yvir 5 ár.

Stovnandi aðalfundur felagsins var 7. februar í ár. Tá var teknaði lutapeningurin kr. 1.155.000,- . Síðan tá er nakað teknað aftrat, soleiðis at lutapeningurin nú er lætt við 1,2 milj. kr. Hetta skuldi gjört tað mögligt fyri felagið at bygt fyri einar 10-12 milj. kr. í fyrsta umfari, men so hvört menn yvirlaka skipini ella gjalda aftur av teimum, kann byggingin halda fram.

Síðani stovnandi aðalfundin og eisini frammanundan hevur verið arbeitt fyri at fara í holt við bygging eftir tí ætlaðu skipan, hvarefter menn kunnu gera leigusáttmála við forkeypsrætti við felagið.

Ymiskir meinbogar hava tí verið at vunnið á, og hevur hetta gjört, at hóast áhuga hjá monnum er enn einki skip undir bygging eftir tí ætlaðu skipan.

Hövuðsmeinbogin fyri at fáa leigusáttmálarnar fullfiggjaðar hevur verið tann, at tað ikki tykist at fara at bera til at nýta tær reglur um eykaavskrivingar, ið eru fyrisettar í omanfyrinevndu lóg, fyri tey för, ið verða leigað við forkeypsrætti frá felagnum.

Tingingar hava farið fram hæði við landsstýrið og líkningarráðið, um reglurnar fyri eykaavskrivingum kunnu vera nýttar, tá skipini verða leigað við forkeypsrætti, men var úrslitið, at tað ikki tykjast at verða líkindi at nýta lógina óbroytta.

Teir, ið ynskja at leiga skip við forkeypsrætti frá Ognarfelagnum, verða sostatt settir í eina verri stöðu enn teir, ið keypa skipini sjálvir. Hetta halda vit vera so avgerandi viðurskifti fyri teir, ið skulu leiga frá felagnum, at um hesir menn ikki fáa sonn rættindi til eykaavskrivingar, fer ikki at bera til hjá Ognarfelagnum at halda fram við starvi sínum, tí neyvan fer nakar tá at ynskja skip gjögnum felagið.

Vit vóna, at hátlvirda ting skilir stöðu okkara, ið forðar okkum fyri at fara undir bygging av skipum, ið skulu leigast út við forkeypsrætti. Í lötuni hava vit fleiri umsóknir liggjandi, ið ikki kunnu verða framdar av hesari orsök, og sum neyvan verða veruleiki, um byggingin ikki kann fara fram gjögnum Ognarfelagið.

Tessvegna loyva vit okkum at heita á hátlvirda lögtingið um at viðtaka uppískoyti til eykaavskrivingarlógina av 2/2 1956, hvarefter reglur verða settar, ið loyva honum, ið útvegar sær skip gjögnum felag okkara, at nýta eykaavskrivingarreglurnar, eins og um hann sjálvur gjörti byggisáttmála. Vit eru til reiðar at tingast við líkningarráðið um innihaldið av slíkum uppískoyti til lógina.

Tað er sum nevnt umráðandi, at fáa skjóta avgerð í hesum máli. Loyva vit okkum tessvegna at biðja um at fáa málið viðgjört, áðren tingið verður slitið hesaferð, soleiðis at málið kann liggja greitt fyri jól.»

Bæði lögtingið og landsstýrið hava fyrr ásamnað tann týdning, felag stovnað til endurnýggingar av fiskiskipaflotanum kann hava fyri landið, smbr. lögtingslóg nr. 50 frá 19. september 1957, har landið innistendur teimum, sum seta seg fyri partabröv ella lutabröv í tílíkum felag fyri einum vinningi av 5 % p.a. av tí peningi, sum teknaður verður og goldin felagnum.

Endamál felagsins er at lata byggja fiskiför í útlandi og fáa tey til landið ella lata tey byggja her í landinum og síðan lata tey til leigu við forkeypsrætti, soleiðis at leigarin seinri kann keypa tey, ella at fáa keypara til tey beinanvegin.

Tær eykaavskrivingarreglur, sum nú eru í gildi, loyva bert honum, sum ger byggisáttmála ella sum flytir inn skip úr útlandinum, rætt til eykaavskriving. Tá nú ognarfelagið hevur fingið skip til landið og seinri selur tað, er hetta söla innanoyggja og forða tá reglurnar fyri, at keypari kann nýta eykaavskrivingarreglurnar.

Ásamnað má verða, at endamál felagsins kemur öllum landinum til góðar og veitir mögulekika fyri útvegan av fleiri fiskiförum til landið. Út frá hesum heldur landsstýrið rímuligt vera, at teir, sum fáa sær skip gjögnum ognarfelagið, verða undir sonnu treytum, sum aðrir, men hetta gerst bert við, at reglurnar um eykaavskriving verða broyttar.

1. viðgerð 6. mars, og 17. mars tegði skattanevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Ár 1959, tann 1. mars, var málið lagt fram á ting av landsstýrinum og kom til 1. viðgerð 7. mars og var beint í skattanevndina. Í viðmerkingunum verður sagt, at Ognarfelagið hevur skrivað til landsstýrið og biðið um, at lógin um eykaavskrivingar verður broytt soleiðis, at eisini hann, ið leigar skip frá Ognarfelagnum ella líknandi felag við forkeypsrætti, fær sama rætt til eykaavskrivingar, sum tann sjálvur gjördi byggisáttmála.

Meirilutin (Hanus við Högadalsá, Poul J. Olsen og J. Fr. Öregaard) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Ein minnilutí (Poul J. Olsen og J. Fr. Öregaard) skilar tó til, at lógin um eykaavskrivingar uppá skip útti at fyriskriva reglur, hareftir lað bert verð loyvt at avskriva eyka við tí peningi, sum vunnin verð við tí skipi, sum avskrivast skuldi. Men við tað at nevnda lög um eykaavskrivingar verður at galda enn í 3 ár, heldur minnilutin, at tað er rímiligt, at eisini skip, sum leigað verða frá Ognarfelagnum við forkeypsrætti, fáa sama rætt til eykaavskriving, sum tey skip, har eigarin sjálvur ger byggi- ella keypssáttmálan.

Ein annar minnilutí (Hanus við Högadalsá) er í hövuðssjónarmiðum samdur við minnilutan (Poul J. Olsen og J. Fr. Öregaard), men av tí at lögtingslógin um eykaavskrivingar er galdandi fyri rakstrarárið 1960 út (skattaárið 1961, í Tórshavn 1961/62) og at öll líkindi eru til at hetta velrartingið samtykkir skattalágaruppskotið nýggja, setur minnilutin ikki fram uppskot um broyting í ella avtöku av eykaavskrivingarlógini á hesum sinni.

Ein triði minnilati (Hákun Djurhuus og Trygve Samuelsen) ásannar, at lóggávan um eykaavskriving er rin ógvuliga týðandi táttur í málinum um endurnýggjing skipaflotans, og vil út frá hesum mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Við at samtykkja lögtingslóg nr. 14 frá 28. februar 1957 um, at lær í lögtingslóg nr. 3 frá 2. februar 1956 ásettu reglur verða óbroyttar galdandi fyri skattaárini 1958, 1959, 1960 og 1961 (í Tórshavn 1958/59, 1959/60, 1960/61 og 1961/62) hevur lögtingið ásannað týdningin av, at lóggávan er í gildi í 4 ár, t.v.s. tað ið svarar til eina árliga eykaavskriving uppá 25 %.

Minnilutin heldur, at tey felög ella persónar, ið koma inn undir reglurnar eftir uppskoti landsstýrisins, eisini eiga at kunna rokna við 4 ára eykaavskriving og setur til uppskot um, at lögtingslóg nr. 14 frá 28. februar 1957 verður broytt samsvarandi.

UPPSKOT

frá

Hákun Djurhuus og Trygva Samuelsen:

1. Lögtingið samtykkir uppskot landsstýrisins.

II. I § 1 í lögtingslóg nr. 14 frá 28. februar 1957 verður sett aftaná «1961» «og 1962» og aftaná «1961/62», «og 1962/63» í báðum tekstum.

Orðið «og» frammanfyri 1961 og 1961/62 gongur út.

2. viðgerð 18. og 3. viðgerð 19. mars 1959.

Minnilutauppskot frá H. Djurhuus og Tr. Samuelsen fall 13—0.

Lógaruppskotið samtykt 24—0.

---

33. *Broyting í rættargangslógini.*

Ár 1959, 4. mars legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi skriv:

Landsstýrið loyvir sær at leggja fyri tingið lóg nr. 125 frá 10. mai 1958 om ændring i lov om rettens pleje og lóg nr. 182 frá 7. juni 1958 om ændring i lov om rettens pleje og biðjur um tingsins viðmæli til, at hesar lógir verða settar í gildi fyri Föroyar.

1. viðgerð 6. mars, og 23. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Landsstýrið hevur lagt fyri lögtingið lög nr. 125 frá 10. mai 1958 og lög nr. 182 frá 7. juni 1958, ið báðar viðvíkja broytingum í lov om rettens pleje, hin fyrra er viðvíkjandi «sagföreres möderet for höjesteret, voteringsordninger i höjesteret og de nordiske sagföreres möderet», hin seinna viðvíkjandi «administrativt bestemt frihedsberövelse».

Landsstýrið biðjur um tingsins viðmæli til, at hesar lögir verða settar í gildi fyri Föroyar.

Málið er framlagt 4. mars og 1. viðgerð fór fram 7. mars 1959, har málið varð beint í lögarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at sela fram fylgjandi

UPPSKOT

Lögtingið samtykkir at frammanfyri nevndu broytingar í rettargangslögini verða settar í gildi fyri Föroyar.

2. viðgerð 1. apríl 1959.
Uppskot nevndinnar samtykt 20 0.

34. *Stuðling av vinnuligum framburði í landinum.*

Ár 1959, 4. mars legði Poul Petersen lögtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslög um stuðlingar av vinnuligum framburði.	lagtingslov om oplhjælpning af produktiv udvikling.
§ 1.	§ 1.
Til stuðlingar av vinnuligum framburði serstakliga í smærri bygdum, sum í vinnuligum livi standa aftanfyri aðrar ella verið hava fyri vinnuligum bakkóslum, er landsstýrinum heimilt eftir reglunum í hesi lög at vera til	Til oplhjælpning af produktive fremskridt særlig i de mindre bygder, som i økonomisk henseende staar tilbage for andre bygder eller har været ude for økonomiske vanskeligheder bemyndiges landsstyret til efter regler-

banda við tekniskum og vinnulig um ráðum til gerð av byggiætlanum og peningaleggingum til fremjingar av tílíkum vinnuligum ætlanum.

§ 2.

Um so er, at landsstýrið heldur eina byggiætlan vera teknisk og vinnuliga forsvarliga, kann það geva figgjarnevndini tilráðing um stuðul eftir reglunum í §§ 3 og 4.

§ 3.

Fyri lán til vinnuligar byggingar av nýggjum ella til viðkingar ella til keyp og innleggingar av maskinum í eigindóm, sum virki eigur, kunnu veðhald gevast av landsstýrinum landskassans vegna.

Veðhald má ikki fara uppum 90 % av kostnaðinum av nevndu fleggingum.

Veðhaldið skal minkast við eins stórum avdráttum yvir hægst 15 ár.

§ 4.

Undir serligum viðurskiftum kunnu lán gevast í staðin fyri veðhald innanfyri somu mark sum fyrisetl fyri veðhald. Lán vera serstakliga givin til byggingar av vinnuligum fyritökum av nýggjum og eisini til smærri vinnuligar fyritökur sum smærri frystihús, hösnagarðar o.l.

Lánini verða givin uppá 15 ár og eru avdráttar- og rentufri í 2 ár. Rentan verður 1½ % p.a.

Lán og veðhald verða givin eftir samráð við figgjarnevndina í hvörjum einstökum föri.

Fyri lán og veðhald landskassans verður tryggleiki givin sum pant í húsum og maskinum. Í serstökum förum kann eisini ann ar tryggleiki krevjast.

ne i denne lov at yde teknisk og økonomisk bistand ved udarbejdelse af projekter og ved finansieringen af saadanne projekters gennemførelse.

§ 2.

Saafremt landsstyret maatte finde et projekt teknisk og økonomisk forsvarligt, kan landsstyret gøre indstilling til finansudvalget om støtte af landskassen efter §§ 3 og 4.

§ 3.

For laan til opførelse af nye anlæg, til udvidelse af bestaaende anlæg eller til anskaffelse af og installation af maskiner i en virksomheden tilhørende ejendom kan der af landsstyret ydes garanti paa landskassens vegne.

Garantien maa ikke overstige 90 % af omkostningerne af de nævnte investeringer.

Garantien skal nedbringes med lige store beløb over højst 15 aar.

§ 4.

Under særlige omstændigheder kan der i stedet for garanti ydes laan af landskassen indenfor samme grænser som fastsat i § 3. Laan vil særlig blive ydet til ny anlæg af produktive foretagender og tillige til mindre produktive anlæg saasom mindre fryse-huse, hönserier o.a.

Laanene ydes paa højst 15 aar og er afdrags- og rentefri i 2 aar. Renten fastsættes til 1½ % p.a.

Laan samt garanti for laan ydes efter samraad med tagtingets finansudvalg i hvert enkelt tilfælde.

For laan og garanti for laan skal der stilles sikkerhed i form af pant i bygninger og maskiner. I særlige tilfælde kan yderligere sikkerhedsstillelse kræves.

§ 5.

So leingi landskassin hevur lán ella veðhald standandi í einum virki, má tað geva seg undir eftirlit, sum landsstýrið krevur viðvíkjandi rakstri og roknskapi.

Avhendir ella leigar lánhavari virki, sum lán ella veðhald er í, ella flytir hann virki, tekur landsstýrið eftir samráð við figgjarnevndina avgerð, um lánið kann vera standandi í ti.

§ 5.

Saa længe landskassen har laan eller garanti for laan indestaaende i en virksomhed er denne pligtig at underkaste sig teknisk og regnskabsmæssigt tilsyn som landsstyret maatte forlange.

Afhænder eller udlejer ejeren den virksomhed, til hvilken laan eller garanti er ydet, eller flytter han virksomheden, afgör landsstyret efter samraad med finansudvalget om laanet skal forblive indestaaende i virksomheden.

§ 6.

Hvussu mikið í lánum ella veðhaldi verða at geva eftir hesi lög verður fyrisett á árligum fíggjarlógum.

§ 6.

Hvor meget der skal ydes i laan eller garantier i henhold til denne lov fastsættes paa de aarlige finanslove.

§ 7.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 7.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Hetta uppskot skuldi havt til endamáls at stuðla vinnuligum lívi á bygdunum.

Tað er neyðugt at stuðla vinnuligan framburð har, sum líkindir eru bæði á sjógvi og landi.

Vit fingu samtykt uppskot um lán til smærri frystihús í fjör (smbr. tingmál nr. 29/1957) og eisini uppskot til lögtingslóg um veðhald av lánum til trol- og garnvirkir v.m. (smbr. tingmál nr. 43/1957). Harafturat eina játtan av okkara ávum á fíggjarlógini um lán til hösnagarðar.

Her liggur ein uppgáva, sum má hava tingsins og landsins áhuga, serstakliga í einari tíð sum okkara, nú so stórur vandi er fyri avloftting av mongum góðum bygdum í landinum. Vegirnir koma nú so líðandi og samferðslan eftir sjónum verður væl betur, nú frá líður, so tað skuldi kunna givið líkindir fyri framburði í landbúnaðinum, köling av mjólk at lata til Havnar ella stórbygdirnar og umsíðir at fáa mjólkavirkir (flöskumeiarí) sett á stovn á hóskandi sentralum stöðum í landinum.

Hetta lógaruppskot er í tráð við lóg nr. 211 frá 16/6 1958 om egnsudvikling í Danmark, sum helst ikki er galdandi í Föroyum.

Um so var, so má tað haldast, at hetta ökið av vinnulívi okkara er so egið föroyskt, at tað er sjálvandi, at tingið tekur sær av hesum áhugamáli.

Vit loyva okkum at leggja hetta mál fram á ting til tingsins vælvild.

1. viðgerð 9. mars, og 21. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi:

ÁLIT

Ár 1959, tann 1. mars, legði fólkaflokkurin fram á ting lógaruppskot um stuðling av vinnuligum framburði í landinum. 9. mars kom málið til 1. viðgerð og varð beint í fíggjarnevndina.

I uppskotinum verður mælt til, at lögtingið veitir studning til vinnuligar fyritökur, og at tað úr landskassanum verður veitt lán til slíkar fyritökur sum hösnahald, smærri ísvirkir o.l.

Nevndin heldur, at tað er av största týdningi, at lað á smábygdum og aðrar staðir, har líkindir eru til less, verða gjörd liltök og sett á stovn virkir, ið kunnu geva arbeiði og inntökur til fólk á hesum plássum, og at tað almenna eigur at styðja slíkar fyritökur annaðhvört við at taka ábyrgd av lánum ella við beinleiðis studningi.

Men nevndin (við undantak av Poul Petersen) er av tí áskoðan, at landskassin vanliga eigur ikki at veita lán, tá hetta óneyðugt vil hekka lögtingsins fíggjarlóg og ikki geva lántakarunum aðrar fyrimunir enn teir, hann fær, við at landsstýrið veðheldur fyri slíkum lánum. Eisiðt vil nevndin (við undantak av Poul Petersen) halda, at tað var rímuligt, um jarðargrunnurin, sum var stovnaður við tí endamáli at veita lán til jarðabrúk, skuldi kunna loyst slíkar uppgávur sum tær her umtalaðu: lán til hösnahald og smærri mejarlir.

Nevndin (við undantak av Poul Petersen) mælir so statt tinginum til at biðja landsstýrið taka málið til viðgerðar og annaðhvört gera uppskot til eina láni- og studningsskipan, hareftir slík virkir sum tey her umtalaðu kunnu fáa lán og studning, ella seta fram uppskot til broytan av lóg nr. 174 frá 21. mai 1937 «om jordbrugets fremme», soleiðis at jarðargrunnin fyrst og fremst verður at veita driftslánum til smærri og störri jarðabrúk.

UPPSKOT

Málið verður sent landsstýrinum til kanningar, og biðið verður um at seta fram uppskot til komandi ólavsöku.

Minnilutin (Poul Petersen) mælir til at samtykkja lógaruppskotið, sum tað fyriliggur.

2. viðgerð 23. mars 1959.
Uppskot Poul Petersens fall 11 - 0.
Uppskot nevndinnar samtykt 21 - 0.

35. *Brovting í norðsjóvarkonventiónini.*

Ár 1959, 7. mars legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi framlöguskriv:

Á millumlanda fundi í januar 1959 komu londini á samt um eina konvention viðvikjandi fiskiskapinum í norðureystur Atlantshavi í staðin fyri norðsjóvar konventiónina frá 1946 undir navninum.

NORTH-EAST ATLANTIC FISHERIES CONVENTION

Soleiðis sum tilskilað í ANNEX eru nevndu havleiðir lagdar sundur í 3. Region 1 - 2. og 3 -. (smbr. viðlagda kort).

Sum tað sæst av hesum eru Föroyar eins og Ísland undir (región 1). Eftir galdandi norðsjógvarkonvensión eru Föroyar innanfyri norðsjóvarumráðið, meðan Ísland er uttanfyri.

Tað er eftir ynski frá landsstýrinum, at markið er lagt sum tað nú liggur. Munurin her er m.a. meskuviddin.

Annars verður víst til konventiónina, sum fylgir við í danskari týðing. (skjal 3).

Landsstýrið loyvir sær at leggja konventiónina fyri tingið við landsstýrisins viðmæli til góðkenningar til síðani at leggja hana fyri fólkatingið til ratifikatión.

1. viðgerð 14. mars, og 23. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Landsstýrið hevur lagt fyri lögtingið hetta mál við sínum viðmæli til góðkenningar, áðrenn konventiónin verður lögd fyri fólkatingið til ratifikatión.

Málið varð framlagt 9. mars og kom til 1. viðgerð 14. mars 1959, har málið varð beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at geva málinum tingsins viðmæli, og setur so slatt fram fylgjandi

UPPSKOT

Lögtingið samtykkir at viðmæla, at North-east Atlantic Fisheries Convention frá 24. januar 1959 verður ratificerað.

2. viðgerð 31. mars og 3. viðgerð 6. aprfl 1959.
Uppskot nevndinnar samtykt 22-0.

36. *Bátahylur í Kaldbak.*

Ár 1959, 6. mars legði K. Wang lögtingsmaður fram soljóðandi uppskot:

Vit undirritaðu vísa til hjálagda skriv dagsett 7. februar 1959 frá Kaldbaks sóknarstýri viðvíkjandi úthygging av Býggjarstöð í Kaldbak.

Fyri bygdina hevur tað stóran týdning at skapast kann ein kyrrur bátahylur og loyva vit okkum at seta fram

UPPSKOT
til

lögtingslóg um bygging av bátahyli í Kaldbak.

§ 1.

Úr landskassanum verða veittar Kaldbaks sóknarstýri kr. 60.000. til bygging av bátahyli í Býggjarstöð í Kaldbak.

§ 2.

Projekt verður at viðurkennast av Landsverkfræðinginum, ið somuleiðis hevur eftirlit við útbyggingini.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Við hesum heita vit á Föroya lögting um studning til framhald av arbeiðinum, ið gjört er í Býggjarstöð, so at har kann bliva ein fullfíggjaður bátahylur.

Hetta krevst av tí at bátarnir nú eru stórir og ov tungir at draga upp hvönn dag, teir verða nýttir.

Maskinbátar verða nógv nýttir í Kaldbak bæði til heimaútiróður og til sildagörn, og somuleiðis til ymiskan annan fluttning, og tíðin krevur, at tað mugu vera stórir bátar.

Vit rokna við, at tað kann koma at kosta o.u. 60 til 70.000 kr. at faa gjört Býggjarstöð til eina góða bátahavn, og vit vóna, at henda umsókn verður væl undirtikin av Föroya lögtingi.

1. viðgerð 9. mars 1959, og málið beint til havna- og veganevndina.

37. *Viðbót til minstuløn og fiskapris.*

Ár 1959, 7. mars legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
lögtingslóg um at leingja skipanina um studning úr landskassanum til minstulön og viðbót til fiskaprísin.

§ 1.

Við tí endamáli at gera lönjavningargrunn fiskimanna föran í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. december 1959 at veita manningini á föroyskum fiskiskipum og útróðrarmonnum til lands í Grönlandi viðbót til minstulön og/ella viðbót til fiskaprísin verður lögtingslóg nr. 3, 18. februar 1955 um uppískoyti til lögtingslóg nr. 72, 22. december 1951 um avrokning og lönjavningargrunn fiskimanna longd soleiðis, at 1,5 mill. kr. verða lætnar lönjavningargrunni fiskimanna í studningi úr landskassanum. Studningurin verður goldin grunninum innan 1. apríl 1960.

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1959.

lagtingslov om at forlænge tilskudsordningen fra landskassen til mindstelön og tilskud til fiskepriserne.

§ 1.

Med det formaal at sætte fiskernes lönreguleringsfond i stand til for tiden 1. januar til 31. december 1959 at yde mandskabet paa færöske fiskeskibe og baadfiskere i grönlandske farvande tilleg til mindstelön og/eller tilskud til fiskepriser forlænges lagtingslov nr. 3 af 18. februar 1955 om tilleg til lagtingslov nr. 72 af 22. december 1951 om fiskernes afregning og lönreguleringsfond, saaledes at der ydes fiskernes lönreguleringsfond 1,5 mill. kr. i tilskud fra landskassen. Tilskudet udbetales fonden inden 1. april 1960.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1959.

Viðmerkingar:

Eins og árini frammanundan loyvir landsstýrið sær at leggja fram uppskot um enduruýgging av studningsskipanini til lönjavningargrunnin til tingsins vælvild.

1. viðgerð 14. mars, og 19. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Málið var lagt fyri tingið av landsstýrinum 7. marts, var til 1. viðgerð 14. marts og var beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars og 3. viðgerð 1. april 1959.

Tingformaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Háknu Djurhuus o. fl.:

Sum uppískoyti til landsstýrisinsuppskotið av 7. mars 1959 verður sett sum nýggj grein 2:

Minstalön fiskimanna verður at prístalsviðgera við minstalönina í 1954 sum grundarlag. Meirkostnaðurin verður at rinda úr landskassanum um lönjavningargrunnin.

Grein 2 í landsstýrisins uppskoti verður at seta sum grein 3.

Tingformaðurin legði fram soljóðandi innihutaálit frá Sigurð Joensen o. fl.:

Mælt verður til, at fitgið samtykkir landsstýrisuppskotið frá 7. mars við teirri broyting, at 2,5 mill. kr. verða latnar Lönjavningargrunni skipsfiskimanna í studningi úr landskassanum, og ti fylgjandi uppskot sett fram:

«Staðinfyri tær 1,5 mill. kr., sum nevndar eru í § 1 fintu seinastu reglu verður sett 2,5 mill. krónur».

Uppskotið frá H. Djurhuus o. fl. var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: Niels H. Jacobsen, K. Wang, Robert Joensen, Johan Simonsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, K. Hoydal, J. H. Joensen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen og J. F. Öregaard.

Uppskotið fall 11—0.

Uppskotið frá Sigurð Joensen o. fl. var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: N. H. Jacobsen, K. Wang, R. Joensen, J. Simonsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, K. Hoydal og J. H. Joensen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen og J. F. Öregaard.

Uppskotið fall 11—0.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 30 atkvöðum.

38. *Veðhald av útgerðarláni til útiróður í Grønlandi.*

Ár 1959, 9. mars legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um ábyrgd fyri útgerðarláni til útróður í Vestur- og Eysturgrönlandi.

§ 1.
Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at taka ábyrgd av útgerðarlánum, sum bátskipanir taka, og sum hvör einstakur av bátskipanini heftir fyri in solidum, til útróður í Vestur- og Eysturgrönlandi í 1959.

§ 2.
Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for udrustningslaan til baadfiskeri i Vest- og Østgrönland i 1959.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for udrustningslaan, som baadelag optager og som hver enkelt af baadelaget hæfter for in solidum, til baadfiskeri i Vest- og Østgrönland.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerking:

Eftir lögtingslóg nr. 31 frá 14. mai 1958 fekk landsstýrið heimild at taka ábyrgd av útgerðarlánum upp í 600.000 kr. í 1958. Tá var bátatalið uppi í 44, men í ár verður bátalið ætlandi minst annað slikt, meu hvuss stórt tað verður, kann illa sigast enn, og tessvegna er onki hægstamark sett fyri ábyrgdini í hesum lógaruppskoti.

Treytin hevur verið, at hvör einstakur av bátskipanini heftir in solidum fyri la útgerð, sum landskassin hevur tikið ábyrgd av, og landsstýrið hevur tí hildið tað verið beint at taka treytina upp í lögina.

Vísandi hertil loyvir landsstýrið sær at leggja uppskot fyri tingið til tingsins vælvild.

1. viðgerð 14. mars, og 21. mars legði figgjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Ár 1959, tann 9. mars, legði landsstýrið fram uppskot til lög um veðhald av útgerðarlání til útróður í Grönlandi. Málið var til 1. viðgerð 14. mars og varð beint í figgjarnevndina, sum hevur viðgjört málið.

I viðmerkingunum frá landsstýrinum verður vist á, at löglingið eftir lögtingslóg nr. 31 frá 14. mai 1958 gav landsstýrinum heimild til at veð-

halda fyri útgerðarláni til útróður í Grönlandi upp í 600.000 kr., og at bátatalið tá var 11, men at bátatalið í ár ætlandi verður annað slíkt, og sostatt verður skotið upp, at einki hægstamark verður sett í lógina.

Nevndin er samd við landsstýrið um, at veðhald fyri nevnda láni verður givið, og at, tá óvist er, hvussu stór luttökan verður í Grönlandsútróðrinum, er rettast ikki at hava nakað hægstamark. Men við tað at bankarnir krevja, at bátsskipanir hefta sínámillum, skjýtur nevndin upp at og mælir so statt til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesi broyting:

Í § 1, 1. reglu, millum «sum og hvör» og «som og hver» verður skotið inn: «hvör bátsskipan sínámillum» og «hvert baadelag indbyrdes».

2. viðgerð 21. mars og 3. viðgerð 3. april 1959.
Uppskot landsstýrisins við broyting nevndarinnar samtykt 27 0.

---

39. *Studningur til heimaútróður.*

Ár 1959, 9. mars legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um studning til heimaútróður.	lagtingslov om tilskud til fiskere, der driver hjemmefiskeri.
§ 1.	§ 1.
Lögtingslóg nr. 48 frá 24. oktober 1958 um studning til heimaútróður verður hervið endurnýggjað at galda í figgjarárinum 1959/60.	Lagtingslov nr. 48 af 24. oktober 1958 om tilskud til fiskere, der driver hjemmefiskeri fornyes herved til at gælde for finansaaret 1959/60.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi 1. april 1959.	Denne lov træder i kraft 1. april 1959.

Viðmerkingar:

Útreiðslurnar av hesi skipan hava verið kr. 126.000,— í fíggjarárinum 1957/58. Hvussu mikið hon fer at vera í hesum fíggjarárinum er ikki gall at siga eitt, men verður útreiðslan til opnar bátar nakað lað samu og haraftirat útreiðslan til viðbót til dekksför, sum menn mela til eitnar stórt hundrað túsund krónur, so verður samlaða útreiðslan um eina kvart millión krónur.

Við hesum viðmerkingum loyvir landsstýrið sær at leggja málið fyri tingið til tingsins vælvild.

1. viðgerð 14. mars, og 19. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

9. mars í ár legði landsstýrið fyri tingið uppskot til lögtingslóg um studning til heimaútróður.

14. mars var málið til 1. viðgerð og var beint í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingunum verður sagt, at útreiðslurnar seinasta fíggjarár hava verið kr. 126.000,—. Landsstýrið metir samlaðu útreiðslurnar í komandi fíggjarári at verða einar kr. 250.000,—.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars og 3. viðgerð 4. april 1959.

Tingformaðurin framlegði soljóðandi broytingaruppskot frá nevndini:

Í staðin fyri broytingaruppskot frá nevndini verður sett:

Sum nýtt punkt 2 í § 1 í lögtingslóg nr. 48 frá 21. oktober 1958 verður sett:

«Hesin studningur verður latin fiskimonnum av öllum tí avreiddu renda fiskinum, bæði manningarparti og bátsparti, uttan frádrátt fyri agn ella aðrar útreiðslur».

Uppskot landsstýrisins við broyting nevndinnar samtykt 29—0.

40. *Elektrificering av útoyggjum v. m.*

Ár 1959, 9. mars legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi skriv:

1. Álagt verður landsstýrinum í samráð við S.E.V. og avvarðandi sóknarstýrir at skipa so fyri, at útbyggingarætlan til ravmagnan av teimum útoyggjum og smábygdum, ið enn ikki hava fingið ravmagn ella ikki eru í ferð við at fáa tað, verður gjørd innan 1. januar 1960 um útreiðslu fyri hesar oyggjar og bygdir.

2. Landsstýrið fær upp í hendi at leggja slíkt fíggjarligt grundarlag undir hesa útbygging, at tað tryggjar bestum útoyggjum og smábygdum ein ravmagnspris, ið ikki liggur hægri enn í stórbygdunum.

3. Landsstýrið kannar ravmagnsprísin í teimum bygdum, ið sjálv ir hava motorverk, sum til dømis: Viðareiði, Norðdepil-Hvannasund, Nólsoy, Hest, Skopun, Sandur og Hvalba, og um hann liggur órímiliga høgt í mun til prísin í stórøkjunum, leggur uppskot fyri fingið um størri beinleiðis studning til byggikostnaðin av hesum verkum so ravmagnsprísurin kann fáast niður.

Viðmerkingar:

Nú er størsti parturin av Føroyum ravmagnaðar tilbetur, men enn liggja nakrar útoyggjar og smábygdir eftir, ið ikki kunnu gleða seg yvir henda hentleika, ið ravmagnið er, ella njóta gott av honum.

Oyggjarnar, ið enn liggja «myrkar» í so máta, eru Fugloy, Svínoy, Kallsoy, Koltur, Mykines og Skúvoy. Tó er at siga um hesar háðar síðsta, at tær eru komnar vel á leið við at fáa eina útbygging í lag og hava í lögtingi fingið góða undirtøku við tí, tær hava biðið um.

Á summum av hesum oyggjum eru tó nøkur smáverk, ið nøkur hús hava tikið seg saman um, men verk, ið kunnu veita øllum húsum ravmagnsmegi til ljós og annað, resta enn.

Uttanfyri stórøkini Klaksvík S.E.V. og El-Suðuroy eru bygdirnar Skálavík, Húsavík, Dalur og Skarvanes, ið ikki hava ravmagnsverk og eiga tær at verða tiknar við í útbyggingarætlanini, ið landsstýrið verður biðið um at fáa gjørt.

At henda útbygging í summum føroum verður heldur dýr í mun til tað, hesi smápláss fíggjarliga eru før fyri, er ikki óhugsandi, tí verður landsstýrið biðið um at leggja slíkt fíggjarligt grundarlag undir hesa útbygging við størri studningsveitan til byggikostnaðin til dømis, at prisurin fyri ravmagnið kortini ikki verður hægri enn í stórøkjunum.

Grundirnar fyri, at landsstýrið verður biðið um at kanna ravmagnsprísin í teimum bygdum, ið sjálvar hava motorverk, liggja í tráð við tað, ið sagt varð omanfyri um at skipa so fyri við útbyggingini av ravmagni til útoyggjarnar, at prísurin kemur longst møguligt niður. Málið má verða tað, at tær bygdir og oyggjar, ið liggja soleiðis fyri, at eindi ikki fæst frá einum av teimum trimum stórøkjunum, kortini ikki skulu gjalda meira fyri ravmagnið, enn tað koslar í stórøkjunum.

Vísir ein kannan av prísunum hjá áðurnevndu motorverkum, at hann liggur órímiliga högur sambart tí, ið sagt er frammanundan, verður landsstýrið biðið um at leggja uppskot fyri tingið um störri beinleiðis studning til byggikostnaðin av hesum verkum, so ravmagnsprísurin kann fáast niður, og annars kanna, um það ber til at fáa hesum bygdum meiri og biligari streym á annan hátt enn við teimum motorverkum, tey nú hava.

1. viðgerð 16. mars, og 13. april legði el-nevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Ár 1959 hin 9. marts legði fólkaflokkurin uppskot til samtyktar fram á ting. Málið kom til 1. viðgerð 16. marts og var beint í serliga 5-manna nevnd.

Nevndin hevur viðgjört málið og var samd um at seta fram soljóðandi

UPPSKOT

Löglingið samtykkir at biðja landsstýrið kanna allar teir í uppskotinum umröddu spurningar og leggja málið aftur fyri komandi vetrarting.

2. viðgerð 15. april 1959.

Uppskot nevndinnar samtykt 25 0.

---

41. *Uppskot til samtyktar (Radarmálið).*

Ár 1959, 23. mars legði Hanus við Högadalsá lögtingsmaður fram soljóðandi uppskot:

Það má nú sigast at vera púra greitt, at það sum ætlað er at fara fram í Mjörkadali og á Samfelli á Streymoy og Uppi á Varða norðuri á Eiði í Eysturoynni eru hermálsligar atgerðir.

Landsstýrið hevur tíðliga 1958 havt uppskot í EW-málinum (Early Warning) til viðgerðar. Í tinginum hevur hetta ikki verið grett, hvörki fyri ella aftaná valið. Ei heldur hevur það verið havt frammi av teim flokkum, sum hitt gamla landsstýri skipaðu frammanundan valinum,

soleiðis at Föroya veljarar fingu havt hetta ovurstóra og týðningarmikla mál í huganum við valið.

Flokkinum kunnigt er Early Warning-tiltakið upplýgt sum verndar-garður úr Grönlandi til Persiu, U.S.A. til verndar. Ætlanin tykist at vera, at Föroyar nú, hvat lætt ikki hava verið fyrr, skulúu verða ein steinurin í hesum garði. Tað man vera óneyðugt at siga nökkrum mannsbarni í Föroyum hvör vandi, ið fer at standast av hesum.

Flokkurin vísir til það memorandum, sum hann flýddi löglingsfeemanninum leygardagin hin 21. mars 1959, so skjótt sum Föroya ríkisstjórn hevði fluttt tey tíðindi, at ætlanin veruliga var at hava standandi her í Föroyum.

Tingmenn hava rætt og skyldu at vita um alt sum gerst í hesum landi.

Tann framferð sum ríkisstýrið og landsstýrið hava havt í hesum máli er eftir okkara hugsan brot upp á aldargamlan föroyskan sið og hugsunarháttt, brot á okkara mannarettindi og fólkaræði og hartil brot á heimastýrislógina, sum júst teir flokkar, ið nú landsstýri skipa, godkenna.

Við hesi greinagerð setir Tjóðveldisflokkurin fram fylgjandi

UPPSKOT TIL SAMTYKTAR

1. Föroya lögting krevur fulla frágreiðing um alt sum fram er farið í EW-málinum og fulla frágreiðing um hvat nú er í gerð í hesum máli.
2. Föroya lögting krevur at allir hernámsligar ætlanir í Föroyum beinan vegin verða sleðgaðar og at Föroya fólk fær bövi at taka stöðu til málið við fólkaatkvöðu.

1. viðgerð 1. april. og 23. april legði serstök 7 mannanevnd fram sa-ljóðandi

ÁLIT

Málið varð lagt fram av tjóðveldisflokkinum 23. mars og við 1. viðgerð varð það beint í serliga sjey-mannanevnd.

Nevndin hevur viðgjört málið so út í ætir, sum það eftir umstöðunum er hava verið líkindir til.

Núverandi landsstýri eins og það fráfarna hevur verið til fundar saman við nevndini fyri at geva henni frágreiðingar um það, sum hent er í málinum um bygging av radarstöð á Sodufelli. Somuleiðis hevur nevndin eisini fingið útskrift av gerðabók landsstýrisins fyri tað tíðarskeið, sum hetta mál er viðgjört í landsstýrinum, eins og alt brævaskifti, sum farið er fram í málinum, er latið nevndini upp í hendur.

Ríkisumboðsmaðurin hevur eisini givið nevndini munnligar frágreiðingar, eins og nevndin gjögnum ríkisumboðsmannin hevur fingið svar frá ríkismálaráðnum upp á ymsar spurningar, sum landsstýrið hevur sett fram viðvíkjandi málinum.

Fyri at fáa bylling á, hvat ið radar og loran eru, bað nevndin Tórbjörn Poulsen, civilingeniör, koma til fundar og geva stutta frágreiðing um hetta evnið. Hansara frágreiðing er lögd við sum skjal í álitinum.

eins og onnur skjöl, eitt nú gerðabók landsstýrisins, brev frá landsstýrinum til ríkisumboðsmannin dagsett 8/8 1958, brev frá ríkisumboðsmanninum til landsstýrið dagsett 17. november 1958, sáttmáli millum forsvarets bygningstjeneste og landsstýrið um fremjan av arbeiðinum.

Ríkisumboðsmaðurin upplýsti fyri nevndini, at lað var Nato, sum stóð aftan fyri hesi arbeiðir. Á Sodnfelli og í Mjörkadali skuldu byggjast ein radarstöð, ein radiostöð eins og íbúðir til millum 100 og 150 starvsfólk. Tænastufólkið skuldi vera danskt og föroyskt. Útreiðslurnar av hesum arbeiðum fóru at vera o.u. 10 milliónir krónur.

Landslæknin var eisini biðin at koma saman við nevndini og greiða frá tí læknaligu, sum sigast kundi í málinum. Hann helt fram, at um tann ólukkan hendi, at atombardagi tók seg upp og at Föroyar í einum slíkum bardaga komu at vera fyri álopi, so vóru vit nógv verri fyri enn tey lond, sum hövdu húgvið seg út til at taka imóti slíkum áloptum. Her var ongin möguleiki fyri burturflyting av fólki, onki reint vatn at lvina sær í aftaná eitt slíkt álop, og forfört var at gera slík verndartiltök, sum vóru til nakran hata.

Nevndin hevur so gjölla sum gjörligt roynt at kanna gerðabók landsstýrisins eins og tað brevskifti, sum farið er fram í málinum og hildið tað saman við tað, sum landsstýrismenninir munnliga hava greitt nevndini frá.

Burtur úr hesum tilfari fæst, at spurningurin um at fremja hesi arbeiðini er rætliliga gamal. Longu 22. november 1956 var málið fyrstu ferð viðgjört á landsstýrisfundi og hevur síðan av og á verið til viðgerðar har. Landsstýrið tykist at hava havt stóran áhuga fyri, at málið verður framt, men selur kortini tær treytir fyri, at oyggjarvegurin verður gjördur við fullari breidd, 5,5 m, úr Havnini og heilt norður í Kollafjarðardal.

Hesum vilja Nato-myndugleikarnir ikki taka lut í og eru bert hugaðir at gera triggjar metra breiðan veg av Sundshálsi norður í Mjörkadal og at Sodnfelli; men tó at ongin onnur beinleiðis avgerð sæst skrivliga at vera tikin í landsstýrinum, so tykist tað at döma eftir millum annað brevi frá ríkisumboðnum 17/11 1958, har talað verður um «anlæg, hvis opförelse i forvejen er tilrettelagt af de færöske myndigheder», sum avgerð kortini er tikin, og 12. marts 1959 er so sáttmáli millum Hærens bygningstjeneste og landsstýrið undirskrivaður.

Í viðmerkingunum til uppskotið frá tjóðveldisflokkinum verður sagt, at tingmenn havu rætt og skyldu at vita um alt, sum gjört verður í landinum.

Hetta er rætt. Væl veit nevndin, at tey viðurskifti kunnu koma, sum ikki ber til at gera almannakunnug, meðan samráðingar fara fram, og við tað, at Nato í hesum föri er partur í samráðingunum, kann tað ætlast, at tögnskylda er krevd; men kortini átti Föroya landsstýri ikki at tikið avgerð í slíkum stórmáli uttan at leggja tað fyri Föroya lögting fyrst.

Í viðmerkingunum verður eisini sagt, at tað er eyðsæð, at tað, sum ætlað er at fara fram í Mjörkadali og á Sodnfelli á Streymoynni og Uppi á Varða á Eiði í Eysturoynni, eru hernálsligar algerðir.

Av teim skjölum og munnligu frásögnum, sum nevndin hevur kannað, fykist tað prógvað, at radarstöðin á Sodnfelli verður bygd av Nato sum eitt lið í hernámsligu verndartiltökum hjá hesum stovni, meðan tað kann vera ivasamt, um tað sama kann sigast um loranstöðina á Eiði. Tað er kortini upplýst fyri nevndini, sí svar frá ríkismálaráðnum gjögnum ríkisumboðið upp á ymsar spurningar frá landsstýrinum, at hvörki kriggsvápn ella herfólk skulu vera knýtt at hesum báðum stöðunum.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilutu og tveir minnilutar.

Meirlutin (Trygvi Samuelsen, Leon Joensen, Haldor Hansen og Marius Johannesen) heldur fram, at eftir teim upplýsingum, sum komnar eru fram undir nevndarviðgerðini, má málið ætlast at vera avgjört.

Ein minnilutí (Sigurð Joensen og Karsten Hoydal) förir fram:

23. marts í ár legði tjóðveldisflokkurin nevnda mál fram á ting, og varð tað eftir 1. viðgerð beint í 7-manna nevnd.

Nevndin hevur haft líkindi til at kanna nökur skjöl viðvíkjandi D.E.W.-málinum, og hevur hon eisini fingið munnliga frágreiðing eftir áheitan: Frá limum í fráfarna landsstýrinum, frá P. M. Dam, lögmanni, ríkisumboðsmanninum og landslæknanum. Umframt hevur Torbjörn Poulsen, verkfræðingur, givið nevndini stutta tekniska frágreiðing um radar, decca og loran.

Av öllum tí, sum fram er komið er greitt, at fráfarna landsstýrið hevur samráðst við NATO-menn og við danska verjumálaráðið uttan at hava givið löglingium ella Föroya fólki hylling á, hvat samráðst varð um, og hvat landsstýrið hevði í hyggju at gera.

Minnilutin skal minna á, at landsstýrið í 1950 legði málið um heimaverju í Föroyum fyri löglingið. Hetta mál varð felt í tinginum við teirri motivering, at fólk í heimaverjunni var vápnað (sí löglingsmál nr. 8/1950).

Í D.E.W.-málinum hevur landsstýrið saman við NATO-mannum og danska verjumálaráðnum í meira enn tvey ár (frá 22. november 1956 til 13. mars 1959, sí skjöl, sum eru viðlögd málinum) haft loyniligar bæði skrivligar og munnligar samráðingar. Hesar samráðingar eru loknar við: «Overenskomst mellem forsvarsministeriets bygningstjeneste ved nordsjællandske bygningsdistrikt og Færöernes landsstyre ved landsingeniörkontoret, Tórshavn, vedrörende projektering og udförelse af en adgangsvej til militært anlæg paa Sodnfelli». Hesin byggisáttmáli er 13. mars í ár «approberaður» við undirskrift Kr. Djurhuus's.

Við hesum er prógvað, at landsstýrið sjálvræðisliga hevur givið fremmandum herfólki innrás í Föroyum í friðartíð. Ríkisumboðsmaðurin hevur á fundi saman við nevndini váttað, at stöðin á Sodnfelli er hernámslig (militær).

Stöða löglingsins og Föroya fólks viðvíkjandi spurninginum um at hava vápnað fólk í landinum í friðartíð er valla broytt síðan 1950. Minnilutin skal harðliga álata, at sáttmáli um herúthúgving Föroya er gjördur uttan um löglingið og fólkið. Minnilutin hevur í sínum starvi í D.E.W.-málinum ógvast við at síggja, at unsitingarvaldið fær tikið sær so mógv ræði, at tað einsamalt tekur avgerðir í málum sum bróta við öldargamlar, góðar tradisjónir og hugsanir, og sum eru lagnummál fyri

Föroyar langt fram í tiðina. D.E.W.-málið er ein spurningur, sum bæði tjóðskaparliga, siðmenningarliga og moralskt viðkemur hvørjum einstakum fólki í Föroyum, tað er tí til líllan sóma fyri landsstýrið, at það hevur bundið ein so álvarsamran spurning saman við játtan um nakað av peningi til vegagerð og víðkan av S.E.V.

Øllum má vera greitt, at hetta at geva hervaldi setur í landinum í friðartíð er eitt mál, sum eingin í dag rettiliga dugir at meta avleiðingarnar av. Tað einasta,vit vita við vissu, er, at í øllum londum, har fremmandir hava gjört hervirkir, hevur útbúgvingin vaksið ár undan ári. Tað er tí heilt greitt, at herútbúgvingin eisini fer at vaksa í Föroyum í komandi árum. At hetta fer at fáa stóra og ringa ávirkan á ungdómin í Föroyum, ivast vit ikki í. Minnilutin hevur eisini ampa av, at eydnast það fyrst hervaldinum reiðiliga at fáa fótin fastan í Föroyum, tá verður það ikki leingi, til sama hervald fer at hava boð eftir föroyskum ungdómi til herfrenastu, hvat aldri hevur verið áður. Verða föroysk foreldur ikki spurd nú er ikki væntandi, at tey vera spurd tá heldur.

Í lötuni vila vit einki um, hvussu leingi «kalda striðið» fer at halda á, hvört það verður 10 -- 20 - 25 ár ella fleiri. Vansarnir av at hava herfólk í landinum eru ikki fyribils. Hvussu fegin vit øll ynskja at bardagur ongantíð má bresla á, mugu vit kortini øll gera okkum greitt, at það er möguleiki fyri bardaga. Tað er neyðugt at rokna við hesum möguleika. Annað hevði verið ábyrgdarleyst.

Eftir teinnum upplýsingum, nevndin hevur fingið, er radar- og radiostöðin á Sodnfelli ikki gjörd í Föroyum til verju í vandastund, men er hon lið í NATO-«verndargarði». Hesin garður av radar- og radiostöðum er ikki gjördur bert fyri at verja, hann er eisini ætlaður til álops, tí at stöðirnar eru förar fyri bæði at boða frá figgindarakettum og at leiða egnar rakettir í mál í figgindafaudi.

Verður herútbúgvingin ikki sleðgað, má avgjört haldast, at Föroyar í einum komandi bardaga vera eitt týðandi militert mál í NATO's verndarvirki. Tað er hugsan minnilutans, at liggja Föroyar berar, er vandin fyri álopi í einum komandi bardaga nógv minni, enn um herstöðir verða bygdar her, og landið soleiðis verður gjört til eitt militert mál.

D.E.W.-nevndin kallaði sum nevnt inn landslæknan til at greiða frá stöðu læknanna. Landslæknin dugdi ikki at síggja, at nökur verndartiltök fingu gjörst í Föroyum. Vóru vil fyri álopi við atomvápni, fór einki nýtiligt vatn at vera, eingin etandi matur og ivingarsamt var um nakað fólk livdi eftir. Landslæknin segði, at John Douglas, militerlækni NATO's í fyrilestri í december 1958 hevði sagt, at verja av sivilfólki var mögulig í stórum londum, tó ikki uttan verndartiltök og venjing. Sum dömi nevndi landslæknin, við donskum læknablöðum sum heimild, at við royndarspreinging á Bikinioynni rak radioaktivt dust 302 km undan ættini, 302 km upp í ettina. Fólk doyðu og vóru skadd á einum öki sum var 18.000 km² til viddar.

Minnilutin skal harðliga mótmæla, at Föroyar, sum eingi líkindi hava at verja sivilfólkið, verða gjördar eitt lið í verndar- og álopsvirki hjá öðrum landi. Verður hetta tiltak framt, uttan at fólkið fær hövi at tala, er tað yvirgangur móti fólkinum.

Nevndarkanningarnar hava sýnt, at landsstýrið í samráðingunum hevur haft í huga, at hermálsliga bygging NATO»s fór at loysa spurningin um fíggjarliga ílögu til gerð av oyggjarvegnum og til viðkan av S.E.V. Av byggisáttmálanum, sum gjördur er, sæst skilliga, at vegurin í Mjörkadal bert er «en adgangsvej til militært anleg paa Sødnfelli». Vegurin fær so statt ongan týdning fyri gerðina av oyggjarvegnum, men so leingi sum hermenn balast í Mjörkadali og á Sødnfelli, er vegurin teirra, og fer hann at forða fyri gerð av oyggjarvegnum, har sum hann var ætlaður. Viðvíkjandi S.E.V. er upplýst, at radar- og radiostöðin skal nýta 5mill. KW ella eins nógvan streym og Tórshavnar býur.

Eftir heimastýrislógini var tað landsstýrisins skylda at leggja D.E.W.-málið fyri lögtingið. Hetta átti langt síðan at haft verið gjört. Hval landsstýrisins stöðulakan í málinum viðvíkir ber ikki til at siga annað, uttan at hon er ógreið. Nökur prinsippiell stöða: fyri ella móti er ongantíð tikin. Tað er einki til skjals um, at meirilutin í landsstýrinum hevur givið játtan til bygging av radar- og radiostöð á Sødnfelli, bert hevur meirilutin ikki sett seg móti, at mögguleikarnir fyri bygging vórðu kannaðir. Meirilutin sigur seg hava ætlað, at málið skuldi koma fyri tingið. Tveir av monnunum í gamla landsstýrinum hava yvirfyri nevndini váttað (teir eru Edw. Mitens og O. J. Jensen), at teir hövdu ikki í hyggju at taka endaliga avgerð í málinum, áðrenn tingið var spurt.

Tað er greitt eftir heimastýrislógini, at heimastýrið tað er lögting og landsstýri, ikki lögting ella landsstýrið. Framvegis er tað greitt, út frá hesi somu lög eins og út frá öllum parlamentariskum, ja, öllum demokratiskum hugsunarhátti, at landsstýrið er undirgivið lögtinginum. Hetta er galdandi í öllum málum, eisini slíkum har lóggávuvaldið er hjá dönum. Tann skylda, sum danastjórn hevur til at leggja lógir og traktatir fyri heimastýri okkara, áðrenn tær verða settar í gildi, er eftir § 7 í heimastýrislógini grundað á: At tað skal tryggjast «at lagtinget i videst muligt omfang faar indflydelse paa udformningen af særlige bestemmelser for Færöerne i love, der gives af rigets myndigheder».

Tað má sláast fast, at sum umsitingarvald hevur landsstýrið ongan myndugleika haft til at taka avgerð í D.E.W.-málinum uttan um lögtingið.

Málið er nú komið fyri tingið til viðgerðar, men her er tað at siga, at hóast D.E.W.-málið hevur verið til umröðu millum landsstýrið öðru megin, NATO og danska verjumálaráðið hitt megin tey seinastu tvey áriui, hevur hetta verið gjört loyniliga og í trúnaði, soleiðis at hvörki Föroyn fólk ella lögtingið hevur haft minsta varhuga av, hvat ið var í umbúna.

Tá ið sitandi lögting var valt, var hetta ovurhonds álvarsama mál als ikki frammi fyri veljaranum, og muga vit so statt ásanna, at hetta lögtingið hevur onga heimild frá fólkinum til at taka eitt stig, sum eftir öllum at döma, kemur at sela mark í fólksins sögu.

Lögtingið hevur ikki heimild til annað uttan at steðga D.E.W.-málinum fyribils, samstundis sum eitt av tveimum verður gjört:

1. Nýval til lögtingið.
2. Fólkaatkvöða um D.E.W.-málið.

Vit mæla til at gera hitt seinra, tí tá fær øll tjóðin tikið stóðu til hetta mál sær.

Vit mæla til at leggja fylgjandi spurning undir vanliga fólkaatkvøðu:

Viltja tygum, at NATO byggir radarstøð í Føroyum?

Minnilutin vónar, at Føroya lögting gevur D.E.W.-málinum sakliga og verduga viðgerð, sum gjølla lýsir málið og tann týdning lað hevur fyri tjóðina bæði nú og í framtíðini.

Fyri at Føroya fólk nú skal fáa fullar upplýsingar um D.E.W-málið krevur minnilutin, at orðaskiftið í tingsalinum um málið verður útvarpað.

Ein annar minnilutin (Knút Wang) vísir til tær í høvuðsálitinum givnu frágreiðingar um tær kanningar hin av lögtinginum í hesum máli valda serliga 7-mannanevnd hevur gjört, men ger annars hesar viðmerkingar:

Meðan nevndin sýnist at hava fingið til skjals øll tey skriv, sum viðvikja hesum máli, meðan fráfarna landsstýrið hevur sitið, kann hetta sama ikki sigast viðvikjandi teim skjølum, sum mega vera til taks og viðvikja tíðini, meðan núverandi landsstýri hevur sitið og kennir til.

Lögmaður hevur fyri nevndini upplýst, at í hansara tíð í landsstýriinum er eingin viðgerð farin fram av málinum, uttan bara tá oyggjarvegurin var fyri og at Nato skuldi gera vegin. Hann segði seg hava skilt, at málið var avgjört og at «man» var komin til sættis um málið.

Seinni er eftir ynski frá hesum minniluta (K. Waug) komin nevndini til kunnleika sáttmáli sum nevnist: Overenskomst mellem forsvarets bygningstjeneste ved nordsjællandske bygningsdistrikt og Færöernes landsstyre ved landsingeniørkontoret Tórshavn, vedrörende projektering og udförelse af adgangsvej til *militært* anlæg paa Sandfelli.»

Hesin sáttmáli er undirskrivaður 12. mars 1959 av M. Helmsdal fyri landsverkfröðingsskrivstovuna og Bent Nielsen fyri Nordsjællandske bygningsdistrikt. Sáttmálin hevur við lögmansinnsigli hesa viðmerking:

Overenskomsten approberes, — Tórshavn *13. marts 1959.*

Færöernes landsstyre (sign.) Kr. Djurhuus.

Sáttmálin er viðheftur álitinum. Tað kann viðmerkjast, at landsstýrið hvörki hevur sjálvboðið lagt sáttmálan fram í nevndini, ei heldur sagt, at ein lílikur sáttmáli var til, tá landsstýrið varð spurt, um endalig tilsögn um bygging fyrilá.

Nevndin hevur ongar upplýsingar fingið umær samráðingar, sum fördar hava verið um lendi til radarstöð, hús í Mjörkadali, brúgv í Kaldbakshotni, ella toghana frá henni.

Hesir sáttmálar hava tann týdning, at fyrrenn teir vóru í lagi kann ikki nökur radarstöð verða bygd á Sodnfelli. Spurningurin um bygging av veg og grundlendi hevur verið neyðugur at greiða, áðrenn talan er um at byggja sjálva radarstöðina. Landsstýrið hevur við at góðkenna frammanfyrinevnda sáttmála eisini átikið sær ábyrgdina fyri at radarstöðin kann verða bygd.

Somuleiðis skal verða ávist, at samstundis við at hetta mál hevur lagið á tingið og nevndin hevur gjört sínar kanningar, hava fyrireik-

ingarnar hildið fram undir fyrisæti av landsverkfröðiugsskrivstovuni, ið er stovnur undir landsstýrinum.

Hetta vísir, at landsstýrið hevur ikki gjört stig til at steðga fyrireikingunum, meðan lögtingið viðger málið.

Minnilutin ásannar, at samráðingar leingi hava verið um hetta mál, so sum í hövuðsálitinum sagt, men hóasl tað, at tílíkar samráðingar, ti tær eru av hermálsligum slagi möguliga ikki kunnu kunngerast á sínum fyrsta stigi, so kunnu tær av landsstýrinum aldri förast longri enn avgerð um bygging ella ikki skal takast. Minnilutin fastheldur, at landsstýrið, uttan at hava spurt lögtingið, ongan rætt hevur til at taka endaliga avgerð í einum fyri Föroyar so avgerandi máli, og at landsstýrisins góðkenning 13. mars 1959 av sáttmálanum av 12. mars, sum frammanfyri er umtalaður, er ikki bindandi fyri lögtingið, ti at landsstýrið her er farið longur, enn tað hevur heimildir til.

Landsstýrið er bara umsitingarvald og hevur aldri fingið heimild til at gera sáttmála, sum loyvir, at radarstöð verður bygd ella at gera sáttmála við danskt hervald um bygging av veg til Mjörkadals.

Í teim útskriftum av gerðabók landsstýrisins, sum fingnar eru nevndini, er radarstöðin nevnd, men annars bert spurningar umröddir, sum viðvíkja oyggjarvegnum. Har er einki nevnt um, at radarstöðin skal verða bygd, sum eitt lið í E.W.- tænastu Natos.

Sámi minniluti vil undirstrika, at hann viðurkennir tann týðning Nato hevur havt og hevur til verju fyri Vesturheimin og at skapa javnvág hermálsliga, so kríggj verður forðað. Men hetta er ikki tað sama sum at vit viðurkenna nökrum rætt til at byggja hermálslig virki her á landi, uttan at föroyinga fólkavalda umboð, lögtingið, verður eftirspurt. Vit fasthalda, at ein tjóð, um hon er lítil sum hin föroyska, eisini í hesum máli, má hava sín sjálvavgerðarrætt, og at principp föroyinga um ikki at luttaka í hermálsligum útbúgvingum ikki kann verða brotið, uttan so at föroyingar fult vitandi taka ábyrgdina av tí. Sum fylgja av ríkisfelagsskapinum við Danmörk, komu vit uppí Nato ökið, men föroyingar sjálvir hava ikki verið spurdir, um teir vildu góðtaka tað.

Tað má sláast fast, at landsstýrið ikki kann binda Föroyar til eina tílíka herútbúgving, og í sáttmálanum av 12. mars 1959 hevur landsstýrið váttað, at talan er um hermálsligt virki.

Viðvíkjandi stöðu teirra landsstýrismanna, sum umboðað hava Hin föroyska fólkaflokkin í fyrrverandi landsstýrum, verður vist til frágreiðing frá Hákuni Djurhuus í Föroya útvarpi 21. mars, endurprentað í Dagblaðnum 1. apríl 1959, har tikið verður til, at meðan hann (Hákun Djurhuus) sat í landsstýrinum «var endaligt lyfti ikki givið um nakra útbygging, ei heldur var farið undir nakra útbygging.» Og hvar hann sigur flokksins stöðu í fyrstu syftu at vera hesa:

«Föroyingar eru eitt fólk, ið eru mótstöðumenn av hernaðartiltökum og eru ímóti eini og hvörjari hernaðarútbygging av Föroyum.» Sonuleiðis skal verða vist til landsstýrisins gerðabók av 13. juni 1958, har O. J. Jensen hevur tikið serstöðu, ið má skiljast so, at hann hevur ikki givið endaliga tilsögn um, at spurningurin verður samtyktur. Sonuleiðis skal verða vist til munnliga frásögn O. J. Jensens í nevndini, har

hann segði, at eftir hansara áskoðan mátti málið verða lagt fyri tingið, áðrenn endalig avgerð var tikin, og at hann var við til at kasta aftur uppskotið, sum M. Helmsdal kom við í hesum máli aftaná tænastuferð sína í Danmark. Og samstundis kann verða mint á, at í gerðabók landsstýrisins frá sumunum fundum um hetta mál er lítið annað fört til gerðabókina enn, at «málið var útsett». Hetta sýnist at prógva, at umræður landsstýrisins um hetta mál hava ikki allar verið fördar til gerðabókina.

Í brevi 8. august 1958 til ríkisumboðið frá landsstýrinum, undirskrivað av lögmanni Kr. Djurhuus, verður tilsögn givin um at byggja radarstöðina, tó við tí treyt, at oyggjarvegurin skal byggjast líka norður í Kollfjarðarvegin. Tað er einki lagt fyri nevndina sum prógvar, at landsstýrið táverandi hevur vikið frá hesi stöðu. Nevndin hevur ikki fingið fyrilagt nakra útskrift av landsstýrisins gerðabók, har tílík avgerð er fikin, ei heldur nakað sum lýsir, nær loyvi er givið til at byggja brúgv í Kaldbaksbotni ella togbana frá henni.

Sum heild kann sigast, at endalig avgerð fyriliggur eingin skrivlig fyrreem sáttmálin frá 12. mars 1959.

Minnilutin heldur, at landsstýrið við at fyrireika, undirskriva og góðkenna sáttmálan av 12. mars 1959 — sum er forútsetningurin fyri, at radarstöðin kann verða bygd — hevur farið útum sínar heimildir. Avgerðin um radarstöðin skal verða bygd ella ikki, má eftir minnilutans áskoðan, *eina* vera hjá tinginum, ið ikki er bundið av landsstýrisins góðkenning av sáttmálanum. Uppskot verður sett samsvarandi hesum.

Um lögtingið skal avgera, um fólkaatkvöða skal vera um bygging ella ikki, tí málið ikki var frammi undan seinasta lögtingsvali, vil minnilutin umhugsa.

Sami minniluti heldur tað vera neyðugt, at lögtingið avgerð, at ongar herútbúgvingar, undir hvörjum skinni tær enn koma fram, verða fyrireikaðar ella framdar, uttan samtykt Föroya lögtings og verður uppskot sett um tað.

Undir viðgerðini í nevndini var mælað, at lögtingið hevur ikki altið verið saman, tá nevndu spurningar hava verið lagdir fyri landsstýrið. Tessvegna verður vist til munnligt uppskot frá lögtingsformanni J. Fr. Øregaard undir viðgerðini av landsstýrismálum, at lögtingið átti at skipa eina utanríkismálanevnd. Minnilutin tekur undir við hesum uppskoti og heldur, at lögtingið, hvörja ferð tað kemur saman til regluliga tingsetu, eigur at velja tílíka 5-mannanevnd, sum landsstýrið kann samráðast við um utanríkismál. Uppskot verður sett um tað.

Minnilutin heldur, at sjálvt um tað ikki er gjörligt at siga, hvör vandi, ið stendst av eini radarstöð í kriggstíð, so kann tað við vissu sigast, at vandin er minni við ongari radarstöð.

Um so er, at radarstöðin verður bygd eftir samtykt Föroya löglings, vil minnilutin verða við til at umhugsa hvörji tiltök, ið eiga at verða framd til at forða avleiðingar av hesum í friðar- og kriggstíð, men heldur, at fyrst eigur spurningurin um bygging ella ikki at verða greiður.

Minnilutin heldur, at málið um loranstöð á Eiði ikki eigur at verða

avgjördur saman við spurninginum um radarstöðina, li henda stöð hevur beilt annan týdning.

Minnilutin vil eisini í hesum álitti vísu á, at 9. mars var fyrispurningur til landsstýrið um oyggjarvegin settur av fólkaflokkinum — hesin fyrispurningur var av landsstýrisflokkinum avvístur, men 12. mars er hin í álitinum nevndi sáttmáli undirskrivaður og 13. mars góðkendur av landsstýrinum. Hesin sáttmáli fastsetur, hvar viðkomandi strekki av oyggjarvegnum skal liggja.

Sambart tí í álitinum framförda setur minnilutin (K. Wang) fram fylgjandi

UPPSKOT

I. Fyrireikingarnar til bygging av radar- og radiostöð á Sodnafelli mega ikki halda fram fyrrenn lögtingið samtykkir tað.
II. Eingin hermálslig útbúgving av Föroyum má verða fyrireikað ella framd uttan eftir samtykt Föroya lögtings.
III. Lögtingið velur eina 5-manna uttanríkismálanevnd til at samráðast við landsstýrið um øll týðandi uttanríkismál. Nevndin verður valð, hvörja ferð tingið kemur saman til regluliga tingsetu, men fyrsta ferð, áðrenn tingið nú fer heim.

UPPSKOT

frá minnilutanum (Karsten Hoydal og Sigurð Joensen):

1. Föroya lögting átalar, at landsstýrið uttan heimild frá lögtinginum og uttan at lata lögtingið vita av hevur samráðst og tikið avgerð í D.E.W.-málinum.
2. Föroya lögting krevur, at allar hermálsligar ætlanir í Föroyum verða steðgaðar beinan vegin.
3. Föroya lögting samtykkir at leggja fylgjandi spurning undir vanliga fólkaatkvöðu:
   Vilja tygum at NATO byggir radarstöð í Föroyum.

UPPSKOT

frá meirilutanum (Tryggvi Samuelsen, Leon Joensen, Haldor Hansen og Marius Johannesen):

Málið má haldast at vera avgjört og verður tikið til eftirtektar.

Lögtingið undirstrikar sína andstöðu móti militerari útbygging í Föroyum í vanligari merking, um talan verður um slíka.

Skjøl í tögtingsmáli nr. 41.

EITT SINDUR UM LORAN OG RADAR

Loran (Long range navigation)

Loran hoyrir undir tað, menn kalla hyperbelnavigatión, og varð hesin navigeringarháttur funnin upp undir seinasta heimsbardaga. Neyðugt er hjá honum, sum meta skal positiónina, at hava samband við tríggjar ella fleiri stöðir, sum varpa út elektromagnetiskar bylgjur (radiobylgjur). Stöðirnar arbeiða saman tvær og tvær og soleiðis, at tað eru ein hövuðsstöð og tvær undirstöðir. Hugsa vit okkum, at vit eru lika langt frá tveimum stöðum, og at hesar varpa út eitt bylgjurað samstundis, so hoyra vit sjálvandi ongan tíðarmun. Eru vit nærri aðrari, so vil vera ein tíðarmunur, og hesin vil vera hin sami á eini ávisari kurvu hyperbel — harav navnið hyperbelnavigatión. Fyri at vita hvar á hesum hyperbel vit eru, mega vit hava samband við hina triðju stöðina. Hesar kurvar verða teknaðar inn á kort, og navigatörurin kann beinleiðis finna positiónina.

Tað eru trý slög av hyperbelnavigatión:

Gee. Serstakliga nýtt til flogför, men finst ikki um okkara leiðir. Rökkur bert um 150 km.

Decca. Finst heldur ikki um okkara leiðir, men longu undir seinasta heimsbardaga var eitt net av tilíkum stöðum í Onglandi, og í Danmark eru eftir bardagalok fleiri slíkar stöðir. Rökkur upp til einar 400 km.

Loran. Hetta rökkur vael longur og er uppfunnið í U.S.A. Alt norðuratlantshavið og ein stórur partur av Kyrrahavinum er nú dekkað av loranstöðum. Stöðirnar liggja 300—900 km hvör frá aðrari. Tann sum er her á landi (á Skúanesi), ein hövuðsstöð, arbeiðir saman við einari á Hebriduntum og einari í Íslandi. Uppgivið verður, at um dagin rökkur Loran u. 1000 km eftir sjónum, men um náttina upp til tvífalt so langa leið. Hugsa vit okkum, at vit eru 500 km burtur og liggja toluliga vael fyri, t.v.s. um lika langt frá tveimum stöðum, so kunnu vit meta positiónina innanfyri eitt öki við radius 100 m (nevnliga + ÷ 0,2 % av fjarleikanum).

Aftaná kríggið hava menn funnið upp eitt serligt Loran, sum um dagin rökkur u. 2500 km og um náttina u. 1500 km eftir sjónum (yvir land 75 % av nevndu longdum). Feilurin er við hesum + ÷ 0,3 % av fjarleikanum.

Radar. (Radio detection and ranging).

Radar arbeiðir eisini við elektromagnetiskum bylgjum og soleiðis, at ein ger nýtslu úr tí eginleika, hesar bylgjur hava at kastast aftur, tá ekkert kemur uppfyri. Vael er tað vanligt bert ein ógvuliga lítil partur, sum vendir aftur, men við serligum móttakarum er tað möguligt at umsetu hesar afturvendu bylgjurnar til ein ljósblett, sum á einum glasskermi kann geva okkum eina billing av tí, ið komið er uppfyri.

Antennan er, sum vit kenna lað, oftast skapað sum reflektorurin i

eini vanligari lummalykt (paraboloiduformaður), soleiðis at varpað verður út eitt bundi av radiobylgjum. Kemur nú okkurt upp fyri hetta bundið, verður nakað kastað aftur, og við at meta, hvussu langa tíð hetta tekur, kann fjarleikin finnast. (Ferðin av bylgjunum er eins og ljósferðin, t. e. 300,000 km/sek., so tað er talan um stuttt tíðarskeið: usek., t. e. milliónlapartur sek.). Antennan kann malast runt, og tað er soleiðis möguligt ikki bert at finna, hvussu langt burtur málið er, men eisini hvussu tað er skapað, og um tað flytur seg, so hvussu skjótt og hvönn veg.

Vanliga verður skilt millum tvey slög av Radar:

Observatjónsradarin verður nýttur til at ansa eftir skipum og flogförum. Fjarleikin kann metast + : 100 m og rætningurin + = 0,4°.

Præsisjónsradarin verður t. d. innan fyri militerið nýttur til automatiska stýring av kanónum. Við hesum kann fjarleikin metast + : 10 m og rætningurin + = 0,1°.

Radar kom serliga fram undir seinasta heimsbardaga, sjálvt um grundarlagið longu var lagt langt frammanundan. Soleiðis hevði tað verið nýtt til at kanna fjarleikan av ti, menn kalla ionosferuna (t. e. luftlag u. 100 km útí í rúmdini). Onglendingar hövdu, tá kriggið brast á, eina ketu av radarstöðum á suður- og eystursstrondini, og kom hetta teimum týsku flogálopunum ógvuliga illa við — teir vistu tá als ikki, hvat Radar var. Nevnt kann eisini vera, at radarstýrdur kanónir skutu niður största partin av V 1-rakettunum, sum sendar vórðu tvörtur um Kanalina, og at radarstýrd flogför vóru týsku kavbátunum til miklan bága. Radarin eigur sostatt ein stóran part av heiðurinum fyri, at Onglendingar sluppu so væl burtur úr bardaganum, sum teir gjördu.

Men tað skal ikki skiljast so, at Radarin einans kann nýtast innan fyri militerið, sjálvt um tað er har, hann hevur sín veruliga uppruna. Öllum kunnugt hevur hvört störri far nú á dögum Radar til at finna veg í myrkri og toku. Sum dömi um, hvussu væl kann síggjast, skal nevnast, at tað er möguligt at síggja eina rennu í ísinum, sum er brotin upp, men frýst saman aftur, sjálvt um hon er fjald av einum kavafölvi.

Tað má eisini nevnast, at Radar verður nýttur til gjölligar meterologiskar kanningar, við tað at el-mag. bylgjurnar (tær mega í hesum sambandi vera sera stuttar, sokallaðar cm-bylgjur) eisini lutvís kastast aftur av regn- og tokuskýggjum, so möguligt er at eygleiða hesi. Eisini ber til at siggja um loftin hevur ymisk köld og heit lög og meta um vatninnihald hennara.

Heldur ikki Radarin er fullkomin. Fyri tvey mál á radarskerminum skulu kunna siggjast samstundis, mega ley verða hvört frá öðrum bæði í fjarleika og rætningi. Við tað at el.mag. bylgjurnar, talan er um her, so gott sum bert flyta seg í beina linju — fara ikki um horn — vil eitt högt mál skugga fyri ti, sum aftanfyri er.

Bylgjurnar kastast eisini aftur frá valnskorpuni, og fyri at umganga hetta má antennan setast högt: á stýrhúsið ella mastrina á skipum. Situr hon sum á «Rituni» við síðuna av skorsteininum, so verður á radarskerminum ein blindur blettur.

Lætt er at blenda eitt tilíkt radareyga, um ein veit, við hvörji bylgjulongd tað arbeiðir — men tað er eisini neyðugt. Soleiðis kann t. d. nevnast, at onglendiugar hövdu fragd av at seta tey týsku radareyguni aftaná at hesir vóru farnir at nýta tey undir kríguum — fullkomuliga út av spælinum, við úr flogfari at varpa út eina örgrynnu av staniolstrimlum av eini ávisari longd.

Hvussu langt ber so til at siggja í einum radara? Tí er eitt sindur torfört at svara. Tær bylgjurnar, sum her er talan um, rökka ikki stört longur enn til sjónarringin, og ein vanligur skipsradari rökkur heldur ikki longur. Men við at gera nýtslu av, at bylgjurnar kastast aftur frá áðurnevndu ionosferu, ber til at siggja nógv, nógv longur.

Tórshavn, 17. april 1959.

TÓRBJÖRN POULSEN,
verkfröðingur.

Skjal til lögtingsmál nr. 11/1958 (vetrarting): Uppskot til samtyktar frá tjóðveldisflokkinum.

EXTRAKT ÚTSKRIFT ÚR GERÐABÓK LANDSSTÝRISINS

Ár 1956, 22. november kl. 11, var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru lögmaður, Hákun Djurhuus og Edw. Mitens.

. . . . . .

2) Spurningurin um möguliga radarstöð á «Sandfelli» varð umröddur.

Ár 1957, 13. december kl. 11 var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru lögmaður, Edw. Mitens og Ole Jacob Jensen.

Til viðgerðar:

. . . . . .

8) Radio- og radarstöð í Föroyum.

Talan er um, at könir menn koma til Föroya aftur í marts-apríl 1958 at halda fram við kanningunum av málinum.

Landsstýrið hevur onki at viðmerkja til hetta.

Ár 1958, 8. mai kl. 10,30 var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru Kr. Djurhuus, lögmaður, Edward Mitens og Ole Jacob Jensen.

Til viðgerðar:

. . . . . .

1) Gerð av vegi frá Oyggjarvegnum til Sandfelli í samband við tilætlaða radarstöð. Landsverkfröðingurin var á fundi undir viðgerðini av hesum máli.

Spurningurin varð umröddur og málið útsett.

Ár 1958, 22. mai kl. 11,15 var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru lögmaður, Edw. Mitens og Ole Jacob Jensen.

Til viðgerðar:

. . . . . .

1) Landsverkfröðingurin var á fundi til viðgerðina av EW málinum og framlegði uppskot.

Landsstýrið samtykti at góðtaka uppskotið frá landsverkfröðinginum við fyrivarni av, at lógarheimild fæst fyri rindan av tí neyðuga peningi uppá kr. 300.000. Somuleiðis var fyrivarni tikið viðvíkjandi tí, ið Tórshavnar býráð skal gjalda av útreiðslunum til breiðkan av núverandi vegi.

Landsstýrið samtykti eisini at loyva landsverkfröðinginum at gera tænastuferð til Köbenhavn til samráðingar við forsvarsministeriið um uppskotið.

Ár 1958, 11 juni kl. 10,30 var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru lögmaður, Edw. Mitens og Ole Jacob Jensen.

Til viðgerðar:

. . . . . .

7) Radio- og radarstöð á Sandfelli.

Útsett.

Ár 1958, 12. juni kl. 10.00 var fundur í landsstýrinum. — Á fundi vóru lögmaður, Edw. Mitens og Ole Jacob Jensen.

Til viðgerðar:

. . . . . .

2) Radar- og radiostöð á Sandfelli í samband við byggjan av vegi frá Sundshálsi til Mjörkadal.

Útsett.

Ár 1958, 13. juni kl. 10,00 var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru lögmaður, Edw. Mitens og Ole Jacob Jensen.

Til viðgerðar:

1) Radar- og radiostöð á Sandfelli í samband við bygging av vegi frá Sundshálsi til Mjörkadal.

Ole Jacob Jensen: Sum málið nú liggur fyri, og serliga tá eingin tilsögn um finansiering fyriliggur, deils um at föra vegin frá Mjörkadali fram til Kollafjarðar og deils um at breiðka strekkið frá Sundshálsi til Mjörkadals, so vegurin fær vanliga trafikkbreidd, kundi hann ikki góðtaka, at landsstýrið framdi málið. Fyrilá finansieringstilsögn av hóskandi oyggjarvegi, hevði málið tá största áhuga.

Edw. Mitens og lögmaður vóru samdir um at fremja málið undir tí forútsetningi, at ríkisstýrið útvegar landsstýrinum finansieringstilsögn bæði til breiðkan av strekkinum frá Sundshálsi til Mjörkadals til vanliga trafikkbreidd og framhald av vegnum frá Mjörkadali til Kollafjarðar.

Ár 1958, 20. november kl. 15,00 var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru lögmaður, Edw. Mitens og Ole Jacob Jensen.

Til viðgerðar:

. . . . . .

2) Samtykt varð at skriva til ríkisumboðið, um at landsstýrið gevur loyvi til, at kanningar viðvikjandi setan av Loransstöð á Sandfelli fara fram.

FØROYA LANDSSTÝRI

Tórshavn, 8. august 1958.

Skjal til lögtingsmál nr. 11/1958 (vetrarting): Uppskot til samtyktar frá tjóðveldisflokkinum.

Under henvisning til tidligere brevveksling vedrörende opförelse af en radar- og radiostation paa Færöerne Sandfelli skal man herved meddele, at landsstyret under forudsætning af, at rigsmyndighederne ser sig i stand til at tilsige landsstyret nödvendig finansieringshjælp, dels til at gennemföre vejen fra Mjörkadal frem til Kollafjörð og dels til senere udvidelse af vejstrækningen fra Sundshálsi til Mjörkadal i normal trafikbredde ca. 5,5 m netto, intet har at erindre imod, at projektet gennemföres.

Det tilföjes, at nævnte vejarbejder belöber sig til ca. 5 mill. kr.

K. Djurhuus,
Lagmand.

/ J. Djurhuus.

Rigsombudsmanden paa Færöerne.

RIGSOMBUDSMANDEN
PAA FÆRÖERNE

Tórshavn, 17. november 1958.

Til lögtingsmál nr. 11/1958 (vetrarting): Uppskot til samtyktar frá tjóðveldisflokkinum.

Fra statsministeriet har jeg modtaget fölgende skrivelse:

«Forsvarsministeriet har under 13. november 1958 tilskrevet statsministeriet saaledes:

«Ved skrivelse j. nr. 16. F.B. 58 af 8. november 1958 har statsministeriet henstillet, at den paatænkte rejse med henblik paa udförelse af visse forundersögelser i forbindelse med opförelsen af Early Warning- og Forward Scatter stationerne paa Færöerne först finder sted, naar det nye landsstyre er dannet. Endvidere har man oplyst, at de færöske

myndigheder iövrigt helst ser, at besöget udsættes til hen imod midte af december d. aa.

Saaledes foranlediget skal man herved henlede opmærksomheden paa, at det drejer sig om anlæg, hvis opförelse i forvejen er tilraadt af de færöske myndigheder, og at det omhandlede besög kun tilsigter at foretage visse rutinemæssige undersögelser i tilslutning til stationernes etablering. Disses opförelse er i forvejen blevet udskudt i ca. 1 aar; idet der er gaaet en byggesæson tabt, fordi arbejdet med anlæg af vejen fra Thorshavn til stationerne ikke har kunnet komme i gang paa grund af landsstyrets vægring, jfr. statsministeriets skrivelse af 26. september 1958.

Forsvarsministeriet maa derfor for sit vedkommende lægge meget stor vægt paa, saafremt den omhandlede rejse kunne gennemföres i indeværende aar og i saa betimelig tid, at de paagældende undersögelser kan være afsluttet inden den kommende jul, idet Danmark i modsat fald ellers maa forudse at komme i en vanskelig situation over for vedkommende NATO-myndigheder.

Under hensyn hertil skal forsvarsministeriet derfor anmode statsministeriet om at undersöge, hvorvidt det ikke maatte være muligt at faa arrangeret den paagældende rejse, saaledes at det önskede undersögelsesarbejde vil kunne gennemföres paa denne side af juleu 1958, idet arbejdet maa paaregnes at være 2-3 uger, afhængigt af vejrforholdene.»

Hvilket herved meddeles under henvisning til statsministeriets telegram af 8. november 1958 og telefonsamtale med Dem af 14. s. m., idet man skal udbede sig Deres omgaaende svar, eventuelt telegrafisk.»

Under henvisning til foranstaaende skal jeg anmode om landsstyrets svar efter omstændighederne omgaaende.

N. Elkær-Hansen.

Færöernes landsstyre.

Skjal til lögtingsmál nr. 11/1958.

OVERENSKOMST
mellem
forsvarets bygningstjeneste ved nordsjællandske bygningsdistrikt
og
Færöernes landsstyre ved landsingeniörkontoret, Tórshavn,
vedrörende
projektering og udförelse af adgangsvej til militært anlæg paa Sandfelli

§ 1.

Ved det i det följende anförte eller omtalte er nordsjællandske bygningsdistrikt betegnet som «Bygherren» og landsingeniörkontoret som

«Entreprenören»; endvidere er det af overenskomsten omhandlede arbejde betegnet som «Entreprisen».

§ 2.

Entreprisen omfatter den komplette udförelse af vejanlæg fra eksisterende vejanlæg ved Sundsá til Sandfelli, hvor vejen paaregnes afsluttet paa den östlige side af fjeldet i kote ca 670. Entreprisen omfatter endvidere levering, opstilling og drift i hele arbejdsperioden af en ca. 800 m. lang tovbane, som forbindelse mellem det inderste af Kaldbaksfjörður og et punkt ved vardestien sydvest herfor samt köremulighed fra dette punkt og til indkvarteringsomraadet i Mjörkadalur og anlæg af anlöbsplads i Kaldbaksfjörður.

Den paatænkte vejföring er vist med rödt paa vedhæftede maalebordsblad, medens den paatænkte placering af ovennævnte tovbane, köremulighed samt anlöbsbro er vist med blaat.

Entreprenören udförer endvidere alle opmaalinger og afsætninger samt de for arbejdet nödvendige projekteringer og arbejdstegninger.

§ 3.

Gældende for overenskomstforholdet er vedlagte:

Tekniske bestemmelser for projektering og udförelse af vejanlæg i forbindelse med militært anlæg paa Færöerne. Anvisninger, der maatte blive givet af det af bygherren udpegede tilsyn.

Endvidere henvises til Entreprenörforeningens vejledende retningslinier vedr. regningsarbejde, der udföres som selvstændig entreprise (udgivet 1956).

§ 4.

Entreprisen paabegyndes umiddelbart efter overenskomstens underskrift, og arbejdet skal söges fremmet saaledes:

at anlöbsbro, tovbane og köremuligheder herfra og til indkvarteringsomraadet er klar til ibrugtagen ca. 1. maj 1959,

at vejen fra Sundsá til indkvarteringsomraadet kan befærdes ca. 1. december 1959,

at vejen i sin helhed fra Sundsá til Sandfelli kan befærdes ca 1. juli 1960.

Iövrigt paaregnes vejarbejdet igangsat fölgende steder:

Ved Sundsá med retning mod Mjörkadalur.

Ved Mjörkadalur ved retning mod Sundsá og Sandfelli.

Ved Sandfelli med retning mod Mjörkadalur.

§ 5.

Ved bygherrens foranstaltning vil der blive etableret en arbejdslejr i omraadet ved Mjörkadalur.

Lejren vil omfatte indkvarteringsmulighed samt marketenderi for alt personel.

Indkvarteringen vil bestaa af rum med 1 evl. 2 köjer med madrasser og tæpper og er vederlagsfri.

Fuldkost for indkvarteret personel vil kunne köbes for 6,00 kr. pr. dag. For övrigt personel vil enkeltmaaltider kunne köbes til senere fastsat pris.

Vedligeholdelse og drift af lejren varetages af bygherren, medens rengöring af tildelte indkvarteringsrum med tilhörende vaskerum, latriner m. v. henhörer under entreprenören.

Arbejdslejren paaregnes at være klar til ibrugtagen ca. 1. juli 1959, saafremt den i § 4 anförte tovbane er etableret til 1. maj.

§ 6.

Entreprenören fremskaffer alle materialer, der skal anvendes i forbindelse med arbejdet.

§ 7.

Entreprenören fremskaffer efter aftale med bygherren alt större materiel, der er nödvendigt for arbejdets udförelse.

§ 8.

Betalingen for entreprisen samt for det af entreprenören udförte projekteringsarbejde fastsættes saaledes:

A. Godtgörelse af udgifter til:
   - Overenskonstmæssig arbejdslön, herunder dyrtidsbetaling og ferielön.
   - Materialer, der forbruges ved arbejdets udförelse.
   - Forbrugsgods, værklöj, mindre materiel m. v.
   - Underentreprenörer, jfr. § 9.

   alt med et tillæg paa 12 % til dækning af administrationsudgifter.

B. Godtgörelse for brug af större entreprenörmateriel, idet der betales en maanedlig leje paa 1½ % for bæltetraktorer og 3½ % for övrigt materiel af materiellets værdi pr. effektiv arbejdsmaaned, og 1½ % for alt materiel i de övrige maaneder af arbejdsperioden.
   Saafremt materiellet udnyttes udover de normale 8 timer pr. dag, betales yderligere ½ % for hver 2 timers körsel.
   Lejen skal dække alle udgifter til afskrivning, forrentning og större reparationer.
   Ved materiellets værdi forstaas ved indköbt materiel selve indköbsprisen, medens værdien af entreprenörens eksisterende materiel, der beskæftiges under arbejdet, fastsættes ved forhandling.

C. Godtgörelse af lönninger til entreprenörens tekniske personal, der deltager i projekteringsarbejdet, med et tillæg paa 50 % til dækning af administrationsudgifter.

D. Godtgörelse af dokumenterede udgifter til reproduktion af tegninger og gebyrpligtige telefonsamtaler samt godtgörelse for tjenesterejser uden for Færöerne efter de herfor gældende takster.

Af ovennævnte tillæg til dækning af administrationsudgifter skal entreprenören afholde:

— Ledelse og administration paa landsingeniörkontoret.
  Ledelse og administration paa arbejdspladsen, idet bygherrens tilsyn betales direkte af bygherren.
— Lovpligtige ulykkesforsikringer.
— Ansvarsforsikringer.

§ 9.

Anvendelse af underentreprenörer til udförelse af arbejder af större omfang end svarende til 5 % af overslagssummen kan kun ske efter nærmere forhandling med bygherren.

§ 10.

Betaling vil finde sted saaledes:

Inden 1. april 1959 betales 1.200.000. kr. skriver enmillionto-hundredetusinde kroner 00 öre til entreprenören med henblik paa investering i materiel. Dette belöb afskrives paa nedennævnte maanedsopgörelser med 10.000. kr. i den i § 8, stk. B., nævnte leje af materiellet. Der udfærdiges ved hver maaneds afslutning en opgörelse efter de i § 8 anförte retningslinier. Det heraf resulterende belöb anvises senest 14 dage efter maanedsopgörelsens modtagelse ved bygherren til en af entreprenören anvist konto i Föroya gjaldslova.

Förste maanedsopgörelse udfærdiges pr. 1. maj 1959 for det da forløbne tidsrum.

§ 11.

Eventuelle tvistigheder, der maatte opstaa mellem parterne om deres indbyrdes retsforhold i anledning af arbejdet, afgöres ved voldgiftsret bestaaende af tre medlemmer, hvoraf hver af parterne udvælger et, medens det tredie medlem, der skal fungere som opmand, udnævnes af Færöernes ret.

Tórshavn, den 12. marts 1959.

sign. M. Helmsdal
landsingeniör.

sign. Bent Nielsen
f. nordsjællandske bygningsdistrikt

Overenskomsten aprobères:

Tórshavn, den 13. marts 1959.

Færöernes landsstyre
sign. K. Djurhuus

Köbenhavn, den marts 1959.

Forsvarets bygningstjeneste
paa forsvarsministeriets vegne

Skjal til nr. 41/1958 (velrætting)

Rigsombudsmanden paa Færöerne.
Tórshavn, den 7. april 1959.

Fra statsministeriet har man dags dato modtaget nedenfor anförte besvarelse af de anförte spörgsmaal:

1. skal tilsvarende anlæg opföres i Danmark? Svar: ja saavel radarvarslingsanlæg (early warning) som radioanlæg (forward scatter) skal opföres i Danmark. Stedbetegnelse kan ikke gives.

2. Er radarstation med radioanlæg saa militært vigtige, at de i krigstilfælde maa anses for angrebsmaal for atomvaaben? Svar: som tidligere oplyst er intet af anlæggene forsynet med skyls eller lignende til forsvar. Efter forsvarsministeriets opfattelse anses anlæggene ikke at have saadan militær karakter, at de vil udgöre angrebsmaal for atomvaaben eller lignende.

3. Kan NATO varslingstjeneste undvære de to anlæg paa Færöerne? Svar: NATO ville ikke have insisteret paa gennemförelse af anlæggene, saafremt de kunne undværes i varslingstjenesten.

4. Vil rigsmyndighederne uanset lagtingsflertal imod anlæggenes udförelse insistere herpaa? Svar: anlæggene er som anfört nödvendige for NATO. Der henvises til at man fra dansk side lige siden anlæggenes förste planlæggelse har holdt sig i kontakt med færöske myndigheder, der har givet tilslutning til anlæggenes udförelse.

5. Hvor store pengemidler vil fra forsvarets side blive anvendt til arbejdslön, materiale m.v. paa Færöerne i forbindelse med anlæggenes udförelse? Svar: skönsmæssigt ca. 10 mill. kr., udförelsen af arbejderne vil i videst mulig omfang blive overdraget færöske firmaer og entreprenörer.

6. Har forsvarsministeren udtalt, at rigsmyndighederne ikke vil foretage sig noget, som færöske myndigheder ikke er indforstaaet med? Svar: nej. Forsvarsministeren har i radioudtalelse sagt, at færöske myndigheder har tiltrandt anlæggenes udförelse, jfr. ovenfor.»

Hvilke herved meddeles.

2. viðgerð 23. apríl og 3. viðgerð 25. apríl 1959.

K. Wang: Minnifulauppskot I - II var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, J. Simonsen, V. Nielsen, K. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssøn; K. Hoydal, J. H. Joensen og R. Joensen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen; D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen og J. Fr. Öregaard

Uppskotið fall 13—0.

Uppskot III fall 15—0.

K. Hoydal og Sigurð Joensen: Uppskot I. var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: M. Johannesen, N. H. Jacobsen, K. Wang, R. Joensen, J. Simonsen, V. Nielsen, K. Mahr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssøn, K. Hoydal og J. H. Joensen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen og J. F. Øregaard.

Uppskotið fall 13—0.

Uppskot 2:

Ja atkvöddu: N. H. Jacobsen, K. Wang, R. Joensen, J. Simonsen, V. Nielsen, K. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, K. Hoydal og J. H. Joensen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen og J. F. Øregaard.

Uppskotið fall 12—0.

Uppskot 3.

Ja atkvöddu: N. H. Jacobsen, K. Wang, R. Joensen, J. Simonsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, K. Hoydal og J. H. Joensen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Mohr, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen og J. F. Øregaard.

Uppskotið fall 11—0.

Uppskot meiralutans í nevndini var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: J. Lindenskov, Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsö, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen og J. F. Øregaard.

Nei atkvöddu: N. H. Jacobsen, K. Wang, R. Joensen, J. Simonsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, K. Hoydal og J. H. Joensen.

Atkvöddu ikki: P. Petersen og Kj. Mohr.

Uppskot meiralutans samtykt 17—11.

42. *Avogning av lendi til sinnissjúkhús.*

Ár 1959, 3. apríl legði lögmaður fram soljóðandi

FORSLAG

til

lov om ekspropriation af grundarealer til sindssygehus.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til for statskassen at erhverve om fornødent ved ekspropriation efter reglerne i lov nr. 69 af 7. maj 1881 om forpligtelse til jordafgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder samt til offentlige skoler paa Færöerne de arealer m. v., der udkræves til opförelse af et sindsygehospital i Tórshavn i overensstemmelse med godkendt plan over arealer og bygninger.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Málið um bygging av sinnissjúkahúsi norðan fyri landssjúkahúsið er komið so langt ávegis, at landsstýrið hevur fingið fyrilagt spurningin um at útvega neyðugl grundstykki til hesa bygging. Stykkið, ið byggjast skal, er ogn hjá tí almenna og privatum. Um ognartöka fer fram, verður hildið beinast, at tað er landsstýrið, ið fær hesa heimild, soleiðis sum lög nr. 293 frá 27. apríl 1949 um ognartöku til Suðuroyar sjúkhús og Dronning Alexandrines hospital tilskilar. Ognartöka av grundstykki til sjúkahús er felagsmál, men fyri at skunda undir málið, hevur landsstýrið hildið tað verið neyðugt, at viðgerð av málinum fyrst fer fram í löglinginum, soleiðis sum tá seinast nevnda lög var viðgjörd.

1. viðgerð 9. 2. viðgerð 14. og 3. viðgerð 21. apríl 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 28-0.

43. *Fyrispurningur frá K. Wang (um Oyggjarvegin).*

Ár 1959, 9. mars legði K. Wang lögtingsmaður fram sotjóðandi fyrispurning:

Undir viðgerðini av uppskoti til Oyggjarlögtingslóg 1959/60 upplýstu bæði varalögmaður Kristian Djurhuus og landsstýrismaður Niels Winther Poulsen, at farið verður nú undir at gera oyggjarvegin. Eisini varð upplýst, at um neyðugt er at taka lán, verður tilík lántöka lögd fyri lingið.

Loyvi eg mær tí at biðja hitt háttvirda landsstýri um at svara uppá

1. Nær og av hvörjum er endalig avgerð tikin um, hvar oyggjarvegurin skal liggja?

2. Tá ivingarsamt er um lántöka er neyðug og einki er setl á Oyggjarlögina til at byggja oyggjarvegin fyri, hvör skal so gjalda byggingina?

3. Um annar enn lögtingið ella avvarandi kommunur byggja vegin, er tá ætlan landsstýrisins at henda bygging verður setl í verk uttan at siga lögtinginum frá ella fáa lögtingsins heimild til tess.

Um fyrispurningurin kundi fáa frama var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, L. Joensen, Johan Simonsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, H. v. Högadalsá og J. F. Øregaard.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. J. Olsen, Haldor Hansen.

Burtur: D. Nolsöe, V. Nielsen, P. M. Dam og Hemming Jespersen.

Fyrispurningurin fekk ikki frama 12—0.

44. *Skattur til landskassan.*

Ár 1959, 13. mars legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi uppskot:

§ 1.
Reglurnar í § 3 í lögtingslóg nr. 17 frá 28. mars 1952 um eykaskatt til landskassan verða óbroyttar galdandi fyri skattaárið 1959/60.

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinnan vegin.

§ 1.
Bestemmelser i § 3 i lagtingslov nr. 17 af 28. marts 1952 om ekstraskat til landskassen forbliver uændrede i kraft for skatteaaret 1959/60.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Fyri skattaárið 1952/53 varð landsskatturin hækkaður við at allar inntökur uppá 5.000 kr. og hægri fingu eina hækking uppá 30 % av ti eftir stigunum í § 2 í lógini um landsskatt. Hesin eykaskattur hevur verið kravdur öll árini síðan, og heldur landsstýrið ikki líkindi vera til at minnka ella strika henda skatt enn.

Landsstýrið setur tí fram uppskot um at lógarreglan verður endurnýggjað fyri skattaárið 1959/60.

1. viðgerð 16. 2. viðgerð 18. og 3. viðgerð 19. mars 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 23—0.

45. *Ábyrgd av láni til Sandavágs kommunu.*

Ár 1959, 19. mars legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
lögtingslóg um ábyrgd av láni til Sandavágs kommunu til skúlabygging.

§ 1.
Landsstýrið verður heimilað til

lagtingslov om garanti for laan til Sandavågs kommune til skolebyggeri.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til paa

landskassans vegna at taka ábyrgd av lánum til Sandavágs söknar kommunu uppí 200.000 kr. hjá Kreditforeningen af kommuner i Danmark til gerð av felagsskúla Miðvág-Sandavág.

landskassens vegne at garantere for laan til Sandavágs kommune indtil 200.000 kr. hos kreditforeningen af kommuner i Danmark til opförelse af fællesskoler Miðvág-Sandavág.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Miðvágs og Sandavágs kommmmur eru farnar undir bygging av nýggjum skúla í felag.

Hetta er góðtikið av skúlastjórnini og er byggikostnaðurin ætlaður til 1.418.000 kr.

Miðvágs kommuna hevur við lögtingslög nr. 55 frá 3. nov. 1958 fingið landskassaábyrgd fyri láni í Kreditforeningen af kommuner i Danmark upp til 350.000 kr.

Nú sökir Sandavágs kommuna um loyvi at taka lán 200.000 kr. í sama sjóvni til hesa bygging.

Sandavágs kommuna er figgjarliga vel fyri, men reglurnar hjá kreditfelagnum krevja, at rikiskassin og landskassin taka ábyrgd av lánum fyri föroyskar kommunur, so um kommunuan skal fáa lánið, so krevst landskassaábyrgd.

Landsstýrið hevur viðgjört umsóknina og samtykt at tilmæla tinginum at ganga umsóknini á móti.

Tilskilað skal verða, at kommunan tann 25. februar 1958 átti:

í peningi	180.157,66 kr.
og í eftirstöðu	47.762,08
tilsamans	227.919,74 kr.

og var skuldin

lán til vatnverk	27.000 kr.
havnalán	56.250
havnalán	21.875
	105.125 kr.

Av hesum lánum eru tær 56.250 kr. móti transporti í landskassaávindingi.

Álikningin 1957 var um 163.000 kr.

1. viðgerð 20. mars, 2. viðgerð 3. april og 3. viðgerð 6. april 1959.

Uppskot landsstýrisins samtykt 22-0.

46. *Broyting í lóg um seming.*

Ár 1959, 21. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Föroya arbeiðarafelag hevur aftur í ár vent sær til löglingið við uppskoli um broyting í galdandi lóg um seming, serliga viðvikjandi reglunum um uppgerðini av úrslitinum av eini uratkvöðu. Hetta mál hevur verið fyri í lögtinginum fyrr, bæði í tingseluni 1956/57 og 1957/58, men gjördi tingið av ikki at gera nakra broyting.

Málið er av umsóknarnevndina beint í lógarnevndina.

Í lóg fyri Föroyar nr. 86 frá 31. mars 1928 um mægling í arbejdsstridigheder, soleiðis sum lógin er broytt við lögtingslóg nr. 79 frá 22. december 1951 verður í § 6, stk. 4 fyrisett viðvikjandi uratkvöðuni:

«Eftir semingsuppskot er felt, tá yvir 50 % av atkvöðuluttakandi have greitt atkvöðu ímóti uppskotinum og minst 75 % av teim limum, sum atkvöðurætt eiga, hava luttikið í atkvöðugreiðsluni. Fyri hvört procenttal (stig), sum luttökuprocentin er undir 75, skal tað procenttal av givnu atkvöðunum, sum neyðugt er til fellingar, selast upp við ½.

Hevur atkvöðuluttökan ikki verið 25 % av teim, ið atkvöðurætt eiga, má uppskotið ætlast at vera samtykt.

Blankir og aðrir ógildigir atkvöðuseðlar verða ikki taldir uppi í uppgerðini».

Uppskotið frá Föroya arbeiðarafelag gongur út uppá at gera tvær broytingar í hesum reglum p r i n c i p a l t, at semingsuppskotið er fallið, tá ið meira enn helmingurin av teimum, ið atkvöðu hava greitt, hava greitt atkvöðu ímóti og s u b s i d i æ r t, at procenttalið 75 av öllum limum, verður broytt til 50 % av teimum limum, sum staddir eru í Föroyum, tá atkvöðugreiðslan fer fram.

Lógarnevndin hevur býtt seg sundur í 3 minnilutar.

Minnilutin (Sigurð Joensen og J. Fr. Óregaard) mælir tinginum til at samtykkja tað subsidiera uppskotið frá Föroya arbeiðarafelag.

Minnilutin (M. Johannesen og Trygve Samuelsen) vísir til la stöðu, ið lögtingið hevur tikið í hesum máli í 1956/57 og 1957/58 og heldur ikki, at umstöðurnar síðan eru broyttar soleiðis, at tað er umráðandi at gera nakra broyting í hesum reglum.

Minnilutin setur tí onki uppskot fram um broyting í teim galdandi reglum.

Ein triðl minniluti (Niels H. Jacobsen) mælir tinginum til at samtykkja, at luttökuprocentin 75 verður broytt til 66 ⅔ % og setur fram uppskot samsvarandi.

UPPSKOT
frá

minnilutanum (Niels H. Jacobsen):

I § 6, stk. 4 í lög nr. 86 frá 31. marts 1928 verður «75 %» og «75» broytt til «66⅔ %» og «66⅔».

Föroya Arbeiðarafelag Tvöroyri, tann 23. febr. 1959.

Föroya lögting, Tórshavn.

Avísandi til «álit» í lögtingsmáli nr. 77/1956: Broyting í lög um seming, loyvir undirritaða Föroya Arbeiðarafelag sær hervið aftur í ár at seta uppskotið fram og vónar, at háttvirda lögting vil taka vel undir við tí.

UPPSKOT
til

lögtingslög um broyting í lög fyri Föroyar nr. 86 av 31. mars 1928 sum broytt við lögtingslög nr 79 av 22. december 1951 um seming í vinnutrætum.

§ 1.

Í lög fyri Föroyar nr. 86 av 31. mars 1928 sum broytt við lögtingslög nr. 79 av 22. december 1951 um seming í vinnutrætum, verður gjört fylgjandi broyting:

I fyrstu syftu:

§ 6, stk. 4 verður at seta soleiðis:

Úrslitið av frumatkvöðu verður uppgjört á henda hátt: Semingsuppskot er felt, tá' ið meira enn helmingurin av teimum, ið hava luttikið í atkvöðugreiðsluni, hava greitt atkvöðu ímóti tí.

I aðru syftu:

I § 6 stk. 3 verður í tveimum stöðum orðið «heimaverðandi» sett millum orðini «stemmeberettigede».

lagtingslov om ændring i lov for Færöerne nr. 86 af 31. marts 1928 som ændret ved lagtingslov nr. 79 af 22. december 1951 om mægling i arbejdsstridigheder.

§ 1.

I lov for Færöerne nr. 86 af 31. marts 1928 som ændret ved lagtingslov nr. 79 af 22. december 1951 om mægling i arbejdsstridigheder, foretages fölgende ændring:

Prinsipalt:

§ 6, stk. 4 affattes saaledes:

Opgörelsen af resultatet af en urafstemning finder sted efter nedennævnte regler:
Et mæglingsforslag anses for forkastet, naar over 50 % af de stemmedeltagende har stemt imod forslaget.

Subsidiært:

I § 6 stk. 3 indsættes 2 gange mellem «stemmeberettigede» og «medlemmer» ordet «hjemmeværende».

§ 6 stk. 4 verður at orða soleiðis:

Úrslitið av frumalkvöðum verð ur uppgjört á henda hátt:

Semingsuppskotið er felt, tá ið meira enn helmingurin av teimum, ið luttikið hava í atkvöðugreiðsluni, hava greitt atkvöðu ímóti tí, og minst 50 % av teimum limum, sum standir eru í Føroyum, meðan atkvöðugreiðslan fer fram, hava luttikið í atkvöðuni.

§ 6 stk. 5 fellur burtur.

§ 6 stk. 1 affattes saaledes:

Opgörelsen af resultat af en urafstemning finder sted efter nedennævnte regler:

Et nueglingsforslag anses for forkastet, naar over 50 % af de stemmedeltagende har stemt imod forslaget, og mindst 50 % af de stemmeberettigede hjemmeværende medlemmer har deltaget i afstemningen.

§ 6 stk. 5 gaar ud.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi straks

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 31. mars og 3. viðgerð 3. april 1959.

Uppskot Føroya arbeiðarafelags 1 í 2 fall 12 – 0.

Uppskot frá N. H. Jacobsen fall 11 – 0.

---

47. *Fólkapensión.*

Ár 1959, 31. mars legði lögmaður fram framlöguskriv:

Samráðingar hava verið millum rikisstýrið og landsstýrið um at seta í gildi í Føroyum fólkapensiónsskipan svarandi til hana, sum fram er í hinum partinum av rikinum við lög nr. 258, 2. oktober 1956 «om ændring i lov om folkeforsikring.».

Hesar samráðingar eru endaðar við viðlagda uppskoti til «Lov for Færöerne om folkepension».

Eftir uppskotinum verður aldursrentan broytt til fólkapensión, og verður grundpensiónin tann sama sum hon, ið er galdandi í bygdakommunum í Danmark.

Til partvísa rindan av eykaútreiðslunum, ið standast av hesi skipan og skipanini viðvíkjandi avlamistrygging, verður eins og í hinum partinum av rikinum kravt serligt gjald 1 % av skattskyldigu inntökuni. Av

tí partinum av eykaútreiðslunum, ið ikki verður goldin av nevnda gjaldi, rindar ríkiskassin helvtina.

Fólkapensiónin leggur munandi meirútreiðslur uppá landskassan. Fyri at lætta um, verður henda fraud í trimum stigum, soleiðis at 1. stig verður tikið 1. oktober 1959 við 1/3 av muninum millum aldursrentuna og fólkapensiónina, 1/3 aftrat 1. apríl 1960 og seinasta 1/3 1. apríl 1961.

Hóasi tað, at henda stigvísa fremjing lættir um byrðina, vil ríkisstýrið mæla til, at tað verður lætt enn meira um hana, soleiðis at landskassin fyrsta árið úr ríkiskassanum fær endurgoldið 2/3 av tí 1 % gjaldið gevur og annað árið 1/3.

Av praktiskum grundum letur skipanin seg ikki seta í verk fyrr enn 1. oktober 1959.

Annars verður víst til uppskotið og viðmerkingarnar.

1. viðgerð 2. apríl, og 14. apríl legði sociala nevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Sambart uppskotið er fólkapensiónin ætlað at seta í gildi í staðin fyri núgaldandi ellisrentulóg og er í summum förum lík ellisrentulógini, men hevur tó nógvar fyrimunir frammum hana.

Hövuðsbroytingarnar eru t.d.: «ellisrenta» broytt til «fólkapensión»; ásetan av eini minstupensión galdandi fyri öll fólk uttan inntökumark, ið eru 67 ár; hækkan av grundpensiónini til sonu hæddir, ið galdandi eru fyri bygdakommunur í Danmörk og sanustandis broyting av viðbótum og hækkan av teimum; broyting av reglunum um frádrátt, so tær vera samsvarandi reglurnar um fólkapensión; hækkan av aldursmarkinum 60 ár fyri stakar kvinnur og 65 ár fyri onnur til ávikavist 62 og 67 ár, her er undantikið reglurnar um fyribilsskipanina til pensiónin kemur í fulla hædd; ásetan av 1 % pensiónsgjaldi av allari skattskyldugari inntöku til partvísa rindan av meirútreiðslunum, ið verða eftir nýskipanini og ásetan av reguligari pristalsregulering. Fyri at seta lógina um fólkapensión í gildi verða meirútreiðslurnar 4 mill. krónur, men viðvíkjandi hesum verður víst til lógina og fyribilsskipanina til pensiónin kemur í fulla hædd.

Ein minniluti av nevndini (Jóan Hendrik Joensen og Knút Wang) er samdur við meirilutan at mæla til at samtykkja lógina, men hesin minniluti loyvir sær tó at viðmerkja:

Av tí, at lógin um fólkapensión skal avgreiðast á tingi í hesi vikuni, hevur nevndin ikki havt möguleika at kanna tann meirkostnað, sum stendst av hesi lóg. Í viðmerkingunum til lógarappskotið verður sagt, at útreiðslan av fólkapensiónini verður umleið 4 milj. krónur meira enn av núgaldandi lóg um aldursrentu, men nevndin hevur ikki frá landsstýrinum kunna fingið töl ella útrokningar sum henda peningahædd byggir á.

Minnilutin kundi hugsa sær, at tað við uppskotinum fylgdi útrokning

av, hvat fólkapensiónin kostar pr. 1. april 1960 og pr. 1. april 1961 eftir sonu pristalshæld sum gjöldini eru útroknað eftir.

Hesir upplýsingar hevur sum nevnt ikki verið mögulígt at fingið og í viðmerkingum til lógaruppskotið verður sagt, at torfört er við vissu at siga, hvat meirkostnaðurin veruliga verður. Helta kann eisini skiljast so, at fólkapensiónin kemur at kosta minnandi meira enn hesar umræddu 4 mitj. kr. aftrat aldursrentuni.

Minnilutin mælir til, at tá lógin hevur verið í gildi eitt fjórðingsár, fær landsstýrið til vega gjöllar upplýsingar um, hvat fólkapensiónin kemur at kosta hvey fey næsta stigini.

Minnilutin má finnast at tí, at útroknningarnar av fólkapensiónsgjöldunum verða gjördar eftir danska pristalinum. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið eru eingir upplýsingar um, hvat kommunanna partur verður, minnilutin heldur, at kommunanna partur heldur eigur at verða minni prosentvís enn higartil og altíð verða lýtur í mun til fólkatalið og ikki eftir talinum av fólkapensiónistum.

Av tí at ein dýrari socialfóggáva má verða goldin av hækkandi inntökum roknar minnilutin við, at landsstýrið samstundis við at henda lóg verður samtykt leggur fram fullfíggjað uppskot um endurnýgging skipaflotans ella öðrum vinnuvegum.

Minnilutin kundi ynskt, at fólkapensiónin og onnur social fóggáva var burturav föroysk, men sær við núverandi lögtingsmeirilutu ongan möguleika til at fáa eitt tilikt uppskot framt.

Nevndin er annars samd um at mæla fringinum til at samlykkja uppskotið, soleiðis sum tað er sett fram av landsstýrinum.

2. viðgerð 18. og 3. viðgerð 21. april 1959.

Uppskot landsstýrisins til lov for Færöerne om folkepension (skjal 4) samtykt 29—0.

48. Broyting í lóg um avlamistrygging.

Ár 1959, 31. mars legði lögmaður fram soljóðandi framlöguskriv:

Samstundis við, at landsstýrið samráddist við ríkisstýrið um fólkapensión í Føroyum, var samráðst um, at reglurnar um avlamistrygging vórðu broyttar soleiðis, at tær komu at samsvara fólkapensiónini. Samráðingarnar endaðu við viðlagda uppskoti til «Lov om ændring i lov for Færøerne om invalideforsikring.»

Landsstýrið vísir til sjálvt lógaruppskotið við viðmerkingum og skriv frá landsstýrinum til lógtingið í lógtingsmáli nr. 17/1958 (vetrarting): Fólkapensión. Tað sum í nevnda skrivi er fört fram viðvíkjandi 1/2 eykagjaldinum til landskassan, endurrinding úr ríkiskassanum, mer og hvussu skipanin kemur í gildi, er eisini galdandi fyri avlamistryggingina.

1. viðgerð 3. april, og 14. april legði socialn nevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Samstundis sum uppskotið um fólkapensión verður sett fram, verður uppskot um broyting í lógini um avlamistrygging sett fram. Galdandi lóg um avlamistrygging verð sett í gildi samstundis sum galdandi lóg um ellisrentu, og verður nú skotið upp at broyta lógina soleiðis, at hon kemur at samsvara við fólkapensiónarlógina.

Vísl verður til uppskotið um fólkapensión viðvíkjandi reglum og gjöldum: m.a. verður tryggingin, eins og í bygdakommunum í Danmörk, útgoldin einaferð um mánaðin og ikki sum nú annan hvörn mánað; persónur, ið hevur aldur til fólkapensión fær slíka ístaðin fyri avlamistrygging, tá hann hevur aldur til tess. Avlamistryggingargjaldið verður hækkað til 21,60 kr. um árið, til partvísa rindan av meirútreiðslunum og verður at rinda til hin tryggjaði er 62 ár ístaðin fyri nú 60 ár. Tryggingin verður prístalsregulerað. Hækkan av tryggingarhaddinum fóri við sær meirútreiðslu uppá einar 1,2 mill. krónur. Eins og við fólkapensiónini verða fyribilsreglurnar at galda fyri avlamistryggingina, til tryggingin kemur í fulla hædd.

Ein minniluti (Jóan Hendrik Joensen og Knút Wang) vísir til viðmerkingarnar í nevndarálitinum til lógina um fólkapensión.

Nevndin er annars samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið, soleiðis sum tað liggur fyri.

2. viðgerð 18. april og 3. viðgerð 21. april 1959.

Uppskot landsstýrisins til lov om ændring i lov for Færøerne om invalideforsikring (skjal 5) samtykt 29—0.

49. *Landskassalán til Havnagerð v. m.*

Ár 1959, 2. apríl legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi:

UPPSKOT
til

Lögtingslóg um landskassalán til havnagerð, vegagerð og endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

§ 1.

Landsstýrið fær heimild tey fylgjandi fimm fíggjarárini 1959/60 til 1963/61 landskassans vegna at læna uppí 1 mill. kr. hvört fíggjarárið.

Hesi lán verða bert at nýta til at lúka tær av lögtinginum góðkendu studningsskipanir til fylgjandi endamál:

a. havnabygging
b. vegagerð, herundir gerð av tunellum og
c. endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

§ 2.

Henda lögtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

Lagtingslov om laan til landskassen til havnebygning, vejbygning og fiskerflaadens fornyelse.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til i de fem følgende finansaar 1959/60 til 1963/61 paa landskassens vegne at optage indtil 1 mill. kr. i laan indenfor hvert finansaar.

De saaledes optagne laan kan kun anvendes til opfyldelse af de af lagtinget vedtagne tilskudsordninger til følgende formaal:

a. havnebyggeri
b. vejbyggeri, herunder tunnelbyggeri og
c. fornyelse af fiskerflaaden.

§ 2.

Denne lagtingslov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Eftir lögtingslóg nr. 56, 3. november 1958, um havnabygging er samtykt at veita í studningi til útbygging av ymsum havnum 50 % av 18.675.000 kr. ella 9.337.500 kr. við 1/10 ella 933.750 kr. um árið tey 10 fylgjandi fíggjarárini frá 1959/60 at rokna. Eisini er í lögtingsmáli nr. 77/1957 (lögtingstíðindi 1957 s. 213) samtykt at veita Tórshavnar býráð til bygging av cyslara og vestara bringarði 50 % av 17.325.000 kr. ella 8.662.500 kr. við 1/20 ella 433.125 kr. um árið, tá tann neyðugi byggipeningurin er tryggjaður. Eftir hesum kann árligi landskassastudningurin til havnir koma uppí 1.366.875 kr. árið.

Vegabygging er ikki eins og havnabyggingin skipað í ætlanum fyri fleiri ár, tað er í torföri frammánundan gjölliga at siga, hvussu nógv verður bygt ávist ár. Eftir teimum royndum, ið eru, kann ætlast, at vegabyggingin komandi árini snýr seg um 1,6 til 2 mill. kr. um árið.

heruppií er ikki roknað oyggjarvegurin og tunnellin í sambend við veg millum Tvongisvág og Hvalbø. Studningurin, 75 %, verður so 1,2 til 1,5 mill. kr. Gerð av oyggjarvegnum og tunnellini vil eyðsvið hækka hetta studningstalið munandi.

Viðvíkjandi skipabyggingini er at siga, at komandi 5 árini verður av linuskipum størri og smærri helst bygt fyri 10 mill. kr. um árið. Hereftirat koma so í 1959/60 teir 3 Portugals-trolararnir og ein annar størri trolari, sum bygdur verður í Danmark. Eftir studningsreglunum galdandi í fíggjarárinum 1958/59, 20% av virðinum í studningi, verður landskassastudningurin hvört árið 2 mill. kr. til linuskip og til trolararnar, tó bert fyrsta árið og bert við 15 % um 1 mill. kr.

Samlaði landskassastudningurin kann, eftir tí her er greitt frá til nevndu trý endamál, koma uppí 1,6 til 1,9 mill. kr., í fíggjarárinum 1959/60 tó 1 mill. kr. aftrat í studningi til trolarabygging. Studningur til oyggjarvegin og til nevndu tunnell økja tóltini enn meira.

Tað verður helst so, at havnagerðirnar ikki verða framdar so skjótt, sum ætlanirnar fyriseta. Hóast hetta sela tær her tilskilaðu uppgávur tílík krøv til landskassan, at tað kann hugsast at verða neyðugt hjá landsstýrinum at hava möguleikar fyri at lænn pening, um játtanirnar á fíggjarlógini ikki rökka til.

Við samráðing við ríkisstýrið vil ríkisstýrið útvega heimild fyri, at ríkisknssin veðheldur fyri tey lán, sum tikin verða eftir fyriliggjandi uppskoti til lögtingslóg.

1. viðgerð 4. apríl, og 13. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins. Men av tí, at tað í lógaruppskotinum verður sagt, at ein partur av hesum láni er ætlaður til tunnelgerð, og tá ið tunnelgerð tit samferðslu er heilt óroynd í Föroyum, heldur nevndin, at áðrenn avgerð verður tikin at nýta pening av hesum láni til tunnelgerð, eigur málið at verða lagt aftur fyri tingið við byggi- og kostnaðurætlan.

UPPSKOT

Áðrenn farið verður undir tunnelgerð millum Tvöroyri og Hvalba, verður málið lagt aftur fyri tingið við byggi- og kostnaðarætlan eins og avgerð verður tikin um, hvussu stóran part av byggipeninginum kommunurnar skulu rinda.

2. viðgerð 15. apríl og 3. viðgerð 18. apríl 1959.

Tingformaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Kj. Mohr:

Sum nýggj § 2 verður sett:

«Föroya lögting heimilar landsstýrinum saman við figgjarnevnd ini at tingast um at taka við mögulugum útlendskum lánum til bygging av fiskiskipum, herundir eisini at geva landskassaábyrgd fyri peningahædd upp í 20 mill. kr.»

§ 2 verður § 3 í báðum tekstum.

«Færøernes lagting bemyndiger landsstyret til sammen med finansudvalget at forhandle om optagelse af eventuelle udenlandske laan til bygning af fiskerskibe, herunder ogsaa at garantere landskassens vegne for et beløb op til 20 mill. kr.»

Tingformaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Robert Joensen o. fl.

Í staðin fyri 1. stykki í grein 1 í landsstýrisins uppskoti verður sett:

Landsstýrið fær heimild til landskassans vegna í figgjarárinum 1959/60 at læna uppí 1 miljónir kr.

Landsstyret bemyndiges til i finansaaret 1959/60 paa landskassens vegne at optage 1 mill. kr i laan.

Broytingaruppskot frá R. Joensen o. fl. fall 11—0.
Broytingaruppskot frá Kj. Mohr fall 15—0.
Uppskot landsstýrisins samtykt 26—0.
Uppskot nevndinnar samtykt 22—0.

---

50. *Eykastudningur til lønjavningargrunnin.*

Ár 1959, 3. april legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
lögtingslóg um eykastudning til lönjavningargrunn fiskimanna.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at gjalda lönjavningargrunni fiskimanna í eykastudningi 1 mill kr. hvört figgjarárið, figgjarárini 1959/60 og 1960/61.

§ 2.

Eykastudningurin 1 mill. kr. hvört fíggjarárið verður útvegaður við fylgjandi broytingum í hesum lögum:

1. Í lögtingslóg nr. 23, 11. februar 1950 um innflutningsgjöld o.a. soleiðis sum hon er broytt við lögtingslógum nr. 58, 7. september 1950, nr. 66, 6. oktober 1950, nr. 11, 6. marts 1951, nr. 71, 18. december 1951, nr. 1, 9. marts 1954, nr. 3, 18. februar 1955 og nr. 6, 25. januar 1957 verða fylgjandi broytingar gjördar:

I í § 1:

Lón.

SPIRITUOSA OG SPRITT.

Brennivín og akvavitt:

5.	av 50 rúmprosent og undir	1 litur	22,00 kr.
6.	yvir 50 rúmprosent, men ikki yvir 70 rúmprosent	1 litur	28,00
7.	yvir 70 rúmprosent	1 litur	36,00
	Aðrar vörur undantikið heilt denaturerað spiritus.		
8.	av 50 rúmprosent og undir	1 litur	32,00
9.	yvir 50 rúmprosent, men ikki yvir 70 rúmprosent	1 litur	36,00
10.	yvir 70 rúmprosent	1 litur	48,00

ÖL.

11.	Öl, sum verður innflutt úr hinum partinum av kongarikinum og er sovorðið, at tað verður ikki skattað hægri enn öl, sum er av skattaklassa II, nevnt í lög nr. 111, 1. april 1922, § 2, sbr. nr. 221, 1. mai 1923 § 1	1 litur	1,20 kr.
12.	Annað	1 litur	1,80

SKREYTVÖRUR, BIJOUTERIVÖRUR OG NIPSLUTIR.

17.	Í tekstini gongur út orðið «damutaskur» og 60 % verður broytt til	100 %

INSTRUMENTIR, RADIOTÓL O. A.

Teksturin og avgjaldið verður broytt soleiðis:

20.	Klaviaturinstrumentir eisini við innbygdum spælivælum og onnur musikinstrumentir og lutir til tilík, radiomóttakarar, hátalarar, radiolampur (radiorör), bilatarör og eisini tiltaks- og eykalutir til hesi	av virðinum 25 %
20 a.	Plátur til mekanisk musikinstrumentir, grammofonir, plátuspælarar, fonografir og tilík instrumentir og tiltaks- og eykalutir, barandir stiftir og innspældar og óinnspældar plátur og	

valsar, bandupplakarar og tillaks og cykalutir
til hesar ..... av virðinum 50 %
32. Fýrverkarlutir ..... av virðinum 100 %
35. Leikutoy og felagsspöl og lutir til slíkar
vörur ..... av virðinum 100 %

LUKTILSI OG FRÍÐKANNARLUTIR.
45. Annað ..... av virðinum 100 %

VOGNAR OG ONNUR AKFÖR EISINI VOGNSMIÐUVERK.
67. Motorsyklur og persónvognar ..... av virðinum 60 %
67 a. Vöruvognar ..... av virðinum 40 %
68. Aðrar vörur ..... av virðinum 25 %

Sum nýtt lbn. verður sett:

KUFFERT, TASKUR V. M.
74. Öll slög av kuffertum, taskum, pengapungum, seðlamappum, dokumentmappum v.m. uttan mun til tilfarið, undantikið tó tílíkar vörur, sum eftir tilfarinum hoyra undir lbn nr. 41 og 47 ..... av virðinum 25 %

2. Í § 5, 2. stk. verður sett sum nýtt punktum:
Ikki verður við innklarering roknað við avslátturi, uttan so at hesin er frádrigin sjálvum fakturaprísinum.

3. Í § 10 verður henda broyting:
a. Öl ..... 1 litur 0,80 kr.

II. Í § 32 í lóg nr. 73, 19. marts 1930 um motorakför v.m., soleiðis sum henda er broytt seinni, verða hesar broytingar:
Gjaldhæddirnar verða hesar:
a. 75 kr.
b. 50 kr.
c. 100 kr.
d. 120 kr.
e. 120 kr.

§ 3.

Frammanfyri nevndu broyttu gjöld verða uppkravd frá og við 1. apríl 1959. Tey broyttu innflutningsgjöld verða kravd av öllum vörum sum tað tolluppkrevjandi valdið hevur ikki loyvt innflytaranum til frála nýtslu (gjaldkvittan ella útflýggingarloyvi ikki giviið), líka mikið um sendingin er innflutt innan 1. apríl 1959. Landsstýrið er heimilað at geva undantaksloyvi har serlig viðurskiftir gera tað neyðugt, tað fyrsta vikuna.

§ 4.

Landsstýrið fær heimild at seta niður nevnd at kanna löggívuna um innfluttningsgjöld v.m. og at gera uppskot til nýggja lög viðvikjandi hesum.

§ 5.

Heuda löglingslög kemur í gildi beinanvegin.

FORSLAG
til
lagtingslov om ekstraordinært tilskud til fiskernes lönreguleringsfond.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at betale fiskernes lönreguleringsfond i ekstraordinært tilskud 1 mill. kroner i hvert af finansaarene 1959/60 og 1960/61.

§ 2.

Det ekstraordinære tilskud paa 1 mill. kr. i hvert finansaar tilvejebringes ved fölgende ændringer i nedennævnte love:

I. I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indförselsafgifter m.v., saaledes som denne er ændret ved lagtingslovene nr. 58 af 7. september 1950 nr. 66 af 6. oktober 1950, nr. 14 af 6. marts 1951, nr. 71 af 18. februar 1951, nr. 1 af 9. marts 1951, nr. 3 af 18. december 1955 og nr. 6 af 25. januar 1957 foretages fölgende ændringer:

1. i § 1:

Ihu.

SPIRITUOSA OG SPRIT.

Brændevin og akvavit:

5. af 50 rumprocent og derunder	1 liter	22,00 kr.
6. over 50 rumprocent, men ikke over 70 rumprocent	1 liter	28,00
7. over 70 rumprocent	1 liter	36,00
Andre varer undtagen fuldstændig denatureret spiritus:		
8. af 50 rumprocent og derunder	1 liter	32,00
9. over 50 rumprocent, men ikke over 70 rumprocent	1 liter	36,00
10. over 70 rumprocent	1 liter	18,00

ÖL.

11. Öl, der indföres fra det övrige kongerige og er af den art, at det ikke er höjere beskattet end öl af den i lov nr. 11 af 1. april 1922,		

§ 2, jfr. lov nr. 221 af 1. maj 1923, § 1, omhandlede skatteklasse II ..... 1 liter 1,20
12. Andet ..... 1 liter 1,80 .

GALANTERI- og BIJOUTERIVARER SAMT NIPSSAGER:

17. I teksten udgaar ordet «dametasker» og «60 %» aendres til ..... 100 %

INSTRUMENTER SAMT RADIOMODTAGERE M. V.
Teksten og afgiften aendres saaledes:

20. Klaviaturinstrumenter, ogsaa med indbygget spilleapparat og andre musikinstrumenter samt dele til saadanne, radiomodtagerapparater, höjtalere, radiolamper (radiorör), billedrör samt dele og tilbehör dertil ..... af værdien 25 %
20 a. Plader til mekaniske musikinstrumenter, grammofonplader, pladespillere, fonografer og lignende instrumenter samt dele og tilbehör dertil, herunder stifter og indspillede eller uindspillede plader og valser, baandoptagere samt dele og tilbehör dertil .... af værdien 50 %
32. Fyrværkerigenstande ..... af værdien 100 %
35. Legetöj og selskabsspil samt dele til saadanne varer ..... af værdien 100 %

PARFUME OG KOSMETISKE ARTIKLER.

45. Andet ..... af værdien 100 %

VOGNE OG ANDRE BEFORDRINGSMIDLER SAMT VOGNMAGERARBEJDE

67. Motorcykler og personvogne ..... af værdien 60 %
67 a. Varevogne ..... af værdien 40 %
68. Andre varer ..... af værdien 25 %

Som nyt IIbn. indsættes:

KUFFERTER, TASKER M. V.

71. Alle slags kufferter, tasker, portemonnaer, tegneböger, dokumentmapper m.v., uanset materialets art, dog undtaget saadanne varer, der efter materialets art henhörer under IIbn. 11 og 17 ..... af værdien 25 %

2. I § 5, 2. stk. tilföjes som nyt punktum:
Ved indklarering tages ikke hensyn til rabatter, med mindre disse udtrykkeligt er fratrukket i fakturaens taBbelöb.

3. I § 10 foretages følgende ændring:
a. Øl ..... 1 liter 0,80 kr.

13. I § 32 i lov nr. 73 af 19. marts 1930 om motorkøretøjer m.v., saaledes som denne senere er ændret, foretages følgende ændringer:

Afgiftsbeløbene bliver disse:
a. 75 kr.
b. 50 kr.
c. 100 kr.
d. 120 kr.
e. 120 kr.

§ 3.

De foran omhandlede ændrede afgifter opkræves fra og med den 1. april 1959. De ændrede indførselsafgifter opkræves af alle varer, der ikke af de afgiftsopkrævende myndigheder er tilladt indleveret indføreren til fri raadighed (afgiftskvittering eller udleveringstilladelse, uanset om indførselen maatte have fundet sted inden den 1. april 1959. Landsstyret bemyndiges til at give dispensation, hvor særlige omstændigheder gør det nødvendigt i den første uge.

§ 4.

Landsstyret bemyndiges til at nedsætte et udvalg til undersøgelse af den gældende lovgivning vedrørende indførselsafgifter m.v. og at fremsætte forslag til ny lovgivning vedrørende dette.

§ 5.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Eftir galdandi reglum, sbr. serliga kunngerð nr. 16, 25. juni 1951 og lögtingslóg nr. 10, 6. marts 1958 hevur lönjavningargrunnur fiskimanna tu uppgávu at tryggja fiskimonnum eina minstulön og veita teimum viðbót til fiskaprísin. Tær gjölligaru reglurnar fyri minstulönini og prisviðbótini setur stýri lönjavningaegrunnsins sjálvt, tó so at landsstýrisins góðkenning er neyðug, seinasta reglugerðin, galdandi fyri árið 1958, er frá 8. marts 1958.

Tær inntökur, ið eru grunninum neyðugar fyri at lúka hesar uppgávur, honum eru álagdar, fær hann í teimum gjöldum uppá útflutningin av fiski, sum serliga er tillögd honum. Aftaral hesum er tað úr landskassanum síðani 1. marts 1955 veitt grunninum í eykastudningi 1,5 mill. kr. um árið.

Samráðingar hava nú í hesum dögum verið millum fiskimannafelögini og reiðarafelagið um sáttmálarnar teirra millum. Eftir teimum upplýsingum landsstýrið liggur við, er tað, ið skilir partarnar, kravið frá fiskimonnum um eina fríðarlön, og at reiðarafelagið heldur, at limir tess ikki eru mentir at taka hesa útreiðslu uppá seg.

Eftir galdandi reglum, smbr. § 1, nr. 3 í löglingslóg nr. 31, 19. mai 1951 um frítíð við lön, kemur ikki undir tær galdandi frítíðarreglurnar persónur, um so er, at hann bert er partslöntur.

Fyri at skapa arbeiðið, ikki minst nú talan er um í stórum at endurnýggja fiskiskipaflotan, verður hildið neyðugt at skapa möguleikar fyri, at eisini partslöntir fiskimenn kunnu fáa frítíðarlön.

Út frá hesum hevur landsstýrið 2. april í ár um seningsmannin sett pörtunum hetta skriv:

«Fyri at gera lönjavningargrunnin föran at lúka skyldu sína verðu latið honum í millión krónur eyka, treytað av, at arbeiðsfriður skapast í 2 ár, eins og tilfelli er hjá arbeiðarunum á landi.

Sum er hevur grunnurin til uppgáva at rinda prisviðbót og lönjavning og verður hann eisini heil- ella lutvís at rinda frítíðarlön til fiskimenn

Landsstýrið verður at seta fram neyðturvilig inntökuuppskot.

2. og 3. viðgerð 3. april 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 17-0.

51. *Uttanbíggjajørð.*

Ár 1959, 9. april legði Sigurð Joensen löglingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
lóg um uttanbýggjajörð.

§ 1.

Uttanbíggjajörð er í hesi lóg at skilja sum jörð, hvörs eigari hevur fastan bústað uttanfyri lað bygd, har jörðin er. Býlingar verða í hesi lóg roknaðir at hoyra saman við ta bygd, sum teir hava jarðarlunnindi saman við.

§ 2.

Hvör tann, sum eigur uttanbíggjajörð, skal hava uppsitara til jörðina Uppsitarin skal hava fastan bústað í bygdini, har jörðin er.

§ 3.

Uttanso at uttanbíggjaeigari og uppsitari koma ásamt um annað, skal

uppsitarin verða löntur in natura, við brúki av innangarðsjörð og landsindum og / ella brotparti av ti, sum uttangarðsjörðin gevur av sær.

§ 4.

Koma uppsitari og uttanbíggjaeigari ikki ásamt um uppsitaralönina, verður hon áselt av einum gerðarrætti, har hvör parturin velur sín gerðardómara. Hesir venda sær til sýslumannin í teirri sýslu, har jörðin er, og setur sýslumaðurin tá triðja mannin í gerðarrættin. Tann, sum sýslumaðurin nevnir, verður áslöðumaður gerðarrættarins. Um annar av pörtunum ikki innan 4 viknr frá ti, at hin hevur biðið hann, hevur valt mann í gerðarrættin, hevur tann fyrri rætt til at velja báðar.

Úrskurður gerðarrættarins kann innan 4 vikur verða skotin til landbúnaðarnevndar.

§ 5.

Vil uttanbíggjaeigari skifta uppsitara, má uppsögnin verða givin ikki seinari enn allahalgannadag, hin 1. november, til fráfaringar trettanda dag, hin 6. januar árið eftir, uttanso at uppsitari doyr, flytur av bygdini ella grovliga misheldur uppsitaraskyldur sínar.

§ 6.

Uttanbíggjaeigari hevur skyldu til at boða hagastýrinum í ti haga, har jörð hansara er, frá skrivliga, láið hann setur uppsitara á jörð sína ella sigur uppsitara upp. Hagastýrið hevur í sínum lagi skyldu til at lata bygdamann, sum er uppsitari til ávísa uttanbíggjajörð, fáa váttan um hetta. Slíka váttan kann uppsitari lata tinglesa sum brúksrætt við ognarheimild uttanbíggjaeigarans, um ikki uppsitarasáttmáli til hesa jörð longu er tinglisin.

§ 7.

Avtala um stytri uppsagnarfreist ella annan fráfaringardag enn nevnt í § 5 er ógyldug. Skiftir uttanbíggjajörð eigara, situr uppsitarin tó við jörðini, til hann er lógliga uppsagdur.

§ 8.

Verður uttanbíggjajörð seld, skal uppsitarin hava ein vnaligan forkeypsrætt. Áðrem tinglesingardómarin tinglesur ognarskjal viðvíkjandi uttanbíggjajörð, skal hann lata vísa sær váttan frá tinglisnum uppsitara til jörðina um, at jörðin er honum boðin fyri tað virði, ið söluskjalið vísir, uttanso at keyparin er uppsitarin.

§ 9.

Hagastýrið í haga, har uttanbýggjajörð er, skal ansa eftir, at uppsitarar eru til jörðina. Er við árslok uppsitaraleys jörð ella ein ella fleiri uppsitarar uppsagdir, og eingin komin í staðin fyri, tá skal hagastýrið krevja tann uttanbíggjamann ella teir uttanbíggjamenn, sum jörðina eiga, at rætta hetta fyri trettandu. Trettinda dag hevur hagastýrið rætt til at seta uppsitarar á slíka jörð fyri slíkar treytir, sum galda í bygdini.

og hava slíkir uppsitarar sama rettindi og skyldur, sum um teir vóru settir av eigarunum, hagar til teir eru lógligu uppsagdir.

§ 10.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin. Innan treflanda dag hin 1 januar 1960 skulu allir eigarar av uttanbiggjajörð hava givið hagastýrinum í teimum bögum, har jörðin liggur, boð um hvönn ella hvörjir uppsitarar, teir hava, og koma aðramáta inn undir reglurnar í § 9, 2 pkt. í hesi lóg.

Greinagerð.

Uttanbiggjajörð er ikki nýkomin til í Föroyum, men tað má sigast, at hon í seinni tíð er mógv vaksin, við tað at fólkið í stóran mun flytur burtur úr teimum smáu bygdunum. Uttanbiggjajörð er eitt eyðkennefni föroyska ognarjörð, og ikki ber til at síga annað, enn at hon at samanstikið er til ógagns fyri samfelag okkara, og at hon bevur sín stóra part av skuldini fyri, at landbúnaðurin hjá okkum stendur aftanfyri lann í öðrum londum, har uttanbiggjajörð ikki er til. Lóggávan í öðrum londum byrgir fyri, at menn eiga jörð, ið teir ikki sjálvir dyrka. Tað sama er at síga um lann beluing av Föroya jörð, sum er almenn ogn, í har er lógboð um, at festari skal sita á festinum.

Tað er royndur lutur, at innangarðsjörð, hvörs eigari er uttanfyri bygdina, fer í örökt. Ofta er tað so, at uppsitarin eistni eigur jörð sjálvur, og tað vil so vera, at hann tá heldur vil rökja sína jörð, meðan uppsitarajörðin liggur í ónosa, ja, veltir teigar verða umsíðar hagi aftur. Hetta kann ikki vera annað enn landaskaði.

Óskilið viðvikjandi uttanbiggjajörðini veksur í hvörjum. Tað er ikki óvanligt nú at síggja bö, sum hoyrir til uttanbiggjajörð, standa ósligan.

Tað tykist ongantíð ov skjótt, at lóggávan kemur sær uppí spursmálið um, hvussu verða skal við uttanbiggjajörðini. Upp til okkara tíð lógin viðurskiftini hvat uttanbiggjajörðini viðvikur reltiliga fröst. Fólkatalið í bygdunum stóð við ella vaks spakuliga. Flutti nokur burtur, sóltu næstu frændir hansara við jörðini, og helta elvdi ikki nakað soleiðis óskil. Eisini hevur tað altíð verið ein óskrivað lóg, at tann, sum sat við jörðini, var næstur at fáa hana til keyps. Nakað beinleiðis lóghoð um, at uppsitarar skulu vera til uttanbiggjajörð, er ikki at finna í nýggjari lóggávu, men lóggávan roknar við uppsitarum til uttanbiggjajörðina, og av bygdamonnunum, har jörðin liggur, hevur tað altíð verið roknað fyri óskil, at eingin var uppsitarin. Tað förir eisini stórar trupulleikar við sær reint hurtursæð frá tí skaðiliga í, at landsins gröði ikki, táið soleiðis er, verður landsins föði, ið hvussu er ikki til fulnar. Tað ber ikki allastaðni til at skifta út, ið hvussu er verður tað ikki gjört í bræði, og har sum uttanbiggjajörð er í felag ella í blandi við innanbiggjajörð, verður tað til skaða fyri innanbiggjajörðina, tá hin ikki verður rökt, hvat hon aldri verður til lítar, tá eingin uppsitari er. Uppsitaraleys uttanbiggjajörð verður í mongum förum so at kalla harraleys jörð, og kann lóggávuvaldið ikki loyva tilíkum í landinum.

Lóggávuvaldið, sum bæði av figgjarligum, samfelagsligum og mentanarligum grundum eftir förinuni royndir at livga bygdirnar, hevur einu serliga grund til at royna at fáa skil á jarðarviðureskiftini á bygdunum. Royndir vísa, at tað byrgir ikki fyri fólkaflytingini av bygdunum, at lendingur og vegir verður gjört. Tað livir eingin av vegum, heldur ikki av lendingum, sum útróðrarvánirnar eru. Hitt vildi borið fanu rætta vegin, um fólkið í bygdunum fekk vissu fyri, at lann jörð, sum í bygdini er, sum boyrir bygdini til, sum er rökt og innangarðs brotin upp úr haga av bygdanonnunum, at hon skal koma bygdini til góðar. Tað vil vera við til at skapa lann tryggleika, sum neyðugt er, um bygdamennirnir skulu stöðast, og bygdirnar ikki avtoftast. Tað er einki at ivast í, at tað hollasta fyri landshúsarhaldið og fyri smábygdirnar var, at uttanbiggjajörðin varð avloyst og fall til bygdina. Hetta hevði tó verið ein heldur bondsklig framferð og ikki lætt at föra út í lívið.

Frammanfyristandandi uppskot er ein millumleið, sum, samstundis sum tað vil tryggja uppsitararnar, ger tað atkomiligt hjá teimum at ognast jörðina uttan peningamiss fyri uttanbiggjaeigaran.

1. viðgerð 13. april, og 22. april legði búnaðarnevndin fram soljóðandi

ALIT

Sigurð Joensen hevur 4. april 1959 lagt fram á ting uppskot til lóg um uttanbiggjajörð í 10 §§.

Málið varð 13. april beint í búnaðarnevndina, ið hevur viðgjört málið og býtt seg í ein meiri- og ein minniluta.

Meirilutin (Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, H. Hansen og V. Nielsen) vísir til, at tingið áður hevur sett eina millumtinganevnd at viðgera og koma fram við uppskotum til broytan av teim nágaldandi búnaðarlógum. Tá so liggur fyri heldur meirilutin að rættast, at hetta mál verður beint til viðgerðar í nevndu millumtingabúnaðarnevnd og setur fram uppskot samsvarandi hesum.

Minnilutin (J. Högnesen) mælir tinginum til at samtykkja lógaruppskotið frá Sigurð Joensen óbroytt.

Meirilutin (Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, H. Hansen og V. Nielsen) setur fram soljóðandi

UPPSKOT

Málið verður beint til viðgerðar í tingsins millumtinga búnaðarnevnd.

2. viðgerð 23. april 1959.
Uppskot Sigurð Joensens fall 6 0.
Uppskot meiralutans samtykt 26 0.

52. *Ábyrgd av láni til keyp av agni.*

Ár 1959, 9. apríl legði Poul Petersen lögtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um ábyrgd av láni til keyp av agni.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt í fíggjarárinum 1959/60 landskassans vegna at taka ábyrgd av lánum uppí kr. 250.000, tilsamans til keyp av agni.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for laan til köb af agn.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassets vegne i finansaaret 1959/60 at garantere for laan op til kr. 250.000, tilsammen til köb af agn.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerking:

Í löglingsmáli nr. 29/1958 samtykti tingið at geva landsstýrinum heimild at taka veðhald av láni fyri frystihús til keyp av agnsild í Föroyum.

Tá var so nógv átliðið á heyst, at lógin kom ikki fyrr enn 3. november 1958. Tá var sildaveiðutiðin at kalla at enda, men henda heimild hevur verið av stórum týdningi hjá teim smærru frystihúsunum at fáa lán í banka móti víðari trygd í veðhaldi frá landskassanum og harvið gjörd för at keypa sær förvandi agn niðurfyri.

Tá var tað bert sildin, eftirsum ongin höggustokkur var at hekoma á fiðum seinasta ár. Lógaruppskotið er nú rúmkað til eisini at umfata höggustokk.

Eftir áheitan frá frystihúsum loyva vit okkum at leggja lógaruppskot fyri tingið til tingsins vælvild.

1. viðgerð 13., 2. viðgerð 20. og 3. viðgerð 22. apríl 1959.
Uppskot Poul Petersens samtykt 23—0.

53. *Broyting í lóg um lønrinding.*

Ár 1959, 9. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Föroya arbeiðarafelag hevur lagt inn á ting uppskot til broyting í lov (nr. 95) om Arbejdslöns udbetaling paa Færöerne frá 7/4 1936.

Málið er av umsóknarnevndini beint í lógarnevndina, ið hevur viðgjört málið.

Grein 1 í lógini fyrisetur, at öll arbeiðslön verður at gjalda í peningi og ikki í býti við annað, uttanso at það frammanundan er gjörd klár og týðilig avtala um annan gjaldingarhátt ella sum það sigst í lógini «medmindre der derom forud er truffet udtrykkelig overenskomst».

Broytingaruppskotið gongur út uppá, at kravið um kontanta lönrindan ikki eigur at kunna frávikjast við avtalu partanna millum.

Nevndin er samd um at það ikki er neyðugt at broyta lógina so, at það ikki skal kunna gerast möguligt at gera avtalu partanna millum um frávik frá lógarinnar hövuðsregla um kontanta lönrindan.

Sum lógin er formulerað, er kontant lönrindan netupp hövuðsreglan, og um lógin ikki verður hildin, kann farast til rettin. Ein lógarbroyting sum skotið upp, hjálpir ikki uppá tann löngjaldara, ið ikki ger sína skyldu. Nevndin heldur tí, at það í lógini eigur at verða skotið inn ímillum «udtrykkelig» og «overenskomst» orðið «skriftlig» og setur fram uppskot samsvarandi.

UPPSKOT

Í lóg nr. 95 frá 7. apríl 1936 um Arbejdslöns udbetaling frá 7/4 1936 verður í § 1, 1. stk. in fine sett millum «udtrykkelig» og «overenskomst» orðið «skriftlig».

Uppskot Föroya arbeiðarafelags er soljóðandi:

UPPSKOT
til
broytan av lóg nr. 95 av 7. apríl 1936, viðvikjandi lönrindan í Föroyum.

§ 1.

Arbeiðslönin til bæði menn og kvinnur, sum eru daglönt, sum eru í starvi við handil, handverk, idnaða og minudrift, til sjófólk og arbeiðarar á dekksförum, sum eru í fiskivinnu ella á hvalaveiðu og til arbeiðarar og dagdöntir, ið starvast á landi við útgerðan av slikum förum, ella við lossing

§ 1.

Arbejdslön til saavel mandlige som kvindelige arbejdere og daglejere beskæftigede ved handel, haandværk, industri og minedrift, til söfolk og arbejdere paa dækskfartöjer, som gaar paa fiskeri eller hvalfangst og til arbejdere og daglejere, der i land udfører arbejde til saadanne fartöjers ud-

ella landing, skal verða goldin í reiðu peningi og ikki í býti við nakað annað.

Arbeiðslönin til persónar, ið taka lut í fiskivinnu ella hvalveiðu, kann verða goldin við einum ávísum luti í veiðuni.

Sjálvt um arbeiðið er uppá akkord, verður frammanfyristandandi skipan at fylgja.

§ 2.

Arbeiðslönin til tey í § 1 nevndu arbeiðsfólk, sum gera dag- ella tímalönað arbeiði á landi, verður goldin eina ferð um vikuna.

§ 3.

Verða arbeiðini í § 1 gjörd uppá akkord, verður útgoldið eina ferð um vikuna forskot, ið svara til ta vanligu daglönina fyri viðkomandi arbeiði.

Við akkord, ið varða meira enn 4 vikur, kunnu arbeiðararnir harumframt 4. hvörja viku krevja avrokning fyri tað útinntað arbeiði og upptil 2/3 av ágóðanum goldið.

Seinast 10 dagar aftaná, at akkordin er liðug, verður avlopið goldið.

§ 4.

Gjaldan av arbeiðslönini fyri nevndu arbeiðir fer fram í arbeiðstiðini á ella við arbeiðsplássið, ella á skrivstovu arbeiðsgevarans, ella verður innkravd av löngjaldsstovu arbeiðarans.

§ 5.

Um ikki lógarheimild er til loss, ella heimlað við sáttmála arbeiðsgevara- og arbeiðarafelags imillum, kann ikki verða aftur-

rustning, eller ved ladning eller losning, skal betales i rede penge og maa ikke erlægges ved anden modydelse.

Arbejdslön til personer, som deltager i fiskeri eller hvalfangst, kan dog i henhold til derom truffen aftale, erlægges som en vis andel i fangsten.

Foranstaaende regel finder anvendelse, uanset om arbejdet udföres paa akkord.

§ 2.

Arbejdslön til de i § 1 nævnte arbejdere, der udföres dag- eller timelönnet arbejde i land, udbetales een gang om ugen.

§ 3.

Udföres arbejdet af den i § 1 omhandlede art paa akkord, udbetales der en gang om ugen et forskud paa vederlaget, der svarer til den normale daglön for det paagældende arbejde.

Ved akkord af længere varighed end 4 uger, kan arbejderne derhos forlange, det hidtil udförte arbejde afregnet og indtil 2/3 af det indtjente vederlag udbetalt.

Naar akkorden er fuldfört, udbetales restvederlaget senest 10 dage efter.

§ 4.

Udbetaling af de i de foregaaende paragraffer omhandlende vederlagsydelser finder sted i arbejdstiden paa eller ved arbejdspladsen, eller paa arbejdsgiverens kontor, eller indhentes af arbejdernes udbetalingskontor.

§ 5.

Saafremt ikke andet følger af den gældende lovgivning eller er hjemlet i kollektiv overenskomst,

bildið ella drigið frá arbeiðslönunum til serligt endamál.

§ 6.

Ósemjir viðvíkjandi arbeiðslönum til tey í § 1 umröddu arbeiðsfólk kunnu fyriloggjast til avgerðar hjá Föroya rætti, líkamikið hvar saksökjaran býr, og verða viðgjörd eftir reglum,ið eru galdandi fyri undirrætssakir.

§ 7.

Lógin fær lógarheimild leiman vegin.

2. viðgerð 10. og 3. viðgerð 14. apríl 1959.
Uppskot Föroya arbeiðarafelags fall 8—0.
— nevndarinnar samtykt 26—1.

kan der ikke tilbageholdes i lönnen eller fradrages i særlige øjemed.

§ 6.

Sager, angaaende arbejdslön til de i § 1 omhandlede arbejdere, kan anlægges ved retten for Færöernes Retskreds, uanset hvor sagsögeren har bopæl og behandles efter de for underretssager gældende regler.

§ 7.

Denne Lov træder i kraft straks.

---

54. *Fiskiskapur innanfyri tiskimark.*

Ár 1959, 10. apríl legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

lögtingslóg um fiskiskap innanfyri fiskimark.

§ 1.

Mørkið, sum berl föroyingar og aðrir danskir ríkisborgarar hava rætt at rökja fiskiskap innanfyri, er ein linja 12 fjórðingar úr fjörumálanum fram við landi í Föroyum sunnr. kgl. fyriskipan

lagtingslov om fiskeri inden for fiskerigrænsen.

§ 1.

Den grænse, inden for hvilken alene færinger og andre danske statsborgere har ret til at udøve fiskeri, er en linie 12 sömil fra lavvandsmærket langs Færöernes kyst jfr. kgl. anordning nr af april 1959 vedrörende fiskeri-

nr. frá apríl 1959 um fiskipoliti á havinum undir Föroyum.

§ 2.

Innanfyri fiskimarkið eftir § 1 er tað við tí í § 3 tilskilaða undantaki forboðið fiskiförum, sum eru heimahoyrandi og skráset í fremmandum landi at rökja fiskiskap yvirhövur, herundir fáast við tílíkt, sum kann eyðkennast sum accessoriir til veruligan fiskiskap, eitt nú umskiping av fongi, virking, pakking og onnur handfaring av fiski ella fiskavöru, útgerð av skipi frá öðrum skipi og ankring við tí í hyggju seinni at vera luttikin í umskiping ella taka inn útgerð.

§ 3.

Hóast regluna í § 2 er loyvt förum, sum eru heimahoyrandi og skráset í fremmandum landi, sum í longri áramál innan apríl 1959 samfelt hava rökt fiskiskap á leiðum millum hesa linjuna og eina linju, sum yvirhövur gongur í einum fráleika av 6 fjórðingum úr landi smbr. stk. 2 í kgl. fyriskipan nr. frá apríl 1959.

§ 4.

Í teim í stk. 3 í nevndu kgl. fyriskipan tilskilaðu 3 leiðum millum 6 og 12 fjórðingalinjurnar er allur fiskiskapur enn við snöri og línu forboðin innanfyri tey í sama stað nærri tilskilaðu tíðarskeið.

§ 5.

Innanfyri 6 fjórðingalinjuna eftir § 3 er forboðið at fiska við

politiet i havet omkring Færöerne.

§ 2.

Inden for den i § 1 omhandlede fiskerigrænse er det med den i § 3 nævnte undtagelse forbudt fremmede fiskerfartöjer hjemmehörende og registreret i en fremmed stat at drive noget som helst fiskeri, herunder at foretage saadanne handlinger, som kan betegnes som accessorier til egentlig fiskeri-virksomhed, saasom omladning af fiskeladninger, tilvirkning, pakning og anden behandling af fisk eller fiskeriprodukter, forsyning af fiskeskibe fra andre skibe samt ankring af skibe med henblik paa senere deltagelse i omladning eller indtagelse af forsyninger.

§ 3.

Uanset bestemmelsen i § 2 er det tilladt fra fartöjer hjemmehörende og indregistreret i en fremmed stat, hvis fiskere igennem en længere aarrække forud for den april 1959 regelmæssigt har drevet fiskeri i omraadet mellem den linie og en linie, der i hoversagen forlöber i en afstand af 6 sömil fra land, jfr. stk. 2 i kgl. anordning nr. af april 1959.

§ 4.

I de i stk. 3 i den nævnte kgl. anordning nærmere beskrevne tre omraader beliggende mellem 6 og 12 sömile-linierne er i de samme-steds nærmere angivne tidsrum alt andet fiskeri end fiskeri med haandline og langline forbudt.

§ 5.

Inden for den i § 3 omhandlede 6 sömile-linie er det forbudt at

troli, skovlváð og snurruváð. Undir hetta forboð kemur tó ikki fiskiskapur við snurruváð við förum, sum fyrr hava rökt tilíkan fiskiskap á hesum leiðum eftir serligum loyvi. Fiskiskapur eftir hummara og í ramsóknarendamáli, sjálvt um hetta skuldi verið við troli v. m. er tó loyvt sum bigarlil, tá ið loyvi er fingið frammanundan frá landsstýrinum.

fiske med trawl, skovlvaad og snurrevaad. Dette forbud gælder dog ikke fiskeri med snurrevaad fra farlöjer, som tidligere har drevet saadant fiskeri i dette omraade i henhold til særlig tilladelse. Hummerfiskeri og fiskeri i undersögelsesöjemed, selv om dette foregaar med trawl m. v., er dog tilladt som hidtil, naar landsstyrets tilladelse forud er indhentet hertil.

§ 6.

Á leiðum, sum fiskiför hava ikki rætt eftir hesari lög at rökja fiskiskap ella serstakar veiðuhættir, skulu tey havn allan fiskireiðskap ella viðkomandi fiskireiðskap stúgvaðan burtur á sínum náttúrliga stað. Föroysk ella dansk skip koma ikki undir hesa treyt, tá ið tey sökja havn og heldur ikki fremmand för vegna havarí ella í tilíkum föri.

§ 6.

Fiskefartöjer, der befinder sig i omraade, hvor de i henhold til nærværende lov ikke har ret til at drive fiskeri eller bestemte arter af fiskeri, skal have alle fiskeredskaber, henholdsvis de paagældende fiskeredskaber, stuvet til side paa deres naturlige plads ombord. Ved anløb af havn gælder ovennævnte paabud ikke for færöske eller andre danske fiskefartöjer og heller ikke for fremmede fartöjer i tilfælde af havari eller lignende.

§ 7.

Stk. 1. Brot uppá reglurnar í § 2, tá ið tað er ólógligur fiskiskapur, og §§ 4 og 5 koma undir bót frá kr. 5.000,— og haraftrat allur fiskireiðskapur, harundir lemmar, wirar, línur, uppstandarar v. m. og fongur inn undir konfiskation. Skipið kann eisini heftast til rindingar av bótum og kostnað.

Stk. 2. Brot móti forboðnum í § 2 fyri accessoriskar gerðir og treytina í § 6 koma undir bót frá kr. 2.000,—, og haraftrat kann skip, fongur og reiðskapur heftast til rindingar av bótum og kostnað.

§ 7.

Stk. 1. Overtrædelse af bestemmelserne i § 2, for saa vidt angaar ulovligt fiskeri, og §§ 4 og 5 straffes med böder fra 5.000 kr., hvorhos samtlige fiskeredskaber, herunder lemme, slæbetrosser, liner, opstandere m. v. og den ombordværende fangst bliver at konfiskere. Skibet kan beslaglægges til dækning af böder og omkostninger.

Stk. 2. Overtrædelse af forbudet i § 2 mod at foretage accesoriske handlinger og paabudet i § 6 straffes med böder fra 2.000 kr., hvorhos skib, fangst og redskaber kan beslaglægges til dækning af böder og omkostninger.

§ 8.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin, samstundis fara úr gildi lög nr. 59 frá 23. april 1881 om fremmedes fiskeri under Færöerne við seinni broytingum og lög nr. 90 frá 1. april 1925 om forbud mod fiskeri med bundslæbevod med senere ændringer.

§ 8.

Denne lov træder i kraft straks, fra samme tidspunkt ophæves lov nr. 59 af 23. april 1881 om fremmedes fiskeri under Færöerne med senere ændringer og lov for Færöerne nr. 90 af 1. april 1925 om forbud mod fiskeri med bundslæbevaad med senere ændringer.

Viðmerkingar:

Í löglingsmáli nr. 6/1958 (vetrarting): Val av nevnd í fiskimarksmálinum hevur löglingið samtykt uppskot til sáttmála millum Danmark og Bretland um fiskimarkið við Föroyar. Hesin sáttmáli verður nú settur í gildi, og kemur hann í staðin fyri sáttmálan frá 22. april 1955 við Bretland. Sáttmálin verður galdandi, til millumlanda reglur koma í gildi um fiskimarkið, tó so at danska og bretska ríkisstýrið hvört sær kunnu uppsiga hann, táið trý ár eru gingin, aftaná at hann er komin í kraft; henda uppsögnin fær gildi eitt ár, áftaná hon er givin.

Fiskimarkið við Föroyar verður so 12 fjórðingar við tí undantaki, at framvegis verður loyvt skipum heimahoyrandi og skrásett í fremmanda landi, har fiskimenn í mong ár frammanundan hesar nýggju reglurnar koma í gildi, javnan hava fiskað innan fyri 12 fjórðinga markið, at fiska millum hetta markið og eitt 6 fjórðinga mark, soleiðis sum hetta er nærri tilskilað í sáttmálanum. Frá hesum undantaki er aftur tað undantak, at á trimum havleiðitn, ein norðan-, ein vestan- og ein sunnanfyri er forboðið, hetta er galdandi fyri föroyingar, danskarar og aðrar at fiska við öðrum reiðskapi enn snöri og línu.

Tær her nevndu nýggju reglurnar föra við sær, at broytingar mugu gerast í löggávuni, bæði um fiskiskap fremmanda og okkara undir Föroyum, smbr. her lög nr. 59, 23. april 1881 om fremmedes fiskeri við seinni broytingum og lög nr. 90, 1. april 1925 om forbud mod fiskeri med bundslæbevod við seinni broytingum.

Fyrra lögin setur forboð fyri, at fremmandir fiska innan fyri fiskimarkið. Herafturat nevnir hon ávísar gerðir, hesir ikki mugu í sambandi við fiskivinnuna, og eru hesar at virka, pakka ella umskipa fisk ella fiskaúrdrátt, gera línu til, egna ella rekja hana. Síðani inniheldur lögin í § 3 karantenureglur, nýggjar reglur eru komnar hesum viðvikjandi, smbr. kgl. fyriskipan nr. 378 frá 23. december 1958 og eru hesar tí nú óneyðugar.

Lögin frá 1925 setur forboð fyri at nýta teol ella skovliváð innan fyri fiskimark, og krevur hon, at skip við hesum greiðum hava allan reiðskap burturstúgvnðan, táið tey sigla innanfyri.

Fyriliggjandi uppskot hevur til endamáls at fáa samsvar millum reglurnar um fiskiskap innan fyri fiskimark og nýggja sáttmálan og eina ájourföring av bótunum fyri brot móti hesum reglum.

a d § 1. Her verður sligið fast, at fiskimarkið við Föroyar er 12 fjórðingar, soleiðis sum hetta er nærri tilskilað við kongiligari fyriskipan nr. frá apríl 1959 om fiskeripolitiet ved Færøerne.
a d § 2. Umfram fiskiskap er forboðið fremmandum innanfyri mark allar gerðir, ið standa í samband við fiskivinnu teirra, og ikki sum í lógini frá 1881 bert ávisar gerðir; tey dömi, ið nevnd eru, eru í bert at fata sum dömi. Tann myndugleiki, landsstýrið hevði við sáttmála við annað land at gera undantak, um föroyskir fiskarar fingu tilsvarandi rætlindir í viðkomandi landi, er ikki givin landsstýrinum eftir hesum reglum. Skuldi tað verið úhugi fyri hesum, má málið leggjast fyri lögtingið. At undantak mugu gerast í tilfelli av havarí t. d. frá forboðnum um umskiping, verður hildið óneyðugt at lögfesta, tað er ein náttúrlig regla, at í tílíkum förum mugu rimilig undantök gerast.
a d § 3. 12 fjórðinga markið er ófrávikiligt fyri skip frá trimum landum, har fiskararnir í viðkomandi landi ikki í langa tíð og vanliga hava ikki fiskað innan fyri hetta mark.
a d § 4. Á hesum trimum fiskileiðum er tað eisini forboðið föroyskum og donskum skipum at nýta annan reiðskap enn snöri og línu.
a d § 5. Meðan tað higartil hevur verið loyvt at nýta snurriváð og skovliváð inn at ytstu landoddunum, verður hesin reiðskapur umfram trolið bannaður nú; tó kunnu tey skip, ið higartil hava nýtt snurriváð á hesum leiðum, tey eru bert 2-3 í tali, halda fram við hesi fiskivinnu. Sama er við fiskari eftir hummara og sum lið í kanningum, har trol v. m. verður nýtt, tá loyvi er fingið frá landsstýrinum.
a d § 6. Reglurnar her um, at fiskigreiðurnar skulu vera burturbeindar, eru tær sonnu sum í 1925-lógini vóru galdandi fyri trolarar, nú galda tær tó fyri öll skip, ið sigla á leiðum, har tey ikki hava loyvi at fiska yvirhövur ella við ávísum fiskigreiðum, har hesar skulu vera beindar burtur. At föroysk og donsk skip kunnu taka greiðirnar fram aftur, táið tey koma í havn er náttúrligt; hetta verður eisini loyvt fremmandum við havarí og tílíkum.
a d § 7, s t k. 1. Bótin, fremmandir kunnu verða döndir fyri at fiska innan fyri, er eftir 1881-lógini millum 200.— og 5.000.— kr., fyri ólógligan trolfiskiskap er bótin eftir 1925-lógini frá 5.000.— kr. og uppeftir. Meðan eftir seinnu lógini fiskigreiðir og veiða hereumfram verður konfiskerað, er hetta ikki loyvt eftir tí fyrru. Nú verður bótin fyri ólógligan fiskiskap uttan mun til, um talan er um fremmandan ella föroyskan/danskan, frá 5.000.— kr. og uppeftir, hereumfram verða allar fiskigreiðir og veiðan, ið umborð er, konfiskerað, skipið kann leggjast til tryggjan av, at bót og sakarkostnaður v. m. verður goldin.
a d § 7, s t k. 2. Fyri gerðir innan fyri mark í sambaud við fremmanda fiskivinnu er bótin hin sama sum fyri ólógligan fiskiskap eftir 1881-lógini, og fyri ikki at hava greiðirnar burturbeindar er bótin eftir 1925-lógini frá 500.— til 5.000.— kr. Nú verður bótin fyri brot móti hesum reglum frá 2.000.— kr. Her er ikki talan um konfiskatión, men kann skipið við veiðu og greiðum leggjast til tryggjan av, at bót og sakarkostnaður v. m. verður goldin.

1. viðgerð 14. apríl, og 22. apríl legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Málið er beint í fiskivinnunevndina, sum hevur viðgjört málið.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (P. J. Olsen, P. M. Dam og J. C. Olsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins tó við teim broytingum, at § 5, 2. punkt gongur út, og § 7 verður broytt soleiðis, at munur verður gjördur á fiskiskapi við línu og snöri og so við troli, soleiðis at minsta bótin fyri ólógligan fiskiskap við línu og snöri verður kr. 5.000.—, meðan minsta bót fyri ólógligan fiskiskap við troli verður sett til kr. 10.000.—, og stk. 2 í sonnu grein verður broytt soleiðis, at kr. 2.000.— verða broyttar til kr. 5.000.—.

Minnilutin (Niels Holm Jacobsen) vísir til avgerðina í sjómarksmáluum í juni 1958, har samtykt varð, at fiskimarkið skuldi vera «12 fjórðingar frá ytstu skerjum og oddum út frá beinum basislinjum.» Hóast ein meiriluti av tinginum síðan hevur broytt hesa samtykt við at viðurkenna uppskot til sáttmála millum Danmark og Stórabretland um föroyska fiskimarkið, vil fólkaflokkurin ikki vera við til í löglingslóg um fiskiskap innanfyri fiskimarkið at bróta við prinsippið um fiskimark útfrá beinum basislinjum og kann tí ikki taka undir við § 1 í uppskotinum. — Av tí at minnilutin onga vón heldur vera at fáa tingið nú til at broyta uppskotið um brotnar linjur, setur hann onki uppskot fram um tað. Minnilutin vil annars styðja tær broytingar, sum nevndin er komin á samt um at gera í landsstýrisins uppskoti og sum ikki eru av prinsiplellum týdningi.

UPPSKOT
frá
meiriluttanum (P. J. Olsen, P. M. Dam, Jens Chr. Olsen og N. Holm Jacobsen):

§ 5, 2. punktum í báðum tekstunum gongur út.

Í § 7, stk. 1 millum «kr. 5.000.— og» og «og millum «kr. 5.000.—» og «hvorhos» verður skotið inn «við troll frá kr. 10.000.—» «med trawl fra kr. 10.000.—» og í sonnu § stk. 2 verður «kr. 2.000.—» í báðum tekstunum broytt til «kr. 5.000.—».

UPPSKOT
frá
minniluttanum (Jógvan Högnesen):

Í § 1 aðru reglu fara orðini: «aðrir danskir ríkisborgarar» burtur.

Í § 5 fimtu til sjeyndu reglu kemur staðinfyri: «við föroyingum, sum fyr hava rökt tilikan fiskiskap á hesum leiðum eftir serligum loyvi» fylgjandi:

«ávisar liðir á ávisum leiðum eftir serligum loyvi».

I § 6 settu reglu fara orðini: «ella dousk skip» burtur.

§ 7 fær fylgjandi nýtt 3. stk.:

«Sektirnar fara í grunn til stovnsetan og gjaldan av föroyskari sjóverju».

2. og 3. viðgerð 23. apríl 1959.

Minnilutauppskot frá J. Högnesen til § 1 fall 7-0.
— — — til § 5 fall 14-0.
— — — til § 6 fall 7-0.
— — — til § 7 fall 7-0.

Uppskot meiralutans til § 5 samtykt 19-0.
— — — til § 7 samtykt 28-0.

Lógaruppskotið so broytt samtykt 17-0.

55. *Ábvrgd av láni til Klakksvíkar kommunu.*

Ár 1959, 14. apríl legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

lögtingslóg um ábyrgd fyri láni til Klakksvíkar kommunu til skúlabygging.	lagtingslov om garanti for laan til Klakksvíkar kommune til skolebyggeri.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrið verður heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd av láni upp til 1.000.000 kr. til Klakksvíkar sóknar kommunu til skúlabygging.	Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for laan indtil 1.000.000 kr. til Klakksvíkar sogns kommune til opförelse af skolebygning.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Klakksvíkar kommuna sókir í skrivi 1. í h. m. um loyvi til og ábyrgd landskassans fyri láni, stórt 1.000.000 kr., sum ætlanin er, at taka í Kreditforeningen af kommuner i Danmark til framhald av skúlabyggingini í Klakksvík.

Byggiætlaninar eru góðtiknar og hevur kommunan fingið studning játtaðan frá landskassanum og ríkiskassanum.

Kommunan sókti í 1957 um landskassaábyrgd av láni 1 mill. kr. í Kreditforeningen af kommuner i Danmark og varð henda ábyrgd veitt við lögtingslóg nr. 33 frá 21. april 1957.

Farið er undir byggingina og er tilsamans bygt fyri 1.100.000 kr.

Kommunan hevur lánt 500.000 kr. uppá studningarnar og hevur hon nú meira pening fyri neyðini fyri framhald.

Tann góðkendi byggikostnaðurin var	1.680.000 kr.
men kemur nú aftrat kurs- og rentulap um	316.000
skúlainnbúgv	150.000
og yvirskt annað	20.000
hartil kemur so dýrkan vegna broyting í byggiætlan og hækkan av tilfarsprísi og arbeiðslön	220.000
soleiðis at byggikostnaðurin verður tils.	2.686.000 kr.
Klakksvíkar kommuna hevur av lánum	1.236.700 kr.
harav við landskassaábyrgd um 1 mill. kr.	
Elverkið tilsamans (við landskassaábyrgd)	1.680.000
og havnalagið við landskassaábyrgd	438.000
tilsamans	3.354.700 kr.

umfram hevur landskassin tikið ábyrgd av lánum til kajbygging í Klakksvík fyri 2 mill. kr., men eru hesi lán ikki tikin enn.

Skattaálikningin 1959 er um 1.100.000 kr. og eru eftirstöðurnar um 500.000 kr. harav meginparturin er fyri árini 1955-1958.

1. viðgerð 18., 2. viðgerð 21. og 3. viðgerð 22. april 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 28-0.

56. *Bygging av strandfarskipi.*

Ár 1959, 14. apríl legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um bygging av strandfaraskipi v. m.

§ 1.
Landsstýrinum verður heimilt at byggja strandfaraskip og at taka neyðugt lán til hesa bygging.

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinnan vegin.

lagtingslov om bygning af kystfartöj m. v.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til at bygge skib til kystfarten samt at optage nödvendigt laan til dette byggeri.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í fleiri ár hevur talan verið um at fáa nýtt far til strandfarasigliugina í staðin fyri «Smiril». Í 1957 fekk landsstýrið tilboð uppá bygging av skipi 135′ til stöddar fyri kr. 3.250.000.--. Skipið kundi sigla 14 mil og hevði pláss fyri 325 ferðafólkum, og 30 koyggjupláss. Hóast prísurin á nýbygningum ikki er hækkandi í löluni, verður tó neyðugt at rokna við, at nýtt skip av stödd 150′ kemur at kosta um 1 mill. kr.

«Smiril» bygdur í 1931, er ikki tíðarhóskandi til ferðasigling, men verður nýtt skip bygt, kann hann ivaleysi nýtast sum hjálparskip í staðin fyri «Ternuna», sum ikki er hóskandi til hesa tarnastu.

Á fíggjarlógini fyri 1959/60 eru settar av kr. 300.000.— til bygging av strandfaraskipi. Av hesum peningi saman við kr. 200.000.—, játtaðar frammanundan til sama endamál, fer meginparturin til byggingina av strandfaraskipi til Norðoyggjarnar.

1. viðgerð 18., 2. viðgerð 21. og 3. viðgerð 22. apríl 1959.

Tingformaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Kjartan Mohr o. fl.

Landsstýrið saman við fíggjarnevndini kannar málið tekniskt og fíggjarliga um byggjan av einum nýggjum «Smirli» og leggur málið aftur fyri tingið á ólavsöku.

Tingformaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Erlendi Patursson o. fl.

Landsstýrið verður biðið um at gera heildarætlan fyri strandfarasiglingini í Føroyum, har í millum gera uppskot um hvørji nýggj skip skulu keypast ella byggjast til hesa sigling.

Broytingaruppskotið frá E. Paturssoni o. Fl. fall 13 0.
Broytingaruppskotið frá Kj. Mohr o. Fl. samtykt 20 0.
Uppskot landsstýrisins var so statt burturdottið.

57. *Ábyrgd av láni til víðkingar av havnini í Leirvík.*

Ár 1959, 11. apríl legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

lögtingslóg um ábyrgd av láni til Leirvíkar kommuna til havnabygging.	lagtingslov om garanti for lån til Leirvikar kommune til havnebygning.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilt landskassans vegna at taka ábyrgd av láni upp í kr. 100.000. til framhald av havnabygging í Leirvík, fá treytirnar fyri studningsveitanini eftir lögtingslóg nr. 56 frá 3. november 1958 eru lúkaðar.	Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for lån indtil kr. 100.000. til fortsat havneudvidelse i Leirvik, naar betingelserne for ydelse af tilskud er opfyldt efter laglingslov nr. 56 af 3. november 1958.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

I lögtingslóg nr. 56 frá 3. november 1958 hevur lögtingið játtað 50 % studning til ávís havnaarbeiði, teirra millum til Leirvíkar kommunu 50 % av 400.000 kr.

Kommunan sókir nú um loyvi til og landskassaábyrgd fyri láni upp til 100.000 kr., sum er kommununnar partur í byggiugini. Kommunan hevur fingið tilsögn um helta lán frá banka, men móti landskassaábyrgd.

Kommunan hevur frammanundan lán við landskassaábyrgd fyri tilsamans 35.000 kr. pr. 11. december 1957. Fíggjarliga stendur kommunan annars reiðuliga væl.

1. viðgerð 18., 2. viðgerð 21. og 3. viðgerð 22. apríl 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 28—0.

---

58. *Ábyrgd av láni til Nes kommunu.*

Av 1959, 14. apríl legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT

til

lögtingslóg um ábyrgd av láni til Nes sóknar kommunu til havnabygging.	lagtingslov om garanti for laan til Nes sogns kommune til havnebygning.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd av láni upp í kr. 150.000. til viðkan av havnini í Runavík, tá treytirnar fyri studningsveitanini eftir lögtingslóg nr. 56 frá 3. november 1958 eru lúkaðar.	Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for laan indtil kr. 150.000. til udvidelse af havnen i Runavik, naar betingelserne for ydelse af tilskud er opfyldt efter lagtingslov nr. 56 af 3. november 1958.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerking:

Í lögtingslóg nr. 56 frá 3. november 1958 hevur lögtingið játtað studning til ávís havnaarbeiði, tetrra millum til Nes søknar kommunu 50 % av 2.500.000 kr. ella 1.250.000 kr. at rinda í 10 ár og við fíggjarárinum 1959/60 ella við 125.000 kr. árliga.

Ætlandi verður ríkisstudningur latin til hesi sonu havnaarbeiði við 25 % av byggikostnaðanum.

Kommunan søkir nú um loyvi at læna pening til byggingina og um landskassaábyrgd fyri lánunum.

Ætlan kommununnar er at læna peningin úr Kreditforeningen af kommuner í Danmark, men tá kommununnar partur av fyrsta stigi í byggiætlanini bert er 25 % av 1.800.000 kr., sum landsverkfræðingurin hevur tilmælt at byggja í fyrstu syftu, ella 150.000 kr. heldur landsstýrið seg bert kunna tilmæla lögtinginum at veita ábyrgd fyri hesum parti av byggikostnaðinum, tí kommunan má ætlast at kunna læna í Föroyum uppá landskassa- og ríkiskassastudningin uttan serliga landskassaábyrgd.

Nes kommuna hevur lán frammanundan við landskassaábyrgd tilsamans um 300.000 kr. og eru rentur og avdrög av hesum greidd regulliga.

Fíggjarliga stöða kommununnar er annars sum hjá kommunum flest og vil landsstýrið halda, at tann her umrædda útbygging av kaiini í Runavík vil geva kommununi so mikið øktar inntökur og mögulei kar, at hon óivað verður för fyri at greiða sínar skyldur av hesum láni.

1. viðgerð 18., 2. viðgerð 21. og 3. viðgerð 22. apríl 1959.

Uppskot landsstýrisins var so statt hurtardottið.

59. *Hægri skúli.*

Ár 1959, 15. apríl legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar

Landsstýrinum verður heimilað at byggja hægri skúla við kostdeild. Hægri skúlin umfatar 3 ára studentaskúla og 3 ára preliminer- ella realskúla.

Viðmerkingar:

Í ólavsökutingseto 1958, smbr. lögtingsmál nr. 9/1958, legði landsstýrið málið um hægri skúla fyri lögtingið við frágreiðing um, hví landsstýrið ikki helt seg kunna fremja lögtingsviðtökuna frá 21. februar 1958. Eftir hesi samtykt skuldi skúlin byggjast sunnan fyri viðalundina í Tórshavn og eftir tilboð komið frá svenskum felag. Orsökin til, at landsstýrið helt seg ikki kunna seta lögtingssamtyktina í verk, var, at nærri kanningar vístu, at ikki var pláss at byggja eftir svenska projektinum á grundökinum, og haraftrat kom, at meistara-, handverkara- og arbeiðsmannafelög mótmæltu, at skúlin varð liðugt innfluttur. Uppskot landsstýrisins var at fáa heimild at byggja skúlan sunnan fyri viðalundina og at fáu heimild til at útbjóða arbeiðið og annars at fremja málið.

Hetta uppskotið og fýra minnilutauppskot frá lögtingsnevndini viðvíkjandi bygging av hægri skúla fullu öll við atkvöðugreiðslu 17. oktober 1958.

Tær umstöður, ið förðu við sær, at landsstýrið ikki helt seg fá kunna fremja tingsamtyktina frá februar 1958, eru óbroytlar enn.

Tað er ongin ivi um, at lögting og landsstýri hava verið og eru samd um, at viðurskiftini á studentaskúlanum eru ikki samsvarandi teimum krövum, ið vera sett fyri studentaskúlar í norðanlondum, bæði viðvíkjandi húsaumstöðunum og tí, at næmingarnir ganga ár stytti á skúla, enn hildið verður beint aðrastaðni. Arbeiðsviðurskiftini fyri lærarar og næmingar versna, tá ið so er, og heraftrat kemur törvurin at koma á hægri skúla veksur, tá samfelagið ökir um krövini til læru hjá teimum ungu.

Út frá hesum vendir landsstýrið sær aftur til lögtingið í hesum máli, við áheitan um at fáa heimild at fremja hetta mál nú. Av tí at spurningurin um, hvar skúlin skal vera, er ein spurningur, ið eftir sini náttúru hoyrir fyrisilingini og ikki löggávuvaldinum til, er uppskotið til samtyktar bert formulerað soleiðis, at tað gevur landsstýrinum heimild at byggja skúlan.

Viðvíkjandi byggipeningi er at siga, at í grunninum til bygging av studenta- og kostskúla eru 31. december 1958 kr. 579.195,33. Haraftrat eru játtaðar á fíggjarlögtingslóg 1959/60 kr. 300.000, og við löglingslóg nr. 15 frá 20. marts 1958 er landsstýrinum heimild at lena upp í 2 milj. kr.

1. viðgerð 21. april, og 23. april legði skúlanevndin fram soljóðandi

ÁLIT
við skjali

Málið var lagt fram av landsstýrinum 15. april 1959. Við 1. viðgerð varð tað aftaná drúgvan orðadrátt beint í skúlanevndina.

Sum greitt er frá í viðmerkingunum frá landsstýrinum, so hevur spurningurin um bygging av hægri skúla fleiri ferðir verið frammi á tingi áður og er gjöfla viðgjördur bæði í nevndum eins og í lingsalinum.

Nevndin veit, at málið hevur stórnu áhuga millum manna, og heldur, at tað er ongantíð ov skjótt, at farið verður undir at byggja. I bræví frá lærarnum við studentaskúlan til Föroya lögtings verður sagt, at teir «mæla frá at taka nýggjar nemningar upp í summar, um ikki fæst vissa fyri í hesi tingsetu, at tíðarhóskandi skúli verður bygdur alt fyri eitt.»

Somuleiðis mælir felagið Colegium Academicum Faeroense við bræví til lögtingið, at skúlin verður bygdur onga tíð ov skjótt. Bræverið er lagt við í málinum.

Nevndin hevur havt samráðingar við landsstýrið og hevur fingið váttan fyri, at ætlanin er at fara undir byggingina beinan vegin.

So stutt mælir nevndin tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Til Föroya landsstýri, Tórshavn.

Av teirri grund at tað higartil hevur vist seg at hava verið teir störstu trupulleikar við at komu ásamt um, hvar studentaskúlin skal verða lagdur, og hvussu hann eigur at verða bygdur, tykist tað, eins og málið er dottið niður fyri.

Av sonn ørsök er tað álvarsama nú hent, at lærararnir halda seg vera noyddar til — um málið ikki verður framt — at leggja störvini frá sær, tá ið teir nemningar, sum í löturni ganga á gamla skútanum, hava lokið prógv sini, og at tað so statt er störsti vandi fyri, at studentaskúli okkara fyri aðru ferð fer fyri bakka.

Collegium academicum Faeroense vendir sær tí til háttvirda landsstýri við inniligari bön um, at farið verður undir byggjan av studentaskúla samb. lögtingsmál 59/1958 — 3 ára studentaskúla og 3 ára preliminer- ella realskúla við kostdeild, og at hesin skúlin verður lagdur í Hoydölum. Farið verður undir skúlabyggingina beinanvegin, og Brøstsjúkahúsið verður tikið til kostdeild, so skjótt sum tað er tökt.

2. viðgerð 23. apríl 1959.

Tingformaðurin legði fram fylgjandi broytingaruppskot:

1) frá Erlendi Patursson:

Landsstýrinum, saman við serstakari 5-manna millumtinganevnd, ið tingið velur í hesi tingsetu, verður álagt at fyrireika málið til ólavsökutingsetuna í ár, har í millum at koma við uppskoti um hvar skúlin skal byggjast og við at leggja fram byggi- og kostnaðarætlan.

Greinargerð.

Tað, sum sýnist at hava tarnað hesum máli, er m.a. tað, at málið hevur ikki verið nóg vel fyrireikað og lagt til rættis, tá tingið hevur fingið tað til viðgerðar.

Uppskot seinasta landsstýrinum at nýta ein part av sjúkahúsinum í Hoydölum til skúlabygging fekk ikki frama. Somuleiðis feldi seinasta

ting uppskot um at byggja nýggj skúlahús á hesum plássi. Høydafir sum byggistað skúlans má tí haldast at vera útilokaðir.

Aftaná, at tingið hevur samtykt at byggja skúlahúsini við viðalandina, sýndi tað seg, at henda bygging kundi ikki fremjast.

Tað lá tí á landsstýrinum at vísa á aðrar leiðir til at loysa hetta mál. Men tað hevur ikki verið gjört. Hin vegin hevur landsstýrið biðið um fulla heimild til einsamall at taka allar avgerðir í hesum máli.

Tað kann ikki haldast vera rætt, at tingið nú gevur frá sær alt ræði og avgerðarvald í hesum máli og letur tað upp í hendurnar á umsitingarvaldinum. Hin vegin má tað haldast vera náttúrlig skylda landsstýrisins at fyrireika málið, har í millum við at seta fram uppskot um, hvar skúlin skal byggjast og við at leggja fyri tingið byggi- og kostnaðarætlan.

Uppskot samsvarandi hesum verður her við lagt fram.

2) Frá Poul Petersen o. fl.

Landsstýrið fremur lögtingssamtyktina í lögtingsmáli nr. 10/1957 uppi undir Viðalundini ella á øðrum stað í Tórshavn undir einum ella kostskúla og skúlabygningar hvørt sær.

Uppskotið frá Erlendi Patursson fall 5 - 0.
Uppskotið frá Poul Petersen o. fl. fall 9 - 0.
Uppskot landsstýrisins samtykt 27 - 0.

---

60. *Vegir og lendingar.*

Ár 1959, 18. apríl legði havna- og veganevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Havna- og veganevndin hevur viðgjørt tær o. u. 100 umsóknir viðvíkjandi vega- og lendingamálum, sum innkomnar eru.

Eisini eru lögtingsmáliní:
nr. 25/1958: Studningur til umvæling av lendingarviðurskiftunum og bátadráttrinum á Vágseiði,
nr. 31/1958: Lendingarábótur í Fugloy og
nr. 36/1958: Bátahylur í Kaldbak,
sum beind eru í nevndina, viðgjørd saman við umsóknunum.

Undir viðgerðini av hesum umsóknum hevur nevndin hildið tað verið ein saknur, at ikki frágreiðing um, hvussu kommununnar hava rökt tey vega-, havna- og lendingararbeiði, studningur er veittur til, hevur verið lök, og verður tí ynskt, at avrit av rapportunum frá teim sýnum, sum fram eru farin í árinum, fyri framtíðina verða latin nevndini, áðrenn viðgerðin av lendinga- og vegamálunum byrjar.

I. Vegir.

Á fíggjarlögtingslógini eru settar av 1.200.000 kr. til nýggjar vegir og brýr.

Skal byggingin av samferðsluvegum kunna fremjast til muns, má henda upphædd, sum nevndin kundi ynskt var störri, öll verða nýtt til hetta endamál, og hevur nevndin tí ikki hildið seg kunna seta uppskot um nakra játtan til aðrar vegir t. d. dyrkingarvegir.

Nevndin skal tí loyva sær at seta fram soljóðandi

UPPSKOT

A. Til tær í 1951 og seinri samtykku störru vegabyggingarnar ..... kr. 1.100.000

B. Til niðanfyri nevndu vegir verður veittur hesin studningur:

Kommuna	Studningurin er til	Studningur $^3/_4$ av kr.
Viðareiðis	Vegin Viðareiði-Hvannasunds	15.000
Haldórsvíkar	Tjörnuvíkarvegin	25.000
Kvívíkar	Skælingsvegin	15.000
Húsavíkar	Húsavík-Dals	30.000
Hvalbiar	Sandvíkarvegurin	20.000
	Breiðkan av vegunum í Skálum í Hvalbö	10.000
	Vegin Hvalbö-Tvöroyri	10.000
	Tilsamans $^3/_4$ av kr.	125.000

II. Lendingar.

Til lendingar eru á fíggjarlögtingslógini settar 100.000 kr. Av hesum peningi eru 208.500 kr. bundnar til studningar fyri fíggjaraeið 1950/60, sum játtaðar eru áður.

Hesir studningar eru:

Kommuna	$^3/_4$ av kr.
Hvannasunds	
Til leingjan av lendibrúgv í Norðdepli, ikki bygt (3' ársgjald av 3 ára játtan)	27.000
Húsa	
Lending og drátt á Syðradali, bygt (5' ársgjald av 5 ára játtan)	8.000

Leirvíkar

Leinging av pierinum í Leirvík, bygt (1/ ársgjald av 7 ára játtan)	20.000

Nes

Bátalýlur í Oyrunum, ikki bygt (3/ ársgjald av 3 ára játtan)	30.000

Hvalbiar

Leinging av pieri á Hamranesi, bygt (1/ ársgjald av 6 ára játtan)	33.000

Porkeris

Pier í Porkeri, bygt (1/ ársgjald av 5 ára játtan)	40.000

Sunnbiar

Til útbygging av pollinum í Sunnbö, ikki bygt (1/ ársgjald av 5 ára játtan)	120.000
Tilsamans $^{3}/_{4}$ av kr.	278.000
= kr.	208.500

Viðvíkjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

UPPSKOT

A.

Kommuna	Studningurin er til	Studningur $^{3}/_{4}$ av kr.
Svínoyar		
	Leinging av lendibrúnni í Víkini ($^{3}/_{4}$ av 15.000 kr. um árið í 3 ár)	15.000
Klakksvíkar		
	Lendilbrúgv í Arnafirði	10.000
Kunoyar		
	Leingjan av lendibrúgv í Haraldsundi ($^{3}/_{4}$ av kr. 10.000 um árið í 2 ár)	10.000
Mikladals		
	Eykastudning til rennistrong á Tröllanesi	1.000
Elduvíkar		
	Lendingarábötur í Elduvík	5.000
Nes		
	Brimverju á Nesi	5.000
	Lending í Æðuvík	10.000

Sjóar

Lendibrúnna á Selatrað (3/4 av kr. 15.000 um árið í 1 ár) 15.000

Kvívíkar

Bátaspæl í Leynum 12.000

Hests

Veg oman á lendingina í Hesti 8.000

Sandavágs

Verjugarð fram við kirkjugarðinum í Sandavági (3/4 av 10.000 kr. um árið í 2 ár) 10.000

Bíggjar

Umbótur við lendingina í Gásadali 10.000

Mykines

Trygging av vegi oman á lendingina *10.000*

Sands

El-motor til spæl til bátadrátt 2.000

Skálavíkar

Eykastuðning til framan leinging av bringarðinum.. 20.000
Til leinging afturat (3/4 av 25.000 kr. um árið í 2 ár).. 25.000

Húsavíkar

Til lending á Skurvaskeri 15.000

Skúvoyar

Lendingarábøtur 10.000

Hvalbiar

Leinging av bátadrátti í Sandvík 12.000

Froðbiar

Umvæling av lendibrúgv í Øravík 15.000

Fámjins

Lendingarábøtur 10.000

Hovs

Leinging av verjugarði 10.000

Vágs

Ábøtur við lendingina á Vágseiði 10.000

Tilsamans 3/4 av kr. 253.000
kr. 189.750

B. Landsstýrið verður biðið um at láta landsverkfræðingin gera byggi- og kostnaðaráætlanir fyri hesar lendingarúbótur:

1. Dýping og viðkan av hylinum innan fyri bringarðin í Kvívík.
2. Leinging av lendibrúnni í Toftum í Hósvík og breiðkan av vegnum til hesa brúgv.
3. Dýping av bátahylinum í Hesti.
4. Leinging av lendibrúnni í Funningi.

Tingformaðurin legði fram fylgjandi broytingaruppskot:

1) frá Niels Hofm Jacobsen o. fl.:

Í nevndarinnar uppskoti I. V e g i r B. verður aftaná «Vegin Hvalba-Tvöroyri» ístaðin fyri «10.000» sett «100.000»

og

sum nýggj regla undir «vegin Hvalba-Tvöroyri» verður sett «vegin Sandvík-Hvalba ..... 20.000»

og

í nevndarinnar uppskoti II l e n d i n g a r A verður niðri undir «Leingjan av bátadrátti í Sandvík» sett:

Bátahylur á Bíggjargarði í Hvalba (¾ av 25.000 um árið í 5 ár)	25.000
Leingjan av bryggjuni í Sandvík (¾ av 15.000 um árið í 5 ár)	15.000

2) frá K. Wang o. fl.:

Í nevndarinnar uppskoti I V e g i r B verður sum nýtt stykki at setast:

Kaldbaks

Til framhald av vegi inn móti Kaldbaksbotni	10.000

og

Tórshavnar utlanbiggja

Til framhald av vegi oman í Akkersvík	8.000

3) frá Vilhelm Nielsen:

I Vegir: Sum nýtt punkt verður sett.
Lögtingslóg um at byrja samferðsluveg millum Fúlaklett og Oyrargjógv.

§ 1.

Landsstýrið verður heimilað landskassans vegna at læna tann pening, ið törvar til at fremja vegasambandið millum Fútaklett og Oyragjógv.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at optage det til gennemførelse af vejforbindelsen mellem Fútaklett og Oyragjógv nödvendige laan.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

---

4) frá Leon Joensen o. fl.:

Undir I verður sett sum nýtt stk. C:
Landsstýrið verður biðið um at áleggja landsverkfröðinginum at kanna kostnaðin og annað viðvikjandi vegastrekkinum F ú t a k l e t t – O y r a r g j ó g v og leggja úrslitið aftur fyri ólavsökutingið.

---

5) frá Jens Chr. Olsen o. fl.:

Undir B. Vegir aftaná Hvalbö – Tvöroyri verður sett:
Nes

Veg til Jacob H. Höjgaard 8.000

Undir B: sum punkt 5 verður sett:
Kanning av virðismetan av lendingsviðurskiftunum á Krúargili.

---

6) frá Robert Joensen o. fl.:

I nevndarinnar uppskoti I. V e g i r B verður út fyri «vegin Viðareiði—Hvannasund» ístaðin fyri «15.000» at seta «200.000» og undir «Viðareiðis» verður sett «og Hvannasunds».

---

7) frá Johan H. Joensen o. fl.:

Undir I V e g i r verður sett nýtt stykki soljóðandi:
Til uppdyrkingarvegin í Sumbiar kommunu $^{3}/_{4}$ av kr. 40.000.

---

8) Frá Erlendi Patursson o. fl.:

Undir II Lendingar verður sett nýtt stykki:
Til leinging av atlögubryggju í Kirkjubö:
¾ av kr. 20.000.

9) Frá K. Wang o. fl.:

Í nevndarinnar uppskoti II. Lendingar A. verður sum nýtt petti millum «Hests» og «Sandavágs» at seta:

Kaldbaks
Til bátahyl í Biggjarstöð í Kaldbak
(¾ av 10.000 kr. um árið í 6 ár) 10.000

Í öðrum lagi:
Í nevndarinnar uppskoti II. Lendingar B. verður sum nýtt petti at seta:
5. Útbygging av bátahyli í Biggjarstöð í Kaldbak.

10) Frá K. Wang o. fl.:

Í nevndarinnar uppskoti II. Lendingar B. verður sum nýtt petti at seta:
Víking av lendibrúnni á Sundi.

---

11) Frá Poul Petersen:

Sum nýtt punkt II – C (dýping av Streymnum) verður sett:
Landsstýrinum verður heimilt at stíla fyri kostnaðarætlan yvir útreiðslur til burtrspreingingar av flesini í Streymnum at leggja fyri tingið á komandi ólavsöku.

Viðmerkingar:
Í lögtingstíðindi nr. XIV/1891 var málið fyri á tingi (sunbr. lingtíðindi 1891 bls. 70) og samtykt at fara undir burtrspreinging av flesini, meðan tingið í 1931 samtykti at leggja spurningin niður (sunbr. tingmál nr. VI/1931 — tingtíðindi 1931 bls. 106). Í 1949 var málið fyri aftur (sunbr. tingmál nr. 83 — tingtíðindi 1949 bls. 296) og samtykt at freyta landsverkfröðinginum at biðja entreprenörfirma kanna og meta um eina dýping av Streymnum og gera kostnaðarætlan v. m. at leggja fyri tingið í tingsetuni 1950.

Endaliga var so málið fyri aftur í 1951 (smbr. tingmál nr. 15 — tingtíðindi 1953 bls. 30) og samtykt at treyta landsverkfröðinginum skjótast mögulígt at kanna, hvat gerast kann at rudda burtur steinar ella kneysar o. í. og leggja málið fyri tingið á ólavsöku 1951.

Í 1958 vóru uppskot frammí um fíggjarheimildir til dýpingar av Streymínum undir málinum: Nýggj havnaaellan, men ongin samtykt.

Tað er eitt sterkt ynski fyri norðan at fáa henda spurning kannaðan og fáa so mikið gjört sum burtursprenging av ella burturav flesini og harvið fáa rúmka og beinka siglingina mumandi.

Út frá hesum loyvi eg mær at seta uppskol fram til tingsins vælvild.

2. viðgerð 20. apríl 1959.

Broytingaruppskot (7) frá Johan H. Joensen o. fl. var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja — atkvöddu: J. H. Danbjörg, N. H. Jacobsen, K. Wang, B. Joensen, J. Simonsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, K. Hoydal, J. H. Joensen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, Jens Chr. Olsen, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, V. Nielsen, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. J. Olsen og J. F. Öregaard. Burtur: H. Petersen og P. M. Dam.

Uppskotið fall 11—0.

Broytingaruppskot (1) frá Niels Holm Jacobsen o. fl. (veg Hvalba Tvöroyri) var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja — atkvöddu: J. H. Danbjörg, P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, B. Joensen, J. Simonsen, V. Nielsen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, K. Hoydal, J. H. Joensen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, Jens Chr. Olsen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, Kj. Mohr, Fr. Hansen, K. Djurhuus, P. J. Olsen, H. Hansen og J. F. Öregaard. Burtur: H. Petersen og P. M. Dam.

Uppskotið fall 12—0.

Broytingaruppskot (9) frá K. Wang o. fl. fall 15—0.
(9) subsidiert samtykt 22—0.
(10) frá K. Wang og fl. samtykt 19—0.
(2) frá K. Wang o. fl. fall 15—0.
(8) frá E. Paturssen fall 12—0.
(3) frá Vilhelm Nielsen fall 11—0.
(4) frá Leon Joensen samtykt 25—0.
(5) frá Jens Chr. Olsen fall 9—0.
(5) (kráargil) samtykt 24—0.
(11) frá Poul Petersen samtykt 24—0.
(6) frá Robert Joensen fall 10—0.

Uppskol nevndinnar 1—11 — II A. og II B samtykt 28—0.

61. *Endurgjaldskrøv av skaða uppá fiskireiðskap.*

Ár 1959, 18. apríl legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Jógvan á Dul hevur í skrivi frá 9. februar 1959 veitt sær til tingið orsakað av skaða, sum m/s FÖROYINGUR var fyri um heystið 1957, tá ið russiskt sildaveiðuskip setti niðurryvir görnini hjá FÖROYINGI. Umsóknarnevndin hevur beint málið til fiskivinnunevndina.

Tað er síðani gjölla greitt frá hesum tilburði og frá teim royndum, sum gjördar hava verið við Færöernes marinedistrikt sum millumlið at fáa yvirleiðarin á russiska sildaveiðuflotanum at ganga undir krav um skaðabót, men higartil uttan úrslit, og tessvegna hevur marinustöðin sent málið til víðari viðgerð gjögnum danska uttanríkisdeildina.

Hann skilar til í skrivinum, at donsk-norsk nevnd eftir sáttmála millum Danmark og Noreg situr til tess at viðgera tílík endurgjöldskröv og í hesi nevnd sita 2 föroyingar.

Eftir samtykt á lögtingi er tílíkur sáttmáli Bretland og Föroya imillum í umbúna.

Haraftrat sigur hann, at föroysk skip eftirhondini hava verið fyri stórum missum av russiskum fiskiskipum, mest í sildaveiðuni, men ikki sört heldur í fiskiskapi undir Föroynum.

Um að skuldi ikki borið til at fingið tílíkum sáttmála við Rusland, so mátti tó líkindir verið at fingið treytað russiskum skipum eina tílíka skipan. Tey hava notið so góðar sömdir inni á föroyskum firðum.

Nevndin má geva Jógvan á Dul viðhald í týðninginum að hevur at tryggja föroyskum fiskiskipum endurgjald av skaða, sum tey kunnu koma fyri av fremmandum ávum.

Sum sagt í skrivinum hevur marinustöðin verið millumlið millum föroyskar útgerðarmenn og yvirleiðarin á russiska sildaveiðuflotanum. Í summum förum hevur að eydnast at koma á samt um skaðabót, men í öðrum förum eitt nú sum í hesum ikki.

Tað er tí ein royndi at biðja landsstýrið stíla fyri, at tingingar verða tiknar upp við Rusland um eina skipan, so sum samtykt í tingmáli nr. 45/1956, tingtíðindi 1956 bls. 121, og samsfundis skunda undir eina avgerð í fyriliggjandi endurgjaldskravi.

Vísandi hertil mælir nevndin tinginum til at samtykkja soljóðandi

UPPSKOT

Tingið biður landsstýrið stíla fyri, at tiknar vera upp tingingar við viðkomandi russiskar myndugleikur um við sáttmála at seta nevnd til viðgerðar av öllum endurgjöldskrövum fyri skaða, sum fiskiskip úr

ðrum landinum gera uppá fiskireiðskap hjá skipi heimaboyrandi í hinum landinum.

2. viðgerð 21. aprll 1959.
Uppskot nevndinnar samtykt 25—0.

---

62. *Ábyrgd av láni til S.E.V.*

Ár 1959, 22. apríl legði lögmaður fram saljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um ábyrgd fyri lánum til S. E. V.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd fyri lánum, 17 mill. kr., el-felagið S.E.V. tekur til hesar byggingar:

Útbygging av Mýrunum,
bygging av 60 KV-linjum,
útbygging av Heljareyga.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om garanti for laan til S. E. V.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for indtil 17 mill. kr. i laan til elselskabet S.E.V. til disse byggearbejder:

Udbygning af Mýrar,
bygning av 60 KV-linier,
udbygning af Heljareyga.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Interkommunala elektricitetsfelagið S.E.V. hevur vent sær til landsstýrið við umsókn um, at landskassin tekur ábyrgd fyri lánum, og at landsstýrið annars er felagnum til hjálpar at útvega neyðug lán til útbygging av framleiðsluorku felagsins.

Seinast, umsókn frá felagnum var til viðgerðar, var í tingsetuni 1957.

lögtingstiðindi 1957, s. 274, har játtað var felagnum ábyrgd fyri 3 mill. kr. í láni til útbyggingar av Dalánni í Vestmanna, sbr. lögtingslóg nr. 30, 14. mai 1958. Hesi arbeiði byrjaðu í juli 1958, og kunnu tey koma partvis í nýtslu í november 1959. Útbyggingin vil ökja framleiðslumöguleikarnar frá 15 til 19 mill. kwh. árliga; vegna vöksturin í el-nýtsluni verður S.E.V. hóast hesa útbygging bert veitingarfört í tvey ár.

Tað er tí longu nú neyðugt at fara undir aðra útbygging.

Á Mýrunum verður gjörd 10 m hög og 350 m long byrging, sum goymir umleið 1 mill. tons av vatni. Vatnið verður gjögnum 1150 m langt berghol og 500 m langt stálrör veitt oman til kraftstöð í Heygadali (fallhæddin verður 230 m). 3.000 HK turbinu á stöðini vil kunna framleiða o. u. 8 mill. kwh. árliga. Verður byrjað við hesum í ár, kann stöðin lakast partvis í nýtslu í 1961/62 og kann vera liðug í 1962/63. Kostnaðurin er mettur til 7,0 mill. kr.

Vegna tað, at KW-lastin til Sundalagið-Eysturoynna-Klakksvíkar í vetur kom uppá 2.700 KW, er neyðugt at býta ökið sundur í tvey. Nýggj linja verður tí lögd frá Vestmanna yvir Veðranes til Skálaboth at veita streym til Skálafjörðin, Göturnar, Leirvík og Klaksvík, meðan gamla linjan veitir til restina av ökinum. Linjurnar koma at vera tiltak hjá hvörjari aðrari, um okkurt berst á. Sama, sum er sagt um linjuna til Eysturoyar, kann eisini verða sagt um linjuna suður til Tórshavn. Fyri at klára lastina er neyðugt at seta spenningin upp til 60 KV um eini 8—10 ár. Rættast verður tó hildið at byggja linjurnar fyri hönda spenning beinanvegin, men at reka tær sum longst við 20 KV. Linjan til Skálaboth verður bygd í 1959/60 til 1960/61 og til Tórshavn 1960/61 til 1961/62. Kostnaðurin er mettur til 2,5 mill. kr.

Frá Heljareyga verður vatnið veitt oman til kraftstöð á Fjörð. Hetta ökir um framleiðslumöguleikarnar við o. u. 8 mill. kwh. árliga, og verður kostnaðurin 7 mill. kr.

Byggiætlan felagsins er sum niðanfyri sett upp í mill. kr.:

	1959/60	1960/61	1961/62	1962/63
Mýrarnar	2,0	3,0	1,0	1,0
60 KV-linja	0,5	1,0	1,0	
Heljareyga	1,8	3,0	2,0	0,2
	1,3	7,0	1,0	1,2
Kurstap, prishækking v. m.		0,5	1,0	0,8
Tilsamans	4,3	7,5	5,0	2,0

Framleiðslumöguleikar í mill. kwh.:

	1959/60	1960/61	1961/62	1962/63	1963/64
Fossá + Dalá	17,0	19,0	19,0	19,0	19,0
Mýrarnar			1,0	6,0	8,0
Heljareyga			1,0	6,0	8,0
Tilsamans	17,0	19,0	27,0	31,0	35,0

Samlaða byggingin eftir hesi ætlan fer at kosta 18,8 mill. kr. Av hesum heldur felagið seg kunna fáa í studningi 1,8 mill. kr. til útbyggingina av Heljareyga. Restpeningin 17 mill. kr. er tann peningahæddin, felagið hevur vent sær til landsstýrið um.

1. og 2. viðgerð 22. april og 3. viðgerð 23. april 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 23—0.

63. *Uppskot til samtyktar frá Tjóðveldisflokkinum.*

Ár 1959, 22. april legði S. Joensen lögtingsmaður fram soljóðandi

UPPSKOT TIL SAMTYKTAR

Föroya lögting krevur at lög frá 7. juni 1952 um deyðarevsing verða tikin úr gildi í Föroyum.

Greinargerð:

Tann umrædda lög heimilar í ófriðartíð og undir herseting deyðsrevsing fyri tær brotsgerðir, sum eftir greinunum 98, 99, 102 stk. 3, 111 og 237 í teirri vanligu borgarligu revsilógini verða revsaðir við fongsli.

Greinirnar 98 og 99 ráma tann, sum við ólógligum atgerðum vil koma Danmarkar ríki undir fremmandaræði ella loysa nokran part frá ríkinum ella gera Danmarkar ríki ófrælst.

Grein 111 rámar tann, sum á líkan hátt, eitt nú við útlendskari hjálp.

vil broyta ríkisskipanina ella taka hana av.

Grein 102 rámar tann, sum gevur nakran ann undir slíkum umstöðum, at vandi er fyri lívi hins annigivna.

Grein 237 er manndrápsgreinin.

Tjóðveldisflokkurin heldur tað vera syrgiligt uftarstig bæði úr menniskjaligum og mentunarligum sjónarmiði, at Danmörk hevur lógfest deyðsrevsing í borgarligari lóg vend móti civilum borgarum, hvat norðurlandabúar í okkara tíð hava hildið hoyra eini meira barbariskari tíð til.

Tað ger ikki hesar reglur minni hættistigar, at tær av revsireglum at vera ikki sefa so greitt mark fyri, hvat ið felur inn undir tær, sum annars hevur verið siður í lóggávuni, men gevur dómsstólunum, sum í nógvum förum verða nevningating, rúmari ræsur. Nevnast má eisini, at eftir grein 29 í rettargongulógini er vantandi, at rettarmál eftir teim nevndu reglum, um tey koma, ikki sjaldan verða fyri afturlatum durum.

Hvat nú Föroyum og Föroyingum viðvíkir, er fyrst at siga, at einki liggur okkum fjarari enn tað, at taka mann av lívi. Tað er einki at taka seg aftur í, at deyðsrevsing býður föroyska tjóðini í móti. Men föroyska tjóðin eigur heldur ongan lut í teirri deyðsrevsing, sum við fyrrnevndu reglum er sett í lóg.

Föroya fólk ella umboð tess Föroya lögting er ikki spurt. Samstundis sum tingið krevur lógina avtikna, hvat Föroyum viðvíkir, mótmælir tað hesi mannagongd.

1. viðgerð 22. april 1959.

Uppskotið var sett undir atkvöðu við navnakalli:

J a a t k v ö d d u: J. Lindenskov, P. Petersen, M. Johannesen, N. H. Jacobsen, K. Wang, R. Joensen, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, K. Hoydal, J. H. Joensen, og J. F. Øregaard.

A t k v ö d d u i k k i: Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, Haldor Hansen. Burtur: Samuel Petersen og Leon Joensen.

Uppskotið samtykt 16—0.

64. *Eftirløn til tænastumann.*

Ár 1959, 22. apríl legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um veitan av lönaraldri og eftirlönaraldri til tænastumann.

§ 1.

Tilskilað verður Gunnar Gunnarsson, fulltrúa, lönaraldur frá 1. apríl 1954 eftri galdandi reglum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om tildeling af löningsanciennitet og pensionsanciennitet til tjenestemand.

§ 1.

Der tildeles fuldmægtig Gunnar Gunnarsson löningsanciennitet fra 1. april 1949 og pensionsanciennitet fra 1. april 1951 efter gældende regler.

§ 2.

Denne lov træder i kraft strak.

Viðmerkingar:

Gunnar Gunnarsson var við skrivi landsstýrisins frá 29. juni 1952 settur sum fulltrúi av 2. stigi. Eftir reglunum átti hann at byrja við eina grundlön uppá kr. 3.600. , men hetta vildi fört við sær, at hann fór niður í lön. Hann hevur so fingið lön, sum um lönaraldur hansara var roknaður frá 1. apríl 1949. Gunnar Gunnarsson hevur sökt um at fá sín eftirlönaraldur roknaðan frá 1. apríl 1951, t. v. s. 5 ár aftanó 1. apríl 1946.

Hildið verður rímiligt, at Gunnar Gunnarsson fær eftirlönaraldur frá 1. apríl 1954 og lönaraldur frá 1. apríl 1949.

Upplýsast kann, at Gunnar Gunnarsson er föddur 6. august 1916.

1. og 2. viðgerð 22. og 3. viðgerð 23. apríl 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 28 0.

65. *Gjaldið til fólkapensión.*

Ár 1959, 22. apríl legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um gjald til fólkapensjón.

§ 1.

1. stk. Til lutvís rindan av fólkapensjónini verður av hvörjum skattgjaldara sambart § 17, stk. 3 í lóg um fólkapensión latið gjald, sum er 1 % skattleggjandi inntökuni.

2. stk. Hetta gjald fellur til gjaldingur samstundis sum landsskatturin og krevur gjaldstovan tað saman við landsskattinum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om bidrag til folkepension.

§ 1.

Stk. 1. Til delvis dækning af udgifterne til folkepension erlægges jvfr. § 17, stk. 3 i lov om folkepension af enhver skatteborger et bidrag, som udgör 1 % af den skattepligtige indkomst.

Stk. 2. Dette bidrag forfalder til betaling samtidig med landsskatten og opkræves af gjaldstovan sammen med landsskatten.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Undir viðgerðini av lógini um fólkapensjón varð samtykt, at til lutvís rindan av pensjónini skuldi verða kravt gjald frá hvörjum skattgjaldara 1 % av skattleggjandi inntökuni.

Tá lógin um fólkapensón ikki fyrisetta reglur um rindan av hesum gjaldi verður her sett fram uppskot til lóg um hetta.

Annars verður víst til lögtingsmál nr. 17/1958: (vetrarting): Fólkapensjón.

1. og 2. viðgerð 22. apríl og 3. viðgerð 23. apríl 1959.
Uppskot landsstýrisins samtykt 27—0.

66. *Stuðul til útróðrarmenn, sum avreiða til kgl. gr. handilin.*

Ár 1959, 22. april legði K. Djurhuus landsstýrismaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

löglingslóg um stuðul til útróðrarmenn, ið avreiða til kgl. grönlendska handilin.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilað um neyðugt at tryggja útróðarmonnum, ið summarið 1959 avreiða fisk til kongiliga grönlendska handilin:

a. at forvinnan verður roknað eftir avreiðingarprísi, ið ikki liggur lægri enn hesin:
fyri nr. 1 tosk yvir 14″ 0/35 kr. pr. kg.
fyri nr. 1 tosk frá 10-14″ 0/30 kr. pr. kg.
Prísurin er roknaður eftir fiski, ið er avhövdaður, kruvdur, skolaður, reinsaður og fríur fyri blóð.

b. at minstalön kann verðn goldin teimum við upp í 700 kr. um mánaðin frá tí degi teir fara úr Föroyum til teir koma aftur til Föroyar.

c. eina skipan soleiðis, at upp í 500 kr. um mánaðin kunnu gjaldast í forskot uppá forvinning.

d. fría ferð aftur og fram fyri manning, bát, skúr og annað neyðugt viðföri, um forvinningur teirra annars vildi komið at ligið undir meðalforvinnu för-

laglingslov om stötte til baadfiskere, der indhandler fisk til Den kongelige grönlandske Handel.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til, om nödvendigt, at sikre baadfiskere, der sommeren 1959 indhandler fisk til Den kongelige grönlandske Handel:

a. at fortjenesten beregnes efter en afregningspris, der ikke ligger lavere end denne:
for prima torsk over 14″ 0/35 kr. pr. kg.
for prima torsk mellem 10-14″ 0/30 kr. pr. kg.
Prisen er beregnet for fisk, der er uden hoved og indvolde samt skyllet og renset fri for blod.

b. at der kan betales fiskerne en minimumsfortjeneste fra indtil 700 kr. om maaneden fra den dag, de afsejler fra Færöerne til den dag, de kommer tilbage til Færöerne.

c. en ordning saaledes, at indtil 500 kr. om maaneden kan betales i forskud paa fortjenesten.

d. fri transport frem og tilbage for mandskab, baad, barakker og andet nödvendigt materiale, saafremt deres fortjeneste i modsat fald ville komme til at ligge under middelfortjenesten for de færöske baadfiskere,

oyska útróðrarmanna, ið rógva út í Grönlandi fyri egnu rokuing ella fyri föroyskt felag.

§ 2.

Tann peningur, landsstýrið eftir § 1 kemur undir at gjalda, verður goldin úr landskassanum.

§ 3.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

der fisker i Grönland for egen regning eller for færöskt selskab.

§ 2.

De beløb, landsstyret i henhold til § 1 maatte komme til at lægge ud, betales af landskassen.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í löglingstíðindi nr. 11/1958 (ólavsökutingsetan): Útróður í Grönlandi samtykti lögtingið at senda landsstýrinum til viðgerðar og samráðingar við ríkisstýrið mál um at útvega föroyskum útróðrarmonnum fríari ræsur í Grönlandi, herundir Eysturgrönlandi.

Sum kunnugt hava Föroyingar aftaná kriggið tikið upp aftur útróðurin við opnum bátum í Grönlandi, tey seinru árini bert frá Föroyingahavnini og Ravnoynni. Í 1958 var bátatalið ávikavist 36 og 24 við tilsamans um 300 mannum. Tovkussaq, har útróður fyr hevur verið rikin, hevur nú í fleiri ár ikki verið nýtt í so máta. Um 120 bátskipanir útyvir tær 60, ið vóru í fjör, hava sökt um at sleppa til Grönlands.

Sum av lögtinginum samtykt hevur landsstýrið í februar og marts í ár haft samráðingar í Köbenhavn við ríkisstýrið um spurningin, og hevur grönlendska landsráðið verið saman til eykasetu í dögunum 10.–16. marts.

Úrslitið av hesum samráðingum og landsráðsviðgerð er, at skipan er gjörd fyri 1959, meðan samráðingar skulu fara fram við landsráðið í Godthaab, helst í august, um eina framtíðarskipan.

Skipanin fyri 1959 er henda:

Til kongiliga grönlendska handilin avreiða hesar bátskipanir á fylgjandi plássum:

1. Nanortalik ..... 2 bátskipanir
2. Sydpröven ..... 2 bátskipanir
3. Narssaq ..... 10 bátskipanir ella 5 bátskipanir og 1 fiskiskip til stöddar 50 br. reg. t.
4. Holsteinsborg ..... 11 bátskipanir ella 6 bátskipanir og 1 fiskiskip.
5. Heraftrat bjóðar handilin at keypa fisk frá 10 bátskipanum í Tovkussaq.

Meðan hesin útróður sum sagt er fyri grönlandshandilin og til somu treytir sum galdandi eru fyri grönlendingar, verður loyvt föroyingum at fáa sær landstöðir á hesum nýggju plássum og við fylgjandi bátatali:

1. Kangerdluk við Eggersö (Kappin) ..... 20 bátskipanir.
   Í samband við hetta loyvi verður lað ökið, loyvt er at fiska á, viðkað frá Kappanum og til Nua við Utorqarmiut (44° 20′ v. l. 59° 51′ n.).
2. Sunnari armurin av Kobbermineknugten. ..... 15 bátskipanir.
   Treyt er, at ikki verður sigli og fiskað innanfyri linju frá Josva Minen til Borgs Havn.
3. Munnan av Sermiligarssuk ..... 15 bátskipanir.
   Treyt er, at ikki verður sigli og fiskað í sjálvum fjörðinum eystanfyri 19° v. l. og ikki í fjörðinum Qæsigialik norðan fyri Sermiligarssuk.
4. Græðefjorden ..... 5 bátskipanir.
   Treyt er, at ikki verður sigli og fiskað í Sermilikfjörðinum, herundir í mununum, í sjálvum Græðefjorden innan fyri 51° 03′ v. l. og í sundinum Avquteraq, og at norðari munnin av Ikerasagssuaq-sundið verður stongt.
5. Tovkussaq ..... 10 bátskipanir.
   Treyt er, at norðara markið fyri tí opna ökinum her verður flutt suðureftir til Merqorigsorssuaq og harðani til Kangeq (á fastlandinum innanfyri Kalollen).

Umfram tær vanligu treytirnar, ið hava verið settar fyri útróður frá Föroyingahavnini og Ravnsoynni at gjalda til «konjukturudligningsfonden» ½ oyra fyri kg av lí, ið fiskað verður, eru hesar kommar aftral:

a. Fiskararnir mugu ikki hava við sær silagörn ella skjótivápn.
b. Slógv verður bert at beina burtur við landstöðina sjálva.
c. Frágreiðing verður send frá hvörjari landstöð um fiskiskapin 1959.

Annars er tað um ikki treyt so tó ein forútsetningur bæði fyri skipanina 1959 og framtiðina, at av teimum frammanfyri nevndu bátskipanum, ið avreiða skulu til handilin, verða í minsta lagi 25, ið avreiða til handilin.

Undir samráðingunum varð avtalað, at í minsta lagi 20 grönlendingar skulu kunna fáa hövi at mynstra umborð á föroysk fiskiskip ella sleppa við útróðrarbátum undir sonnu vilkorum sum föroyingar.

Viðvíkjandi Eysturgrönlandi er tað so, at her er frilt at fiska frá norðara arminum av Lindenowfjörðinum og norðureftir. Vísl varð á tvey pláss har fiskimöguleikar eru: Tiugmiarmiut og Cap Cort Adeler.

Orsökin til, at landsstýrið vendir sær til lögtingið í hesum máli við uppskoti til lögtingslög um at fáa heimild at tryggja teimum fiskimonnum, ið avreiða til grönlandshandilin avrokuningarpris, minstulön, forskotsrindan og kanska frian flutning, er, at hetta er fyrsta ferð, at

skipan sum henda verður royndi og undir treytum, sum í fyrstu syftu kunnu reisa tann spurning, um tær ikki föra við sær, at árlökan verður minni enn hjá teimum, ið fara at rógva út fyri egnu rokning ella fyri föroyskt felag. Her kann nevnast, at avrokningarprísurin hjá grönlandshandlinum fyri avhövdaðan og kervdan nr. 1 fisk yvir 14", sum er skolaðtr, reinsaður og frúr fyri blóð, er 29 oyru pr. kg, meðan hann til Grönlandsfelagið í Föroyingahavnini er 50 oyru pr. kg fyri allan fisk; handilin gevur tó eitt uppískoyti til prísin, tá fiskiskapurin fyri árið er uppgjördur, soleiðis at uppískoytið verður hægri já meira er avreitt, helfa kann ellast til 3-4 oyru pr. kg. Menninir mugu sjálvir gjalda flutning eisini av bátum og skúrum aftur og fram, handilin vil tó royna at skipa fyri flutningi til Grönlands, kostnaðurin verður so 500 kr., uppá hesum er eisini flutningur av báti og skúri, men ikki matur. Sjálvir mugu teir syrgja fyri innivisti, á nökrum plássum heldur handilin seg tó kunna taka hetta uppá seg.

Lógaruppskotið frammanfyri hevur til endamáls at tryggja fiskimonnum, so teir ikki sjálvir skulu leypa allan tann risiko henda fyrsta royndin ber við sær, teir fáa somu minstulön og forskotsskipan sum aðrir föroyskir fiskimenn.

Henda skipanin saman við ti, at hesir útróðrarmenn hava loyvi at fiska allastaðni frá viðkomandi plássi, og at teir skulu lata gjald til «konjukturudligningsfonden» skuldi gjört tað lönandi hjá mannum at farið til Grönlands at fiska fyri handilin.

Hvussu nógv skipanin, um illa skuldi gingist, kann koma at kosta landskassanum er ikki lett at siga. Fara 25 bátar, hvör við 5 mannum og skuldi úrslitið verið av ti allarvánaligasta, skuldi uppískoyti landskassans komið at ligið um 300.000.— kr.

1. viðgerð 22. april, og 23. april legði figgjarnevndin fram soljóðandi

NEVNDARÁLIT

Ein meiriluti (A. Djurhuus, H. Iversen, Samuel Petersen, J. Fr. Öregaard og Poul Petersen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við niðanfyri tilskilaða broyting.

Poul Petersen förir sum grund fyri undirtöku sinari, at allir fiskimenn eiga sama ræti til trygging av forvinnuni.

Minnilutin (Erlendur Patursson og Johan Simonsen) förir fram:

Landsstýrið metir hesa skipan í versta tilfelli at koma at kosta 300.000.— kr. Eftir teim upplýsingum, sum eru til skjals í málinum, má hetta haldast vera alt ov lágt sett. Kostnaðurin verður helst í minsta lagi 2 ferðir so stórur, t. e. 600.000.— kr., möguliga upp aftur stórri.

Við 1. umræðu varð landsstýrið spurt, hvussu hesin peningur skuldi útvegast, men onki svar fekst. Spurdur í figgjarnevndini, svaraði figgjarnevndarformaðurin, at ongin peningur var í landskassanum til hetta endamál, men at peningur má útvegast. Upp á fyrispurning upplýst:

nevndarformaðurin, at lönjavningargrunnur skipsfiskimanna skuldi haldast heilt uttan fyri. Somuleiðis upplýsti nevndarformaðurin, at peningaútgjaldingin verður ikki aktuel fyrr enn úlróðrarmenninir eru heim aftur komnir.

So staðt setur minnilutin (Erlendur Patursson og Johan Simonsen) fram hetta

UPPSKOT

Tá teir föroysku úlróðrarmenn, sum í úr noyðast at avreiða fisk til grönlendska handilin fyri undirpris, hava fingið avrokning sína og uppgerð um vinning teirra fyriliggur, tekur fingið avgerð um, hvönn stuðning neyðugt verður at veita hesum monnum til tess at böta teimum fatjið, sum av undirprisinum kemur at standast, og samtíðis avgerð um tær tolla- og skattabækkingar, ið standast av hesum kostnaði.

UPPSKOT

Frá meirilutanum (A. Djurhuus, H. Iversen, Samuel Petersen, J. Fr. Öregaard og Poul Petersen):

I báðum tekstum gongur § 1, d. út og ístaðin verður skotið inn millum «mánaðin» og «frá» og «maaneden» og «fra» «tá ið ferðaútreiðslurnar eru frá» «efter fradrag af rejseudgifterne».

2. viðgerð 23. og 3. viðgerð 25. apríl 1959.
Minnilutauppskot (E. Patursson og J. Simonsen) fall 16 - 0.
Uppskot meirilutans samtykt 25 - 0.
Uppskot landsstýrisins so broytt samtykt 23 - 0.

67. *Ábyrgd av láni til Vágs kommunu.*

Ár 1959, 22. apríl legði lögmaður fram soljóðandi

UPPSKOT
til

lögtingslóg um ábyrgd av láni til Vágs kommunu til havnabygging.

§ 1.

Landsstýrið verður heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd av láni upp í 325.000 kr. til átbyggjan av havnalagnum í Vági, tá treytirnar eftir lögtingslóg nr. 56 frá 3/11-58 eru fúkaðar.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for laan til Vågs kommune til havnebygning.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for laan indtil 325.000 kr. til udbygning af havneanlægget i Vågi, naar betingelserne i lov nr. 56 af 3/11-58 er opfyldt.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir lögtingslóg nr. 56 frá 3/11-58 er veiftur studningur til átbyggjan av havnalagnum í Vági við 50 % av 1.700.000 kr. og fær kommunan eitt landi ríkisstudning við 25 % av byggiætlanini.

Eftir tilmæli frá landsverkfröðingiunum fer Vágs kommuna undir at byggja fyri 1,3 mill. kr. innanfyri fyrstu fimm árini og hevur landsstýrið góðtikið tilmæli landsverkfröðingsins.

Kommunan sökir nú um loyvi at taka lán til sín part av byggikostnaðanum 325.000 kr. og landskassaábyrgd fyri hesum láni.

Ætlan kommununnar er at taka lánið hjá Kreditforeningen af kommuner í Danmark og um so er, at hon fær lánið har, so krevst bæði landskassa- og ríkiskassaábyrgd.

Kommunan hevði pr. 31/12-57 lán tilsamans 134.050,88 við landskassaábyrgd og umfram lán til havnalagið uppá 386.126,86. Skattaeftirstöðurnar hjá kommununi eru um 500.000 kr. og er skattaálíkningin um 450.000 kr.

Havnalagið hevur sjálvt greitt reotir og avdrög av havnalánunum og hevði umfram í 1957 yvirskot um 6.000 kr.

1. viðgerð 22. apríl, 2. viðgerð 22. og 3. viðgerð 23. apríl 1959.

Uppskot landsstýrisins samtykt 26—0.

68. *Forboð fyri gerð og sølu av mjólk frá mjólkamaskinum.*

Ár 1959, 23. apríl legði búnaðarnevndin fram soljóðandi

ÁLIT

Í skrivi frá 16. mai 1958 hava Föroya bóndafelag og Föroyn búnaðarfelag leitt á landsstýrið at seta forboð fyri innflutningi av mjólkamaskinum.

Föroya landsstýri framlegði lögtingsmál nr. 3/1958: Forboð fyri gerð og sölu av mjólk frá mjólkamaskinum. Málið varð beint í búnaðarnevndina og nevndin sendi málið til Föroya landbúnaðarfelag til ummælis.

Tann 24. september 1958 sendi Tórshavnar mælkeforsyning & margarinefabrik skriv til Föroya landsstýri um at fáa undantaksloyvi at brúka mjólkamaskinu (jarnkúgv), tá mjólkatrot er.

Tann 6. januar 1959 kom soljóðandi svar frá Föroya búnaðarfelag. Í skrivinum stendur, at stjórnarfundurin tók ta slóðt ikki at móttæla nýtslu av slíkari mjólk, tá stór mjólkaneyð er, men eigur henda framleiðsla altíð at vera undir eftirliti, og tann, ið keypir slíka mjólk eigur at fáa upplýst, at tað er ikki vanlig föroysk mjólk, sum man fær, eisini eigur at verða ansað eftir, at föroysk mjólk verður ikki blandað uppi kunstiga mjólk. Annars má endamálið verða, at altíð fæst nóg nógv av föroyskari mjólk og vil felagið halda, at um studningsveitanin verður broytt, soleiðis, at 15 oyru verða latin í summarmánaðunum juni, juli og august, sum felagið hevur sett uppskot fram um, men sum ikki hevur verið tikið til fylgju, so hevði hetta bóst nógv um at fingið eina javnari framleiðslu av mjólk.

Nevndin er á einum máli við Föroya búnaðarfelag um at loyvi eigur at verða givið til framleiðslu av mjólk við mjólkamaskinum, har mjólkatrot er, tó heldur nevndin, at eingin framleiðsla frá mjólkamaskinum eigur at fara fram fyrrenn landsstýrið hevur givið loyvi til less.

Nevndin ber eisini ótta fyri, at um ikki mjólkamaskinur veru undir eftirliti, kann hetta koma at skaða hina föroysku mjólkaframleiðsluna so nógv, at neytatalið verður minkandi ístaðin fyri vaksandi.

Vísandi til tað omanfyri framförda mælir nevndin lögtinginum til at samtykkja soljóðandi uppskot

UPPSKOT
til

lögtingslóg um forboð fyri gerð og sölu av mjólk frá mjólkamaskinum.	lagtingslov om forbud mod fremstilling og salg af mælk fra mælkemaskiner.
§ 1.	§ 1.
Tað er forboðið at gera og selja mjólk, sum gjörd er við maskinu, uttan við serloyvi frá landsstýrinum.	Det er forbudt at fremstille og sælge mælk, der er fremstillet paa maskine, uden særlig tilladelse fra landsstyret.
Maskinur til nýtslu umborð á skipi koma ikki undir hesa regla.	Maskiner til benyttelse ombord i skibe kommer ikke ind under denne bestemmelse.
§ 2.	§ 2.
Föroysk mjólk hevur fyrsta rætt at verða seld. Tá föroyska mjólkin er útseld, kann mjólk framleidd í maskinu seljast. Landsstýrið gev reglugerð fyri sölu av mjólk gjörd við maskinu.	Færösk mælk skal sælges först. Er den færöske mælk udsolgt, kan mælk fremstillet paa maskine sælges. Landsstyret udfærdiger reglement for salg af mælk fremstillet paa maskine.
§ 3.	§ 3.
Hann, sum brýtur hesa regla, kemur undir bót, sum fer í landskassan. Tílík mát fara fram sum lögreglumál.	Den, der overtræder denne bestemmelse, kommer under böder, der tilfalder landskassen. Saadanne sager behandles som politisager.
§ 4.	§ 4.
Henda lög kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

---

2. og 3. viðgerð 23. april 1959.

Tingformaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá nevndini:

I § 2 ganga orðini út:	I § 2 udgaar ordene:
Tá föroyska mjólkin er útseld, kann mjólk framleidd í maskinu seljast.	Er den færöske mælk udsolgt, kann mælk fremstillet paa maskine sælges.

Broytingaruppskotið samtykt 26 - 0.
Lógaruppskoti so broytt samtykt 26 - 0.

---

69. *Vistarhaldspeningur hjá tingmonnum m. v.*

Ár 1959, legði J. F. Øregaard lögtingsmaður fram soljóðandi:

UPPSKOT
til

lögtingslóg um broyting í lögtingslóg nr. 14 frá 22. marts 1956 um dagpening tingmanna v. m.

§ 1.
Í § 2 í lögtingslóg nr. 14 frá 22. marts 1956, um dagpening tingmanna v. m. verður talið «12» broytt til «25».

§ 2.
Henda broyting fær gildi frá 10. februar 1959.

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 14. af 22. marts 1956 om dagpenge for lagtingets medlemmer m. v.

§ 1.
I § 2 i lagtingslov nr. 14 af 22. marts 1956 om dagpenge for lagtingets medlemmer m. v. ændres tallet «12» til «25».

§ 2.
Denne ændring faar gyldighed fra 10. februar 1959.

Viðmerkingar:

Eftir § 2 í nevndu lögtingslóg er vistarhaldspeningur tingmanna og limun millumtinganevnda settur til 12 kr. fyri hvönn dag, teir eru burtur frá heimi sínum til ting ella millumtinganevndarstorv.

Nevnda samsýning var sett í marts 1956. Tá svaraði hon ikki til tað, tað kostaði at vera á gistingarhúsi her í Havn og sjálvandi eitt minni í dag. Tær 25 kr., ið nú verða skotnar upp, skuldu heldur svarað til nevnda kostnað.

1., 2. og 3. viðgerð 23. april 1959.

Uppskotið samtykt 22 - 0.

70. *Fyrispurningur til løgmann frá Erlendi Patursson.*

Ár 1959, 23. april legði Erlendur Patursson lögtingsmaður fram soljóðandi:

Er tað so, at landsstýrið hevur játtað at lata útróðrarmenn í Grönlandi, sum skulu avreiða til grönlendska handilin, hava prisviðbót, sum svarar til munin, ið aðrir útróðrarmenn og hesir fáa fyri fiskin?

Um so er, verður lögmaður biðin upplýsa, hvaðan hesin peningur skal fáast.

Loyvið givið 23. april og viðgerð 21. april 1959.

Skjal nr. 1.

LANDSKASSIN

Rakstrarroknskapur

og

fíggjarstandur 1957-58

Rakstrarroknskapur landskassans

(Saman

INNTØKUR	Roknskapur	Figgjarlóg
§ 1. Skattur, tollur og onnur gjøld	16.970.558,73	12.710.000,00
§ 2. Inntøka av handli og fiskivinnu viðv.	900.178,53	760.000,00
§ 3. Inntøka av gjøldum samferðslu viðv.	260.295,76	195.000,00
§ 4. Inntøka av spæli	0,00	0,00
§ 5. Rentur og vinniugsbýti	245.078,73	140.000,00
§ 6. Rakstur av ognum	72.056,04	70.000,00
§ 7. Partur í danska tjóðarbanka yvirskoti sambært lóg	45.854,98	20.000,00
§ 14. Ymiskar inntøkur	26.485,98	30.000,00
Kassamunur	181,78	0,00
	18.520.690,53	13.925.000,00

fyri fíggjarárið 1957-58

dráttur)

ÚTREIÐSLUR	Rokn skapur	Fíggjarlóg
§ 15. Lógtingsútreiðslur	211.603,48	204.300,00
§ 16. Landsumsitingin	1.319.444,11	1.142.082,00
§ 17. Heilsumál	2.160.778,21	1.800.000,00
§ 18. Samferðslumál	3.224.811,11	2.075.000,00
§ 19. Kenslumál	1.724.216,29	1.551.311,00
§ 20. Vísind, bókment og list	246.025,24	221.778,00
§ 21. Fiskivinna, sjóferð o. t.	3.221.740,42	3.023.720,00
§ 22. Jarðabrúk	584.909,90	582.681,00
§ 23. Handil, ídnaður o. t.	223.116.56	182.547,00
§ 24. Social mál	2.319.859,32	2.549.601,00
§ 25. Eftirlön	71.433,86	71.850,00
§ 26. Dóms- og lögreglumál	64.017,21	60.000,00
§ 28. Vinnulánsgrunnurin, saneringslán og P/f Sjóvinnubankin	÷ 106.380,50	250.755,00
§ 34. Aðrar og óvissar útreiðslur	60.161,87	57.000,00
§ 35. Ymiskir grunnar	50.000,00	50.000,00
§ 36. Rentuútreiðslur	62.145,71	35.200,00
§ 37. Ognarútreiðslur	16.662,95	3.000,00
§ 38. Tap viðvíkjandi »Farmur«	500.232,04	0,00
Rakstraryvirskot	2.565.912.75	64.175,00
	18.520.690,53	13.925.000,00

Fíggjarstøða landskassans

(Saman

OGNIR

40.	Fastar ogndir (hús v. m.)	1.870.896,49
41.	Flogvøllur, oljugoymslur og oljubrúgv	1.012.899,93
42.	Skip (herundir trolarar undir bygging)	2.580.869,29
43.	Virðisskjøl	1.028.950,00
44.	Útlán	5.036.807,42
45.	Kassa-, banka-, sparikassa og giropeningur	3.119.160,62
46.	Tilgóðar í millumrokning	1.533.008,59
	Aðrar millumrokningar, forskot og ágóðar	848.279,48
47.	Inntökueftirstøður	1.802.361,44
48.	Inntøkur viðv. 1957/58 inngoldið aftaná 1. aprfl 1958	1.853.488,93
49.	Peningur tilhoyrandi grunnum og deponentum v. m.	11.424.776,09
		32.111.498,28

FØROYA GJALDSTOVA, tann 21. november 1958.

J. Nicolaisen

pr. 31. mars 1958

drátturr)

SKULD

60.	Lán	6.240.415,67
61.	Skuld í millumrokning	1.600.171,85
62.	Deposita	37.174,16
63.	Útreiðslur viðv. 1957/58 útgoldið aftaná 1. apríl 1958	1.518.016,35
69.	Ymsir grunnar, burturleggingar v. m	14.238.967,58
70.	Kapitalkonto	5.910.839,92
	Rakstraravlop 1957/58	2.565.912,75
		32.111.498,28

Ábyrgdir pr. 11/12 1957 kr. 32.929.868,02 sambært specifikatión.

Specifikatiónir

til rakstrarroknskapin fyri fíggjarárið 1957—58.

INNTØKUR

			Roknskapur	Fíggjarlóg
§ 1. SKATTUR, TOLLUR OG ONNUR GJØLD				
1. Landsskattur:				
1. Hövuðsálíkning 1957—58		5.590.583,50		
Økjan:				
2. Tilflytarar		30.767,00		
3. Hækkanir		254.609,50		
3a Inng. uppá fyrr avskriv. skatt ÷ flutt til grunnin fyri endurnýggjan av skipaflotanum.....	3.820,63	3.820,63	0,00	
Munur við uppgerð 31/3-58			0,10	
			5.875.960,10	
Minkan:				
4. Lækkanir og dupult skattað	351.320,00			
5. Strikað vegna andlátella giftu	15.562,93			
6. Strikað vegna búfluttning...	33.430,94			
7. Föroya landsstýri eftirgivið	11.046,86			
8. Úrslitaleys innheinting	35.211,03		446.571,76	
			5.429.388,34	
9. Sektir			86,90	
10. Gjald av happadráttarvinningum.....			8.647,50	
11. Rentuskattur			337.776,46	5.775.899,20 4.450.000,00
2. Tollinntökur:				
1. Innfluttningstollur		10.672.743,19		
2. Framleiðslugjald		298.140,34		
3. Partur landskassansí tollsektum		12.795,00		
4. Konfiskatiónir		2.001,10		
		10.985.679,63		
5. ÷ Útr. til sýslur og postv.		8.970,38	10.976.709,25	8.100.000,00
At flyta...			16.752.608,45	12.550.000,00

		Roknskapur	Fíggjarlóg
Flutt...		16.752,608,45	12.550.000,00
3. Lestagjald av skipum		15.956,25	15.000,00
4. Skemtunarskattur		166.642,96	120.000,00
5. Gjöld fyri rúsdrekkakort:			
Viðvíkjandi 1957/58		19.205,00	15.000,00
6. Sektir:			
Fólkayvirlitssektir	0,00		
Aðrar sektir	16.146,07	16.146,07	10.000,00
		16.970.558,73	12.710.000,00

§ 2. INNTØKA, HANDLI OG FISKIVINNU VIÐVÍKJANDI

1. Valutagjald		268.940,50	250.000,00
2. Útflúttningsgjald:			
Inntökur í 1957/58	605.978,90		
÷ Avskrivað sum tap	2.057,87	603.921,03	500.000,00
3. Gjald fyri loyvisbröv		27.317,00	10.000,00
		900.178,53	760.000,00

§ 3. INNTØKA AV GJØLDUM SAMFERÐSLU VIÐVÍKJANDI

1. Vektgjald fyri bilar		212.645,76	170.000,00
2. Gjald fyri sölu av bilum o. ö.		47.650,00	25.000,00
		260.295,76	195.000,00

§ 4. INNTØKA AV SPÆLI

1. Undirskot av happadrátti fyri 1957	3.920,10		
flutt til kapitalkonto	3.920,10	0,00	0,00
2. Totalisatorspæl		0,00	0,00
		0,00	0,00

§ 5. INNTØKA AV RENTUM OG VINNINGSBÝTI

1. Sektarrentur:			
1. Rentur av landsskatti	111.700,28		
2. Pantigjald av landsskatti	6.116,40	117.816,68	80.000,00
2. Rentur av tökum peningi:			
1. Rentur av bankapeningi	28.418,12		
2. Rentur av giropeningi	476,28		
3. Rentur av öðrum peningi	159,07	29.053,47	20.000,00
At flyta...		146.870,15	100.000,00

		Roknskapur	Figgjarlóg
Flutt...		146.870,15	100.000,00
3. Vinningsbýti:			
1. Vinningsbýti av partabrövum.....		14.200,00	20.000,00
4. Rentur av öðrum ágóða:			
1. Rentur av útláni til kommunur.....	4.339,85		
2. Rentur av rakstrarláni til fiskivinnuna	946,29		
3. Rentur av öðrum útláni	77.109,62		
4. Rentur av öðrum ágóða	1.612,82	84.008,58	20.000,00
		245.078,73	140.000,00

§ 6. RAKSTUR AV OGNUM			
1. Oljugoymslurnar:			
1. Inntökur	74.000,00		
2. Útreiðslur	6.840,05	67.159,95	70.000,00
2. Tinganesognirnar:			
1. Inntökur	24.155,00		
2. Útreiðslur	19.258,91	4.896,09	0,00
		72.056,04	70.000,00

§ 7. PARTUR Í DANSKA TJÓÐARBANKA YVIRSKOTI SAMBÆRT LÓG.....		15.854,98	20.000,00

§ 14. YMISKAR INNTØKUR			
Arvagjöld	26.769,74		
Inntökur av vrakgóði ...	41,00		
Inntökur av grind	÷ 549,76		
Leiga av lendi	200,00		
Avrit av valutaloyvum ...	25,00	26.485,98	30.000,00

ÚTREIÐSLUR

		Rokn.skapur	Fjggjarlög
§ 15. LØGTINGSÚTREIÐSLUR			
1. Løgtingsmenn:			
1. Tingmannalønir	113.853,12		112.000,00
2. Dagpeningur til nevndarlimir	8.236,60		3.500,00
3. Ferðaútreiðslur	1.047,00		1.000,00
		123.136,72	(116.500,00)
2. Løgtingshúsið v. m.:			
1. Hiti, ljós og reingerð ..	6.686,24		7.000,00
2. Viðlíkahald	1.950,77		4.900,00
3. Aðrar útreiðslur.....	6.196,89		3.200,00
		14.833,90	(15.100,00)
3. Løgtingstíðindi og kunngerðasavn:			
1. Prenting o. t.....	14.537,84		19.000,00
2. ÷ Inntökur av sölu ...	1.687,20		÷1.300,00
		12.850,64	(17.700,00)
4. Grannskoðan:			
1. Løgtingsgrannskoðan...	0,00		
2. Statsautoriserað grannskoðan	14.532,16		
3. Intern granskoðan.....	43.850,06		
4. Tollgrannskoðan.....	2.400,00	60.782,22	55.000,00
		211.603,48	204.300,00
§ 16. LANDSUMSITINGIN			
1. Løgmaður og landsstýri:			
1. Lønir.....	65.600,15		64.000,00
2. Borðfæ	10.000,08		10.000,00
3. Leiga av høli, hiti ljós v. m.....	5.377,60		7.400,00
		80.977,83	(81.400,00)
2. Landsskrivstovan:			
1. Skrivstovustjóri og fulltrúar	97.238,60		105.891,00
2. Skrivstovufólk.....	53.765,05		44.000,00
3. Honorarir	2.400,00		2.400,00
4. Húsaútreiðslur	34.673,82		33.000,00
5. Skrivstovútreiðslur.....	14.706,09		12.600,00
6. Porto, telefon, telegr. og lýsingar.....	11.346,89		13.000,00
7. Aðrar útreiðslur	2.848,97		1.500,00
		216.979,42	(212.391,00)
	At flyta...	297.957,25	293.791,00

		Rokn skapur	Figgjarlóg
Flutt...		297.957,25	293.791,00
3. Fiskivinnuskrivstova og ídnaðarstova:			
1. Lön til fyristöðumannin	21.274,65		18.000,00
2. Skrivstovufólk	25.483,06		22.000,00
4. Húsaútreiðslur	4.572,54		4.900,00
5. Skrivstovuútreiðslur ...	4.109,85		3.600,00
6. Porto, telefon, telegr. og lýsingar.....	4.468,75		4.100,00
